# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Fíggjarárið 2022

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

August 2023

# Innihaldsyvirlit


0. FRAMLØGA 7

1. INNGANGUR 9

1.1 LANDSROKNSKAPURIN 2022 9
1.2 GRANNSKOÐAN AV ROKNSKAPINUM 9

2. LØGMANSFYRISITINGIN 13

2.1 LØGMANSSKRIVSTOVAN (LG 2021/202-111) 13
2.2 LØNIR TIL AÐALSTJÓRAR (LG 2022/202-111) 13
2.3 UMBYGGING Í TINGANESI (LG 2019/202-111) 15
2.4 LØNIR TIL LØGMANN OG LANDSSTÝRISFÓLK (LG 2022/202-123) 16
2.5 DÁTUEFTIRLITIÐ (LG 2022/202-142) 19

3. FÍGGJARMÁL 21

3.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2014/100-001) 21
3.2 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ (LG 2021/203-111) 22
3.3 TALGILDU FØROYAR (LG 2018/203-111) 22
3.4 LANDSINS OGNIR (LG 2020/203-111) 24
3.5 UMVÆLING AV ALMENNUM BYGNINGUM, LØGUJÁTTAN (LG 2021/203-111) 25
3.6 VEÐHALDS- OG EFTIRLØNARSKYLDUR (LG 2022/203-151) 27
3.7 DAGFØRING AV ROKNSKAPARRUNDSKRIVI (LG 2016/203-151) 28
3.8 TAKS (LG 2020/203-151) 29
3.9 LANDSBANKI FØROYA (LG 2020/203-151) 31
3.10 KERVISGRANNSKOÐAN (LG 2022/203-151) 32
3.10.1 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ TAKS 32
3.10.2 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ GJALDSTOVUNI 32
3.10.3 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ KT LANDSINS 33
3.10.4 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ TALGILDU FØROYUM 35
3.11 EFTIRLØNIR HJÁ FÓLKASKÚLALÆRARUM (LG 2022/203-181) 35
3.12 LANDSVERK (LG 2021/203-381) 36
3.12.1 ROYNDARVERKÆTLAN VIÐ ORKUSPARING Í LANDSINS BYGNINGUM 40
3.12.2 RÆTTARMÁL 41
3.13 ASFALT- OG SKERVVERK, LØGUJÁTTAN (LG 2021/203-381) 42
3.14 STRANDFARASKIP LANDSINS (LG 2022/203-382) 43
3.15 STRANDFARASKIP LANDSINS, LØGUJÁTTAN (LG 2022/203-382) 50
3.16 STUÐUL TIL ÚTOYGGJAR (LG 2022/203-382) 50

**3.17 Akstovan (LG 2020/203-384) 51**
**3.18 FAS-skipanin (LG 2021/220-521) 52**
**3.19 Lønarhæddaravgjald (LG 2020/220-522) 55**
**3.20 Loyvisgjald á alivinnu (LG 2020/220-522) 56**
**3.21 Onnur gjøld/avgjøld 57**

**4. Fiskivinnumál 59**

**4.1 Fiskimálaráðið (LG 2021/205-211) 59**
**4.2 Vørn, Tilbúgving á sjógvi og Veðurtæn. (LG 2021/205-311) 59**
**4.3 Havstovan (LG 2021/205-343) 61**

**5. Umhvørvis- og vinnumál 63**

**5.1 Jarðfeingi (LG 2017/206-321) 63**
**5.2 Búnaðarstovan (LG 2021/206-332) 63**
**5.3 Búnaðarstovan, løgujáttan (LG 2021/206-332) 65**
**5.4 Almenn jørð, søla (LG 2021/206-332) 66**
**5.5 Føroya Altjóða Skipaskrá, FAS (LG 2021/220-521) 66**
**5.6 Sjóvinnustýrið, bygningur (LG 2015/206-351) 67**
**5.7 Vinnustovnurin (LG 2017/206-371) 67**
**5.8 Rúsdrekkasøla Landsins (LG 2022/206-373) 68**
**5.9 Umhvørvisstovan (LG 2021/206-374) 70**
**5.10 Heilsufrøðiliga starvsstovan (LG 2017/206-375) 73**
**5.11 Barsilsskipanin (LG 2020/206-394) 73**

**6. Uttanríkis- og mentamál 75**

**6.1 Umsiting av stuðli undir § 7 (LG 2021/207-000) 75**
**6.2 Neyðhjálp og menningarsamstarv (LG 2022/207-133) 76**
**6.3 Nám (LG 2021/207-231) 77**
**6.4 Rásin (LG 2020/207-232) 78**
**6.5 Glasir (LG 2020/207-233) 78**
**6.6 Tekniski skúli í Klaksvík, løgujáttan (LG 2018/207-233) 83**
**6.7 Miðnám í Vestmanna (LG 2021/207-233) 83**
**6.8 Miðnám á Kambsdali (LG 2021/207-233) 84**
**6.9 Skúladepil við Marknagil, løgujáttan (LG 2020/207-233) 85**
**6.10 Frítíðarundirvísing (LG 2019/207-235) 86**
**6.11 Musikkskúlar (LG 2021/207-235) 86**
**6.12 Vinnuháskúlin (LG 2018/207-236) 88**
**6.13 Sjónám (LG 2020/207-236) 88**
**6.14 Føroya Brandskúli og inntøkufíggjað virksemi hjá Vinnuháskúlanum (LG 2021/207-236) 89**
**6.15 Fróðskaparsetur Føroya (LG 2021/207-236) 90**
**6.16 Studni (LG 2021/207-237) 93**
**6.17 Yrkisdepilin (LG 2021/207-237) 100**
6.17.1 Umsiting av lógarbundnum játtanum 100
6.17.2 Stovnsroknskapur 104
**6.18 Tjóðpallur Føroya (LG 2020/207-242) 106**

6.19 TJÓÐSAVNIÐ (LG 2019/207-243) 106
6.20 TJÓÐSKJALASAVNIÐ (LG 2021/207-243) 107
6.21 LANDSBÓKASAVNIÐ (LG 2020/207-243) 108
6.22 MIÐLASTUÐUL (LG 2021/207-244) 108
6.23 KIRKJUGRUNNURIN OG TILTAKSGRUNNURIN (LG 2018/207-245) 109

7. HEILSUMÁL 111

7.1 FÓLKAHEILSURÁÐIÐ (LG 2020/211-201) 111
7.2 HEILSUTRYGDARVEITINGAR (LG 2020/211-202) 111
7.3 FRÁGREIÐING UM VIÐGERÐARSTOVNARNAR (LG 2022/405-013) 113
7.4 FRÁGREIÐING UM KOMMUNULÆKNASKIPAN (LG 2022/405-014) 114
7.5 FRÁGR. UM LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, ÚTBYGGING (LG 2022/405-016) 117

8. ALMANNAMÁL 121

8.1 FAMILJUFYRISITINGIN (LG 2019/212-141) 121
8.2 ALMANNAVERKIÐ (LG 2021/212-211) 121
8.3 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LG 2015/212-213) 122
8.4 INNHEINTING AV SKYLDUGUM BARNAPENINGI (LG 2021/212-213) 122
8.5 EFTIRGEVING AV FORSKOTSRINDAÐUM BARNAPENINGI (LG 2021/212-213) 123
8.6 EINKJUBARNASTYRKUR (LG 2014/212-213) 124
8.7 BARNAÍSKOYTI (LG 2015/212-213) 124
8.8 BÚSTOVNAR O.A., LØGUJÁTTAN (LG 2019/212-216) 124
8.9 ALMANNAVERKIÐ, TRIVNAÐARTÆNASTUR (LG 2022/212-216) 126
8.9.1 EIND 8 Í TRIVNAÐARDEPLINUM 126
8.9.2 EIND 11 Í TRIVNAÐARTÆNASTUM 128
8.10 FELAGSKASSAR (LG 2022/212-216) 129
8.11 ARBEIÐSFREMJANDI TILTØK (LG 2021/212-217) 129

9. FÍGGJARSTØÐA 133

9.1 FÍGGJARSTØÐA STOVNANNA 133
9.1.1 EFTIRLIT OG GÓÐKENNING AV ROKNSKAPUM 133
9.1.2 GRANNSKOÐAN 134
9.2 FÍGGJARSTØÐA LANDSKASSANS (LG 2022/300-000) 137
9.2.1 KAPITALINNSKOT (LG 2022/300-102) 137
9.2.2 KEYPSSKÁLA-SKRÁSETT VIRÐISBRØV 139
9.2.3 VIRÐISBRØV 139
9.2.4 ÚTLÁN 141
9.2.5 ÁOGN O.A. 141
9.2.6 TØKUR PENINGUR 143
9.2.7 SKULD 145
9.3 ÚTJAVNINGARKONTA (LG 2022/300-203) 145
9.4 FYRISITING AV GJALDFØRI OG SKULD (LG 2022/300-104 OG 202) 146
9.4.1 PORTEFØLJUSKIPANIN 146
9.4.2 GJALDFØRIÐ HJÁ LANDINUM 146
9.4.3 LANDSKASSASKULD - BRÆVALÁN 148

10. AÐRAR VIÐMERKINGAR 153

10.1 SKIPAN AV ROKNSKAPARHALDINUM 153
10.2 LOYVI TIL EGNA BÚSKAPARSKIPAN 153
10.3 ÚTBJÓÐING AV VØRUM OG TÆNASTUM 155
10.4 TÍÐARAVMARKING AV LØNUM OG TÍÐARSKRÁSETING 155

11. ORÐALISTI 157

# 0. Framløga

Sambært § 12, stk. 2, í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”, skal roknskapargrannskoðanin innan 8 mánaðir eftir fíggjarárslok lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu leingja freistina.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2022 fyri Løgtingið til samtyktar.

Frágreiðingin er løgd fyri tey landsstýrisfólk til viðmerkingar, sum umsita málsøkini. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrisfólkum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2022 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni fara at kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2022 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Argir, 31. august 2023

Beinta Dam
landsgrannskoðari

# 1. Inngangur

## 1.1 Landsroknskapurin 2022

*Landsstýrið skal leggja fram samlaðan landsroknskap áðrenn 1. juni.*

§ 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini ásetir, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok. Sambært § 1, stk. 1, í Ll. nr. 33 frá 23. mars 1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skal Landsstýrið, innan mai mánaður er liðin, leggja samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár fyri Løgtingið.

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2022 var latin Løgtinginum 31. mai 2023.

Tað er eisini ásett í § 11, stk. 1, í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.", at landsstýrismaðurin í seinasta lagi fimm mánaðir eftir fíggjarárslok skal lata løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini tann árliga landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.

*Roknskapurin skal vera gjørdur í BSL.*

Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í K. nr. 22 frá 14. mars 2007 "um roknskaparverk landsins o.t."[1] Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir aðalráðini, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

Aðalráðini og stovnar teirra skulu eisini støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

*Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.*

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini verða roknskaparupplýsingar samsvarandi góðkendum ársroknskapum tiknar við í landsroknskapin, sum Gjaldstovan setir upp.

## 1.2 Grannskoðan av roknskapinum

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

*Endamálið við grann-skoðanini.*

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- at eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,

[1] Broytt við K. nr. 110 frá 14. juli 2017.

- at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
- at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

### Landsgrannskoðanin

*Ábyrgd grannskoðarans.*

Landsgrannskoðanin er stovnur undir Løgtinginum og er óheft í virki sínum. Landsgrannskoðanin skal grannskoða árliga landsroknskapin, t.e. samlaða roknskapin fyri landsumsitingina og allar landsstovnar.[2]

Grannskoðanin skal fevna um fíggjarliga grannskoðan, løgfrøðiliga-kritiska grannskoðan og fyrisitingargrannskoðan. Harafturat skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin ger sjálv av, hvussu grannskoðanin verður útint. Grannskoðanin verður løgd soleiðis til rættis, at øki og stovnar verða grannskoðað við jøvnum millumbili. Landsgrannskoðanin fer út á stovnar og deildir at kanna t.d. roknskapar- og lønarviðurskifti ella at kanna mannagongdir fyri umsiting av lóggávu og játtanum. Aðrar uppgávur eru t.d. játtanareftirlit, gjøgnumgongd av fíggjarstøðu og avstemman.

### Privatir grannskoðarar

Hjá nøkrum landsstovnum og grunnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðara. Í øðrum førum verður grannskoðanin útint sambært avtalu ella siðvenju.

Grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um úrslitini av grannskoðanunum. Løgtingsgrannskoðararnir gera ein samandrátt av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum, sum verður latin Løgtinginum saman við uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin.

### Frágreiðingar umbidnar av løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, sum teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini áleggja Landsgrannskoðanini at gera víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum økjum ella at gera tvørgangandi fyrisitingargrannskoðan, sum fevnir um fleiri játtanir, stovnar o.a.

Dømi um slíka frágreiðing er frágreiðingin “um nýtsluna til byggiverkætlanina Landssjúkrahúsið, útbygging”, sum Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum í apríl 2023.

### Aðrar frágreiðingar

Umframt ársfrágreiðingina ger Landsgrannskoðanin eisini frágreiðingar um ávís útvald evni ella øki. Dømi um tílíkar frágreiðingar eru frágreiðing “um kanning av KT-trygdarstøðuni hjá stovnum landsins” frá august 2020 og frágreiðing “um grannskoðan av lønum til leiðarar, settir seinastu árini” frá desember 2021.

### Viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrisfólkum

Í § 12, stk. 1, í grannskoðanarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin skal hava eina skrivliga fráboðan um úrslitið av grannskoðanini. Vanligt er, at stovnsleiðslan frammanundan fær høvi at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina. Tað er fyri at tryggja, at ongar misskiljingar eru, og at tey skriv, sum verða send landsstýrisfólkinum eru so røtt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

*Landsstýrisfólkið skal hava frágreiðingar til viðmerkingar.*

Í § 12, stk. 3, er ásett, at áðrenn frágreiðing um úrslitið av einari grannskoðan verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri viðkomandi landsstýrismann til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um

[2] Tó ikki roknskapirnar hjá teimum, har tað í lóg, kunngerð, viðtøkum, siðvenju e.l. er ásett, at grannskoðanin verður útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu takast við í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar.

Frágreiðingin skal sendast landsstýrisfólkinum til viðmerkingar til tess at tryggja, at tað tilfar, sum verður latið løgtingsgrannskoðarunum, verður so objektivt rætt sum gjørligt, og at landsstýrisfólkið eisini fær høvi at lýsa síni sjónarmið.

### Millumlanda samstørv

Landsgrannskoðanin er við í norðurlendskum samstarvi ímillum ríkisgrannskoðanirnar í Danmark, Finnlandi, Íslandi, Norra, Svøríki og Føroyum. Í august 2022 var Landsgrannskoðanin vertur fyri árliga ríkisgrannskoðarafundinum.

Landsgrannskoðanin er eisini við í norðuratlantiskum samstarvi ímillum grannskoðanirnar í Íslandi, Grønlandi og Føroyum.

*Ráðstevna í Føroyum um almenna grannskoðan.*

Í mai 2022 var norðurlendsk ráðstevna um almenna grannskoðan hildin í Føroyum, har luttakararnir vóru frá norðurlendsku ríkisgrannskoðanunum, parlamentarisku grannskoðanunum, umframt ymiskum granskarum á økinum.

Sum skrivari hjá løgtingsgrannskoðarunum, er landsgrannskoðarin við á fundum ímillum skrivararnar hjá parlamentarisku grannskoðarunum í Norðurlondum.

Landsgrannskoðanin hevur umboð í grannskoðaranevndini, ið grannskoðar ES-stuðul frá Northern Periphery and Arctic Programme.

# 2. Løgmansfyrisitingin

## 2.1 Løgmansskrivstovan (LG 2021/202-111)

***Roknskaparreglu-gerðin er ikki dagførd.***

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsgrannskoðanin frá grannskoðan av Løgmans-skrivstovuni. Roknskaparreglugerðin er seinast dagførd í juli 2017 og trongdi til dagføringar, m.a. manglar frágreiðing um gjaldkort.

Í august 2023 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at roknskaparreglugerðin er ikki dagførd.

## 2.2 Lønir til aðalstjórar (LG 2022/202-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað lønir til aðalstjórar. Vit kannaðu útgjøldini fyri november 2022 og februar 2023. Endamálið við grannskoðanini er at kanna, um lønirnar eru goldnar samsvarandi galdandi reglum, avtalum og lønartalvu.

Skipanin við aðalstjórum kom við broytta bygnaðinum av miðfyrisitingini á ólavsøkudegi 1996, tá ið farið var frá felagsábyrgd til ráðharraábyrgd.

***Aðalstjórar eru settir sum tænastumenn.***

Tey, sum eru sett í starv sum aðalstjórar, eru sett sum tænastumenn, lønt eftir 39. lønarflokki í semju ímillum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins. Løgmansstjórin er løntur eftir 40. lønarflokki. Afturat lønini fáa aðalstjórar viðbót sambært semju frá september 2001, sum tó ikki er eftirlønargevandi. Upphæddirnar eru seinast javnaðar 1. oktober 2021.

Mánaðarliga samsýningin er:

*kr.*

| | Grundløn | Viðbót | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Løgmansstjóri | 69.048,21 | 5.898,47 | 74.946,68 |
| Aðalstjórar | 62.912,75 | 5.898,47 | 68.811,22 |

Tænastumenn eru settir sambært Ll. nr. 31/1971. Lønartalva, viðbøtur og aðrar veitingar verða ásettar í semju ímillum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmála-ráðið.

Lønir fyri november 2022 (goldnar í oktober):

*kr.*

| Løgmansstjóri/aðalstjóri | Grundløn | Aðalstj. viðbót | Viðbót tíðarav. | Tilsamans[3] |
|---|---|---|---|---|
| John Rajani | 69.048 | 5.898 | 0 | 74.947 |
| Herálvur Joensen | 62.913 | 5.898 | 12.583 | 81.394 |
| Eyðun Mohr Hansen | 62.913 | 5.898 | 0 | 68.811 |
| Bjarni Askham Bjarnason | 62.913 | 5.898 | 0 | 68.811 |
| Turid Arge | 62.913 | 5.898 | 0 | 68.811 |
| Poul Geert Hansen | 62.913 | 5.898 | 0 | 68.811 |
| Rógvi Reinert | 62.913 | 5.898 | 0 | 68.811 |
| **Tilsamans** | | | | **500.396** |

Lønir, februar 2023:

*kr.*

| Løgmansstjóri/aðalstjóri | Grundløn | Aðalstj. viðbót | Viðbót tíðarav. | Eftirl.gj arb.gevari | Tilsamans[4] |
|---|---|---|---|---|---|
| John Rajani | 69.048 | 5.898 | 0 | 0 | 74.947 |
| Herálvur Joensen | 62.913 | 5.898 | 12.583 | 0 | 81.394 |
| Eyðun Mohr Hansen | 62.913 | 5.898 | 0 | 0 | 68.811 |
| Bjarni Askham Bjarnason | 62.913 | 5.898 | 0 | 0 | 68.811 |
| Turid Arge | 62.913 | 5.898 | 0 | 0 | 68.811 |
| Elin Mortensen | 16.566 | 11.226 | 0 | 2.485 | 30.276 |
| Poul Geert Hansen | 62.913 | 5.898 | 0 | 0 | 68.811 |
| Pól Edvard Egholm | 62.913 | 5.898 | 0 | 9.437 | 78.248 |
| Nella Festirstein | 62.913 | 5.898 | 0 | 9.437 | 78.248 |
| **Tilsamans** | | | | | **618.358** |

***Lønirnar eru í samsvari við ásettan lønarflokk.***

Samanumtikið vísir grannskoðanin, at lønirnar, sum eru goldnar út fyri november 2022 og februar 2023, eru í samsvari við 40. og 39. lønarflokk í tænastumannasáttmálanum.

Lønin hjá aðalstjóranum í Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Elini Mortensen, er 27.792 kr., umframt eftirlønargjald, tí at hon virkaði sum sendikvinna til og við 15. apríl 2023. Lønin svarar til munin ímillum 37. og 39. lønarflokk og aðalstjóraviðbót fyri januar og februar.

Landið rindar eftirlønargjøld saman við mánaðarlønunum fyri teir tríggjar aðalstjórarnar, sum eru settir í fyribilsstørv. Teirra løn er ikki goldin forút, eins og hjá teimum í føstum størvum.

## Fyribilssettir og fráfarnir aðalstjórar

Sambært almenna setanarpolitikkinum eiga øll størv at verða lýst leys, og sambært K. nr. 84/2011 "um rakstrarjáttan" skal Fíggjarmálaráðið góðkenna øll tænastumannastørv og øll onnur størv, ið eru lønt í 37. lønarflokki í tænastumannasáttmálanum ella hægri, áðrenn tey verða skipað.

***Nakrir aðalstjórar eru fyribilssettir.***

Aðalstjórarnir í Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Umhvørvismálaráðnum og Løgmálaráðnum eru fyribilssettir frá januar 2023. Teirra løn í februar 2023 er, eins og hjá teimum í føstum starvi, sambært 39. lønarflokki í tænastumannasáttmálanum, umframt aðalstjóraviðbót.

Aðalstjórin í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum bleiv settur í tíðaravmarkað starv í desember 2016 við 20% viðbót vegna tíðaravmarkað starv. Í 2021 var tíðaravmarkaða setanin longd við trimum árum.

Landsgrannskoðanin spurdi Løgmansskrivstovuna, hvørjar avtalur eru gjørdar viðvíkjandi fyribilssettu aðalstjórunum, um setanarskriv eru gjørd, um Fíggjarmálaráðið

[3] Upphæddin er uttan arbeiðsmarknaðargjøld.
[4] Upphæddin er uttan arbeiðsmarknaðargjøld.

hevur góðkent størvini, og hvussu leingi fyribilssetanirnar kunnu vara, áðrenn størvini verða alment lýst leys.

Í august 2023 hevur løgmaður svarað,

- at avtalur eru gjørdar við fyribilssettu aðalstjórarnar um at røkja størvini, til tey verða lýst leys, og at tey umframt lønina, sum tey fingu frammanundan, fáa eftirlønargevandi viðbót, sum svarar til munin ímillum vanliga aðalstjóraløn og lønina, tey høvdu frammanundan, umframt ikki eftirlønargevandi aðalstjóraviðbót. Harvið fáa tey somu løn, sum aðrir aðalstjórar, men vanliga eftirløn í staðin fyri at vinna rætt til tænastumannaeftirløn, tó bara eftirløn av tí partinum av lønini, sum ikki er aðalstjóraviðbót.
- at fyribilssettu aðalstjórarnir hava fingið skriv, sum endurgevur oman fyri nevndu avtalu. Skrivini eru at rokna sum setanarskriv og hava verið grundarlag fyri lønarútgjaldinum í Búskaparskipan Landsins.
- at hesar avtalur eru meinlíkar teimum, sum hava verið brúktar áður, tá ið aðalstjórar eru fyribilssettir, og at Fíggjarmálaráðið hevur góðkent avtalurnar. Leggjast skal afturat, at ætlanin upprunaliga var – hóast tað ikki er skrivliga til skjals – at lýsa størvini leys sum skjótast, og at størvini væntandi kundu verið sett á sumri 2023.
- at løgmaður hevur sett nevnd at endurskoða lønar- og setanarviðurskifti hjá aðalstjórum, og bíðað verður við at lýsa størvini leys, til nevndin er liðug. Væntandi verður lønarnevndin liðug í november 2023.

***Aðalstjórastørvini ikki lýst leys enn.***

Tveir fyrrverandi aðalstjórar, sum eru farnir í onnur størv í landsfyrisitingini, fáa framhaldandi aðalstjóraviðbøtur.

Landsgrannskoðanin spurdi Løgmansskrivstovuna, um fyrrverandi aðalstjórar, sum eru farnir í onnur størv í landsumsitingini, hava rætt til aðalstjóraviðbót.

***Fyrrverandi aðalstjórar fáa aðalstjóraviðbót.***

Í august 2023 hevur løgmaður svarað, at í øðrum førinum er talan um gamalt mál, og trupult er at gera viðmerkingar til tað í dag. Hitt málið er nýggjari. Í tí málinum er gjørd fráfaringaravtala, har aðalstjórin varðveitir somu løn íroknað aðalstjóraviðbót í trý ár, og eftir tað verður aðalstjórin løntur sum ráðgevi ella fulltrúi sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Fráfaringaravtalan er, sum slíkar, úrslit av samráðing ímillum partarnar. Semjan er góðkend av Fíggjarmálaráðnum.

## 2.3 Umbygging í Tinganesi (LG 2019/202-111)

Í seinastu frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av høvuðskontu 2.11.1.21 “Umbygging í Tinganesi”.

Í sambandi við umvælingar av bygningunum í Tinganesi var eitt mál ímillum Landsverk og eina fyritøku, ið legði nýtt teppi á í 2014 fyri slakar 200 t.kr. Eftir stutta tíð vísti tað seg, at arbeiðið var ikki nøktandi, og drúgv togtogan var ímillum Landsverk og veitaran. Niðurstøðan var, at Landsverk skifti teppið, og kravdi veitaran eftir endurgjaldi.

Í 2021 greiddi Løgmansskrivstovan frá, at kostnaðurin fyri at leggja nýtt teppi á fór at verða lægri enn mett, tí framleiðarin skuldi rinda fyri sjálvt teppið, og Løgmansskrivstovan skuldi rinda 36,4 t.kr. fyri áleggingina. Málið hevði verið kostnaðarmikið; tað byrjaði í 2014, og drúgva tíðin hevði havt við sær, at fleiri fólk høvdu brúkt nógva tíð upp á tað.

Landsverk hevði onnur endurgjaldskrøv ímóti sama veitara, og Løgmansskrivstovan helt, at meirútreiðslan upp á 124 t.kr., sum hon hevði havt av at skifta teppið, skuldi leggjast afturat og gerast partur av samlaðum kravi ímóti veitaranum.

Í 2022 greiddi Løgmansskrivstovan frá, at Landsverk metti, at tað neyvan fór at verða nakað endurgjaldskrav, tí løgfrøðiliga var ov nógv arbeiði í tí samanborið við, hvat kann fáast í endurgjaldi.

***Kravið um endurgjald er slept.***

Í august 2023 hevur Løgmansskrivstovan boðað frá, at hon ger ikki meira við málið, tí tey taka metingina hjá Landsverki til eftirtektar.

## 2.4 Lønir til løgmann og landsstýrisfólk (LG 2022/202-123)

Landsgrannskoðanin hevur kannað samsýningar, bíðilønir, kostnaðarendurgjøld og eftirlønir til løgmann og landsstýrisfólk, sum eru goldin út í januar 2023. Játtanin er á høvuðskontu 2.12.3.01 "Løgmaður og landsstýrið".

Í Ll. nr. 10/1993 "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." eru ásetingar um løn, bústað, kostnaðarendurgjald og eftirløn til løgmann og landsstýrisfólk. Løgmaður fær samsýning, sum er 130%, og landsstýrisfólk fáa samsýning, sum er 110% av 40. lønarflokki í lønartalvu fyri Felag Tænastumanna Landsins.

*kr.*

| | **Løgmaður** | **Landsstýrisfólk** |
|---|---|---|
| Samsýning | 89.763 | 75.953 |

Hevur løgmaður fastan bústað uttan fyri høvuðsstaðarøkið, kann hann flyta til høvuðsstaðin í ein bústað, sum landið rindar. Løgmaður kann játta landsstýrisfólkum endurgjald fyri útreiðslur til bústað í høvuðsstaðnum, um viðkomandi í starvstíðini hevur fastan bústað, har tað ikki er landfast, ella serlig viðurskifti gera seg galdandi.

Fyri hvørt landsstýrisfólk verður í mesta lagi endurgoldið, móti kvittan, upp til 10 t.kr. um mánaðin fyri húsaleigu, el og hita.

Sambært § 1, stk. 4, í Ll. nr. 10/1993, fáa løgmaður og landsstýrisfólk, sum ikki eru úr Tórshavn, Hoyvík, av Argjum ella Hvítanesi, árligt kostnaðarendurgjald afturat lønini, sum er endurgjald fyri útreiðslur, ið standast av flutningskostnaði.

Landið rindar upp í 15% av lønarsamsýningini í eftirløn í eina eftirlønarskipan, sum er góðkend av landsstýrinum. Eftirlønarprosentið verður ásett í mun til, hvussu leingi landsstýrisfólk hevur virkað eftir gomlu skipanini, og hvussu leingi viðkomandi hevur sitið á Løgtingið.

Samanumtikið vísir grannskoðanin, at upphæddirnar eru í samsvari við galdandi lógarreglur og avtalur.

Roknskapar- og játtanartøl:

*t.kr.*

| | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir | 9.584 | 7.767 | 7.447 | 9.258 | |
| Keyp av vørum og tænastum | 0 | 0 | 0 | 46 | |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 18 | 0 | 0 | 0 | |
| **Tilsamans** | **9.603** | **7.767** | **7.447** | **9.305** | |
| *Játtan* | *8.943* | *7.980* | *7.600* | *8.589* | *11.300* |

Játtanin fyri 2023 er hækkað í sambandi við løgtingsvalið, og hædd er tikin fyri fráfaringarløn til landsstýrisfólk, og at tað nú eru 9 landsstýrisfólk í mun til 7 seinast.

Samsýningarnar til núverandi løgmann og landsstýrisfólk fyri februar 2023:

*kr.*

| | Samsýning | Kostnaðar-endurgjald | Eftirlønargj. arbeiðsg. | Tilsamans[5] |
|---|---|---|---|---|
| Aksel Vilhelmson Johannesen | 89.763 | 0 | 2.693 | 92.456 |
| Høgni Hoydal | 75.953 | 0 | 0 | 75.953 |
| Sirið Stenberg | 75.953 | 3.960 | 6.076 | 85.989 |
| Ruth Vang | 75.953 | 0 | 6.076 | 82.029 |
| Margit Stórá | 75.953 | 0 | 11.393 | 87.346 |
| Dennis Holm | 75.953 | 3.960 | 11.393 | 91.306 |
| Djóni Nolsøe Joensen | 75.953 | 0 | 6.836 | 82.789 |
| Ingilín Didriksen Strøm | 75.953 | 1.861 | 9.114 | 86.928 |
| Bjarni Kárason Petersen | 75.953 | 0 | 8.355 | 84.308 |
| **Tilsamans** | | | | **769.104** |

***Landsstýrisfólk skulu siga onnur størv frá sær.***

Tá ið løgmaður ella landsstýrisfólk tekur við, skal viðkomandi, sambært § 9, stk. 1, í Ll. nr. 10/1993, vanliga siga størv í almennari tænastu ella privatum virkjum frá sær. Landsstýrisfólk kann tó í hendinga førum, við samtykki løgmans, halda fram í tílíkum størvum. Løgmaður boðar Løgtinginum frá, hvørji størv avvarðandi landsstýrisfólk framvegis hevur loyvi at røkja.

Tá ið landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, tók við 22. desember 2022, røkti hann fulltíðarstarv sum námslektari á Fróðskaparsetri Føroya. Dennis Holm fór í farloyvi úr starvinum á Fróðskaparsetrinum 7. januar 2023; hann var tí í almennari tænastu, samstundis sum hann var landsstýrismaður hetta tíðarskeiðið.

Spurd, hevur Løgmansskrivstovan í august 2023 svarað, at landsstýrismaðurin hevur upplýst, at hann segði Fróðskaparsetrinum frá beinanvegin 22. desember 2022, at hann fór úr starvi. Løgmansskrivstovan tekur hesa frágreiðing frá landsstýrismanninum til eftirtektar, og hevur ikki aðrar viðmerkingar.

### Bíðiløn

***Landsstýrisfólk, sum fer frá, fær bíðiløn.***

Sambært § 2 í Ll. nr. 10/1993, fær landsstýrisfólk, sum fer frá, samsýning eftir, hvussu leingi viðkomandi hevur sitið. Hevur landsstýrisfólk sitið minni enn eitt ár, verður samsýning latin í 3 mánaðir, og hevur landsstýrisfólk sitið yvir eitt ár, verður samsýning latin í 6 mánaðir.

Sambært § 1 í Ll. nr. 12/1999 "um samsýning og eftirløn løgtingsmanna" verða løgtingslimir samsýntir samsvarandi 34. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins. Fleiri landsstýrisfólk í undanfarnu samgongu blivu løgtingsfólk eftir valið.

Útgoldnar lønir v.m. til fráfarna løgmann og landsstýrisfólk fyri februar 2023:

*kr.*

| | Samsýning | Frád. fyri løgtingsløn | Kostnaðar-endurgj. | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Bárður S. Nielsen | 132.638 | -42.875 | 3.383 | 93.146 |
| Uni Rasmussen | 75.953 | | | 75.953 |
| Kaj Leo H. Johannesen | 118.828 | -42.875 | | 75.953 |
| Magnus Rasmussen | 118.828 | -42.875 | 4.557 | 80.510 |
| Árni Skaale | 118.828 | -42.875 | 5.417 | 81.370 |
| Jenis av Rana | 118.828 | -42.875 | | 75.953 |
| Sólvit E. Nolsø | 78.139 | -19.907 | | 58.232 |
| **Tilsamans** | | | | **541.117** |

Í samlaðu lønini í talvuni eru ikki eftirløn, arbeiðsmarknaðargjøld, kostnaðarískoyti v.m.

[5] Upphæddin er uttan arbeiðsmarknaðargjøld.

### Kostnaðarendurgjald

Í februar 2023 høvdu hesi landsstýrisfólkini rætt til kostnaðarendurgjald:

*kr.*

| Landsstýrisfólk | Bústaður | Upphædd |
|---|---|---|
| Sirið Stenberg | Vágur | 3.960 |
| Dennis Holm | Vágur | 3.960 |
| Ingilín Didriksen Strøm | Velbastaður | 1.861 |
| **Tilsamans** | | **9.780** |

Løgmaður og landsstýrisfólk fáa kostnaðarendurgjald fyri flutningskostnað við egnum bili við Strandfaraskipum landsins 200 ferðir aftur og fram árliga, og koyripening og tunnilsgjald ímillum heimstað og Tórshavn 200 ferðir aftur og fram árliga. Landsstýrisfólk úr Tórshavn, Hoyvík, av Argjum og Hvítanesi fáa ikki kostnaðarendurgjald.

Sambært § 1, stk. 4, í K. nr. 120/2021 "um ferðing í embætisørindum og um samskiftisútreiðslur hjá landsstýrismonnum", verður samlaða kostnaðarendurgjaldið útgoldið mánaðarliga afturút við 1/12 av árligu upphæddini.

Landsgrannskoðanin vísti á, at munur er á, hvat sami persónur kann fáa í endurgjaldi fyri ferðing, alt eftir um viðkomandi er landsstýrisfólk ella løgtingsfólk.

Endurgjald til landsstýrisfólk fyri koyring verður roknað út eftir stytsta teininum, sum Landsverk upplýsir ímillum heimstaðarbýin ella bygdina og Havnina. Fyri løgtingsfólk er tað vegateinurin ímillum heimstað og Tórshavn.

***Endurgjøld fyri koyring verða roknað ymiskt.***

Ymisku hættirnir at rokna endurgjøld gera t.d., at fyri landsstýrisfólk er teinurin ímillum Tórshavn og Vestmanna 38,38 km, meðan hann fyri løgtingsfólk er 40 km.

Í juli 2023 bað Landsgrannskoðanin Løgmansskrivstovuna um viðmerkingar.

Í august 2023 hevur Løgmansskrivstovan víst á § 1, stk. 3, í K. nr. 120/2021, har ásett er, at *"Koyripeningurin í kostnaðarendurgjaldinum verður roknaður út eftir kilometratalinum fyri stytstu leið, sum Landsverk upplýsir, millum heimstaðarbýin ella bygdina og Havnina."* Løgmansskrivstovan leggur afturat, at hon hevur ikki viðmerkingar til rokniháttin, sum Løgtingið brúkar at endurrinda útreiðslur til ferðing.

Broytingar eru ikki gjørdar í Ll. nr. 12/1999 "um samsýning og eftirløn løgtingsmanna", síðan Føroyar blivu eitt valdømi, og undirsjóvartunlarnir eru vorðnir partur av føroyska infrakervinum.

Løgtingsfólk hava m.a. rætt til koyripening ímillum heimstað og Tórshavn 100 ferðir aftur og fram árliga, og til flutning við egnum bili við Strandfaraskipum landsins 100 ferðir um árið.

Sambært Búskaparskipan landsins fáa løgtingsfólk, sum búgva i Norðoyggjum endurrindað tunnilsgjald ímillum Klaksvík og Leirvík og koyripening fyri 75 km hvønn vegin. Tað gevur 4.166 kr. um mánaðin.

Um roknað var við koyripeningi fyri stytstu leiðina, hevði upphæddin verið 3.558 kr. um mánaðin, íroknað tunnilsgjald fyri Norðoyatunnilin og Eysturoyartunnilin.

Spurd um viðmerkingar, hevur Løgmansskrivstovan víst á, at landsstýrisfólk fáa endurgoldið fyri stytstu leið, sum ásett í oman fyri nevndu kunngerð um ferðing í embætisørindum hjá landsstýrismonnum. Løgmansskrivstovan leggur afturat, at hon hevur ongar viðmerkingar til, hvussu Løgtingið roknar endurgjald fyri ferðing.

## 2.5 Dátueftirlitið (LG 2022/202-142)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Dátueftirlitinum á høvuðskontu 2.14.2.02.

Dátueftirlitið er óheftur fyrisitingarmyndugleiki, sum er skipaður við Dáturáði og fyrisiting. Landsstýrismaðurin[6] setir Dátuináðið, og ráðið er skipað við fimm limum, harav formanni, sum skal vera løgfrøðingur. Fyrisitingin røkir dagliga virksemið hjá Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið umsitur Ll. nr. 80/2020 "um vernd av persónupplýsingum (Dátuverndarlógin)", og Ll. nr. 178/2020 "um yvirvøku við vakmyndatóli".

Dátuverndarlógin er grundað á ES-fyriskipanina GDPR, og hevur við sær eina nýggja skipan innan dátuverndarrætt í Føroyum.

Dátueftirlitið ráðgevur, vegleiðir og hevur eftirlit við, at reglurnar um vernd av persónupplýsingum verða hildnar. Stovnurin samskiftir við Dátuináðið um, hvussu eftirlitini skulu fremjast, og hevur eisini eftirlit við dátuverndarfólkum. Í nýggju lógini er dentur lagdur á vegleiðandi og ítøkiligu kunningina um dátuverndarøkið, og í tí sambandi hevur Dátueftirlitið gjørt vegleiðandi tilfar.

Í 2021 viðgjørdi Dátueftirlitið 18 mál um trygdarbrot, og staðfesti í 12 av málunum, at nøktandi var boðað frá. Mest vanliga trygdarbrotið var, at teldupostar o.a. var sent til skeivan móttakara ella til rættan móttakara við skeivum innihaldi.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin er góðkend av Løgmansskrivstovuni í juni 2022. Játtanin til Dátueftirlitið er tvífaldað seinastu árini, tí starvsfólkaorkan er styrkt við trimum ársverkum yvir 4 ár.

Roknskapar- og játtanartøl:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.550 | 1.819 | 2.609 | 3.019 | 3.277 |
| Keyp av vørum og tænastum | 312 | 488 | 379 | 336 | 531 |
| Keyp av útbúnaði | 138 | 59 | 116 | 216 | 145 |
| Leiga, viðlíkahald, skattur o.a. | 0 | 0 | 2 | 15 | 98 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. Útr. | 10 | 10 | 27 | 18 | 8 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. Innt. | 0 | 0 | 0 | 0 | -4 |
| **Tilsamans** | **2.010** | **2.376** | **3.133** | **3.604** | **4.054** |
| *Játtan* | *2.045* | *2.445* | *3.252* | *3.923* | *4.103* |

Størsti parturin av útreiðslunum hjá stovninum eru lønir til starvsfólk og samsýningar til nevndarlimir. Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um lýsingar, umsóknir, prógv, setanarskriv o.a. vóru í lønarmálunum og samanbar lønirnar við galdandi sáttmálar. Einki var at finnast at.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum keyp við Eurocard. Vit mæltu til at leggja skjalprógv við øllum útreiðslunum.

Landsgrannskoðanin kannaði eisini við stakroyndum ferðauppgerðir. Einki var at finnast at.

---

[6] Í undanfarna valskeiði vóru lógarmál, herundir Dátueftirlitið, umsitin av løgmanni, og tá var tað løgmaður sum setti Dátuináðið; nú er tað landsstýrismaðurin í lógarmálum.

Dátueftirlitið húsast í parti av hølum, ið Fjarskiftiseftirlitið leigar. Stovnurin rindar 90 t.kr. um árið í húsaleigu beinleiðis til eigaran, tó at stovnurin hevur sáttmála við Fjarskiftiseftirlitið um framleigu. Sambært Dátueftirlitinum fer stovnurin at nágreina í komandi sáttmála, hvønn leigan skal rindast til.

Dátueftirlitið eigur ikki ognir, ið sambært roknskaparkunngerðini skulu skrásetast í landsroknskapinum. Stovnurin hevur yvirlit yvir smærri ognir.

### Viðmerkingar frá seinastu ársfrágreiðing

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Dátueftirlitinum. Landsgrannskoðanin hevur mælt til at gera mannagongdir, ið tryggja, at váðameting og KT-trygdarpolitikkur verða samfeldir partar av innaneftirlitinum.

Dátueftirlitið hevði bíðað við at skifta KT-útbúnaðin út og at dagføra netið og skipanina, tí eingin tænasta fór at verða veitt til verandi útbúnað eftir 2020, og stovnurin arbeiddi við at endurskoða KT-viðurskiftini.

Í 2019 greiddi Dátueftirlitið frá, at trygdarskjøl, váttanir og KT-trygdarpolitikkur vóru nútímansgjørd og avgreidd, men at enn manglaði at avgreiða eina trygdarskoðan.

Í 2020 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at sambært Dátueftirlitinum var trygdarskoðanin framvegis ikki gjørd. Dátueftirlitið hevði verið í drúgvum samskifti við Elektron og Formula, tí partarnir vóru ikki samdir um, hvørjar leiklutir teir høvdu, eitt nú dátuábyrgdari og dátuviðgeri.

Í 2021 greiddi Løgmansskrivstovan frá, at Dátueftirlitið og KT Landsins høvdu gjørt sáttmála um tænastustig av Landsnet-grundtænastum. Tað merkti m.a., at spurningurin um, hvussu ábyrgdarbýtið var skipað ímillum Elektron, Formula og Dátueftirlitið, ikki longur var viðkomandi.

Dátueftirlitið hevði eisini dátuviðgerðaravtalu við KT Landsins, sum m.a. tilskilaði, at KT Landsins var dátuviðgeri hjá Dátueftirlitinum, og at bæði Elektron og Formula vóru undirdátuviðgerar. Harumframt var tilskilað í avtaluni, at dátuviðgerin, sum var KT Landsins, fyri egna rokning skuldi útvega árliga skoðanarváttan frá óheftum triðjaparti, um at dátuviðgerin (t.e. KT Landsins) og undirdátuviðgerar (t.e. m.a. Elektron og Formula) halda dátuverndarlógina umframt aðra lóggávu um dátuvernd.

Dátueftirlitið og Gjaldstovan gjørdu í juli 2021 avtalu um Trygdarpakkan, sum m.a. hevur við sær, at Gjaldstovan eina ferð um árið skipar fyri, at Dátueftirlitið fær eina skoðan av tí virksemi, sum liggur hjá stovninum.

Í 2022 greiddi Løgmansskrivstovan frá, at trygdarskoðan var ikki gjørd enn.

***Trygdarskoðan ikki gjørd enn.***

Í august 2023 hevur Løgmálaráðið kunnað um, at trygdarskoðan er ikki gjørd. Ráðið væntar, at tað kemur í rættlag, tá ið KT Landsins vitjar Dátueftirlitið næstu ferð.

# 3. Fíggjarmál

## 3.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2014/100-001)

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava seinastu 25-30 árini javnan gjørt vart við, at fleiri stovnar og grunnar hava ikki verið við í fíggjarlógini og í landsroknskapinum, og at ivasamt er, um grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan hava verið hildnar.

Í serstakari frágreiðing "um ávísar stovnar og grunnar og tilknýti teirra til fíggjarlóg og landsroknskap", latin løgtingsgrannskoðarunum í oktober 2007, vísti Landsgrannskoðanin á, at fleiri landsstovnar vóru ikki við í fíggjarstøðuni.

Árini eftir tað hildu løgtingsgrannskoðararnir fram við at vísa á týdningin av, at allir stovnar, grunnar, feløg o.o., sum ikki eru í fíggjarlógini og sum koma undir § 2, stk. 2, í lógini um landsins almenna roknskaparhald, verða tikin við í landsroknskapin.

***Ikki allir landsstovnar við í landsroknskapinum.***

Landsroknskapurin fevnir nú um næstan allar landsstovnar og alment virksemi, sum landið varðar av. Somuleiðis er við gjaldføri o.ø. hjá landinum. Dømi um almennar stovnar og virksemi, sum ikki eru við í landsroknskapinum, eru Føroya Realkreditstovnur og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, sum hava einar 2,6 mia.kr. í eginogn.

Í svari til løgmann í sambandi við Lm. nr. 37/2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað *"framhaldandi og áhaldandi verður arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Bústaðir og Búnaðargrunnurin vóru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt verður við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýti til landsroknskapin."*

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir "Eksternir grunnar". Ætlanin var at taka eginpeningin í Bústøðum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframa við í landsroknskapin undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Sambært landsstýrismanninum var eftir at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kundu verða tikin við í landsroknskapin.

Seinastu árini er alsamt meira virksemi hjá landinum lagt í virkiseindir, sum eru skildar frá landsfyrisitingini, t.d. í partafeløg. Landsroknskapurin avspeglar tí í minni mun veruliga virksemið, váðar o.a. hjá landinum.

Í 2016 segði Fíggjarmálaráðið seg vera samt við Landsgrannskoðanina um vandan, ið kann standast av, at ov nógv virksemi verður lagt í almenn partafeløg uttan fyri fíggjarlóg, har ikki sama gjøgnumskygni, almenn stýring og almennar reglur eru galdandi. Fíggjarmálaráðið arbeiddi fram ímóti, at eginpeningurin í eksternu grunnunum fór at verða tikin við í landsroknskapin fyri 2017 undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Arbeitt var við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini fór at verða tikin til tilknýtið til landsroknskapin.

Landsstýrismaðurin greiddi í 2018 og aftur í 2019 frá, at tað var framhaldandi arbeitt ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Í 2018 var miðað ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 skuldi eginpeningurin í eksternu grunnunum takast við undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Tað bleiv ikki gjørt kortini.

Í 2021 segði landsstýrismaðurin, at *"sitandi samgonga og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava sett sær fyri at fáa ein meira fullfíggjaðan almennan roknskap."*

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at fyri summarfrítíðina var fundur við Landsbankan, Hagstovuna og Gjaldstovuna um krøv og leist fyri innlating av roknskapartølum frá feløgum og grunnum. Arbeitt verður við at gera avtalu við eitt felag um, hvat og hvussu upplýsingar skulu latast inn, ábyrgdarbýti o.a. Avtaluleisturin skal síðani eftir ætlan brúkast til hini feløgini og grunnarnar.

## 3.2 **Fíggjarmálaráðið** (LG 2021/203-111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðanina av roknskapinum hjá Fíggjarmálaráðnum, á høvuðskontu 3.11.1.03.

*Partapeningur*
Partabrøvini hjá landinum vóru skrásett undir ymiskum høvuðskontum. Partabrøv í P/f Elektron og niðurskrivaðu partabrøvini í gamla P/f Føroya Banka hava verið skrásett undir Fíggjarmálaráðnum síðani 2001. Í 2011 vórðu partabrøv í P/f Virðisbrævamarknaði Føroya skrásett undir Fíggjarmálaráðnum. P/f Virðisbrævamarknaður Føroya var tikið av í 2014.

Fíggjarmálaráðið kunnaði um, at ráðið var í samskifti við Gjaldstovuna um at gjøgnumganga goymsluna og skrásetingina av partabrøvum, herundir rættleikan, og um øll partabrøvini hjá landinum skulu vera undir landskassanum.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at Fíggjarmálaráðið hevur samskift við Gjaldstovuna um skrásetingina av partabrøvum hjá landinum. Øll partabrøv eru nú skrásett undir stovnsnummarinum hjá landskassanum.

Landsstýriskvinnan leggur afturat, at Fíggjarmálaráðið hevur kannað partabrøvini í P/f Tjaldur og P/f Smyril Line í sambandi við søluna av partabrøvunum. Partabrøvini í P/f Tjaldur eru nú seld, og partabrøvini í P/f Smyril Line eru við átekning niðurskrivað samsvarandi aðalfundarsamtyktum og verða eftir ætlan seld í hesum árinum. Tað er Løgmansskrivstovan, sum stendur fyri søluni.

*Depotkonta*
Í mai 2022 var saldan á depotkontuni 322 t.kr. Fíggjarmálaráðið hevði heitt á Atlantic Airways um at fáa greiði á, hvørji partabrøv ikki vóru innfríað, soleiðis at peningurin kundi gjaldast eigarunum. Deponeringin av peninginum er galdandi í 20 ár frá 2. mars 2015 at rokna.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at restupphæddin á depotkontuni er ikki avgreidd enn, men Fíggjarmálaráðið ætlar, saman við Løgmálaráðnum, at fáa fund í lag við P/f Atlantic Airways fyri at fáa endað málið.

## 3.3 **Talgildu Føroyar** (LG 2018/203-111)

Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin verkætlanina Talgildu Føroyar.

Játtanin er á høvuðskontu 3.11.1.61. Landsgrannskoðanin spurdi m.a., hvussu langt verkætlanin var komin samanborið við tíðarætlanina, um kostnaðarætlanin helt, og um fíggingin var komin upp á pláss.

Sambært viðmerkingunum til verklagslógina frá 2017, var fíggingarleisturin hesin:

*t.kr.*

| | **Ár 2016 til 2020** |
|---|---:|
| Landið | 90.000 |
| Ymiskir samstarvsfelagar | 19.500 |
| Peningastovnar | 15.000 |
| Kommunur | 25.500 |
| **Tilsamans** | **150.000** |

Seinkingar og ymiskar avbjóðingar gjørdu, at ætlaði fíggingarleisturin var broyttur nakað. Sambært Talgildu Føroyum varð tillagaði fíggingarleisturin tá:

*t.kr.*

| | **Ár 2016 til 2020** |
|---|---:|
| Landið | 90.214 |
| Ymiskir samstarvsfelagar | 17.200 |
| Peningastovnar | 9.000 |
| Kommunur | 10.600 |
| **Tilsamans** | **127.014** |

Í 2021 greiddi leiðslan frá, at av tí at fíggingin var seinkað so nógv, var neyðugt at leingja verkætlanina við tveimum árum.

### *Virkisskráin*

Virkisskráin, sum var steðgað í 2018 vegna vantandi fígging, kundi setast í gongd aftur, men neyðugt var við meirfígging til verkætlanina, tí seinkingin hevði við sær, at verkætlanin dýrkaði. 10,5 mió.kr. vóru játtaðar til Talgildu Føroyar í 2022, harav størsti parturin fór til menning av Virkisskránni. Seinkingin og meirfíggingin hevði eisini við sær, at neyðugt var at tillaga verandi verklagslóg.

***Virkisskráin kostar meira enn 18,5 mió.kr.***

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at Virkisskráin er seinkað og verður klár at taka í nýtslu við ársbyrjan 2024. Tað hevur við sær 3,5 mió.kr. í eykaútreiðslum í 2023. Enn er óvist, hvussu stórari upphædd tørvur er á í 2024. Samlaði kostnaðurin av Virkisskránni verður sostatt oman fyri 18,5 mió.kr.

### *Samleikin*

***44.000 brúka Samleikan.***

Landsstýriskvinnan hevur kunnað um, at Samleikin nú verður brúktur av umleið 44.000 borgarum, sum er eini 85% av øllum teimum, sum hava møguleika at brúka Samleikan. Tað eru 17 ymiskir veitarar, sum bjóða tænastur, ið brúka Samleikan sum innritan og/ella til talgilda undirskrift. Síðani á heysti 2022 er Samleikin einasta loysn at rita seg inn á netbankaloysnirnar hjá peningastovnunum. Tað eru um 10-15.000 innritanir við Samleikanum um samdøgrið.

### *Vangin*

Í august 2022 vóru 15 veitarar, sum bjóðaðu tilsamans 80 ymiskar tænastur til borgarar á Vanganum, harav 4 kommunur, 1 fyritøka og 8 almennir stovnar. Umleið 15 kommunur og aðrir tænastuveitarar vóru ávegis á Vangan.

***24 veitarar bjóða tænastur á Vanganum.***

Í august 2023 eru 24 tænastuveitarar, sum bjóða 170 ymiskar tænastur á Vanganum, harav 15 kommunur, 8 landsstovnar og 1 fyritøka.

### *Kommunur*

20 kommunur hava gjørt avtalu um at fíggja sín part av verkætlanini Talgildu Føroyar. Parturin hjá teimum 9 kommununum, sum enn ikki hava gjørt avtalu, er 1,4 mió.kr.

*Talgilt borgara- og koyrikort*
Í 2021 var, saman við Akstovuni, farið í holt við at gera eina forkanning til talgilt koyrikort. Í forkanningini var vavið víðkað, soleiðis at verkætlanin eisini kom at fata um eitt borgarakort.

Sambært landsstýriskvinnuni var talgilda borgara- og koyrikortið liðugt ment og tikið í nýtslu í apríl 2023. Eini 20.000 fólk hava tikið appina niður á telefonina. Áðrenn farið varð í holt við menningina, var verkætlanin mett at kosta 2 mió.kr., íroknað innanhýsis starvsfólkaútreiðslur. Fígging var fingin til vega frá Akstovuni og Strandfaraskipum landsins, umframt játtanina til Talgildu Føroyar. Verkætlanin var framd fyri metta kostnaðin.

## 3.4 Landsins ognir (LG 2020/203-111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin játtanina “Landsins ognir”. Sambært fíggjarlógini varðar landið av oljutangum landsins, og landskassin fær 1,2 mió.kr. um árið í leiguinntøkum. Í fíggjarlógini fyri 2020 eru játtaðar 1,2 mió.kr. í inntøku.

Í frágreiðing í 2003 umrøddi Landsgrannskoðanin undirkontuna “Oljugoymslur o.a.” Inntøkan av goymslunum hevði tá verið óbroytt í 25 ár. Í 2001 var avtala gjørd, har oljufelagið bant seg til at gjalda 1,2 mió.kr. um árið fyri at leiga oljugoymslurnar ímóti at halda tær viðlíka og hava tilbúgving klára. Avtalan skuldi vera galdandi í 5 ár. Landsverk greiddi frá, at avtalan seinast var dagførd í 2007.

Inntøkan, 1,2 mió.kr. um árið, hevði verið óbroytt seinastu 43 árini. Landsverk visti ikki, hvussu komið var til leiguprísin, tí tað var so langt síðan, hann var ásettur.

Í 2021 gjørdi Landsverk avtalu við Fíggjarmálaráðið um, at stovnurin tók upp samráðingar við oljufelagið um, hvat framhaldandi skuldi henda og fekk gjørt eina nýggja avtalu.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Effo hevur leigað, røkt og rikið oljutangar landsins í Sørvági og í Søldarfirði í 73 ár. Landið hevur ongar útreiðslur havt av leigumálunum, undantikið trygging av oljutangunum, 35 t.kr. árliga til og við 2002.

Fíggjarmálaráðnum kunnugt hevði landið, í øllum førum í nýggjari tíð, bert í einum føri arbeitt við málinum um at selja oljutangar landsins. Fíggjarlig heimild (játtan í fíggjarlógini) var til at selja tangarnar í 2006, 2007 og 2008. Landsstýrismaðurin fekk í 2007 politiska undirtøku fyri at fara undir eina tilgongd at selja oljutangar landsins.

Sambært sáttmálanum skuldu Landsverk og Effo samráðast um málið, áðrenn Landsstýrið kundi taka endaliga avgerð um, hvat skuldi henda. Oljutangarnir vóru týðandi partur av goymsluskipanini hjá Effo. Um Effo ikki keypti tangarnar, var neyðugt at taka atlit at, at tað tekur tíð hjá felagnum at tillaga virksemið, fáa nýggjar oljutangar til vega o.t.

Samanumtikið vóru oljutangarnir ikki seldir, tí eingin nøktandi sølutilgongd var funnin. Síðani 2008 hevur tað ikki verið frammi aftur at selja oljutangarnar.

Í august 2022 kunnaði Fíggjarmálaráðið um, at oljutangarnir í Sørvági og í Søldarfirði vóru góðkendir til 2024, men vóru í ringum standi. Effo fór tí at gevast við virkseminum í Sørvági í september 2022. Samskift var við Effo um niðurtøku av tangunum og upprudding í tí sambandi, men tað var ikki avklárað.

Leiguinntøkurnar fyri oljutangarnar í Sørvági fóru sambært Fíggjarmálaráðnum at minka í 4. ársfjórðingi 2022, og í 2023 fóru allarhelst ongar inntøkur at vera. Effo hevði boðað frá, at felagið eisini fór at gevast heilt í Søldarfirði. Leiguinntøkurnar fyri Søldarfjørð fóru so at minka í 2023, og í 2024 fara allarhelst ongar inntøkur at vera.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum kunnað um, at Effo gavst við virkseminum í Sørvági í 2022 og endaði leigumálið seinast í 2022. Landsverk samskiftir við Effo um upprudding og niðurtøku av oljugoymsluanlegginum. Tilgongdin er ikki komin á mál enn.

*Landsverk samskiftir við Effo um upprudding og niðurtøku.*

Landsstýrismaðurin hevur eisini greitt frá, at Landsverk samskiftir við Tjóðsavnið um møguliga niðurtøku, tí talan er um krígsminni frá seinna heimsbardaga. Tilgongdin er ikki komin á mál enn. Effo hevur enn leigumál um tangarnar í Søldarfirði og væntandi gevst Effo við virkseminum har í seinasta lagi í 2024. Landsverk samskiftir við Tjóðsavnið um viðurskiftini har. Eisini hevur Landsverk havt innleiðandi samskifti við Runavíkar kommunu um yvirtøku av lundini, har oljugoymslan er.

*Samskifta við Tjóðsavnið, tí oljutangarnir eru krígsminni.*

## 3.5 Umvæling av almennum bygningum, løgujáttan (LG 2021/203-111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av roknskapinum fyri Umvæling av almennum bygningum, sum er á høvuðskontu 3.11.1.56.

Í 2021 vóru 22 mió.kr. játtaðar til at umvæla, viðlíkahalda og bjálva landsins bygningar. Sambært Landsverki var árligi viðlíkahaldstørvurin 43 mió.kr., og eftirsleipið við at umvæla og viðlíkahalda landsins bygningar var umleið 470 mió.kr.

*Viðlíkahaldstørvurin er stórur.*

Í 2021 vóru 22,6 mió.kr. brúktar, harav 19,3 mió.kr. vóru goldnar privatum arbeiðstakarum og 3,3 mió.kr. fyri tænastur frá Landsverki.

### Grannskoðan

Landsgrannskoðanin valdi við stakroyndum at kanna nakrar verkætlanir, herundir um reglurnar um útbjóðing vóru hildnar, um kostnaðurin svaraði til tilboð ella avtalur, um somu bygningar vóru umvældir við peningi frá øðrum játtanum, og um landið átti umvældu bygningarnar.

Samanumtikið var úrslitið av grannskoðanini:

*Útboð*

Uppgávurnar vóru ikki altíð bodnar út ímillum fleiri arbeiðstakarar, og møguleikin at biðja um undantak frá at bjóða út var ikki brúktur.

*Arbeiði ikki altíð boðin út.*

*Kostnaður*

Samsvar var ikki altíð ímillum tilboð og endaligan kostnað. T.d. kom tilboð upp á slakar 1,7 mió.kr. til at umvæla Suðuroyar Sjúkrahús, men arbeiðið kostaði 2,7 mió.kr. Landsverk hevði gjørt avtalu við arbeiðstakaran um meir-/minniveitingar.

*Útreiðslur hildnar á fleiri játtanum*

Í fleiri førum vóru útreiðslur til umvælingar av somu bygningum/hølum hildnar bæði á hesari játtanini og á øðrum játtanum. Landsgrannskoðanin hevur fyrr víst á, at tá ið útreiðslur til umvælingar av somu hølum eru bókaðar á ymiskar játtanir, sæst ikki, hvat ein umbygging ella umvæling hevur kostað.

Sambært Landsverki kann stovnurin til eina og hvørja tíð upplýsa neyva upphædd fyri ymisku verkætlanirnar. Tá ið útreiðslur eru hildnar á fleiri játtanum, er oftast talan um

viðlíkahald ella umbyggingar, og Landsverk vísti á dømi viðvíkjandi bústovnum hjá Almannaverkinum.

*Spjaddar útreiðslur grugga roknskapin.*

Í 2020 var Fíggjarmálaráðið samt við Landsgrannskoðanina, at tað gruggar landsroknskapin, at útreiðslur viðvíkjandi einari og somu verkætlan eru spjaddar á ymiskar játtanir. Fíggjarmálaráðið hevði tikið tílík mál upp við Landsverk, og var semja um, at útreiðslur sum meginregla ikki skulu haldast á fleiri játtanum. Ráðið fór at meta um, hvussu reglur kunnu ásetast, tá ið tað snýr seg um viðlíkahald og játtanir.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at enn vóru ongar reglur ásettar fyri umvælingar og játtanir. Fíggjarmálaráðið og Landsverk høvdu fyri neyðini at gera ásetingar, sum lýstu markamót ímillum nýtslu á løgujáttanum og umvælingarjáttanini. Ásetingarnar kundu verði settar í roknskaparreglugerðina fyri Landsverk. Landsstýrismaðurin vísti á, at Landsverk hevði gjørt vegleiðingina “Markamót – viðlíkahaldsbýtið ímillum Landsverk og landsins stovnar”.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum greitt frá, at Fíggjarmálaráðið og Landsverk í drúgva tíð hava arbeitt við málinum um markamót ímillum løgujáttanir og viðlíkahaldsjáttanina av landsins bygningum. Málið er ikki endaliga avgreitt.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at sum útgangsstøði er viðlíkahaldsjáttanin viðkomandi fyri allar landsins bygningar. Tað er ikki møguligt at gera fullkomnan skilnað ímillum løgujáttanir til bygningar, og játtanina til viðlíkahald av somu bygningum. Viðlíkahald av bygningum eigur at vera støðugt, og kann ein “vanlig” løgujáttan vera til ein bygning, har annað viðlíkahald eisini skal fremjast aðrastaðni í bygninginum. Til dømis á Landssjúkrahúsinum og á bústovnum.

### *Umvælingar av bygningum hjá kommunum o.ø.*

Landið hevði eisini brúkt pening til at umvæla bygningar, sum kommunur brúka til røktarheim og læknamiðstøð. Landsverk vísti á, at landið eigur bygningarnar, tí var álagt Landsverki at halda teir viðlíka, og at Landsverk hevði onga ábyrgd av, ella ávirkan á, hvussu bygningarnir vórðu brúktir ella leigaðir út.

Sambært Heilsumálaráðnum vóru avtalur nú fingnar um teir bygningarnar.

*Týdningarmikið at staðfesta ognarskap á bygningum.*

Í august 2022 vísti landsstýrismaðurin á, at tað var av størsta týdningi at staðfesta ognarskapin av bygningum. Tó at tað var rætt, at Landsverk ikki kann ábyrgjast fyri, hvør leiga verður ásett til kommunur og kommunal samstørv at gjalda, so var uppgávan hjá Landsverki at ráðgeva Fíggjarmálaráðnum, hinum aðalráðunum og landsstovnum um hóskandi leigupris og markamót viðvíkjandi viðlíkahaldi, sum skuldu ásetast í leigusáttmálar við kommunur og kommunal samstørv um nýtslu av landsins bygningum.

### *Norðoya Røktarheim*

Í 2021 vóru 196 t.kr. brúktar til at umvæla Norðoya Røktarheim, og slakar 2 mió.kr. í 2020.

Ein fyritøka gav tilboð at reinsa ventilasjónskanalirnar fyri slakar 168 t.kr. Landsverk rindaði aðra helvtina, og Klaksvíkar Sjúkrahús rindaði hina.

Norðoya Røktarheim er partur av Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og landið eigur bygningarnar og grundøkið. Klaksvíkar kommuna brúkar stóran part av bygninginum, og ógreitt er, hvør hevur ábyrgd av hvørjum í sambandi við rakstur og viðlíkahald.

Í mars 2022 greiddi Heilsumálaráðið frá, at nýtslusáttmáli var gjørdur í 2018 ímillum Klaksvíkar Sjúkrahús og Norðoya Bú- og heimatænastu, og at Klaksvíkar Sjúkrahús arbeiddi við at dagføra sáttmálan.

Sambært landsstýrismanninum hevur Landsverk fingið upplýst frá Klaksvíkar sjúkrahúsi, at sáttmálin frá 2018 við Norðoya Bú- og heimatænastu er dagførdur í 2022. Tó er málið enn óloyst viðvíkjandi framtíðar ognarviðurskiftum ímillum landið og Norðoyar Bú- og heimatænastu, í sambandi við at eldraøkið var lagt út til kommunurnar.

*Tinganes*
Í 2021 vóru um 500 t.kr. brúktar av játtanini 3.11.1.56 "Umvælingar av almennum bygningum" til bygningar í Tinganesi.

Í 2021 vóru 2 mió.kr. játtaðar á høvuðskontu 2.11.1.21 "Umbygging í Tinganesi", og 0,5 mió.kr. vóru brúktar.

Sambært Landsverki er løgujáttanin "Umbygging í Tinganesi" til størri umvælingar og umbyggingar, út frá Heildarætlanini frá 2010, ið var endurskoðað í 2021. Av játtanini til umvælingar av almennum bygningum hevur Landsverk goldið vanligt viðlíkahald.

Í august 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at løgujáttanin "Umbygging í Tinganesi", eins og løgujáttanirnar til Landssjúkrahúsið og Bústovnar, hevði tær avbjóðingar, at verkætlanin fevnir um nógv byggistig, og talan er um nógvar bygningar. Tískil varð neyðugt við vanligum viðlíkahaldi á ávísum bygningum, samstundis sum verkætlanir vóru í gongd fyri aðrar bygningar. Landsstýrismaðurin helt, at tað var neyðugt at hava greiðan skilnað ímillum størri verkætlanir, serstakliga sambært verklagslóg, og annað viðlíkahald, soleiðis at kostnaðurin av verkætlanum kundi gerast upp, og samanhaldast við játtanarheimildina.

## 3.6 Veðhalds- og eftirlønarskyldur (LG 2022/203-151)

### Eftirlønarskyldur landskassans[7]
Gjaldstovan hevur seinastu árini skrásett allar tænastumannaeftirlønarskyldurnar, og fekk fyri nøkrum árum síðani ein aktuar at meta um, hvat tað hevði kostað, hevði landið keypt seg leyst frá skyldunum. Skyldan hjá landskassanum verður roknað av nýggjum 3. hvørt ár. Eftirlønarskyldan var roknað seinast til roknskapin 2022. Sambært landsroknskapinum 2022 er samlaða eftirlønarskyldan hjá landskassanum 4.163 mió.kr.

***Í 2022 er samlaða eftirlønarskyldan hjá landskassanum 4,2 mia.kr.***

### Veðhaldsskylda vegna tryggingaravtalur hjá Føroya Lívstrygging
Sambært § 3 í Ll. nr. 105/1999 "um umskipan av Føroya Lívstrygging" er landskassaábyrgdin framvegis galdandi fyri tær tryggingaravtalur, sum Føroya Lívstrygging hevði, tá ið lógin kom í gildi. Roknskaparreglurnar vóru broyttar við virknaði fyri roknskaparárið 2012, so heimild ikki longur er at innrokna landskassaveðhaldið í roknskapin.

Avleiðingin av broyttu roknskaparmeginreglunum var, at eginognin hjá P/f Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag, hvørs skyldur landskassin veðheldur fyri, gjørdist negativ. Sambært ársfrásøgnini fyri 2022 er eginognin negativ við 653 mió.kr. Roknaðu skyldurnar eru umleið 2.461 mió.kr., og íløguognirnar eru 1.797 mió.kr.

Sambært § 3, stk. 2, í Ll. nr. 53/2015 "um P/f Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag" hevur landsstýrismaðurin heimild til at rinda til felagið, tá ið felagnum tørvar pening at halda verandi tryggingaravtalur.

### Veðhaldsskylda vegna P/f Eystur- og Sandoyartunlar
P/f Eystur- og Sandoyartunlar hevur tikið 2.768 mió.kr. í láni, harav 127 mió.kr. falla til gjaldingar í 2023[8]. Lánið verður fast rentað við 2,73% fram til 2040, tá ið tað skal vera

[7] Kelda: s. 248 í Landsroknskapinum 2022.
[8] Kelda: s. 249 í Landsroknskapinum 2022.

goldið aftur. Pr. 31. desember 2022 var tunnilsverkætlanin gjørd upp til 2.880 mió.kr. Í 2022 var tilgongdin 229 mió.kr.

Sambært § 5 í Ll. nr. 30/2014 "um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy" setir landið 400 mió.kr. í partapeningi í felagið, tíðarskeiðið fram til 2024. Til og við 2022 eru 300 mió.kr. goldnar felagnum.

Sambært lógini hevur landsstýrismaðurin heimild at hækka partapeningin ella at veita felagnum trygd fyri minstuferðslu í Eysturoyartunlinum og Sandoyartunlinum. Felagið kann tiltransportera hesa játtan og trygd fyri minstuferðslu sum trygd í sambandi við fígging av verkætlanum felagsins. Harafturat kann felagið tiltransportera í mesta lagi 10 mió.kr. um árið í møguligum rakstrarstuðli, sum landsstýrismaðurin eftir umsókn kann veita felagnum, tá ið Sandoyartunnilin er tikin alment í nýtslu.

Í 2022 hevur landskassin veitt P/f Eystur- og Sandoyartunlum 54,1 mió.kr.

**Rættarmál mótvegis Føroya landsstýri**

Føroya Reiðarafelag hevur stevnt Føroya landsstýri í sambandi við lógaráseting fyri skipan av sølu av veiðirættindum á uppboði í 2016. Úrskurður er gjørdur í Føroya Rætti, men Føroya landsstýri skeyt úrskurðin inn fyri Landsrættin. Landsrætturin fríkendi Føroya landsstýri. Reiðarafelagið hevur søkt um at fáa loyvi at leggja málið fyri Hægsta Rætt. Føroya landsstýri hevur ikki fingið svar, um umsóknin er játtað.

Um Føroya landsstýri hevur endurgjaldsábyrgd, verður møguliga eitt endurgjald at rinda fyri 2016, sum Føroya Reiðarafelag hevur gjørt upp til slakar 18 mió.kr., harumframt er eisini eitt krav fyri 2017, sum ikki er gjørt upp enn.

P/f Northwest Pelagic hevur sent Fiskimálaráðnum eitt endurgjaldskrav upp á umleið 81 mió.kr. í sambandi við úrskurð í Føroya Rætti um afturtøku av veiðiloyvi.

Hesi bæði málini eru ikki liðugt viðgjørd, og eingin endalig niðurstøða er.

## 3.7 Dagføring av roknskaparrundskrivi (LG 2016/203-151)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt, at Gjaldstovan hevði gjørt uppskot til nýggja roknskaparreglugerð eftir nýggjum leisti, sum Gjaldstovan sjálv hevði gjørt. Ætlanin var, at nýggi leisturin skuldi gerast til eitt roknskaparrundskriv fyri landsumsitingina.

Í 2017 segði Fíggjarmálaráðið, at ráðið fór at gjøgnumganga uppskotini til dagført roknskaparrundskriv og dagførda roknskaparreglugerð saman við Gjaldstovuni, soleiðis at tey kundu setast í gildi og góðkennast á heysti 2017.

Í 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið hjá Gjaldstovuni og Fíggjarmálaráðnum at dagføra roknskaparrundskrivið var komið so mikið áleiðis, at tað væntandi kundi verða lýst tíðliga á heysti 2019.

Í 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at sambært § 4, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skuldi Fíggjarmálaráðið senda út rundskriv um roknskaparreglugerð saman við vegleiðing um, hvussu reglurnar skuldu verða gjørdar. Ráðið hevði í samstarvi við Gjaldstovuna gjørt eitt uppskot til dagført rundskriv um roknskaparreglugerðir o.a. Arbeitt var nú við einari vegleiðing. So skjótt tað arbeiðið varð liðugt, skuldi uppskotið sendast til hoyringar.

Í august 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið at gera vegleiðingina til roknskaparrundskrivið var enn ikki komið á mál. Ætlanin var, at vegleiðingin skuldi verða partur av einari fyrimynd at gera roknskaparreglugerð, sum í mest møguligan mun skuldi koyra talgilt saman við Búskaparskipan landsins, undir hesum atgongdarstýring, stovnsleiðarar og stovnsnummur. Eyðvitað tekur tílíkt arbeiði tíð, men Fíggjarmálaráðið vónaði, at roknskaparrundskrivið og fyribilsútgáva av vegleiðingini fóru at verða sett í gildi um ársskiftið (2022).

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at arbeiðið at gera vegleiðingina til roknskaparrundskrivið er enn ikki er komið á mál. Fíggjarmálaráðið fer saman við Gjaldstovuni at menna eina talgilda skipan til endamálið. Arbeiðið verður sett í gongd í heyst, og kann væntast liðugt seint í fyrra hálvári 2024.

***Komið er ikki á mál at dagføra roknskaparrundskrivið.***

## 3.8 TAKS (LG 2020/203-151)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðanina av roknskapinum hjá TAKS á høvuðskontu 3.15.1.04. Játtanin á undirkontu 20 er til umsitingina av TAKS. Partur av rakstrinum hjá TAKS er inntøkur av ymiskum tænastugjøldum.

*Tænastugjøld uttan fyri avgreiðslutíð (reinførisváttanir)*

Inntøkurnar fyri reinførisváttanir hava ligið ímillum 175 t.kr. og 200 t.kr. um árið síðani 2015. Taksturin var 1.800 kr. fyri hvørja váttan.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar fakturar. Á øllum fakturunum var viðmerkt, at rokning var skrivað við loyvi í K. nr. 14/2010 "um tænastugjøld uttanfyri arbeiðstíð". Landsgrannskoðanin helt, at tilvísingin var misvísandi, tí tær 1.800 kr., sum TAKS kravdi fyri reinførisváttanir, vóru ikki ásettar í K. nr. 14/2010.

TAKS vísti á, at upphæddin var ásett við heimild í § 22 í Bek. nr. 515/2012 "for Færøerne om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme". Har stendur, at Heilsumálaráðið ásetir prís- og lønarreguleringar. Upphæddin var ikki broytt, síðani uppgávan var løgd til TAKS at umsita.

Landsgrannskoðanin mælti til at rætta tilvísingarnar í fakturunum, soleiðis at samsvar var ímillum gjald og heimild.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at sambært TAKS fór tilvísingin á fakturunum at verða rættað. TAKS hevði ikki funnið nakað skjalatilfar um, hvussu tær 1.800 kr. vóru ásettar. TAKS fór at venda sær til Heilsumálaráðið um at eftirmeta kostnaðin.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið at rætta tilvísingina á fakturum var sett á skrá. Fak-skipanin, har rokningar verða upprættaðar og útskrivaðar í, skuldi tillagast. KT-deildin skuldi avgreiða uppgávuna í mun arbeiðsorku og raðfesting.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at arbeiðið at rætta tilvísingina á fakturum er ikki avgreitt enn, men verður ætlandi avgreitt í næstum.

***Tilvísingin á fakturum er ikki rættað.***

*Tænastuavtala við Heilsutrygd*

TAKS hevði ikki gjørt skrivliga tænastuavtalu við Heilsutrygd. Í 2016 gjørdi TAKS eitt uppskot til tænastuavtalu, har eitt fast árligt gjald var ásett fyri KT-rakstur og umsiting, umframt broytiligt gjald fyri at senda út brøv. Landsgrannskoðanin mælti til, at avtala verður góðkend og undirskrivað av báðum pørtum.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at higartil hevði Heilsutrygd ikki skrivað undir tann partin, sum er um umsitingarkostnað til TAKS, tí tað er lógarásett, at TAKS skal

gera uppgávuna. Heilsutrygd var tó sinnað at skriva undir part av avtaluni um, hvussu uppgávan verður umsitin (hvør hevur ábyrgd av hvørjum).

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tænastuavtalan var ikki undirskrivað enn. Heilsutrygd og TAKS vóru komin til ta niðurstøðu, at umsitingarkostnaðurin verður tikin úr avtaluni, og verður tikin við í eitt kunnandi fylgiskjal.

***Tænastuavtala við Heilsutrygd er gjørd.***

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at tænastuavtalan ímillum Heilsutrygd og TAKS viðvíkjandi ábyrgdarbýtinum er undirskrivað, og kostnaðurin er ásettur í fylgiskjali til avtaluna. Eisini hava partarnir undirskrivað eitt "EK28 bókingarskjal" viðvíkjandi kostnaðinum fyri 2022 og 2023.

*Lønir*

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur lønarmál. Vit kannaðu eisini um tíðarskrásetingarnar eru í samsvari við innanhýsis reglurnar.

TAKS hevur skrivligar reglur um arbeiðstíðir, og flekstíð +37 og -15 tímar. Reglurnar eru ikki galdandi fyri tollararnar; teir skráseta bert, nær teir eru tøkir, og skráseta tímarnar á vikuuppgerðir.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar lønir hjá tollarum, um lýsingar, umsóknir, prógv, tilboð um setan og setanarbræv vóru í lønarmálunum. Einki var at finnast at setanunum.

Tollararnir eru settir í tænastumannastørv ella tænastumannalíknandi størv. Sambært arbeiðstíðaravtalu frá 2017, er arbeiðstíðin 39,5 tímar um vikuna, og yvirtíð verður ikki roknað, fyrr enn vanligir arbeiðstímar eru arbeiddir. Sambært avtaluni verður yvirarbeiði gjørt upp í byrjaðum hálvum tímum hvønn dag. Í einum 8-viku skeiði skulu starvsfólk hava arbeitt 316 tímar, áðrenn yvirtíð verður roknað.

Tað er ikki í samsvari við reglurnar, at dagliga arbeiðstíðin ikki verður skrásett, og at skrásetingin av tímum út yvir vikunormin er ófullfíggjað. Landsgrannskoðanin kundi tí ikki við vissu siga, at lønirnar hava verið rættar.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hereftir fóru tollarar at stempla, soleiðis at arbeiðstíðin verður skrásett.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at TAKS arbeiddi við at loysa málið. Nú kundu tollararnir skráseta, nær teir vóru á vakt. Yvirtíð varð ikki enn skrásett í klokkuskipanini. TAKS samskifti við Gjaldstovuna um, hvussu tað kundi loysast.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan víst á, at skipanin, sum Gjaldstovan hevur til skráseting av vaktartímum, herundir normtímum og yvirtíð, hóskar ikki so væl til tolldeildina. Arbeitt verður við at finna eina skipan, sum ikki krevur ov nógva orku at brúka.

*Peningastovnskontur, stovnaðar til avrokning av donskum eftirlønum*

Lógin um bundna eftirløn kom í gildi 1. januar 2014. Fleiri løntakarar høvdu danskar eftirlønarveitarar, og skattaskipanin kundi ikki ávísa lønir og eftirlønir til danskar kontur. Donsku eftirlønarveitararnir høvdu tá ikki áhuga í at stovna føroyskar kontur.

Fyri at avrokna eftirlønirnar, sum fóru um skattaskipanina, gjørdi TAKS munnliga avtalu við Elektron og Suðuroyar Sparikassa um at stovna kontur fyri hvønn einstakan danskan eftirlønarveitara. Loyvi var ikki fingið frá aðalráðnum til at stovna konturnar, og tær vóru ikki skrásettar í Búskaparskipan landsins. TAKS átti konturnar, sum vóru skrásettar í bankanum við einum øðrum kundanummari.

Sambært TAKS vóru konturnar “einans” snúningspunkt um eftirlønir, sum TAKS í roynd og veru ikki átti. Upp í 25 kontur hava verið skrásettar á kundanummarinum. Fleiri vóru stovnaðar í 2013, sum eftirsíðan eru gjørdar upp, og onkur nýggj var stovnað í 2018. Í 2021 vóru 8 tílíkar samlikontur aktivar.

Sambært TAKS hevði Suðuroyar Sparikassi ræði á kontunum; sparikassin stovnaði og gjørdi upp kontur eftir áheitan frá eftirlønarveitarunum. Tá ið broytingar vórðu gjørdar, boðaði Suðuroyar Sparikassi Elektron frá, sum gjørdi neyðugar broytingar í skattaskipanini. TAKS hevði ikki ávirkan á arbeiðið.

TAKS hevði eftirlit við, at samlikonturnar vórðu tømdar, men hevði einki eftirlit við, at kontunummurini hjá eftirlønarveitarunum vóru røtt. Út frá flytingunum bar heldur ikki til at gera eftirlit, tí einki móttakaranavn stóð á flytingunum, og kontunummurini, eftirlønirnar vóru fluttar á, sóust ikki altíð. Frá stovnan til 31. mai 2021 vóru 46,1 mió.kr. fluttar á og av teimum 8 kontunum, sum vóru aktivar í 2021.

TAKS hevði einki eftirlit við, um eftirlønirnar vóru fluttar til rætta móttakaran, tó at TAKS átti konturnar. Landsgrannskoðanin mælti til:

1. at TAKS setti í verk eitt virkið innaneftirlit, sum skuldi tryggja, at øll inn- og útgjøld vóru røtt, feilir vóru funnir og rættaðir, og í samráð við aðalráðið og Gjaldstovuna, tók støðu til, um konturnar skuldu skrásetast í Búskaparskipan landsins, ella
2. at TAKS fekk avtalur í lag við eftirlønarveitararnar um, at danskar eftirlønir, sum vóru avroknaðar um skattaskipanina, vórðu goldnar á kontur, sum veitararnir eiga.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at TAKS fór at senda donsku eftirlønarveitarunum skriv um, at eftirlønir verða goldnar á kontur, sum veitarin sjálvur eigur. Gjaldstovan tók undir við TAKS.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í fíggjarmálum kunnað um, at allir danskir eftirlønarveitarar nú hava stovnað sær føroyska peningastovnskontu. Samlikonturnar hjá TAKS eru niðurlagdar.

***Donsku eftirlønarveitararnir hava nú stovnað kontur í føroysku peningastovnunum.***

## 3.9 Landsbanki Føroya (LG 2020/203-151)

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsgrannskoðanin frá um grannskoðan av Landsbanka Føroya.

Landsbankin hevði ikki góðkenda roknskaparreglugerð, men sambært stjóranum var uppskot gjørt, sum tó skuldi lagast til, áðrenn tað var sent Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at reglugerðin hjá Landsbankanum fer at verða góðkend í næstum, tá ið PandaConnect-skipanin er góðkend sum egin búskaparskipan.

Umframt standardskipanir á Landsneti, nýtir Landsbankin skipanina PandaConnect til íløgurøkt. Landsbankin hevur bert rættindi til at spyrja í skipanini. Landsbankin fær hvørt ár grannskoðaravváttan frá veitaranum.

Sambært rundskrivi um KT-trygd frá apríl 2019 skulu aðrar skipanir, enn tær, sum KT Landsins veitir, góðkennast av Fíggjarmálaráðnum. Landsbankin bað í 2017 um formligt loyvi til at nýta PandaConnect, men hevur ikki fingið svar.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at formliga var ásett, at Fíggjarmálaráðið skuldi góðkenna KT-skipanir, men í roynd og veru viðgjørdi Gjaldstovan umsóknirnar og mælti til góðkenningar. Góðkenningin av PandaConnect, sum egin búskaparskipan, og sum týðandi KT-skipan uttan fyri Landsnet, var framvegis til viðgerðar hjá Gjaldstovuni. Fíggjarmálaráðið hevði heitt á Gjaldstovuna um at skunda undir viðgerðina.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Gjaldstovan hevði arbeitt við at gera ein leist fyri, hvat viðgerð og tilmæli um góðkenning av egnari búskaparskipan skuldu innihalda. Gjaldstovan hevði fleiri umsóknir um egnar búskaparskipanir til viðgerðar, og tað var ymiskt, hvussu langt tær vóru komnar í viðgerðini.

Tað restaði lítið í viðgerðini av PandaConnect-skipanini. Fíggjarmálaráðið væntaði tí at fáa eitt tilmæli um góðkenning frá Gjaldstovuni í 2022.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at Fíggjarmálaráðið hevur samskift við Gjaldstovuna um at fáa eitt tilmæli um góðkenning frá Gjaldstovuni.

## 3.10 Kervisgrannskoðan (LG 2022/203-151)

Kervisgrannskoðari grannskoðar hvørt ár skipanir og kervi hjá TAKS, Gjaldstovuni, KT Landsins, Talgildu Føroyum og ávísum veitarum hjá KT Landsins. Um viðurskifti eru, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisgrannskoðarin ítøkilig tilmæli, sum eru raðfest soleiðis:

- Høg: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag sum skjótast.
- Miðal: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 6 mánaðir.
- Lág: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 12 mánaðir.

### 3.10.1 Kervisgrannskoðan hjá TAKS

KT-viðurskiftini hjá stovnum sum TAKS skulu skoðast árliga av KT-grannskoðara við viðkomandi royndum og útbúgving, og sum Fíggjarmálaráðið hevur góðkent.

Fyri árið 2022 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tvær frágreiðingar um KT-viðurskiftini hjá TAKS:

- Frágreiðing 2022, grannskoðan av almennum KT-stýringum á Elektron fyri TAKS, og
- ISAE 3000-váttan um almennar KT-trygdarstýringar hjá P/f Formula fyri veitingina av Public 360 í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember í mun til SLA-avtalu við TAKS.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at almennu KT-stýringarnar og stýringarnar viðvíkjandi dátuvernd sum heild eru á einum trygdargóðum stigi, og at krøvini, sum eru ásett í tænastusáttmálanum og dátuviðgerðaravtaluni, sum heild verða fylgd á trygdargóðan hátt av Elektron í veitingini. Við árslok 2022 vóru 10 tilmælir opin, nýggju við miðal raðfesting og eitt lágt raðfest. Grannskoðanin gav sjey nýggj tilmælir í 2022, og seks vóru lokað.

### 3.10.2 Kervisgrannskoðan hjá Gjaldstovuni

Kervisgrannskoðarin hevur gjørt avtalu við leiðsluna á Gjaldstovuni um at grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýring hjá stovninum. Grannskoðanin skal gerast í mun til tænastuveitingar til teir stovnar, sum nýta skipanirnar hjá Gjaldstovuni (Búskaparskipan landsins), eins og grannskoðanin verður gjørd fyri Elektron, sum er høvuðsveitari hjá Gjaldstovuni. Fyri árið 2022 hevur kervisgrannskoðarin gjørt seks frágreiðingar um KT-viðurskifti hjá Gjaldstovuni:

- Føroya Gjaldstova, ársfrágreiðing 2022, grannskoðan í árinum,
- Ársfrágreiðing frá Kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiði fyri Gjaldstovuna í 2022,
- Føroya Gjaldstova, Frágreiðing 2022, grannskoðan av almennum KT-stýringum,
- Frágreiðing 2022, grannskoðan av almennum KT-stýringum á Elektron fyri Føroya Gjaldstovu,
- ISAE 3000-váttan um almennar KT-stýringar og viðgerð av persónupplýsingum hjá Føroya Gjaldstovu í veitingini av Búskaparskipan landsins (BSL) fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2022, og
- ISAE 3000-váttan um almennar KT-stýringar hjá Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2022.

#### KT-stýringar á Gjaldstovuni

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at Gjaldstovan á flestu økjum framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av KT-umhvørvi sínum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini.

Fýra tilmæli vóru opin við árslok 2022, trý við miðal raðfesting og eitt við lágari raðfesting. Grannskoðanin gav eitt nýtt tilmæli, og eitt er lokað í árinum.

Sum heild er fatanin hjá kervisgrannskoðaranum, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT-stýringarnar hjá Gjaldstovuni, er trygdargott, við atliti at veitingini av Búskaparskipan landsins, undantikið veikleikarnar, sum eru nevndir í frágreiðingini.

#### KT-stýringar á Elektron fyri Gjaldstovuna

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at almennu KT-stýringarnar og stýringarnar viðvíkjandi dátuvernd sum heild eru á trygdargóðum stigi. Eisini hevur Elektron sum heild á trygdargóðan hátt fylgt krøvunum í tænastusáttmálanum og dátuviðgerðaravtaluni í veittu tænastunum. Gjøgnumgongdin av útvaldum økjum innan almennar KT-stýringar vísti nakrar nýggjar veikleikar, sum góvu orsøk til nýggj tilmæli.

11 tilmæli vóru opin við árslok 2022, øll við miðal raðfesting. Grannskoðanin gav sjey nýggj tilmæli, og seks vóru lokað í árinum.

Kervisgrannskoðarin sigur eisini, at eftirlits- og trygdarstigið kring skipanir og dátur, sum Gjaldstovan nýtir hjá Elektron, er trygdargott, tá sæð verður burtur frá viðmerktu viðurskiftunum. Somuleiðis er niðurstøðan, at Elektron, burtursæð frá einstøkum viðurskiftum, sum eru fevnd av tilmælunum, livir upp til ásetingarnar í SLA-avtaluni og dátuviðgerðaravtaluni partanna millum.

### 3.10.3 Kervisgrannskoðan hjá KT Landsins

Kervisgrannskoðarin hevur í 2022 grannskoðað almennu KT-kontrollarnar í sambandi við, at Elektron veitir tænastur til KT Landsins og kundar stovnsins. Kervisgrannskoðarin hevur eisini grannskoðað KT-kontrollarnar v.m. í sambandi við KT-tænastur, sum Formula veitir KT Landsins. Grannskoðanin er framd sambært SLA-avtalum partanna millum.

#### P/f Elektron

Fyri 2022 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini ímillum KT Landsins og Elektron:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiði fyri KT Landsins í 2022,
- Frágreiðing 2022, grannskoðan av almennum KT-stýringum á Elektron fyri KT Landsins, og

- ISAE 3000-váttan um almennar KT-stýringar hjá P/f Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2022 í mun til SLA-avtalu við KT Landsins.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at almennu KT-stýringarnar og stýringarnar viðvíkjandi dátuvernd sum heild eru á einum trygdargóðum stigi, og at krøvini í tænastusáttmálanum og dátuviðgerðaravtaluni sum heild verða fylgd á trygdargóðan hátt av Elektron í veitingini. Við árslok 2022 vóru 10 tilmæli opin, átta miðal raðfest og tvey lágt raðfest. Grannskoðanin gav sjey nýggj tilmæli, og seks vóru lokað í árinum.

### P/f Formula

Formula og KT Landsins hava gjørt SLA-avtalu, galdandi frá 1. september 2016, sum ásetir tænastustigið fyri veitingina. Fyri 2022 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tvær frágreiðingar um KT-viðurskiftini millum KT Landsins og Formula:

- Frágreiðing um grannskoðanargjøgnumgongd av tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2022, og
- ISAE 3000-váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT-stýringar í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2022.

Kervisgrannskoðarin sigur, at sum heild eru flestu lýsingarnar av stýringum væl grundaðar við støði í teimum leiðreglum, ið eru settar í verk. Somuleiðis eru flestu eftirlitini tilevnað á hóskandi hátt, og eru í samsvari við ásetingarnar í ISO 27001 standardinum, ið Formula brúkar sum starvskarm fyri váttanina. Harafturat hava flestu stýringarnar sum heild virkað munadygt í árinum.

Fimm tilmæli vóru opin við árslok 2022, tvey við miðal raðfesting og trý við lágari raðfesting. Grannskoðanin gav trý nýggj tilmæli, meðan onnur trý vóru lokað í árinum.

### KT-eftirlitsskipanir á KT Landsins

Kervisgrannskoðarin og leiðslan á Gjaldstovuni hava avtalað, at kervisgrannskoðarin skal grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýringar hjá KT Landsins í mun til tænastuveitingarnar til stovnarnar, sum nýta Landsnet.

Endamálið við grannskoðanini er at tryggja, at grundleggjandi og týðandi viðurskifti viðvíkjandi almennum KT-stýringum eru í samsvari við trygdarásetingarnar hjá KT Landsins, umframt at meta um, hvørt nøktandi trygdar- og eftirlitsstig eru sett í verk.

Fyri 2022 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini á KT Landsins:

- Ársfrágreiðing 2022, grannskoðan í árinum,
- Frágreiðing 2022, grannskoðan av almennum KT-stýringum, og
- ISAE 3000-váttan um almennar KT-stýringar hjá KT Landsins í veitingini av Landsneti fyri árið 2022.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er m.a., at KT Landsins á flestu økjum framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av sínum KT-umhvørvi, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini.

Veitingarnar frá Elektron og Formula, sum Landsnet í týðandi mun byggir á, eru somu-leiðis grannskoðaðar fyri árið 2022. Niðurstøðan er, at veitingarnar sum heild eru í samsvari við avtalaða trygdarstigið, og við ta lýsing av trygdarstiginum, sum veitararnir hava givið KT Landsins. Einstakir veikleikar eru tó staðfestir og umrøddir í váttanunum og frágreiðingunum.

Sum heild er fatanin hjá kervisgrannskoðaranum, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT-eftirlitsskipanirnar hjá KT Landsins, við atliti at veitingini av Landsneti, er trygdargott, við undantaki av viðmerktu veikleikunum í frágreiðingini.

Við árslok 2022 vóru fýra tilmæli opin, trý við miðal raðfesting og eitt við lágari. Grannskoðanin gav tvey nýggj tilmæli, og eitt var lokað í árinum.

### 3.10.4 Kervisgrannskoðan hjá Talgildu Føroyum

Kervisgrannskoðarin hevur gjørt avtalu við leiðsluna á Gjaldstovuni um at grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýring hjá Talgildu Føroyum í mun til tænastuveitingar til stovnar og fyritøkur, sum nýta Samleikan, Vangan, Mínboks og Heldina. Fyri árið 2022 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini hjá Talgildu Føroyum:

- Ársfrágreiðing 2022, grannskoðan í árinum,
- Frágreiðing 2022, grannskoðan av almennum KT-stýringum, og
- ISAE 3000-váttan um viðgerð av persónupplýsingum hjá Talgildu Føroyum í veitingini av Samleikanum, Vanganum, Mínboks og Heldini fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2022.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er, at Talgildu Føroyar hava trygdargóða og nøktandi stýring á flestu økjum í KT-umhvørvi sínum, tá ið ræður um veitingar, Talgilda Samleikan, Vangan, Heldina og Mínboks.

Gjaldstovan og Talgildu Føroyar hava arbeitt við grannskoðaratilmælunum, sum vórðu givin í sambandi við grannskoðanina seinasta ár. Við árslok 2022 vóru fimm tilmæli opin, øll við miðal raðfesting. Grannskoðanin gav eitt nýtt tilmæli, og eitt var lokað í árinum.

## 3.11 Eftirlønir hjá fólkaskúlalærarum (LG 2022/203-181)

### Endurrindan frá statinum 2022

Tænastumenn, sum hava verið settir í føroyska skúlaverkinum, og tey, sum hava verið sett við eftirlønarrætti sum tænastumenn í fólkaskúlanum, koma undir skipanina við læraraeftirlønum.

Eftirlønirnar verða veittar eftir somu reglum sum hjá teimum, ið fáa tænastumanna-eftirløn. Ll. nr. 32/1971 “um tænastumannaeftirlønir” er galdandi fyri tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni 1997. Teir, sum eru eftirløntir fyri 30. juni 1997, fáa eftirløn eftir danskari lóg.

Staturin endurrindar landinum 80% av útreiðslunum til tænastumenn v.fl. í fólka-skúlanum, sum eru farnir frá áðrenn 1. januar 1988, herundir eftirsitandi, sum hava rætt til eftirlønina. Harafturat endurrindar staturin 80% av tí parti av eftirlønunum, sum rættur var vunnin til inntil 31. desember 1987.

Gjaldstovan sendir krav eina ferð um mánaðin til Økonomistyrelsen um endurgjald fyri læraraeftirlønir. Eina ferð um árið ger Gjaldstovan upp, hvat staturin skal endurrinda. Í uppgerðini fyri 2022 eru upphæddirnar:

*kr.*

| Ár | Endurgjaldskrav frá Gjaldstovuni | Endurgjaldskrav smb. eftirlønarlistunum | Munur |
|---|---|---|---|
| 2022 | 30.466.250 | 30.476.932 | -10.682 |

Landsgrannskoðanin hevur, sum part av grannskoðanini, kannað nøkur eftirlønarmál. Við støði í lógum, avtalum og grannskoðanarleiðbeining hava vit kannað, um:

- eftirlønarmóttakararnir á báðum yvirlitunum lúka ásetingarnar,
- útgoldnu eftirlønarupphæddirnar geva rætt til endurgjald, og
- um endurgjaldskrøvini eru rætt roknað.

Niðurstøðan er, at eftirlønarmóttakararnir høvdu rætt til eftirløn, og at Landsstýrið hevði rætt til endurgjald frá statinum fyri útgoldnu eftirlønarupphæddirnar.

## 3.12 Landsverk (LG 2021/203-381)

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsgrannskoðanin frá um grannskoðanina av Landsverki.

*Roknskaparviðurskifti*
Landsverk hevði dagført roknskaparreglugerðina og sent hana til Fíggjarmálaráðið at góðkenna. Ráðið væntaði, at roknskaparreglugerðin fór at vera góðkend í 2022.

Landsverk ætlaði at broyta reglugerðina, soleiðis at greitt verður frá um inntøkur, m.a. um heimildir, prísáseting, avsláttir og kredittir. Í 2021 kunnaði Landsverk um, at stovnurin fór at gera mannagongdir fyri sleip o.a. Reglur vóru ikki gjørdar.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum greitt frá, at í roknskaparreglugerðini hjá Landsverki frá 2022, eru m.a. meginreglur fyri prísáseting, sum Landsverk fylgir í praksis, sjálvt um reglugerðin ikki er endaliga góðkend.

Fíggjarmálaráðið hevði ikki givið loyvi til, at Landsverk kundi nýta egna búskaparskipan, tó at hon hevði verið brúkt í nógv ár.

***Landsverk ikki formligt loyvi til egna búskaparskipan.***

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið skuldi seta seg í samband við Gjaldstovuna um møguligar búskaparskipanir, sum ikki vóru góðkendar, og biðja Landsverk um nýggja umsókn.

Í 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Gjaldstovan hevði arbeitt við at gera ein leist fyri, hvat viðgerð og tilmæli um góðkenning av egnari búskaparskipan skuldu innihalda. Fíggjarmálaráðið hevði biðið Landsverk um at koma við dagførdari umsókn.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsverk samskiftir við Gjaldstovuna um nýggja umsókn til góðkenning av egnari búskaparskipan.

### Inntøkufíggjað virksemi
Landsgrannskoðanin grannskoðaði roknskapin hjá Landsverki á høvuðskontu 3.38.1.02, við denti á Inntøkufíggjaða virksemið á undirkontu 40.

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini stendur m.a., at alt vøru- og tænastuvirksemi, t.d. á skerv- og asfaltverkum, sum Landsverk fremur fyri onnur og til sín sjálvs, verður skrásett undir inntøkufíggjaðum virksemi. Amboð/smiðjur fevnir um alt arbeiði at røkja amboð, sum Landsverk hevur um hendi, umframt at keypa nýggj amboð. Skerv- og asfaltverk fevnir um alt arbeiðið at reka og røkja hesi verk, og útreiðslur til at keypa asfalt og at framleiða tað. Raksturin av inntøkufíggjaðum virksemi skal hvíla í sær sjálvum.

Sambært viðmerkingunum ætlaði Landsverk frameftir at leggja seg eftir at hava størri avlop í inntøkufíggjaðum virksemi frá asfalt- og skervframleiðslu, sum kundi verða nýtt til at endurnýggja verandi asfalt- og skervverk komandi trý árini. Eftir tað kundi avlopið, vegna effektivari rakstur og lægri útreiðslur til viðlíkahald av framleiðsluverkunum, gerast enn størri, og kundi m.a. nýtast til hægri játtan til Landsvegahald.

Roknskapartøl fyri Inntøkufíggjað virksemi 2017 til 2022:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 76.017 | 87.333 | 93.102 | 121.759 | 108.483 | 126.590 |
| Rakstrarinntøkur | -81.595 | -86.906 | 102.623 | 129.728 | 119.369 | 126.281 |
| Løguútreiðslur | 0 | 0 | 247 | 0 | 0 | 0 |
| Flytingarútreiðslur | 0 | 0 | 4 | 30 | 0 | 0 |
| Flyt. mill. alm. myndugleikar | 5.539 | 249 | 2.746 | 2.471 | 848 | 959 |
| **Tilsamans** | **-39** | **676** | **-6.525** | **-5.468** | **-10.039** | **1.267** |

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum boðað frá, at Asfaltverkið er liðugt dagført, og nýtt skervverk keypt. Raksturin verður uttan iva rationellari, og minni verður brúkt til umvælingar og viðlíkahald av verkunum næstu árini. Tað kann merkja, at meiri peningur verður tøkur til onnur endamál hjá Landsverki í næstu framtíð.

### *Keyp av tænastuveitingum annars*

Í 2021 vóru 6,3 mió.kr. goldnar til ein arbeiðstakara, uttan at uppgávurnar vóru bodnar út. Sambært Landsverki høvdu tey, eftir at stovnurin seldi sína boriútgerð, roynt at fingið samstarv í lag við arbeiðstakarar, sum vóru einastu av sínum slagi í landinum, ið høvdu neyðugu útgerðina til boring og spreinging. Latingarnar vóru ikki nøktandi, og Landsverk vísti á, at um feilir hendu í fyrsta liðinum, ávirkaði tað alla framleiðsluna. Landsverk metti tað tí ikki vera fíggjarliga ráðiligt at gera vanligt útboð og vanligan sáttmála. Landsverk helt seg nú hava ment ein leist at gera útboð eftir, sum hevði verið grundarlag undir vanligum almennum útboði, ið bleiv avgreitt í februar 2022.

### *Umvælingar av Maskinmiðstøðini í Kollafirði*

Útreiðslur til umvælingar av Maskinmiðstøðini vóru bókaðar á Inntøkufíggjað virksemi[9] og á aðrar játtanir, harvið bar ikki til at síggja samlaða kostnaðin.

Umvælingar av Maskinmiðstøðini vóru eisini goldnar av kontuni “Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum”. Landsverk vísti á, at tað er ein sjálvstøðug verkætlan, sum fremur orkusparingar, og tí ikki hevði nakað við vanligan rakstur ella íløgur at gera.

Av løgujáttanini “Umvæling av almennum bygningum” vóru slakar 800 t.kr. goldnar í 2021 vegna Maskinmiðstøðina. Í 2020 vóru 1,8 mió.kr. goldnar vegna orkuskipan, málaraarbeiði o.a. í Maskinmiðstøðini.

***Gjøgnumskygni verri, tá ið útreiðslur eru spjaddar.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at gjøgnumskygnið í roknskapinum hvørvur, tá ið útreiðslur fyri umvælingar av einum og sama bygningi eru spjaddar á fleiri játtanir v.m.

Í august 2022 segði landsstýrismaðurin, at Fíggjarmálaráðið var av somu áskoðan sum Landsgrannskoðanin, at tað minkar um gjøgnumskygni, um verkætlan fær fígging frá fleiri játtanum, og trupult var gera upp, hvat kostnaðurin av verkætlanini var. Ráðið helt, at sum meginregla skuldu allar útreiðslur av einari verkætlan haldast av somu játtan. Var verklagslóg galdandi, skuldu allar útreiðslur verða tiknar við í játtanina. Tað kundi tó ikki útilokast, at serligar umstøður kundu gera seg galdandi.

### *Umvæling og viðlíkahald av maskinum, innbúgvi o.ø.*

***Arbeiði ikki bjóðað út.***

Útreiðslurnar vóru slakar 7 mió.kr., harav vóru 3,8 mió.kr. goldnar fyritøku, uttan at bjóða arbeiðið út. Landsverk greiddi frá, at stovnurin royndi at halda lív í gomlum niðurslitnum skerv- og asfaltverkum. Landsverk hevði ikki arbeiðsorku til, at tey sjálvi kundu gera umvælingarnar, og kundu gjørt eitt slag av rammuavtalu. Landsverk hevði biðið fyritøku, ið kendi skipanina, soleiðis at framleiðslan ikki steðgaði.

### *Leiga av økjum v.m.*

Sáttmálin um leigu av grundøkinum á Sundi, ið er ímillum P/f Asfaltverkið og Tórshavnar kommunu, er frá juli 2004. Leigan er 78 t.kr. um hálvárið fyri 7.797 m$^2$. Upprunaliga var sáttmálin galdandi til 1. juli 2009, og kundi sigast upp av báðum pørtum við 6 mánaða freist til at halda uppat 1. í einum mánað.

Landsverk leigar eisini 4.276 m$^2$ á Sundi fyri 85,5 t.kr. um árið sambært sáttmála frá mars 2011, sum er galdandi til 1. juli 2024, og kann tá sigast upp av báðum pørtum við 6 mánaða freist til at halda uppat 1. í einum mánað.

[9] Á tvær standardkontur (14 og 16)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum hevur í august 2023 kunnað um, at umsókn um at leingja leigumálið er til viðgerðar hjá Tórshavnar kommunu.

*Inntøkur*
Inntøkurnar eru settar saman av sølu av eykalutum, umvælingum og leigu av maskinum hjá Maskinmiðstøðini, sølu frá skervverkunum, asfaltverkunum og bitumengoymsluni. Landsverk hevur gjørt reglur um avsláttir, og nakrir stórir keyparar hava sett trygdir.

Søla seinastu 6 árini:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Søla | -81.595 | -86.906 | -102.623 | -129.629 | -119.369 | -126.281 |

Sambært Landsverki skuldi avlopið av at framleiða skerv og asfalt verið brúkt til at endurnýggja amboðini, men tað hevði í langa tíð verið brúkt til at bøta um vegir o.a. Fyri at nøkta tørvin, og fyri at fáa sum mest burturúr, mátti Landsverk endurnýggja útbúnaðin. Tað hevði loyst seg nógv betur at framleitt, um útgerðin ikki var so gomul.

Í 2021, 2022 og væntandi eisini í 2023 skuldi peningur játtast á løgujáttan til at endurnýggja og nútímansgera skerv- og asfaltverk. Ætlanin var í framtíðini at hava asfaltverk á Sundi, og eitt flytført skervverk.

## Roknskaparmeginreglur

***Roknskaparmeginreglur broyttar fleiri ferðir.***

Landsverk hevur broytt roknskaparmeginreglurnar fyri Inntøkufíggjaða virksemið fleiri ferðir seinastu árini.

Frá 2006 til 2017 keypti Inntøkufíggjaða virksemið øll arbeiðstól og leigaði tey út til hinar deildirnar. Leigan var ásett út frá kostnaðinum av at halda tólini og at gera íløgur í nýggj arbeiðstól.

Í 2017 broytti Landsverk roknskaparmeginregluna, og vísti á, at leiguprísurin stóð ikki mát við standin á amboðunum. Smiðjurnar høvdu ásett takstir fyri viðlíkahald o.a. Tá ið árið var av, var yvirskot hjá smiðjunum, og tí lagaðu tey kostnaðin til.

Í september 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, í sambandi við løgujáttanina til Asfaltverk, at aðalmálið hjá Fíggjarmálaráðnum var, at Inntøkufíggjaða virksemið skuldi skipast sambært ætlan, sum tók hædd fyri langtíðarkostnaðinum, eisini løgukostnaðinum.

Fíggjarmálaráðið hevði tí álagt Landsverki at hava yvirskot at samsvara samlaða kostnaðinum av virkseminum, og sambært ráðnum var endamálið við inntøkufíggjaða virkseminum ikki at skula rinda fyri meirnýtslu á øðrum kontum. Sambært landsstýrismanninum var løgujáttan ætlað til at umvæla og endurnýggja verandi asfaltverk og skervverk. Fíggjarmálaráðið ætlaði at taka spurningin um verklagslóg upp í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2022.

Í 2021 hevði Landsverk staðfest, at broytingin í 2017 hevði ikki virkað sum ætlað og broytti mannagongdina aftur.

Eftir hesa broytingina átti Inntøkufíggjaða virksemið (Maskinmiðstøðin) maskinurnar. Maskinmiðstøðin gjørdi kostnaðin av maskinum og bilum upp, og ásetti fasta mánaðarliga leigu fyri hvørt flutningstól. Inntøkufíggjaða virksemið leigaði maskinurnar út til hinar deildirnar fyri 16,4 mió.kr.

*Ikki nøktandi at broyta roknskaparmeginreglur ferð eftir ferð.*

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað var ikki nøktandi, at Landsverk broytti roknskaparmeginreglur ferð eftir ferð. Tølini frá ári til ár kunnu tá ikki samanhaldast, og gjøgnumskygni bleiv hareftir. Broyting av roknskaparmeginreglum brýtur samanhangin í roknskapinum, og aðalreglan er, at slíkar broytingar kunnu einans gerast, um nýggi hátturin má haldast at geva rættvísari mynd av roknskapinum, ella t.d. um lógarbroytingar krevja tað. Tá ið roknskaparmeginregla av einihvørjari orsøk verður broytt, eigur leiðslan at boða frá tí í roknskapinum og grundgeva fyri broytingunum. Aðalráðið skal góðkenna tílíka broyting, og Gjaldstovan og roknskapargrannskoðanin skulu hava boð um broytingina.

Í juni 2022 segði Landsverk, at tey vóru samd við grannskoðanina um, at broytingin var gjørd uttan rætta kunning. Sera vánaliga støðan á maskinparkini, sum var heilt niðurslitin, loypti hvøkk á nýggju leiðsluna á Landsverki, sum mátti handla skjótt.

Við árslok 2021 vóru 4,5 mió.kr. fyri keyp av flutningsamboðum v.m. fluttar frá Inntøkufíggjaða virkseminum til Landsvegahaldið, tó at Inntøkufíggjaða virksemið hevði leigað amboð út alt árið. Flytingin gjørdi eisini, at avlopið hjá Inntøkufíggjaða virkseminum hækkaði frá 5,5 mió.kr. til 10 mió.kr.

Landsverk greiddi frá, at Fíggjarmálaráðið gav boð um, at maskinur og amboð skuldu bókast á deildina, tey hoyra til. Landsverk vísti á, at her breyt stovnurin við sítt broytta roknskaparprinsipp, tó at talan bert var um flytingar millum undirkontur á somu høvuðskontu.

Landsgrannskoðanin er ikki ósamd, at flytingar millum undirkontur gera ikki, at Landsverk fer út um játtanina á høvuðskontuni. Stovnar, ið samsvarandi játtanarreglunum hava fingið loyvi til inntøkufíggjað virksemi, skulu skilja tað virksemið frá vanliga virkseminum. Í viðmerkingunum í fíggjarlógini er m.a. ásett, at alt vøru- og tænastuvirksemi, t.d. á skerv- og asfaltverkum, sum Landsverk fremur fyri onnur og til sín sjálvs, verður skrásett undir inntøkufíggjaðum virksemi. Amboð/smiðjur fevnir um alt arbeiði at røkja amboð, sum Landsverk hevur um hendi, umframt at keypa nýggj amboð. Skerv- og asfaltverk fevnir um alt arbeiðið at reka og røkja hesi verk, og útreiðslur til at keypa asfalt og at framleiða tað.

Tað kann undra, at Landsverk alt árið sendi rokningar frá Inntøkufíggjaða virkseminum til m.a. Landsvegahaldið, og við ársenda flutti útreiðslur fyri keyp av amboðum, ið vóru leigað út, á Landsvegahaldið.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið hevði umrøtt ymisk roknskaparlig viðurskifti við Landsverk, undir hesum um skráseting av keypi av rakstrartólum. Fíggjarmálaráðið helt, at rakstrartól skuldu bókast á tað rakstrarstað, har tólini vóru brúkt. Ráðið var ikki vitandi um, at Landsverk hevði broytt roknskaparmeginreglur viðvíkjandi tólum og rakstri av teimum, og fór at taka málið upp í sambandi við rakstrarjáttanina hjá Landsverki í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2023.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum greitt frá, at Landsverk bókar eftir broyttu roknskaparmeginreglunum, hvørs endamál er at savna maskinparkina á “Inntøkufíggjað virksemi”. Landsverk er í einari tilgongd við at endurskoða roknskaparreglugerðina, ið nágreinar mannagongdina.

### Maskinmiðstøðin í Kollafirði

Maskinmiðstøðin var partur av inntøkufíggjaða virkseminum; hon keypti maskinur og amboð, og umvældi tey.

Landsverk kunnaði um, at Fíggjarmálaráðið hevði gjørt vart við, at raksturin av Maskinmiðstøðini átti at vera partur av Landsvegahaldinum og ikki av Inntøkufíggjaða virkseminum. Stovnurin var ikki samdur við Fíggjarmálaráðið.

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini 2022 var eingin broyting í virkseminum, og sambært Búskaparskipan landsins var Maskinmiðstøðin enn partur av Inntøkufíggjaða virkseminum og faktureraði leigu av flutningsamboðum v.m. til Landsvegahald.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum boðað frá, at virksemið er tað sama. Maskinmiðstøðin er enn partur av inntøkufíggjaða virkseminum.

### 3.12.1 Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Landsverki, undirkontu 23 "Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum".

Í fíggjarlógini 2022 vóru játtaðar 3.060 t.kr. í útreiðslum og 3.060 t.kr. í inntøkum.

Roknskapartøl 2017 til 2022:

*t.kr*

| Undirkonta 23 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 0 | 590 | 619 | 340 | 375 |
| Keyp av vørum og tænastum | -20 | -1.109 | -1.132 | -1.318 | -913 | -1.003 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 0 | -35 | 348 | 481 | 535 | 632 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 1.063 | 312 | 69 | 46 | 3 |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | 0 | -134 | 0 | 0 | 4 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 0 | 107 | 47 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **-20** | **26** | **30** | **-150** | **8** | **11** |

Lønarútreiðslurnar 2021 vóru til Landsverk. Góðar 1,3 mió.kr. komu inn fyri avsláttur av oljukeypi í 2020, og slakar 1,2 mió.kr. vóru brúktar.

***Ikki í samsvari við roknskaparreglur at bóka inntøkur á útreiðslukontur.***

Landsgrannskoðanin vísti enn eina ferð á, at tað var ikki í samsvari við roknskapar-reglurnar at bóka inntøkur á útreiðslukontu. Landsverk hevði sett fyrispurning til Gjaldstovuna um málið, og um mannagongdin var skeiv, fór hon at verða rættað.

Útreiðslurnar vóru spjaddar til t.d. Suðuroyar Sjúkrahús, Umhvørvisstovuna, Kring-varpið og Maskinmiðstøðina hjá Landsverki. Landsgrannskoðanin vísti enn eina ferð á, at tað er ein óskikkur at spjaða útreiðslur hjá einum stovni á fleiri játtanir. Tað ger m.a. at gjøgnumskygni í roknskapinum hvørvur, og at einki yvirlit er yvir, hvat umvæling av einum bygningi kostar. Hevur Løgtingið játtað stovnum meira til olju og el, enn stovnarnir brúka, eigur tað at síggjast aftur í nýtsluni hjá einstaka stovninum.

Í 2019 kunnaði Landsverk um, at tey umhugsaðu at flyta sparingina í oljukeypinum til "Viðlíkahald av almennum bygningum". Eingin broyting var gjørd. Landsverk vísti á, at stovnurin kundi ikki gera av, hvar sparingin skuldi bókast, og at málið skuldi setast á skrá til fund við Fíggjarmálaráðið og seinni við Gjaldstovuna.

Landsgrannskoðanin hevur áður mælt til at rinda avslátturin fyri oljukeyp á kontu hjá Gjaldstovuni, og at skjøl vóru løgd við øllum bókingunum. Landsverk tók undir við tilmælinum, men mannagongdin var enn ikki broytt.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið fór at taka málið upp við Landsverk og Gjaldstovuna, herundir um royndarverkætlanin skuldi halda fram, hvussu hon skuldi skipast, hvussu orkusparingin bókingartøkniliga skuldi umsitast, hvussu orkusparingin verður nýtt til ætlaða endamálið, og hvussu tað skuldi fremjast játtanarliga.

Í august 2022 kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um, at komið var ikki á mál við hesum. Landsverk fór at royna at fáa avklárað viðurskiftini við Gjaldstovuna.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum kunnað um, at málið er óavgreitt. Landsverk sigur seg arbeiða við at fáa bókað inntøkur og útreiðslur á hvør sínari kontu í 2023.

### 3.12.2 Rættarmál

Landsverk hevði í 2020 trý rættarmál í sambandi við byggimál.

MT Højgaard hevði stevnt Landsverki eftir góðum 5 mió.kr. í sambandi við verkætlanina Glasir. Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum greitt frá, at semja var gjørd í málinum í desember 2022.

***Semja gjørd við MT Højgaard.***

Landsverk hevði stevnt Ark99 eftir 1,4 mió.kr., av tí at ósemja var um ráðgevarafeil í sambandi við verkætlan hjá Tekniska Skúla í Klaksvík. Landsverk hevði skotið upp fyri sínum sakførara, at hann skuldi royna at finna semju. Sambært landsstýrismanninum var semja ikki funnin. Nýggj roynd skuldi gerast at finna semju, og hildið var fram við gerðarrættarmálinum, íroknað málið um lekan. Sýn og meting hevði verið viðvíkjandi takinum.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsverk í juni 2023 sendi uppskot til semju til Ark99, og Landsverk fekk svarskriv frá Ark99 28. juni 2023. Í løtuni samráðast partarnir um eina semju.

***Samráðast enn við Ark99.***

Landsverk hevði stevnt TG-Verk Føroyar eftir 11 mió.kr. orsakað av feilum og manglum í sambandi við bygging av Hamragarði í Vági.

***Landsverk stevndi TG-Verk eftir 11 mió.kr.***

Í 2021 svaraði landsstýrismaðurin, at Landsverk hevði staðfest nógvar manglar við klimaskerminum, og síðsti parturin av sakarmálinum snúði seg um hesar manglar. Umvælingarnar vóru ikki gjørdar enn. Fyri tað fyrsta hevði stríðsmál verið við arbeiðstakaran um at umvæla manglarnar. Um manglarnir skuldu umvælast, áðrenn sakarmálið var avgreitt, var neyðugt við játtan til endamálið. Síðani var avbjóðingin eisini, at eldraøkið í síni heild var lagt til kommunurnar.

Verkætlanin var ongantíð endaliga og formliga latin kommununum í Suðuroynni, tí bygningurin enn hevði umrøddu manglarnar. Landsverk væntaði tí, at tá ið sakarmálið var liðugt, og umvælingin var framd, kundi formliga handanin fara fram.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at gongd var í málinum, men enn var ikki greitt, hvat endaliga úrslitið fór at verða.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í mai 2022 gjørdi gerðarrætturin úrskurð, og fekk Landsverk lutvíst viðhald í málinum; upphæddin var 8,9 mió.kr. Sp/f TG Verk var insolvent og tað eydnaðist at fáa gjørt semju við Sp/f TG Verk og systurfelagið í Íslandi T.G. Verktakar Ehf. um at rinda 3,8 mió.kr. í endaligari semju.

***Semja gjørd um, at TG rindar 3,8 mió.kr.***

Almanna- og mentamálaráðið og Landsverk hava samskifti viðvíkjandi víðari framferð og komandi samráðingar við kommunurnar í Suðuroyar sunnaru helvt um skipan av framtíðar viðurskiftunum kring Hamragarð/Eiðisgarð og fíggjarligari uppgerð í sambandi við bygningarnar. Landsverk hevur latið uppskot til samráðingarmandat til Almanna- og mentamálaráðið, og upprit um málið verður væntandi lagt fyri Landsstýrið í næstum, og so verður væntandi farið í samráðingar.

***Skulu samráðast við kommunurnar í Suðuroyar sunnaru helvt.***

## 3.13 Asfalt- og skervverk, løgujáttan (LG 2021/203-381)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av høvuðskontu 3.38.1.22 “Asfalt og skervverk, løgujáttan”. Í 2018 var eingin játtan í fíggjarlógini, men 24,5 mió.kr., sum landið rindaði fyri Asfaltverkið á Sundi, vóru bókaðar sum útreiðsla, og 15,8 mió.kr. fyri “leigugjøld”, sum Landsverk áður hevði goldið, vóru bókaðar sum negativar útreiðslur.

Í 2019 vóru 7,5 mió.kr. játtaðar við eykajáttanarlóg í desember, harav vóru 6.331 t.kr. av óbrúktari játtan fluttar til 2020. Í 2021 vóru játtaðar 10 mió.kr. og 11 mió.kr. í 2022.

Roknskapar- og játtanartøl 2018 til 2022:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Asfaltverkið á Sundi | 8.782 | 1.169 | 8.286 | 6.415 | 16.218 |
| Skervverk | 0 | 0 | 0 | 3.502 | 6.941 |
| **Tilsamans** | **8.782** | **1.169** | **8.286** | **9.917** | **23.159** |
| *Játtan* | *0* | *7.500* | *6.331* | *10.000* | *18.000* |

29. apríl 2022 samtykti Løgtingið Ll. nr. 56/2022 “um at endurnýggja asfaltverk og skervverk hjá Landsverki”, har játtanin í mesta lagi kann vera 34,5 mió.kr. Lógin fer úr gildið 1. januar 2025. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a., at asfalt- og skervverk eru samansett av fleiri eindum (modulum), sum kunnu skiftast út hvør sær, og at bert fyri eina av eindunum er kostnaðurin meira enn 10 mió.kr.

Í álitinum frá Fíggjarnevndini stendur m.a., at løguætlanin frá 2021 til 2023 er 34,5 mió.kr., og at 16 mió.kr. eru brúktar, soleiðis at samlaði kostnaðurin verður 50,5 mió.kr.

Í 2018 bjóðaði Landsverk keyp av mobilum forknúsara út, og Dansk Grusgrav Materiel ApS vann útboðið. Tilboðsprísurin var 4.876 t.kr.

Sambært ordradagfesting í mars 2019 skuldi fyritøkan lata útgerð fyri 7.365 t.kr. Harav skuldu 2.210 t.kr. rindast forút og restin sambært avtalu.

Seinni skuldi Landsverk keypa fleiri knúsieindir, ið skuldu bindast saman við forknúsaranum, og helt stovnurin tað vera skilabest ikki at bjóða keypið út alment. Sambært Landsverki kunnaðu tey Fíggjarmálaráðið um avgerðina.

Landsverk vísti á, at eindirnar skuldu helst kunna bindast saman. Steðgaði t.d. ein eind, skuldu hinar ikki halda fram við at koyra. Tað gera tær ikki, um stýringar ikki kunnu bindast saman, og var tað antin ikki gjørligt ella sera torført, um talan bleiv um ymisk merkir frá ymiskum veitarum. Í mai 2022 kunnaði Landsverk um, at øll útgerðin var latin.

***Asfaltverkið og mobila skervverkið hava higartil kostað góðar 61 mió.kr.***

Spurdur, hvat kostnaðurin fyri asfalt- og skervverk higartil hevur verið, hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum svarað, at kostnaðurin fyri asfaltverkið á Sundi og mobila skervverkið hevur í tíðarskeiðinum 2018 til juli 2023 verið góðar 61,1 mió.kr.

## 3.14 Strandfaraskip landsins (LG 2022/203-382)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Strandfaraskipum landsins. Játtanin er á høvuðskontu 3.38.2.01.

### Roknskaparviðurskifti

Strandferðslan hevur í 2022 verið merkt av stórari útskifting í leiðsluni og í umsitingini.

***Roknskaparreglu-gerðin ikki dagførd.***

Landsgrannskoðanin hevur fyrr mælt Strandferðsluni til at dagføra roknskapar-reglugerðina, sum er frá 2017. Strandferðslan vísti á, at orka hevur ikki verið til at dagføra reglugerðina seinasta árið, orsakað av at stovnurin hevur vantað starvsfólk.

Sambært landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum fer Strandferðslan at dagføra roknskaparreglugerðina skjótast tilber.

*Egin búskaparskipan*

***Ikki formligt loyvi til egna búskaparskipan.***

Strandferðslan brúkar egna búskaparskipan til skráseting av inntøkum. Stovnurin hevur enn ikki formliga fingið góðkenning frá Fíggjarmálaráðnum at hava egna skipan.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum hevur kunnað um, at Strand-ferðslan hevur sent fyrispurning til Gjaldstovuna um møguliga góðkenning av búskaparskipanini. Gjaldstovan hevur fingið sama fyrispurning frá fleiri stovnum. Gjaldstovan kannar málið og vendir aftur.

*Eftirlitsslóð*

Landsgrannskoðanin hevur enn eina ferð staðfest, at stórur partur av bókingunum, so sum inntøkur, kassauppgerðir v.m., eru uttan hjáløgd skjalprógv í Búskaparskipan landsins. Vit mæltu enn eina ferð til at skjalfesta bókingarnar. Strandferðslan ætlaði at kanna, hvat kann gerast við tað.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at sambært Strandferðsluni mangla skjalprógv ikki. Inntøkurnar hjá stovninum og tilhoyrandi skjalprógv verða skrásett í Navision. Ein sjálvvirkandi koyring verður gjørd, har inntøkurnar verða fluttar yvir í Búskaparskipan landsins, men skjølini fylgja ikki við.

*Innanvirkis roknskapir*

Í august 2022 kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um, at Fíggjarmálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini, at innanvirkis roknskapir í Búskaparskipan landsins eru stýringsamboð, sum eisini kunnu nýtast til at vísa samlaða kostnaðin av verk-ætlanum. Fíggjarmálaráðið skuldi fylgja málinum upp. Sambært Strandferðsluni er stovnurin byrjaður at gera verkætlanarroknskapir á nøkrum økjum.

*Avsláttrarskipan*

Í 2022 upplýsti Strandferðslan, at stovnurin samskifti við Talgildu Føroyar um at vera við í borgarakortinum, og at eitt borgarakort fór helst at vera fyrsta lið til bílegging og at gera mun á prísum.

Sambært Strandferðsluni samskifta tey við Gjaldstovuna, um hvørja skipan tey skulu hava til inntøkurnar. Á Sandoyarleiðini hevur stovnurin eina skipan at bíleggja pláss við Teistanum.

*Roknskapartøl 2018 til 2022:*

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 84.317 | 92.157 | 94.976 | 96.540 | 102.899 |
| Keyp av vørum og tænastum | 108.426 | 121.145 | 126.658 | 122.337 | 170.993 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 2.739 | 1.848 | 4.763 | 3.101 | 3.310 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 27.806 | 29.106 | 29.992 | 47.943 | 35.998 |
| Avskrivingar o.a. | 590 | 968 | 1.410 | 1.393 | 2.172 |
| Søla av vørum og tænastum | -72.116 | -76.573 | -63.985 | -71.877 | -69.505 |
| Tilskot, rentur, bøtur | 305 | 315 | 249 | 403 | 333 |
| Innanh. flyt. millum alm.stovn. (útr) | 13 | 26 | 34 | 440 | 767 |
| Innanh. flyt. millum alm.stovn. (innt) | -702 | -825 | -825 | -845 | -734 |
| **Tilsamans** | **151.379** | **168.167** | **193.272** | **199.435** | **246.232** |

*Lønir*
Landsgrannskoðanin kannaði nøkur nýggjari lønarmál, um rættir lønarsatsir eru nýttir, um starvslýsing, prógv o.a. eru í lønarmálunum, og um útgjaldingin samsvarar við hóskandi tíðarskráseting v.m. Einki var at finnast at.

*Keyp*
Strandferðslan hevur ikki bjóðað keyp út á Keypsportalinum í 2022. Sambært stovninum hava tey útvegað tilboð eftir tørvi.

Strandferðslan bjóðar størri umvælingar av skipum út ímillum føroyskar veitarar. Sambært leiðsluni er tað ein fortreyt, tá ið tey skulu skifta lutir á skipunum út, at tey kanna marknaðin fyri tilfar, Strandferðslan vil hava, soleiðis at til ber at standardisera so nógv av útgerðini sum gjørligt.

Strandferðslan hevur keypt generatorar til Smyril, og í tí sambandi kannaðu tey sløg av generatorum, ið kunnu fáast inn í verandi rúm, sum er lítið, og orkan, ið skal inn hagar, er stór. Strandferðslan bað um tilboð frá teimum trimum veitarunum, sum kundu laga generatorarnar til plássið, stovnurin hevur. Kanningararbeiðið tók fleiri ár, tí var sera trupult at fáa endaliga játtan til keypið, og harvið broyttust prísirnir og veitingartíðirnar nógv í tíðarskeiðinum.

*Keyp, goldin frammanundan*
Sambært roknskaparkunngerðini § 13, stk. 2, skulu útreiðslur og inntøkur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, verða skrásettar, tá ið tær eru latnar. Vørur latnar fram til 15. februar kunnu verða skrásettar upp á árið frammanundan, um keypsavtala var gjørd fyri ársskiftið.

***Strandferðslan hevur í 2022 goldið 8,6 mió.kr. forút fyri vøru, sum ætlandi verður latin seinast í 2023.***

Strandferðslan hevur goldið 8,6 mió.kr. forút til skipasmiðju í Føroyum vegna keyp og ísetan av generatorsettum til Smyril.

Í oktober 2022 tók Strandferðslan av tilboði frá skipasmiðju upp á 2 WÄRTSILA generatorsett við treytum um, at DNV góðkennir forkanningarnar av ísetan av generatorsettunum v.m. Prísurin er 880.726 EUR, og latingartíðin skuldi vera 10-11 mánaðir eftir, at Strandferðslan góðkendi tilboðið. Motorarnir verða framleiddir í Kina, og tað tekur meira enn eitt ár, frá tí at teir eru bílagdir, til teir koma til Føroya.

Gjaldstreytirnar eru: 20% við undirskriving av sáttmála, 30% tá ið helvtin av latingartíðini er farin, og 50% tá ið vøran verður latin, sum bankatrygd er latin fyri, 6 mánaðir áðrenn vøran skuldi latast.

***Útreiðslur skulu takast við í tí ári, tær viðvíkja.***

Landsgrannskoðanin vísti á grundleggjandi meginregluna í almenna roknskaparhaldinum, at útreiðslur skulu verða tiknar við í tí roknskaparári, tær viðvíkja.

Forútgoldnu keypini eru bókað í 2022, tó at vørurnar ikki eru komnar, og eftir tíðarætlanini ikki koma fyrr enn seinast í 2023. Landsgrannskoðanin hevur heldur ikki sæð,

at tað er greitt frá í roknskapinum, at stovnurin hevur forútgoldið 8,6 mió.kr. til skipasmiðjuna.

Strandferðslan hevur greitt frá, at orsakað av langari latingartíð verður tað trupult at avgreiða keyp, um ikki er gjørligt at rinda forút sambært handilstreytunum. Forútgjøldini kundu møguliga verið skrásett sum debitpostur í fíggjarstøðuni, men tað hevði kanska havt við sær, at gjaldið ikki bleiv skuldskrivað einari rakstrar- ella løgujáttan, so kundi hent at ein tøk játtan fór til spillis, tí sjálv útreiðslan ikki bleiv debitbókað fyrr enn árið eftir.

Strandferðslan vísir á avbjóðingina stovnurin, sum landsfyritøka, hevur við at verða flokkaður sum "vanligur" almennur stovnur. Eisini vísir stovnurin á, at við einum so stórum rakstrargagni sum Smyrli, hava tey tørv á at keypa inn stórar eykalutir og tilfar fyri fleirtals milliónir krónur. Onkuntíð kemur tað fyri, at Strandferðslan heilt einfalt ikki fær játtanina, ella hon verður strikað av Fíggjarmálaráðnum, tó at stovnurin leggur stóran dent á, at játtanarumbønin er alneyðug.

Strandferðslan sigur, at *"Um tað altíð bleiv stýrt neyvt eftir játtanini so sum t.d FMR býtir hana út, so var tað fyri langari tíð síðani fast í homrum. Tíbetur stýrir SSL í síðsta enda eftir botnlinjuni – og tað er í samráð við FMR og FISK; tí tað er nærum ógjørligt t.d. upp til 1,5 ár áðrenn eina hending at siga júst, hvat ið tað fer ella skal kosta.*

*So jú, vit taka fult út undir við § 13, stk. 2 í roknskaparkunngerðini – men mugu samstundis viðganga, at tað er ikki altíð, at tað ber til at ganga bókstaviliga eftir hesi áseting. Tað er tó ikki talan um brot á nakra grundleggjandi grundreglu, men fyri at fáa veruleikan og ástøðina/reglurnar at spæla saman, er onkuntíð neyðugt hjá SSL at gera onkrar 'flytingar' ella 'dispositiónir', ið ikki passa neyvt inn í mynstrið hjá einum fult forútsigiligum almennum stovni. Tí tað er SSL ikki.*

*Og tí skal undirritaði ikki dylja yvir, at SSL hevði við sínum avbjóðandi og sveiggjandi rakstri og løgum hóska seg munandi betur sum eitt alment partafelag – har ið man fekk eina fasta játtan útfrá einum frammanundan fastløgdum virksemi. Júst so sum bussarnir eru skipaðir. Harvið hevði t.d. § 13, stk. 2 nokk ikki verið galdandi – tí eitt P/f ræður nógv meiri yvir sínum rakstri og dispositiónum."*

Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum hevur víst á, at sum grundregla skulu stovnar landsins sjálvandi halda seg til galdandi játtanarreglur. Avbjóðingar kunnu verða við keypi av stórum útbúnaði, har tað er long leveringstíð, í hesum føri har motorar skulu framleiðast til skip hjá Strandferðsluni.

### *Ognarrættur*

Spurd, hvussu Strandferðslan tryggjar sær, at stovnurin fær tær veitingar, ið hann rindar fyri framman undan latingini, svaraði leiðslan, at tey royna í mestan mun at brúka føroyska fyritøku sum millumlið millum Strandferðsluna og útlendskan veitara.

***Landsgrannskoðanin spurdi, um Strand-ferðslan hevði tryggjað sær ognar-rættin til vøruna.***

Strandferðslan vísir á treytirnar hjá skipasmiðjuni, sum eru gjørdar av Danske Maritime í 1961, og seinast dagførdar í 2019, tó tillagaðar til føroysk viðurskifti viðvíkjandi reglunum um "Lógarval og ósemjuloysnir". Skipasmiðjan kann krevja inngoldið 75% av metta virðinum av útintum arbeiðum, og restupphæddin verður goldin við avhending til bíleggjaran.

Landsgrannskoðanin bað um skjalprógv fyri, at Strandferðslan hevur ognarrættin til generatorsettini, ið stovnurin hevur rindað 8,6 mió.kr. fyri í 2022.

Strandferðslan hevur greitt frá, at stovnurin hevur leypandi havt tætt samband við føroysku skipasmiðjurnar um viðlíkahald og umvælingar. Tað hevur ikki verið vanligt at gjørt skrivligar sáttmálar við størstu og mest royndu skipasmiðjuna í landinum um tílík arbeiði, men tað verður vanliga grundað á tilboð og samskifti.

Strandferðslan hevur gjøgnum árini leypandi mett um fíggjarligu støðuna hjá skipasmiðjuni; hon er so týðandi veitari, og stovnurin vísir á góðu fíggjarligu støðuna hjá skipasmiðjuni, sum var tann einasta av føroysku skipasmiðjunum, ið Strandferðslan metti megnaði uppgávuna, og tí bóðu tey um tilboð haðani.

Sambært Strandferðsluni var tað soleiðis, tá ið tað snýr seg um ognarrættin, at við tilboðnum fylgdu viðskiftatreytirnar, ið skipasmiðjan vanliga brúkar. Í tilboðnum verður sambært § 6.2 sagt um ognarrættin: *"Ognarrætturin til og váðin fyri tilfari, sum skipasmiðjan ella hennara undirveitarar keypa inn til nýtslu umborð á skipinum, fer yvir til bíleggjarin, tá tilfarið verður latið á skipasmiðjuni".*

Strandferðslan leggur afturat, at í tilboðnum frá útlendska veitaranum til skipasmiðjuna verður víst til teirra General Terms and conditions Wartsila Marine (2022). Í § 5.5 verður sagt: *"The Supplier retains title and ownership of the Equipment and Spare Parts which shall automatically pass to the Customer only on receipt of the Contract Price in full. Despite of retention of title, risk passes to the Customer at Delivery".*

***Strandferðslan roknar við at fáa ognarrættin í august 2023.***

Sambært Strandferðsluni verða motorarnir latnir føroysku skipasmiðjuni millum 7. og 23. august 2023, og tá flytir ognarrætturin til Strandferðsluna. Strandferðslan nevnir møguleikan, at stovnurin kundi havt tryggjað seg ímóti tapi av ávegis gjøldunum við sonevndum Refund Guarantee ella Advance Payment Guarantee e.l. Strandferðslan heldur, at tað hevði ikki verið neyðugt at trygdin var partur av beinleiðis sáttmála heldur enn vanligu viðskiftatreytunum hjá skipasmiðjuni, og at stovnurin hevði ikki verið betur stillaður, um sáttmáli var skrivaður, sum ongar afturgjaldstrygdir hevði.

Strandferðslan vísir á, at tá ið tey fingu tilboðið upp á motorarnar, metti stovnurin um tað var neyðugt við bankatrygd. Niðurstøðan var, at samanborið við kostnaðin fyri bankatrygdina, 7% av keypspeninginum umleið 700.000 kr., og sterku fíggjarstøðuna hjá skipasmiðjuni og harvið lágan váða, var ikki neyðugt við bankatrygd. Skuldi tað hent, at Strandferðslan t.d. ikki fekk motorarnar innan avtalaðu avhendingarfreistina, og mett var, at mishaldið var týðandi, hevði stovnurin kunnað ógildað avtaluna og kravt inngoldna peningin aftur. Sama hevði verið galdandi, um motorarnir høvdu týðandi manglar, ið veitarin ikki megnar at rætta innan rímiliga tíð.

Strandferðslan vísir eisini á, at "*Hevði [skipasmiðjan] farið á húsagang, áðrenn ognarrætturin var farin yvir til SSL, høvdu SSL ikki havt nakað sjálvstøðugt krav til motorarnar ella nakað krav um, at [skipasmiðjan] rættaði møguligar manglar við umvælingini, men eitt møguligt simpult krav mótvegis trotabúgvinum, sum peningaliga hevði kunnað verði rímiliga avmarkað. Hevði úttøka verið gjørd í motorunum, áðrenn ognarrætturin var farin yvir til SSL, ella høvdu teir verðið seldir til aðra síðu (sonevnd dupultsøla), hevði SSL heldur ikki havt rætt til motorarnar. Mett varð sum sagt, at hetta var ein ósannlík støða."*

Spurdur um viðmerkingar til málið, svaraði landsstýrismaðurin, at Fiskivinnu- og samferðslumáláráðið hevði einki at viðmerkja.

### *Leiga av avloysaraskipi*

Strandfaraskip landsins hava leigað ferjuna Herjólf frá Vegagerðin í Íslandi. Sáttmálin er galdandi í 15 mánaðir frá 1. juni 2022. Kostnaðurin er 27.863 kr. um dagin.

Í løgujáttanini vóru játtaðar 32 mió.kr. til at keypa fraktferju/avloysaraskip til Suðuroyarleiðina. Strandferðslan fer ikki at keypa Herjólf, soleiðis sum ætlanin eina ferð var. Leigutíðarskeiðið verður longt 4 mánaðir, og Strandferðslan skal leiga eina aðra ferju, meðan hjálpimotorarnir verða settir í Smyril.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum hevur kunnað um, at hjálpimotorarnir verða ikki skiftir út í 2023, tí verður eingin ferja leigað.

## Inntøkur

Inntøkur seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Støð uttan tilknýti til depil | 0 | 0 | 0 | -36 | -1 |
| Oyggjaleiðir | -52.530 | -56.273 | -50.425 | -56.606 | -51.981 |
| Bygdaleiðir | -17.487 | -18.163 | -11.779 | -13.392 | -15.560 |
| Avgreiðslur | -2.010 | -2.030 | -1.689 | -1.732 | -1.872 |
| Høvuðsskrivstova | -88 | -108 | -92 | -112 | -92 |
| **Tilsamans** | **-72.116** | **-76.573** | **-63.985** | **-71.877** | **-69.505** |

Í 2022 eru inntøkurnar 2,5 mió.kr. lægri, enn tær vóru í 2018, og 7 mió.kr. lægri, enn tær vóru í 2019.

Sambært Strandferðsluni er orsøkin til, at inntøkurnar á Oyggjaleiðunum eru minkaðar 4,6 mió.kr. frá 2021 til 2022, at Smyril var í dokk í august og september 2022, og at Herjólfur røkti siglingina. Tað eru altíð færri ferðafólk við, tá ið avloysaraskip siglir.

Inntøkurnar hjá Bygdaleiðum eru hækkaðar 2,2 mió.kr. í 2022 samanborið við 2021.

### *Broytt siðvenja*

***Strandferðslan hevur broytt roknskapar-mannagongd.***

Í 2022 hevur Strandferðslan broytt mannagongdina viðvíkjandi inntøkum samanborið við undanfarin ár. Tað, sum er goldið forút, er støðlað, t.v.s. at inntøkan í 2022 hevði verið 2,8 mió.kr. størri, um sama mannagongd var brúkt, sum árini frammanundan.

Landsgrannskoðanin vísti á reglurnar í § 14 í roknskaparkunngerðini, um at slíkar broytingar skulu gerast við at tillaga roknskaparpostin fyrst í tí fíggjarárinum, broytingin verður gjørd, og at Gjaldstovan skal gera tillagingina eftir frágreiðing frá aðalráðnum.

Strandferðslan ásannaði, at tað var ein feilur, at tey ikki høvdu kunnað Gjaldstovuna og grannskoðanina.

Í august 2023 hevur Strandferðslan greitt frá, at stovnurin ráðførdi seg við Gjaldstovuna, um hvussu broytingin skuldi bókast, soleiðis at hon bleiv sjónlig, og at Strandferðslan helst skuldi havt verið varug við, at primoposturin eisini átti at verðið broyttur.

Landsgrannskoðanin vísti á, at um sama skrásetingarmeginregla var brúkt til inntøkurnar 2022 sum undanfarin ár, høvdu inntøkurnar verið 72,3 mió.kr. og ikki 69,5 mió.kr.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum hevur greitt frá, at Strandferðslan tekur hetta til eftirtektar og fer at avgreiða málið rætt næstu ferð.

## Samanumtikið

Sambært roknskapinum 2022 eru útreiðslurnar til umvælingar og viðlíkahald av Smyrli 16.179 t.kr. Um reglurnar í § 13, stk. 2 í roknskaparkunngerðini vóru fylgdar, høvdu útreiðslurnar verið 7.567 t.kr.

Um sama meginregla sum undanfarin ár hevði verið nýtt til at skráseta inntøkur, høvdu inntøkurnar hjá Strandferðsluni verið 2.800 t.kr. lægri, enn tær vóru í roknskapinum 2022.

Strandfaraskip landsins hava tilsamans 10.756 t.kr. minninýtslu í 2022. Um ikki skrásetingarmeginreglan viðvíkjandi inntøkum, og útreiðslurnar til keyp, sum ikki er latið, vóru tiknar við, hevði samlaða nýtslan hjá stovninum verið:

***Broyttu megin-reglurnar broyta úrslitið 11,5 mió.kr.***

| | |
|---|---|
| Sambært roknskapi | 246.232 t.kr. |
| Keyp, ið ikki er latið | - 8.612 t.kr. |
| Broyting av skrásetingarmeginreglu – inntøkur | - 2.800 t.kr. |
| Nýtsla tilsamans | 234.820 t.kr. |
| Játtan í fíggjarlógini | 256.988 t.kr. |
| Minninýtsla | 22.168 t.kr. |

***Landsstýrismaðurin hevur ongar viðmerkingar til broytingina.***

Sambært landsstýrismanninum hevur Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið onga viðmerking til brotið um broytingina av skrásetingarmeginregluni av inntøkunum og frádráttin fyri keyp, sum ikki er latið.

## KT-viðurskifti

Í mai 2022 vísti Strandferðslan á, at parturin av KT-skipanini FARA, sum stovnurin nýtir, fór helst at verða niðurlagdur, tí so fá vóru á tí greinini. Strandferðslan skal aftur á fund við Fíggjarmálaráðið, fyri at koma á mál við einari loysn – antin frameftir við skipanini ella at niðurleggja og so einki hava/fáa.

Í mai 2023 hevur leiðslan kunnað um, at parturin, sum Strandferðslan brúkar hjá FARA, verður endaliga niðurlagdur í 2024. Strandferðslan er einasti kundin hjá FARA, ið enn brúkar tann partin. Tey kanna møguleikan fyri at uppstiga FARA.

***Hardware, sum Strandferðslan keypti til ætlaðu bíleggingar-skipanina, verður ikki brúkt.***

Sambært Strandferðsluni verður KT-útgerðin, sum stovnurin keypti til ætlaðu bíleggingarskipanina[10], ikki brúkt, og stovnurin samstarvar ikki longur við tann veitaran. Eitt rættarmál er ímillum veitaran og Strandferðsluna, har kravið er 1,3 mió.kr. Sambært leiðsluni er enn samband ímillum partarnar umvegis advokatarnar.

Hardware, sum Strandferðslan keypti frá fyritøkuni, liggur sambært Strandferðsluni enn í kjallaranum í høvuðsbygninginum á Tvøroyri.

Spurdur, hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum svarað, at FARA hevur staðfest, at útgerðin er ov gomul og hevur ikki stýriskipanina, sum FARA brúkar. Harafturat lýkur útgerðin ikki trygdarkrøvini, sum FARA hevur til slíka útgerð.

## Fíggjarstøða

Í sambandi við at Landsgrannskoðanin hevur verið ígjøgnum fíggjarstøðurnar hjá landsins stovnum, høvdu vit nakrar spurningar/viðmerkingar til fíggjarstøðupostar hjá Strandfaraskipum Landsins.

### *Tíðaravmarkingar av lønum*

Í 2022 vóru skyldugu lønirnar 2.537 t.kr., og upphæddin til væntaðar lønarhækkingar 564 t.kr. Í 2021 vóru skyldugu lønirnar 1.681 t.kr.

### *Støðisogn v.m.*

Erla Kongsdóttir og Hasfjord vóru ikki við í støðisognini 31. desember 2022. Skipini eru skrásett í juni 2023. Í akfarsyvirlitinum eru akfør, sum kanska ikki eru til longur. Strandferðslan ætlaði at kanna akfarsyvirlitið og dagføra tað. Í 2022 hevði Strandferðslan ikki yvirlit yvir smáamboð. Tað er framvegis ikki gjørt.

### *Tænastu- og vøruskuldarar*

Strandferðslan hevur stemmað skuldarar av pr. 31. desember 2022. Í mai 2022 staðfesti Landsgrannskoðanin, at Tórshavnar kommuna skyldaði Strandferðsluni 44 t.kr., sum Strandferðslan fleiri ferðir hevur roynt at fáa kommununa at rinda, men uttan

[10] Strandferðslan ætlaði í 2018 at gera nýggja ferðaseðla- og bíleggingarskipan, kallað BPS.

úrslit. Stovnurin umhugsar at avskriva upphæddina, tó at tey hava skjalprógv fyri, at upphæddin er røtt.

Tilsamans 347 t.kr. eru settar av móti tapi av skuldarum í 2013 og 2014. Eingin rørsla hevur verið síðan 2019. Skjalfestingin útgreinar ikki hví ella fyri hvønn. Seinni er saldan lækkað aftur. Sambært Strandferðsluni er vegna manglandi arbeiðsorku ikki komið á mál við tí.

*Varðveitingar (deponeringar) og trygdir (StRk. 0850)*
Á kontuni eru bókaðar 2.838 kr. sum er forútgjald fyri ferðaseðlar v.m. Einki er bókað fyrr enn í 2022. Talan er um broytingar av roknskaparmannagongd viðvíkjandi inntøkum.

Sambært Strandferðsluni hevur Gjaldstovan verið vitandi um broytingina, og fíggjardeildin ráðførdi seg við Gjaldstovuna um, hvussu broytingin skuldi bókast, og stovnurin átti at havt kunnað Landsgrannskoðanina um broytingina.

*Peningastovnskontur, kredittkort og kassar*
Sambært Búskaparskipan landsins hevði Strandferðslan 18 peningastovnskontur í føroysku peningastovnskontum, sum stovnurin brúkar til inntøkur frá farmi, ferðaseðlum v.m. 31. desember 2022 var saldan tilsamans 874.358 kr.

Strandferðslan hevur eisini 44.515 kr. standandi á útlendskari peningastovnskontu. Upphæddin er bókað í 2015 við tekstinum "flutt saldur á útl ps-kontum". Eingin rørsla hevur verið síðani, og einki skjal liggur við. Strandferðslan skuldi kanna málið.

Strandferðslan hevur latið fíggjarleiðaranum kredittkort, har hámarkið er 50 t.kr. Kontan, ið kortið er knýtt at, er ikki skrásett í Búskaparskipan landsins.

Spurd, um heimildarváttan v.m. er gjørd til kredittkortið, svaraði Strandferðslan, at heimildarváttan er gjørd umvegis oyðublaði frá peningastovni.

Landsgrannskoðanin vísti á reglurnar í rundskrivi nr. 9002 frá 11. november 2009 "um nýtslu av gjaldskorti og kredittkorti fyri landsstovnar", og mælti til at fáa til vega heimildarváttan sambært reglunum í rundskrivinum.

Fíggjardeildin hevur gjørt fráboðað kassaeftirlit á tveimum skipum í 2022.

***Tørvur á betri eftirliti.***

Í seinastu frágreiðing ásannaði Strandferðslan, at tørvur var á betri eftirliti við umsitingini av atgongumerkja- og gjaldskipanum í einstøku bussunum. Dagførd eftirlitsskipan skuldi koma í gildi 15. september 2022, sum partur av góðskueftirlitsætlanini fyri Bygdaleiðir 2022 – 2024.

Sambært Strandferðsluni hevur stovnurin ikki havt orku til at gera kassaeftirlit í bussunum.

*Skyldur, ið ikki eru endaligar (StRk. 0889)*
Í 2022 eru samlaðu avsetingarnar 3.720 t.kr. Í 2021 setti Strandferðslan 1.056 t.kr. av viðvíkjandi rokningum fyri KT-skipan, og í 2022 eru 2.664 t.kr. settar av afturat. Millum avsetingarnar er 1 mió.kr. vegna faktura frá skipasmiðju viðvíkjandi dokkseting av Teistanum. Aðrar avsetingar eru m.a. vegna ósemju við Tvøroyrar havn um havnagjald fyri Herjólf, endurgjaldskrav frá veitara av bussleiðum og krav frá starvsfólki í sambandi við Erlu Kongsdóttir.

## Rættarmál o.l.
Strandferðslan hevur eitt rættarmál viðvíkjandi KT-veitara. Eisini er eitt trætumál um samsýning til starvsfólk. Strandferðslan hevur eisini krav frá einari fyritøku. Kravið er hjá sakførara, og er á veg í rættin.

## 3.15 Strandfaraskip landsins, løgujáttan (LG 2022/203-382)

Roknskapartøl 2018 til 2022:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| 01. Sandoyarskip | 0 | 3.529 | 5.166 | 0 | 0 |
| 03. Suðuroyarskip | 3.506 | 29.520 | 0 | 7.072 | 30.056 |
| 04. Eykabátur | 0 | 23.728 | 11.947 | 0 | 0 |
| 24. Fraktferja/avloysaraskip til Suðuroyarl. | 0 | 0 | 0 | 0 | 6.836 |
| **Tilsamans** | **3.506** | **56.777** | **17.112** | **7.072** | **36.892** |

### M/s Erla Kongsdóttir

Við Ll. nr. 137/2018 "um at byggja eykabát til Strandfaraskip Landsins" fekk landsstýrismaðurin heimild at gera avtalur um bygging av eykabáti til Strandferðsluna fyri í mesta lagi 34 mió.kr. Lógin fór úr gildi 31. desember 2021.

Í 2019 og 2020 brúkti Strandferðslan 35,7 mió.kr. til byggingina av Erlu Kongsdóttir, t.e. slakar 1,7 mió.kr. meira, enn játtað var í verklagslógini. Sambært Strandferðsluni bleiv báturin dýrari orsakað av klassakrøvum, og tí at eyka myndatól vóru keypt.

***Erla Kongsdóttir bleiv 2,5 mió.kr. dýrari, enn játtan var til.***

Í 2021 hevur Strandferðslan goldið fyritøku 842,5 t.kr. av rakstrarjáttanini hjá stovninum fyri meklarahonorar vegna Erlu Kongsdóttir. Harvið er byggikostnaðurin 36,5 mió.kr. Kostnaðurin fyri bátin er sostatt 2,5 mió.kr. hægri, enn ásett í verklagslógini og tað, sum var játtað í fíggjarlógunum.

Strandferðslan hevur kunnað um, at í sáttmálanum fyri Erlu Kongsdóttir nevndi skipasmiðjan, at tey høvdu ikki meklaraómaksløn við. Tá ið báturin var liðugur kom ynski frá meklarafyritøkuni um 7 til 7,5% av kostnaðinum í ómaksløn. Hesum ynskinum var Strandferðslan ikki samd í, tí Strandferðslan hevði verið partur av forarbeiðinum. Eftir nógvar fundir og samskifti var semja gjørd á vári 2021, um at Strandferðslan skuldi gjalda 2,5% av byggikostnaðinum í meklaraómaksløn. Avtalað var, at gjaldast skuldi í 4 avdráttum, og skuldi tað so vítt møguligt gjaldast í 2021.

***Strandferðslan hevur slept endurgjaldskravinum.***

Í 2021 brúkti Strandferðslan slakar 900 t.kr. til at skifta rútar í bátinum, tí rútarnir vóru ikki í tí standi, teir skuldu vera. Strandferðslan hevði sent krav til seljaran, upp á 1.081 t.kr. Kravið var ikki skrásett í Búskaparskipan landsins.

Spurdur, hví útreiðslan ikki var skrásett, vísti landsstýrismaðurin í august 2022 á, at allir fakturar eiga meginregluliga at vera skrásettir í roknskapinum. Fíggjarmálaráðið skuldi fylgja málinum. Sambært Strandferðsluni hendir ikki meira í hesum málinum.

Spurdur, hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum svarað, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur onga viðmerking til brotið um M/s Erlu Kongsdóttir.

## 3.16 Stuðul til útoyggjar (LG 2022/203-382)

Stuðul til útoyggjar er á høvuðskontu 3.38.2.21. Útjavningarstuðulin kann gjaldast sambært Ll. nr. 86/1998 "um útjavningarstuðul til útjaðaraøki". Játtanin í 2022 er 1,5 mió.kr. Atlantsflog hevur fingið 525 t.kr. og Postverk Føroya 46 t.kr.

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað partin, sum Strandferðslan hevur fingið, sum er 734 t.kr.

Vit kannaðu við stakroyndum, um skrásetingarnar av stuðlinum lúka treytirnar sambært reglugerð frá 7. februar 2006, broytt 26. mai 2016, t.e. um:

1. Útjavningarstuðul bert verður latin til fastbúgvandi á oyggj/bygd sambært §§ 1, 2 og 5.
2. Vørubólkur og stødd/vekt eru sambært § 3.
3. Farmatúrar eftir tørvi eru sambært § 3, stk. 2.

Strandferðslan hevur bókað stuðulin sum inntøku fyri farm, býtt á oyggjarnar, sum hava fingið stuðul:

*kr.*

| Øki | Ikki leigutúrar | Leigutúrar | Tilsamans |
|---|---:|---:|---:|
| Fugloy/Svínoy | 73.128,00 | 165.625,00 | 238.753,00 |
| Hestur | 9.855,00 | | 9.855,00 |
| Kallsoy | 88.196,50 | | 88.196,50 |
| Mykines | 119.060,00 | | 119.060,00 |
| Nólsoy | 30.248,75 | | 30.248,75 |
| Skúvoy | 29.414,31 | 87.500,00 | 116.914,31 |
| Stóra Dímun | | 131.250,00 | 131.250,00 |
| **Tilsamans** | **349.902,56** | **384.375,00** | **734.277,56** |

Strandferðslan hevur í 2022 skrásett 11.140 kr. fyri flutning av olju til fólk, ið ikki eru fastbúgvandi á útoyggj.

*Stuðul goldin til ikki fastbúgvandi.*

Síðani 2011 hevur Strandferðslan brúkt vegleiðing frá Innlendismálaráðnum um at loyva stuðul til at flyta oljutunnur hjá ikki fastbúgvandi, um samlaða árliga upphæddin ikki fer upp um 20 t.kr. Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir víst á, at vit undrast á ta tulkingina.

## 3.17 Akstovan (LG 2020/203-384)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Akstovuni. Roknskaparreglugerðin var seinast dagførd í 2016, og góðkend av ráðnum. Sambært Akstovuni var ætlanin at dagføra reglugerðina. Landsgrannskoðanin mælti til at áseta reglur um fríar arbeiðsbúnar, t.d. í roknskaparreglugerðina, næstu ferð hon bleiv dagførd.

Landsstýrismaðurin mælti Akstovuni til at nýta ásettu mørkini fyri +/- tímar í rundskrivinum um at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at uppskot til nýggja roknskaparreglugerð var sent Fíggjarmálaráðnum. Í uppskotinum vóru reglur um arbeiðsbúnar, og mørkini fyri +/- tímar.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum kunnað um, at ráðið hevur góðkent roknskaparreglugerðina eftir tilmæli frá Fíggjarmálaráðnum.

### KT-viðurskifti

KT-grannskoðari skoðaði skipanirnar og KT-kervið í 2020. KT-grannskoðarin vísti á fleiri veikleikar, harav nakrir vóru álvarsligir og høvdu høga raðfesting. Høgt raðfestu veikleikarnir áttu at fáast í rættlag beinanvegin, ella so skjótt til bar. Stjórin kunnaði um, at tey arbeiddu við at bøta um veikleikarnar. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin fekk veikleikarnar, sum KT-grannskoðarin vísti á, í rættlag, so skjótt til bar.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at fleiri av ávístu veikleikunum vóru loystir, men framvegis var arbeitt við at fáa aðrar veikleikar í rættlag.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum greitt frá, at seinasta skoðan var í 2022, og víst var á fleiri veikleikar. Akstovan arbeiðir støðugt við

at betra teir veikleikar, sum skoðanin hevur víst á. Samskift verður við KT-Landsins og Elektron viðvíkjandi teimum mest átrokandi veikleikunum. Eitt uppskot til ætlan er gjørt, men endaliga ætlanin er ikki framd í verki enn, tí Akstovan vil tryggja sær, at tænastustøðið verður óbroytt. Av somu orsøk er skoðanin fyri 2023 útsett til aftaná summarferiuna við teirri vón, at mest átrokandi veikleikarnir partvíst eru loystir, áðrenn skoðanin fer fram.

## 3.18 FAS-skipanin (LG 2021/220-521)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av FAS-skipanini.

TAKS umsitur inn- og útgjøld í FAS-skipanini. TAKS hevur í Vinnuskránni skrásett feløg, ið eiga og reka skip, sum eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS). Tey feløgini kunnu fáa skattin av hýrunum hjá manningunum afturbornan.

FAS V-tøl kunnu vera virkin í Vinnuskránni, tó at einki veruligt virksemi er, t.d. tí skip eru seld. Landsgrannskoðanin mælti til at hava virknar skrásetingar til virksemið, og støðugt rudda upp í FAS V-tølum í Vinnuskránni.

TAKS tók tilmælið til eftirtektar og ætlaði at rudda óvirkin V-tøl úr skipanini. Eisini skuldi IMO-nummarið hjá skipunum skrásetast saman við skipanavninum, og TAKS ætlaði árliga at kanna hjá Sjóvinnustýrinum, hvørjar broytingar vóru. Skipanin hjá TAKS við skipanøvnum fór at verða dagførd samsvarandi.

Hýrur til manningar kunnu bert rindast um eitt góðkent avrokningarstað, um hvør einstakur av manningini er skrásettur við føroyskum p-tali. Skattskyldan hjá persónum, sum eru undir avmarkaðari skattskyldu til Føroyar, er eyðmerkt í skattaskipanini við serskildari skattakotu[11], sum er knýtt at p-talinum.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum skrásetingar í skattaskránni av manningum, ið vóru úr *øðrum* londum enn Norðurlondum. Stakroyndirnar vístu, at manningarnar rindaðu 35% í skatti, og at nettohýran var ávíst aftur á peningastovnskonturnar hjá feløgunum, sum hýran var goldin av. Sambært TAKS bar ikki til, av tekniskum orsøkum, at rinda hýrur á útlendskar peningastovnskontur, og tí bleiv nettolønin, eftir avtalu millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara, flutt aftur til feløgini, sum síðani skuldu rinda manningunum hýruna.

Í august 2022 tók Fíggjarmálaráðið undir við, at *"TAKS hevur greitt frá, at tey praktisku viðurskiftini, ið eru avtalað ímillum arbeiðsgevara og arbeiðstakara viðvíkjandi avrokning av nettoupphæddini, eru ikki viðurskifti, ið TAKS hevur ábyrgd av ella skal hava eftirlit við."*

TAKS sendi ikki kontuavrit yvir løn ella árligar skattauppgerðir til útlendsku manningarnar. TAKS gjørdi tó skattauppgerðir fyri hvørt p-tal, og tær lógu á deildini í Klaksvík. Tað kom fyri, at reiðarí spurdu eftir skattauppgerðum.

***TAKS hevur ikki mett um váðar, sum kunnu hótta FAS-skipanina.***

Landsgrannskoðanin mælti til, at TAKS tók støðu til, hvørjir váðar kundu hótta FAS-skipanina. TAKS svaraði, at stovnurin hevði ikki serskilda meining um, hvat kundi hótta FAS-skipanina.

Landsgrannskoðanin spurdi TAKS, hvørji eftirlit stovnurin hevði gjørt í 2021 hjá feløgum, ið høvdu FAS-skrásett skip. Eisini spurdu vit, um stovnurin hevði ávísan leist at fremja eftirlitini eftir, og um hvørja niðurstøðu TAKS var komið til í hesum sambandi.

[11] Persónar, ið sigla við skipum í FAS, eru skrásettir í skattaskipanini við skattakotu 28.

TAKS hevði eingi úrslit ella niðurstøður at vísa á, tí Virkiseftirlitið gjørdi eingi eftirlit í 2021, og eingin serstakur leistur var til FAS-eftirlit. TAKS kunnaði um, at í 2019 og 2020 vóru seks eftirlit gjørd. Eitt eftirlit var viðvíkjandi afturbering, meðan hini høvdu sjóneykuna á, um virksemið var fevnt av lógini um tonsaskatt. Sambært TAKS var eitt eftirlit viðvíkjandi FAS-afturbering gjørt seinastu trý árini.

Í 2022 segði Fíggjarmálaráðið, at ráðið fór at taka málið upp við TAKS at fáa greiði á, um eftirlitið var nøktandi.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í fíggjarmálum kunnað um, at TAKS hevur fingið lista frá Sjóvinnustýrinum við øllum skipum, sum eru skrásett í FAS. TAKS hevur skrásett skipini í vinnuskránni undir skipanøvnum við høvuðs V-talinum. Skipini eru skrásett við navni og kallimerki. Ætlanin er regluliga at kanna og dagføra skrásetingina.

Sambært landsstýriskvinnuni er eftirlitið við, hvørji skip eru í FAS-skránni, betrað soleiðis, at TAKS fær sjálvvirkandi fráboðan frá FAS/Teyggjuni[12] um broytingar í skipa-skránni.

***TAKS fær nú sjálv-virkandi boð, tá ið broytingar eru í skipaskránni.***

*Stakroyndir*

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum FAS-skrásett feløg og samanhelt lønir sambært almennu roknskapunum hjá feløgunum og lønir sambært FAS V-tølum.

Í ársroknskapunum hjá FAS-skrásettu feløgunum vóru oftast sosial gjøld og eftirlønir íroknað lønarútreiðslunum. Í FAS-lønarskrásetingunum vóru eftirlønir ikki íroknaðar. Lønartølini kundu geva ábending um, at skeivleikar vóru, ið kundu vera grundarlag undir nærri kanning av lønum í FAS V-tali. Vit bóðu TAKS um viðmerkingar, men TAKS viðmerkti ikki einstøku spurningarnar. Tey svaraðu generelt, at útgreiningar av lønum í roknskapunum vístu, at fulla upphæddin, sum var farin ígjøgnum skattaskipanina, var í roknskapunum og regulerað fyri skattaafturbering.

Í øllum grannskoðaðu málunum bað Landsgrannskoðanin um viðmerkingar til rokn-skapartølini, men TAKS svaraði ikki. Í einum málið boðaði TAKS tó frá, at felagið fór at verða mótroknað fyri ov nógva afturbering.

Landsgrannskoðanin mælti til, at TAKS vísti størri varsemi í sambandi við aftur-beringar, og at stovnurin hevði neyvt eftirlit við hýrum, fyri at tryggja, at talan var um rætta manning, rætta hýru, rætt tíðarskeið og rætt grundarlag til avgreiðslu av afturbering.

Í mai 2022 segði TAKS, at tey áttu at fáa fráboðan beinanvegin, tá ið skip fóru úr FAS-skipanini. Eftirlit áttu at verið gjørd, um lønir fóru um skattaskipanina, eftir at skip vóru strikað úr skipanini, fyri at fáa eina frágreiðing um, hví so var.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at TAKS svaraði ikki Landsgrann-skoðanini ítøkiliga fyri hvørt felag, tí at stovnurin ikki helt tað vera rætt at umrøða einstøk feløg í frágreiðing, sum er almenn. Heldur varð svarað generelt um viðurskiftini.

Landsstýriskvinnan leggur afturat, at TAKS hevur í skattligu sundurgreiningunum eina lønaravstemman í mun til lønarupplýsingar, ið síggjast í almennu ársfrásøgnini. Lønar-upplýsingarnar í ársfrásøgnini eru javnaðar fyri afturbering, ymisk almenn gjøld, avsetingar o.tíl. Tískil er ikki samsvar ímillum lønarútreiðslur sambært ársfrásøgnini og tað, sum er goldið um afturhaldsskipanina.

*Munur ímillum inn- og útgjøld*

Skattainntøkan frá FAS-skipanini var ikki altíð ájøvn við FAS-afturberingina.

[12] KT-skipan til umsiting av FAS Føroya Skipaskráseting, fiskiloyvum, ognarviðurskiftum hjá skipum o.ø.

Afturberingin árini 2012 til 2018 var 3 mió.kr. størri enn goldni skatturin. Munir vóru hvørt ár uttan í 2013. Stórir munir vóru í 2017 og 2018, sum í høvuðsheitum stavaðu frá einari Skatta- og avgjaldskærunevndaravgerð frá apríl 2018[13].

Landsgrannskoðanin undraðist á, at afturberingin kundi vera størri enn skatturin av inntøkunum, og bað um viðmerkingar frá TAKS.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at ein munur stendst av, at lønir verða útgoldnar í desember, men at afturberingin verður gjørd í januar árið eftir. Ein annar munur stendst av, at TAKS í skattligari viðgerð av persónunum staðfestir, at eitt reiðarí av órøttum hevur fingið afturbering og tí verður kravt eftir at gjalda afturberingina aftur til TAKS. Kravið um at gjalda afturberingina aftur til TAKS verður ikki skrásett í árinum, tá ið afturberingin av órøttum fór út, men í árinum, har staðfest verður, at felagið av órøttum hevur fingið afturbering. Einstøku árini kunnu tí ikki viðgerast hvør sær, men hyggjast má eftir tølunum samlað fyri fleiri ár.

Landsstýriskvinnan leggur afturat, at rætt er, at fyri árini 2012-2018 eru 3 mió.kr. afturbornar meira, enn skattur er goldin inn. Men fyri 2019-2021 eru 6,3 mió.kr. minni afturbornar, enn skattur er goldin inn.

*Samanumtikið*

Samanumtikið er skipanin hjá TAKS við ávísing av lønum um FAS V-tøl og afturbering av skatti einføld og sjálvvirkandi. Tá ið skipanir eru einfaldar og sjálvvirkandi, er tað av avgerandi týdningi, at viðkomandi innaneftirlit eru sett í verk, til tess at forða fyri at svik verður framt, og til tess at feilir verða funnir og rættaðir.

Skattalógin § 63a, stk. 1, nr. 1, ásetir, at afturbering til reiðaravirki er av løn fyri tænastu umborð á skipi, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS.

Av tí at feløg, og ikki skip, verða skrásett í Vinnuskránni, kann vandi vera fyri, at goldin skattur verður afturborin fyri skip, sum ikki eru í FAS. Skipanarliga er einki, sum forðar fyri, at feløg kunnu ávísa lønir til eitt og hvørt aktivt p-tal, umvegis FAS V-tal, og soleiðis fáa afturbering.

TAKS fær roknskapir hjá feløgum inn til álíkningar hvørt ár. Roknskapirnir vísa virksemi hjá feløgum, og eru amboð at tryggja rætta afturbering.

Grannskoðanin vísti, at feløgini, ið hava útlendska manning umborð á skipunum, fingu afturbering og nettohýru ávísta aftur á egna kontu. Útlendingar uttan fyri Norðurlond í FAS-skipanini fáa hvørki kontuavrit ella skattauppgerðir sendandi frá TAKS.

Landsgrannskoðanin vísti á, at ávísur váði kundi vera í mannagongdini, og at tað hevði týdning, at eftirlitini hjá TAKS vóru virkin.

Stakroyndirnar og eftirlitini hjá TAKS vístu m.a., at eftirlit við FAS bleiv ikki raðfest. Gjørd eftirlit vóru ikki skjalfest neyvt, og onkur eftirlit vóru ikki liðugt viðgjørd.

Samsvar var ikki millum skrásetingarnar í Føroya Altjóða Skipaskrá og skrásetingarnar hjá TAKS. Tað er ikki vist, at samsvar átti at vera, men TAKS hevði møguleika at samstarva við Føroya Altjóða Skráseting um FAS-skip og skrásetingar.

Sjálvt um talan er um nettojáttan 0 kr., hava nettoúrslitini bæði verið undirskot og yvirskot, og tí hevur tað alstóran týdning, at TAKS áhaldandi stemmar av ímillum inntøkurnar og útreiðslurnar.

[13] Skatta- og avgjaldskærunevndin, mál nr.: 17/00117.

Í mai 2022 greiddi TAKS frá, at tey saman við Elektron fóru at taka dátur úr lønar- og skattaskipanini, viðvíkjandi inn- og útgjøldum av FAS-skatti. Ætlanin var, at tað skuldi verða grundarlag undir afturvendandi avstemman av FAS-skatti og afturbering.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at arbeiðið við avstemmanini er komið væl áleiðis, men er ikki heilt liðugt enn fyri persónar, sum hava blandaðar inntøkur (FAS + aðrar inntøkur).

## 3.19 Lønarhæddaravgjald (LG 2020/220-522)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av lønarhæddar-avgjaldi. Ll. nr. 193/1993 "um lønarhæddaravgjald" er galdandi fyri virkir, sum móti samsýning lata heilsu-, tryggingar- og peningastovnstænastur. Lønarhæddaravgjald er álagt tí virksemi, ið er frítikið at gjalda meirvirðisgjald.

### Útrokning av lønarhæddaravgjaldi

Eftir hvønn ársfjórðing roknaði útrokningarskipanin sjálvvirkandi lønarhæddar-avgjaldið. Útrokningin var gjørd, við at skipanin las ávísan teig í fyribilsskattaskránni, har fyribilsskrásett inntøka av egnum virki var skrásett.

Vinnudeildin, sum umsitur lønarhæddaravgjaldið, fekk ikki boð frá Virkisdeildini, um ella hvussu nógv skattskylduga inntøkan hjá virkjum fór at verða broytt eftirfylgjandi. Sambært TAKS hevði hækking av lønarhæddaravgjaldinum avmarkaðan týdning, av tí at gjaldið verður drigið frá sum útreiðsla í roknskapunum.

Í 2021 mælti Fíggjarmálaráðið TAKS til at broyta mannagongdirnar soleiðis, at Virkis-deildin boðar Vinnudeildini frá, tá ið hon broytir skattskyldugar inntøkur hjá virkjum, sum rinda lønarhæddaravgjald.

Í august 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at avtalað var við Virkiseftirlitið hjá TAKS, at tá ið tey gera rættingar størri enn 50 t.kr., boða tey Vinnudeildini frá, sum síðani rættar lønarhæddaravgjaldið.

### Stakroyndir

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar avrokningar hjá fyritøkum í heilsuvinnuni, eftir at TAKS hevði gjørt rættingar í januar 2020.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at TAKS ikki javnan tryggjaði, at feløgini, sum høvdu blandað virksemi, høvdu rætt býti ímillum avgjaldsskylduga partin og restina av virkseminum, umframt avlop ella hall. Tað er ikki óvanligt, at lutfallið millum virksemini broytist frá ári til ár.

TAKS vísti á, at stovnurin hevði ikki orku til at kanna øll virkir, men gjørdi kanningar so hvørt sum orka og raðfesting loyvdi tí.

Í 2022 kunnaði Fíggjarmálaráðið um, at TAKS hevði eitt mál um blandað virksemi til viðgerðar hjá Kærustovninum. Eftirlitsorkan var ikki økt, og einki nýtt var um stak-royndir annars.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at málið um blandað virksemi er avgreitt í Kærustovninum. TAKS hevur greitt frá, at eingin broyting er viðvíkjandi eftirlitsarbeiðinum.

Sambært TAKS heimvísti Kærustovnurin málið um blandað virksemi til TAKS til nýggja viðgerð. TAKS hevur avgreitt málið við at gera semju við fyritøkuna.

Í 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at tað týdningarmesta var, at eftirlitið gjørdi sannlíkt, at avroknaðu lønarhæddaravgjøldini vóru røtt. Í samskifti við TAKS fór Fíggjarmálaráðið at tryggja, at eitt minstakrav verður fyri eftirliti við øllum skattum og avgjøldum, herundir við lønarhæddaravgjaldinum. Sambært landsstýrismanninum ætlaði Fíggjarmálaráðið, at kunning um eftirlit frameftir verður fastur partur av skránni á regluligu stovnsfundunum við TAKS.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at skipað kunning var ikki sett í verk, men Fíggjarmálaráðið ætlaði framvegis, at TAKS skuldi kunna regluliga um eftirlit á stovnsfundum við ráðið.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at Fíggjarmálaráðið hevur gjørt av, at á stovnsfundum skal TAKS kunna um eftirlit, sum eru framd, og sum ætlanir eru um, undir hesum um raðfestingar og arbeiðsorku.

## 3.20 Loyvisgjald á alivinnu (LG 2020/220-522)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. grannskoðan av høvuðskontu 20.52.2.14 “Loyvisgjald á alivinnu”.

Alivinnan rindar loyvisgjald eftir Ll. nr. 64/2014. Sambært átekning í fíggjarlógini er staðfesti mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært Fish Pool Index brúktur til útrokning av avgjaldsgrundarlagnum.

TAKS hevði ikki skrivligar mannagongdir fyri eftirliti av, um loyvisgjald, sum fyritøkur geva upp, var rætt.

TAKS hevði ikki gjørt annað eftirlit viðvíkjandi loyvisgjaldi, enn at starvsfólk hugdu at skrásettu uppgerðunum. Eingi sjálvvirkandi eftirlit vóru við, at t.d. prísurin var rættur, at avgjaldið var rætt roknað, ella at samlaða kilotalið av laksi faldað við prísinum gav rætt loyvisgjald.

Roknskapartøl 2017 til 2022:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tøkugjald á alivinnu | -158.108 | -136.361 | -139.996 | -81.813 | -196.157 | -284.214 |
| *Játtan* | *-138.000* | *-160.000* | *-164.000* | *-175.000* | *-133.000* | *-195.000* |

Loyvisgjaldsinntøkurnar vóru lægri í 2020 enn undanfarin ár, orsakað av lágum prísum.

Eftir umbøn frá fyritøku hevði TAKS í februar 2021 lækkað loyvisgjøldini hjá fyritøkuni fyri 2020 við 3,7 mió.kr. Fyritøkan helt seg ikki hava skyldu at gjalda, tí fiskurin var undantikin avgjaldi sambært § 2, stk. 5, í lógini, tá ið hann ikki kundi seljast fyri marknaðarvirði.

TAKS var ikki samt við fyritøkuna, um at fiskurin ikki var seldur fyri marknaðarvirði, og fyritøkan hevði kært avgerðina til Skatta- og avgjaldskærunevndina.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið var av somu áskoðan sum TAKS, at ítøkiliga málið var rættiliga prinsipielt. Málið var ikki endaliga avgreitt enn av Skatta- og avgjaldskærunevndini.

Í 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at viðvíkjandi tøkugjaldi og tí málinum, sum var mett rættiliga prinsipielt, fekk TAKS viðhald hjá Kærustovninum, men alifelagið hevði síðani lagt avgerðina fyri Føroya Rætt, og har var málið ikki avgreitt enn.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í fíggjarmálum kunnað um, at málið er enn til viðgerðar í Føroya rætti.

Í nøkrum førum høvdu alifyritøkur biðið TAKS rætta somu uppgerð fleiri ferðir, og munurin var fleiri mió.kr.

Dømi vóru um, at virki bóðu TAKS rætta fyrr senda uppgerð, m.a. tí at feilur var í fyrru uppgerðini ella uppgivni kiloprísurin ikki svaraði til miðal altjóða marknaðarvirði. Tað vóru feilir, sum TAKS kundi havt uppdagað, um stovnurin hevði eftirroknað uppgerðirnar. TAKS ætlaði at taka eftirlit við loyvisgjøldum við í raðfestingini av eftirlitsorkuni.

TAKS vísti á, at stovnurin spurdi vanliga ikki fyritøkurnar, hví tær gjørdu broytingar í áður innsendum uppgerðum. TAKS eftirroknaði ikki hvørja einstaka uppgerð, og tískil hevði TAKS ikki broytt nakað í innsendu uppgerðunum.

Landsgrannskoðanin samanhelt miðalprísirnar 2018 til 2020, ið virkini høvdu givið upp til TAKS, við miðalprísirnar hjá Fish Pool Index. Í nógvum førum var munur á prísunum, bæði pluss og minus.

TAKS vísti á, at talan var um feilir, ið ganga báðar vegir, og tá ið samanlíknað verður við samlaðu inntøkurnar fyri 2018, 2019 og 2020, helt TAKS, at talan var ikki um stórar feilir, tá ið talan var um 0,025%.

Landsgrannskoðanin vísti á, at TAKS hevur ábyrgd av, at inntøkurnar, sum stovnurin umsitur, eru rættar, og Landsgrannskoðanin var ikki samd við TAKS, at feilirnir verða minni, tá ið teir ganga báðar vegir.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Fíggjarmálaráðið tók undir við, at umsiting av og eftirlit við loyvisgjøldum ikki var nøktandi, og í so máta gjørdi tað ongan mun, at feilir gingu báðar vegir. Fíggjarmálaráðið heitti á TAKS um at fáa umsiting og eftirlit í rættlag.

Sambært landsstýriskvinnuni hevur TAKS tikið áheitanina frá Fíggjarmálaráðnum til eftirtektar og hevur gjørt tillagingar í mannagongdum.

## 3.21 Onnur gjøld/avgjøld

**Avgjald av kapitaleftirlønum** (LG 2017/220-521)
Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingini hjá TAKS av avgjaldi av kapitaleftirlønum. Samanumtikið tryggjaði umsitingin, at rættar upphæddir vóru goldnar. Tá ið stjórin góðkendi mánaðarroknskapirnar, váttaði hann mótvegis Fíggjarmálaráðnum, at allar inntøkur vóru við, og at roknskapurin var rættur og álítandi.

Landsgrannskoðanin vísti á, at TAKS onga vissu hevði fyri, at øll, sum skuldu rinda avgjald, rindaðu landskassanum avgjøldini.

Sambært TAKS høvdu tey í longri tíð ynskt at fingið váttan frá grannskoðara í lóggávuna, men komið var ikki á mál. Landsstýrismaðurin ætlaði at fáa tað inn í lógina, næstu ferð rentutryggingarlógin var broytt, tó var enn eingin broyting gjørd í rentutryggingarlógini.

**Brennioljugjald** (LG 2019/220-522)
Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av inntøkum av brennioljugjaldi og endurrindan av brennioljugjaldi til ávísar bátar og virkir.

Um 325 virkir og bátar vóru í januar 2020 skrásett hjá TAKS at fáa oljuavgjald endurrindað. Í 2019 vóru 13 mió.kr. endurrindaðar teimum, sum høvdu rætt til at fáa endurrindað brennioljugjaldið, ið tey høvdu goldið oljufeløgunum.

Virkini sendu umsóknir til TAKS, um at fáa alt ella partvíst brennioljugjald endurrindað. Tá ið umsókn var gingin á møti, skrásetti TAKS viðkomandi virki við ávísari kotu í Vinnuskránni, og so leingi TAKS ikki fekk fráboðan um broyting, stóð skrásetingin óbroytt.

Landsgrannskoðanin bað TAKS um at fáa skjøl viðvíkjandi trimum feløgum, sum vóru skrásett at hava rætt til endurrindan av brennioljugjaldi. Landsgrannskoðanin fekk útskriftir av MVG-uppgerðum fyri juni og oktober 2019. Av tí at MVG-uppgerðirnar eru sendar TAKS umvegis Vinnugluggan, vóru eingi undirskjøl við. Av hesari orsøk, og av tí at TAKS einki eftirlit hevði havt, kundi Landsgrannskoðanin ikki sanna, at endurrindanin av brennioljugjaldi var røtt.

**Ferðaavgjald** (LG 2019/220-522)
Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. grannskoðan av inntøkum av ferðaavgjøldum. Sambært § 1 í Ll. nr. 37/1988 “um ferðagjald” skulu 65 kr. rindast fyri hvørt ferðafólk, sum verður flutt av landinum. Ferðafólkaflutningsfeløg krevja avgjaldið inn og rinda tað til TAKS.

TAKS hevði ikki nýtt heimildina at kanna um upplýsingarnar, sum flutningsfeløgini lótu inn, vóru rættar. TAKS hevði seinast verið á eftirlitsvitjan hjá flutningsfeløgum í 2011.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at TAKS ikki tryggjaði sær, at flutningsfeløgini góvu rætt upp, t.d. við at nýta eftirlitsheimildina. Samanumtikið kundi Landsgrannskoðanin ikki sanna, at avroknaðu ferðaavgjøldini vóru røtt, tá ið TAKS ikki hevði gjørt eftirlit hjá ferðaflutningsfeløgunum.

TAKS var í 2021/2022 á eftirlitsvitjanum hjá stóru flutningsfeløgunum. Eingir týðandi feilir vórðu funnir.

**Viðmerkingar frá landsstýrismanninum**
Landsgrannskoðanin hevur áður umrøtt spurningin, um at fáa eftirlønarveitarar og ferðaflutningsfeløg at útvega grannskoðanarváttan frá sínum grannskoðarum um, at avroknaðu gjøldini eru røtt. TAKS kunnaði um, at stovnurin hevði latið Fíggjarmálaráðnum málið um grannskoðanarváttan at seta á løglista.

*Einki nýtt frá Fíggjarmálaráðnum um grannskoðanarváttan.*

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sambært TAKS var eftirlitsøkið styrkt við einum starvsfólki. Fíggjarmálaráðið ætlaði, at frameftir skuldi kunning um eftirlit verða fastur partur av skránni á regluligu stovnsfundunum við TAKS. Enn vóru ongar broytingar gjørdar í ávikavist rentutryggingarlógini, lógini um serligt avgjald um brenniolju, lógini um avgjald á framleiðslu og innflutningi, og ferðaavgjaldslógini.

Í 2022 vísti Fíggjarmálaráðið á, at tað var týdningarmikið, at eftirlitið gjørdi sannlíkt, at avroknaðu ferðaavgjøldini vóru røtt. TAKS hevði greitt frá, at stovnurin gjørdi stakroyndir eftir orku og raðfesting.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at Fíggjarmálaráðið hevur gjørt av, at á stovnsfundum við TAKS skal verða kunnað um eftirlit, sum eru framd, og sum ætlanir eru um, undir hesum um raðfestingar og arbeiðsorku. Næsti stovnsfundur verður væntandi í september.

# 4. Fiskivinnumál

## 4.1 Fiskimálaráðið (LG 2021/205-211)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av roknskapinum hjá Fiskimálaráðnum.

Fiskimálaráðið hevur egna peningastovnskontu til inngjøld fyri royndarfiskiloyvir og til smærri keyp. Kontan var stemmað av hvønn mánað. Landsgrannskoðanin mælti til at rinda rokningar um Búskaparskipan landsins, heldur enn av egnari peningastovns-kontu.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at ráðið tekur undir við Landsgrann-skoðanini, at rindast skal umvegis Búskaparskipan landsins, men ásannar, at í serligum førum er keyp av egnari kontu neyðugt.

*Stuðulsfíggjað virksemi*
Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini fatar høvuðskontan eisini um stuðulsfíggjað virksemi, ið eru verkætlanir, sum ráðið eitt nú umsitur vegna Norðurlendska Ráðharra-ráðið.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Fiskimálaráðið fylgir ásetingunum í roknskapar-kunngerðini um innanvirkis roknskapir.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ráðið hevur tikið til eftirtektar tilmælið um at gera serstakar innanvirkis roknskapir fyri játtanir, sum ráðið umsitur vegna t.d. Norðurlendska Ráðharraráðið. Eingin verkætlan hevur verið síðan 2019.

***Fara at gera innan-virkis roknskapir.***

## 4.2 Vørn, Tilbúgving á sjógvi og Veðurtæn. (LG 2021/205-311)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av MRCC og Tórshavn Radio á høvuðskontu 5.31.1.06, og hjá Veðurstovuni á høvuðskontu 5.31.1.07.

*Lønir og starvsfólkaviðurskifti*
Starvsfólkini á MRCC og Tórshavn Radio eru tænastumenn ella í tænastumanna-líknandi størvum. Tey eru lønt sambært Tænastumannaavtaluni, og arbeiða eftir vaktarskipan, sum er løgd fyri eitt ár ísenn. Í góðsku- og trygdarhandbókini er m.a. ásett, at yvirtímar skulu avspákast.

Við ársenda 2020 áttu starvsfólkini tilsamans 975 tímar á; nøkur áttu nógvar tímar á. Landsgrannskoðanin mælti til at orða reglur um, hvussu nógvar tímar starvsfólk kundu skylda ella eiga á. Leiðslan hevði gjørt uppskot um mannagongdir, sum eru sambært rundskrivi nr. 9007/2017 frá Fíggjarmálaráðnum "um at tíðaravmarka lønir í rokn-skapinum".

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at MRCC hevur sett rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum inn í góðskuskipanina, og talið av tímum, fólk eiga á, er lækkað.

*Keyp av útgerð*

Vørn bjóðar vanliga øll keyp yvir 50 t.kr. út ímillum minst tveir veitarar. Stovnurin bjóðar keyp yvir 500 t.kr. út sambært rundskrivinum "um keyp av vørum og tænastum". Tá ið um størri keyp av samskiftisútgerð ræður, heldur leiðslan, at stovnurin er somikið tongdur at veitaranum og tænastusáttmála við hann, at ikki ber til at senda hesi keyp í útboð.

Viðvíkjandi tænastusáttmálum ásetir rundskrivið "um keyp av vørum og tænastum" í pkt. 4.2. *"at fyri afturvendandi veitingar verða gjørdir sáttmálar við veitara, sum í minsta lagi skulu verða fyri eitt ár í senn og í mesta lagi trý ár. Eru eyðsýndir fyrimunir við longri sáttmála enn 3 ár, kann hetta verður viðgjørt sum fyrispurningur um undantak."*

Vørn vísti á, at av tí at stovnurin arbeiðir við tilbúgving, krevja tey dygdargóða tænastu frá veitarunum. Vørn brúkar ofta somu veitarar til ávís økir, men hevur ikki gjørt tænastusáttmálar við allar.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum víst á, at ein týdningarmikil partur av uppgávuni hjá Vørn er at taka sær av, at tilbúgvingin á sjónum við Føroyar er fult virkin. Samskiftið við MRCC skal altíð vera í lagi, og um brek er, skal tað gerast aftur beinanvegin uttan drál. Tí vera ofta brúktir somu veitarar, ið Vørn hevur álit á og hevur góðar royndir við; hetta fyri at spara tíð og pengar. Landsstýrismaðurin leggur afturat, at tað er partvíst rætt, at veitarasáttmálar ikki eru gjørdir við allar, men sáttmálar eru ávegis og verða væntandi avgreiddir skjótt.

Landsstýrismaðurin kunnar eisini um, at Vørn hevur veitaraavtalu við teir heilt stóru veitararnar. Tað kemur tó fyri, at okkurt gongur fyri umborð á skipunum hjá Vørn, sum skal rættast beinanvegin, og tá hevur Vørn onkuntíð brúkt veitara, ið stovnurin hevur álit á, fyri at spara tíð og pengar. Í tí stóra og heila leggur Vørn seg eftir at gera tænastusáttmálar, har tað letur seg gera.

*Verkætlan*

Við árslok 2021 hevði MRCC 238 t.kr. standandi á "ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t.", sum vóru til verkætlanina ARCSAR undir EU Horizon 2020.

Verkætlanin var ætlað at vara í 5 ár, men orsakað av koronu er freistin longd við einum ári. Um peningur er eftir, tá ið verkætlanin er liðug, skal hann rindast stuðulslataranum aftur.

*KT-viðurskifti*

Grannskoðanarvirki skoðaði KT-skipanirnar hjá Vørn í 2021. Niðurstøðan var, at *"Skoðanin hevur givið okkum fatan av, at trygdarviðurskiftini hjá Vørn ikki til fulnar samsvara við krøvini í trygdarrundskrivinum, og hava vit í skoðanini staðfest veikleikar"*.

***Vørn arbeiðir við at betra KT-trygdina.***

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Vørn støðugt arbeiðir við at betra um KT-trygdina, og rætta um veikleikar eru. Tað seinasta, ið er gjørt við hjálp frá grannskoðaravirki, er ein tilbúgvingarætlan. Tilbúgvingarætlanin er í løtuni til hoyringar innanhýsis.

## 4.3 Havstovan (LG 2021/205-343)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av roknskapinum hjá Havstovuni.

*Lønir*
Stovnurin rindaði bert yvirtíð til starvsfólk í heilt serligum førum, og eftir avtalu við leiðara frammanundan. Starvsfólk kundu skylda tímar, ið svaraðu til í mesta lagi tvær arbeiðsvikur. Í september 2021 áttu starvsfólk tilsamans 3.000 tímar á, og onkur skyldaði 232 tímar. Í desember 2020 áttu starvsfólk tilsamans 2.327 tímar á.

Í roknskapunum 2020 og 2021 leyk Havstovan ikki reglurnar um tíðaravmarkingar av lønum. Sambært rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum skulu tímasaldur tíðaravmarkast, tá ið starvsfólk eiga fleiri enn 40 tímar ella skylda fleiri enn 30 tímar.

Havstovan greiddi frá, at arbeiðsbyrðan er ójøvn gjøgnum árið. Fleiri starvsfólk høvdu siglt við havrannsóknarskipinum, sum gav nógv eykaarbeiði eftirfylgjandi. Tað var m.a. orsøkin til, at starvsfólk áttu frítíð á til at avspáka seinni.

Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar um tíðaravmarking av lønum. Í 2022 segði landsstýrismaðurin, at Fiskimálaráðið fór at heita á stovnin um at fylgja ásetingunum.

***Vit mæltu til at halda reglurnar um tíðar-avmarking.***

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at flestu starvsfólkini á Havstovuni sigla við Jákup Sverra fleiri vikur um árið frá februar til november. Sigling gevur avspáking, og trupult er at avspáka, tí rannsóknartúrar skulu gerast upp, og dátur klárar til ICES fundir v.m. Síðani koma stovnsmetingarfundir, sum kunnu taka minst eina viku. Tað ger tað sera trupult at liggja innan fyri reglurnar í rundskrivinum um tímasaldu. Havstovan leggur alsamt áherðslu á tað, men við avmarkaðu starvsfólkaorkuni og nógvu siglingini er helst meira realistiskt at fáa tímasaldurnar niður um ársskifti, tá ið eingin sigling er.

Landsstýrismaðurin vísir á, at tað serliga eru deildarleiðararnir, sum hava nógvar tímar skrásettar. Teir leiða og býta út arbeiðið á deildunum, og hava fingið boð um at ansa eftir, at tímasaldur hjá starvsfólkum ikki eru ov høgar. Havstovan hevur verið í sambandi við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um at fáa betri møguleika til at gjalda út yvirtíð.

*Keyp*
Havstovan hevði ikki brúkt Keypsportalin, men hevði biðið um tilboð frá fleiri, tá ið stovnurin keypti vøru ella tænastu, ið kostaði ímillum 50 og 500 t.kr. Í einstøkum førum hevði Havstovan vent sær beinleiðis til kendan veitara, t.d. í sambandi við serútgerð til kanningarstovu.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Havstovan – og serliga Jákup Sverri – hevur keyp, sum ikki fleiri útbjóðarar eru til. Tá ið talan er um størri keyp, verða fleiri veitarar spurdir. Í 2022 hevur Havstovan bjóðað út umvegis Keypsportalin.

*Úr fíggjarstøðuni:*

*t.kr.*

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Bygningar, løgur o.t., netto | 15.911 | 15.112 | 14.313 |
| Onnur áogn | 2.866 | 262 | 20 |
| Banka- og girokontur | 42 | 40 | 0 |
| Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t. | -6.131 | -3.158 | -6.876 |

"Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t." er stuðul til ymiskar verkætlanir, sum ikki eru endaliga gjørdar upp.

***Havstovan hevur ruddað upp í kontunum.***

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Havstovan hevur ruddað upp í verkætlanarkontum, sum eru lidnar, og hevur nú í stóran mun bert verkætlanir, sum framvegis eru aktuellar, á fíggjarstøðuni.

Havstovan hevði tvær peningastovnskontur, harav onnur var skrásett á høvuðskontuni "Havstovan", og bleiv sambært stovninum brúkt til verkætlan, nevnd Nordic WOCE.

Hin peningastovnskontan var á høvuðskontu 5.34.3.04 "Havrannsóknarskip". Loyvda hámarkið á kontuni var 50 t.kr., tó stóðu 2,1 mió.kr. á kontuni 31. desember 2021.

Landsstýrismaðurin hevur í august 2023 greitt frá, at Havstovan/Jákup Sverri nú bert hevur eina peningastovnskontu. WOCE er gjørd upp.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at einki 'loyvt hámark' er á kontuni, men bert ein avtala um, at kassatøming skal verða, tá ið saldan er størri, og tá kunnu 50 t.kr. standa eftir. Sambært landsstýrismanninum helt fíggjarleiðarin á Gjaldstovuni tað ikki gera nakran mun í sambandi við likviditetsuppgerðina, at saldan á kontu hjá Havstovuni var hægri enn 50 t.kr. Annars verða javnan gjørdar kassatømingar, soleiðis at saldan á kontuni er á leið 50 t.kr.

*KT-viðurskifti*

Havstovan hevur nógvar upplýsingar og dátur, sum hava stóran týdning fyri stovnin og fyri samfelagið sum heild. Havstovan er ikki við í Landsneti m.a. av tí, at tey hildu kostnaðin vera ov høgan.

Í KT-handbók hevði Havstovan mannagongdir viðvíkjandi nýtslu av kunningartøkni. Sambært stovninum var KT-grannskoðari í holt við at skoða KT-skipanina, herundir eisini mannagongdirnar.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Havstovan í 2023 hevur sett upp skipan, sum skal stuðla undir arbeiðið at fylgja GDPR-lóggávuni, og at gera váða-metingar av skipanum annars. Havstovan er í holt við at uppstiga kjarnuskipanir á stovninum, og væntandi verður arbeiðið liðugt í heyst. Tá alt er liðugt, er ætlanin at gera endaliga KT-skoðan av skipanunum hjá Havstovuni.

# 5. Umhvørvis- og vinnumál

## 5.1 Jarðfeingi (LG 2017/206-321)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Jarðfeingi. Roknskaparreglugerðin hjá stovninum var ikki góðkend. Fyri tænastur, ið Jarðfeingi gjørdi fyri feløg og stovnar í Føroyum, tók stovnurin samsýning, ið svaraði til tímaløn hjá starvsfólki +110%. Stovnurin tók 890 kr. um tíman fyri granskingararbeiði. Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta prísásetingarmannagongdir í roknskaparreglugerðina.

Í 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at ráðið hevði umrøtt málið við Jarðfeingi, og Jarðfeingi tók undir við at seta takstirnar í roknskaparreglugerðina.

Í uppskotinum um roknskaparreglugerð, sum ráðið fekk, stóð: *"Samsýningar fyri veittar tænastur verða í høvuðsheitum ásettar við støði í tímalønum hjá starvsfólkum, ið veita tænasturnar, og einum gjaldi til felags útreiðslur hjá stovninum. Samsýningarnar kunnu tó vera hægri, t.d. í summum granskingarverkætlanum, har ein felags tímasatsur verður avtalaður fyri allar partarnar í verkætlanini"*.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var framvegis, at prísásetingin fyri tænastur hjá Jarðfeingi í sambandi við granskingarverkætlanir skuldi standa í roknskaparreglugerðini, tá ið farið varð undir at endurskoða reglugerðina.

Í 2022 segði Umhvørvis- og vinnumálaráðið, at ráðið var samt við Landsgrannskoðanina, at prísásetingin átti at standa í roknskaparreglugerðini. Reglugerðin er ikki dagførd, men vónandi verður komið á mál við tí í 2022.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum greitt frá, at roknskaparreglugerðin er ikki dagførd enn. Væntandi verður hon dagførd seinni í ár.

***Jarðfeingi hevur framvegis ikki dagførda roknskaparreglugerð.***

## 5.2 Búnaðarstovan (LG 2021/206-332)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av høvuðskontu 6.33.2.01 Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving og høvuðskontu 6.33.2.03 Búnaðarstovan.

*Útleigan av landsjørð*

Leigugjøldini eru ásett í K. nr. 95/2007 "um umsiting av landsjørð". Í 2021 vóru inntøkurnar 921 t.kr. Sambært kunngerðini skulu prísirnir á landsjørð endurskoðast í minsta lagi triðja hvørt ár. Kunngerðin hevur verið óbroytt síðani 2013, og sambært Búnaðarstovuni vóru tey í samskifti við aðalráðið um dagføring av kunngerðini.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at farið er undir at endurskoða kunngerðina í 2022, men arbeiðið steðgaði, tá val var útskrivað. Arbeitt verður í løtuni við at broyta løgtingslóg um landsjørð, og tá ið tær broytingarnar eru samtyktar, verður

kunngerðin endurskoðað. Landsstýrismaðurin væntar, at lógaruppskotið verður lagt fyri Tingið í vetur.

*Lønir*

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur lønarmál. Einki var at finnast at; tó hevði eitt starvsfólk, sum hevði verið í starvi í eitt ár, ikki skrivað undir setanarbræv. Landsgrannskoðanin mælti til at fáa viðurskiftini í rættlag. Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at setanarbrævið var avgreitt í januar 2023.

Búnaðarstovan hevði ikki skrivligar reglur um, at starvsfólk kunnu skylda tímar ella eiga tímar á. Nøkur starvsfólk skyldaðu ímillum 60 og 118 tímar. Í mai 2022 vóru skyldugu tímarnir hjá teimum flestu lækkaðir munandi.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum greitt frá, at Búnaðarstovan miðar eftir at fylgja ásetingunum um tímasaldur, t.v.s. saldur á +/- 40 t. Nøkur av starvsfólkunum hava árstíðarbundnar arbeiðsuppgávur, ið viðføra at plusssaldan til tíðir gerst væl hægri. Tað skyldast landbúnaðarfakligu arbeiðsuppgávurnar á stovninum (m.a. fjallgonga og slakt). Miðað verður tó eftir at halda árstíðarmiðalið í lagi. Skylda starvsfólk ov nógvar tímar, verður tað avroknað í lønini.

Búnaðarstovan hevði ikki tíðaravmarkað lønir í landsroknskapinum, sum ásett er í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum. Landsgrannskoðanin mælti til at halda ásetingarnar um tíðarskrásetingar og -avmarkingar.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at støðlingar fyri væntaðar lønarhækkingar eru gjørdar fyri 2022.

*Varðveitingar og trygdir*

31. desember 2021 stóðu slakar 4,8 mió.kr. á peningastovnskontuni. Peningurin var gjald frá Tórshavnar kommunu fyri mist bit, skerda fóðurframleiðslu v.m., fyri eitt øki á Glyvursnesi, sum Tórshavnar kommuna hevur langtíðarleigað til golfvøll sambært § 7a, stk. 1, í Ll. nr. 45/2007 “um landsjørð”.

Sambært sáttmála frá juni 2019 var endurgjaldið fyri nýggjan virkisbygning, nýggjan bø, úthegn v.m. aðrastaðni á festinum. Festarin stóð fyri arbeiðinum vegna festið, men hevði ikki kunnað farið undir nýgerðina, orsakað av at gróttøkan til havnarútbyggingina hevði drigið út.

Sambært Búnaðarstovuni vóru festarin, Tórshavnar kommuna og Búnaðarstovan samd um at støðla endurgjaldið í Búskaparskipan landsins, og um at Búnaðarstovan kundi leysgeva rokningar til festaran, so hvørt arbeiði vóru framd. Sambært Búnaðarstovuni hevði TAKS skrivliga góðkent, at stovnurin bókaði MVG-upphæddirnar í sín MVG-roknskap.

***Óvanligar MVG-reglur.***

Búnaðarstovan kunnaði um, at Gjaldstovan hevði eisini góðtikið, at stovnurin bókaði MVG'ið sum keyps-MVG hjá landinum. Landsgrannskoðanin undraðist á, at MVG av tænastum, sum festibóndin keypir frá arbeiðstakarum, skuldi bókast sum útreiðsla hjá landskassanum.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið eisini undrast á, at ein almennur stovnur kann útreiðsluføra keyps-MVG hjá privatum persóni, men sambært Búnaðarstovuni hava TAKS, Fíggjarmálaráðið, Fiskimálaráðið og Gjaldstovan tikið undir við leistinum. Umhvørvis- og vinnumálaráðið ger tí ikki meira við málið.

## 5.3 Búnaðarstovan, løgujáttan (LG 2021/206-332)

Sambært § 6b í Ll. nr. 34/2013 “um Búnaðargrunn” eru 5.148 t.kr. markaðar til ábøtur á bygningar hjá Búnaðarstovuni í Kollafirði. Við eykajáttanarlóg í 2020 vóru 5.148 t.kr. játtaðar til endamálið. Við flyting av óbrúktari játtan, var tøka játtanin áleið 5 mió.kr. í 2021.

Í eykajáttanarlóg mars 2021-3 vóru 2,5 mió.kr. játtaðar til at umvæla fjós og løðu hjá Búnaðarstovuni. Umvælingin varð fíggjað við, at Búnaðargrunnurin flytur landskassanum 2,5 mió.kr. á høvuðskontu 56.33.2.12 “Niðurlaðing av Búnaðargrunninum”.

Í Ll. nr. 84/2022 “um at taka festið Heygsgarð úr festiskipanini” er m.a. ásett, at festið, Heygsgarður í Kollafirði, verður tikið úr festiskipanini, og innistandandi upphædd á festikontuni hjá garðinum í Búnaðargrunninum skal markast til ábøtur og nýgerð á Heygsgarði.

Landsverk hevur í samstarvi við Búnaðarstovuna gjørt eina raðfesta verkætlan fyri umvæling, viðlíkahald og umbygging av bygningunum hjá stovninum. Kostnaðarmetingin at skifta tak á fjósbygningunum var 4 til 5 mió.kr.

Búnaðarstovan vísti á, at eftir at BK 17-reglugerðin var komin í gildi, vóru krøvini økt, so kostnaðurin av at skifta tak á løðuni og fjósinum fór helst at verða 10 mió.kr. Ætlanin var í fyrstu syftu at skifta takið á løðuni og síðani at skifta vindeygu. Búnaðarstovan vónaði at finna bíligari loysn. Í 2020 og 2021 vóru um 340 t.kr. brúktar til projektering.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum víst til svarið til frávik 2023, sum var sent Landsgrannskoðanini 14. juli 2023:

*“Bygningarnir hjá Búnaðarstovuni eru frá 80-unum og eru nógv merktir av elli og sliti. Við eykajáttan í 2020 vóru 5.148 t.kr. játtaðar til umvæling av fjósinum og løðuni. Búnaðargrunnurin rindaði landskassanum tær 5.148 t.kr. við heimild í § 6b í løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn.*

*Fyrireikingarnar og projekteringin tók nakað av tíð. Tørvur var á at gera nógvar kanningar av takplátum og sperrum, fyri at fáa staðfest standin áðrenn farið varð undir umvælingararbeiðið.*

*Í 2022 var, eftir at arbeiðið varð boðið út, farið undir arbeiðið. Bæði fjósið og løðan høvdu átrokandi tørv á viðlíkahaldi, tó hevði fjósið hægru raðfestingina.*

*Arbeiðið varð boðið út við valmøguleikanum at eisini umvæla tekjuna á løðuni. Játtanin á 5.148 t.kr. rakk ikki til at fáa umvælt alt liðugt og tí blivu 2.500 t.kr. játtaðar afturat til endamálið við eykajáttan í mai 2022 og aftur 200 t.kr. við eykajáttan í oktober 2022 fyri at røkka á mál við báðum tekjunum. Báðar eykajáttanirnar vóru útreiðsluneutralar fyri landskassan, tí at Búnaðargrunnurin endurrindaði landinum peningin.*

*Landsstýrismaðurin fekk heimild at flyta peningin til seinni fíggjarár. Umvælingararbeiðið verður eftir ætlan liðugt í 2023*”.

## 5.4 Almenn jørð, søla (LG 2021/206-332)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðanina av sølu av almennari jørð.

*Prísáseting*
Búnaðarstovan helt, at broytta mynstrið í undirstøðukervinum, og tann ávirkan tað hevði á áhugan fyri útbyggingum og jarðarkeypi, hevði við sær, at flokkingin av ávísum bygdum í ávikavist Øki 1 til Øki 5 sambært fylgiskjali A í kunngerðini um umsiting av landsjørð, átti at verða dagførd.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum víst á, at galdandi prísir eru ásettir í K. nr. 95/2007. Farið varð undir at endurskoða kunngerðina í 2022, men arbeiðið steðgaði, tá val var útskrivað. Arbeitt verður í løtuni við at broyta lógina um landsjørð, og tá tær broytingarnar eru samtyktar, verður kunngerðin endurskoðað.

*Mannagongd fyri sølu av jørð*
Búnaðarstovan vísti á, at jørð kundi í serligum førum seljast øðrum sambært § 9 í Ll. nr. 45/2007 “um landsjørð”. Heimildin er víð, og tí sóknaðist Búnaðarstovan eftir greiðari reglum at arbeiða eftir.

Í § 9 í K. nr. 83/2011 “um løgujáttan” er ásett, at allar løgur, sum skulu seljast, skulu lýsast alment til sølu. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur váttað fyri Búnaðarstovuni, at søla av landsjørð ikki er fevnd av ásetingini í § 9 í kunngerðini um løgujáttan, orsakað av materiellu heimildini givnari sambært Ll. nr. 45/2007 “um landsjørð”.

Hinvegin hevur Búnaðarstovan avvíst umsóknum frá privatum persónum, sum hava søkt um at keypa eitt ítøkiligt grundstykki aðrastaðni, og víst til eitt notat frá 2006 frá Vinnumálaráðnum um, at jørð í slíkum førum bert skal seljast til kommunur.

Búnaðarstovan vísti á, at stovnurin var í einari tvístøðu ímillum politiska viljan og siðvenjuna um, at einans kommunur kundu keypa almenna jørð, tó at løgfrøðiliga var heimild til at selja til ein og hvønn.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at eitt av endamálunum við oman fyri nevndu lógarbroytingum er at fáa til vegar greiðar reglur um sølu av almennari jørð. Lógaruppskotið verður væntandi lagt fyri Tingið í vetur.

## 5.5 Føroya Altjóða Skipaskrá, FAS (LG 2021/220-521)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Føroya Altjóða Skipaskráseting (FAS).

*Undantøk til 20 ára aldursmark*
Skip, sum eru 20 ár ella eldri, tá ið søkt verður, kunnu ikki skrásetast í FAS sambært § 4a í Ll. nr. 78/1992. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvussu § 4a, stk. 1-3, í lógini skal umsitast.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið fór saman við Sjóvinnustýrinum at áseta nærri reglur í kunngerð um, hvussu undantakið í § 4a, stk. 1-3, í lógini skal umsitast.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki nýtt er í málinum.

*Skattligur váði fyri landskassan*
Í 2022 vísti landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum á, at *"Skattalógin ásetur, hvat virksemi gevur rætt til skattaafturbering. Dupultskattaavtalur hava somuleiðis ávirkan á, hvar skattur skal gjaldast. Yvirskipað er at siga, at TAKS umsitur skattalóggávuna, og skal tryggja, at skattur ikki verður afturborin av órøttum. Tað hevur tó víst seg, at tað kann vera trupult hjá skattamyndugleikanum at hava eftirlit við, at virksemið hjá skipum í FAS veruliga hevur rætt til skattaafturbering sambært skattalógini og dupultskattaavtalum. Tað er umráðandi, at skattamyndugleikarnir í hvørjum einstøkum máli ítøkiliga meta um og taka støðu til, hvørt reiðaríið hevur rætt til afturbering av skatti."*

Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið høvdu saman við ávikavist Sjóvinnustýrinum og TAKS sett gongd á eitt greiningar- og samstarvsátak. Endamálið var at fáa í lag eitt betri samstarv ímillum Sjóvinnustýrið og TAKS, ið skuldi hjálpa skattamyndugleikanum at tryggja, at afturbering av skatti ikki fór fram av órøttum.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki nýtt er í málinum.

*Samanumtikið*
Í august 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Sjóvinnustýrið vóru í holt við at endurskoða ásetingar í FAS-lógini. Ætlanin var at áseta í FAS-lógini meira ítøkilig og herd krøv til umboðsfólk hjá eigarum, sum vóru búsitandi uttanlands, soleiðis at umboðsfólk í størri mun kundu ábyrgdast, um viðurskifti mótvegis myndugleikum ikki fóru rætt fram. Um størri ábyrgd fór at hvíla á umboðsfólkum kundi væntast, at tey í størri mun fóru at tryggja sær, at tey ikki umboðaðu feløg, har vandi var fyri sambandi við ivasamt virksemi.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum kunnað um, at einki nýtt er í málinum.

***Samanumtikið er einki nýtt í málinum.***

## 5.6 Sjóvinnustýrið, bygningur (LG 2015/206-351)

Í 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at ætlanin var at byggja Sjóvinnustýrinum nýggj skrivstovuhøli í Vágum. Verklagslóg var samtykt fyri tilsamans 9,9 mió.kr. Landsverk stóð fyri byggiverkætlanini, og eftir ætlan skuldi bygningurin verða klárur at flyta inn í á heysti 2019.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum kunnað um, at nýggi skrivstovubygningurin til Sjóvinnustýrið er komin væl áleiðis og verður eftir ætlan liðugur og latin Sjóvinnustýrinum mánaðarskifti september/oktober 2023.

## 5.7 Vinnustovnurin (LG 2017/206-371)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin, at Vinnustovnurin hevði ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at nýta egna búskaparskipan, men hevði í februar 2018 søkt um loyvi.

Í 2022 greiddi Umhvørvis- og vinnumálaráðið frá, at frá tí at Fjarskiftiseftirlitið, sum var fyrsti stovnur í nú samanlagda Vinnustovninum, var sett á stovn, hevði stovnurin havt egna búskaparskipan. Tað var gjørt í samráði við Gjaldstovuna, av tí at skipanin hjá Gjaldstovuni ikki var hóskandi til so nógvar skuldarar, sum Vinnustovnurin hevði.

Hóast formligt loyvi ikki fyrilá, var sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum eingin ivi um, at loyvi til at hava egna búskaparskipan var avtalað. Fyri at fáa formligu viðurskiftini í rættlag, sendi ráðið fyri nøkrum árum síðani Fíggjarmálaráðnum umbøn um formliga

góðkenning. Enn var formliga loyvið ikki givið, og tað tyktist heldur ikki sum, at gongd var í málinum.

*Ikki formligt loyvi til egna búskaparskipan.*

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum kunnað um, at einki nýtt er í málinum um formligt loyvi at hava egna búskaparskipan.

## 5.8 Rúsdrekkasøla Landsins (LG 2022/206-373)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Rúsdrekkasøluni.

2. august 2023 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin í lógarmálum, hvat síðani er hent. Løgmálaráðið hevur víst á, at eftir løgtingsvalið í desember 2022 er málsøkið flutt frá táverandi Umhvørvis- og vinnumálaráði til Løgmálaráðið. Løgmálaráðið hevur verið í sambandi við Uttanríkis- og vinnumálaráðið um spurningarnar frá Landsgrannskoðanini, sum vísti til Rúsdrekkasølu landsins. Tá ið Løgmálaráðið spurdi hjá Rúsdrekkasøluni, var so mikið fráliðið, at vegna feriu var ikki møguligt at fáa svar við so stuttum skotbrái til hesa frágreiðingina.

Rúsdrekkasølan hevur einkarrætt til innkeyp og sølu av rúsdrekka, og virkar sambært Ll. nr. 20/1992 “um innflutning og sølu av rúsdrekka” og K. nr. 144/1992 “um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu landsins”. Rúsdrekkasølan hevur átta handlar kring landið, umframt eina høvuðsgoymslu og høvuðsskrivstovu.

Í § 18 í játtanarskipanini er ásett, at ber virksemi handilsligan dám, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva, at tað verður framt eftir ræðisreglunum, galdandi fyri landsfyritøkur. Sambært § 21 skal loyvi at reka landsfyritøku vera greitt í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið. Í kunngerðini um rakstrarjáttan er somuleiðis ásett í § 13, stk. 2, at í viðmerkingunum skal vera greitt frá landsfyritøkuni, herundir bygnaði, slag av virksemi, og hvussu stórt virksemið ætlandi verður.

*Landsgrannskoðanin ivast í, um viðmerkingarnar í fíggjarlógini eru í samsvari við játtanarreglurnar.*

Í fíggjarlógini vísa viðmerkingarnar til lógina og kunngerðina, sum Rúsdrekkasølan arbeiðir eftir, og at 8 sølubúðir eru. Landsgrannskoðanin ivast í, um hesar viðmerkingarnar eru í samsvari við ásetingarnar í játtanarreglunum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið helt, at teksturin í játtanarskipanini sipar til stovnar, sum hava borgaravendar tænastur og sum fáa eina árliga játtan í fíggjarlógini. Rúsdrekkasøla landsins er ein handil og sostatt ikki ein “vanligur” stovnur við borgaravendum tænastum, umframt at játtanin hevur eitt avlopskrav.

Í játtanarskipanini § 11 stendur soleiðis: “*Viðmerkingarnar til fíggjarlógaruppskotið skulu hava tilvísingar til lógarásetingar, sum gera av, hvussu játtanin verður nýtt, lýsing av teimum úrslitum, miðað verður eftir við játtanini, og upplýsingar um nádd úrslit o.t. Stk. 2. Inntøkur og útreiðslur verða vístar í fleirárs yvirlitum, sum fevna um síðstu roknskapirnar, fíggjarlógina, fíggjarlógaruppskotið og veruligar fíggjarætlanir fyri fylgjandi fíggjarár.*”

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum vísti á, *at “sambært omanfyristandandi skal stovnurin lýsa hvussu játtanin skal nýtast, lýsa tey úrslit miðað verður eftir og upplýsa um nádd úrslit. Játtanin hjá Rúsdrekkasøluni er negativ og hóskar á tann hátt ikki beinleiðis inn í henda karm. Í viðmerkingunum til játtanina er víst til lógarásetingar sum lýsa uppgávurnar hjá einkarsøluni sum m.a. er at hava fjølbroytt úrval av rúsdrekka á goymslu, hava sølustøð kring landið. Út frá hesum hava vit mett, at viðmerkingarnar í fíggjarlógini hava verið fullgóðar. Tað hevur Fíggjarmálaráðið eisini mett og hevur góðtikið okkara viðmerkingar til játtanina.*

*Vit fara tó at umhugsa um teksturin eigur at verða broyttur til fíggjarlógina fyri 2023."*

Í fíggjarlógini 2023 er teksturin ikki broyttur.

*Lønir*
Landsgrannskoðanin kannaði nøkur starvsfólkamál, um lýsingar, umsóknir við prógvum, tilboð um setan, setanarskriv o.a. vóru í málunum. Eisini kannaðu vit, um lønirnar eru sambært galdandi sáttmála og lønarflokk. Í einum máli vísti Landsgrannskoðanin á, at tað er ikki nøktandi, at størv ikki eru lýst leys, og mælti til, at setanarpolitikkur landsins verður fylgdur.

*Keyp av vørum og tænastum*
Rúsdrekkasølan brúkar ikki ferðaavrokningarskipanina hjá Gjaldstovuni, men hevur egin ferðauppgerðarskjøl.

***Ferðauppgerðir vóru ikki altíð fullfíggjaðar.***

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar uppgerðir, og samanumtikið vóru fleiri ferðauppgerðir ikki skjalfestar, onkrar vóru ikki váttaðar av leiðara ella stjóra, og í tveimum førum vóru dagpengar ikki goldnir fyri allar dagarnar. Stovnurin ætlaði at bøta um eftirlitið við ferðauppgerðum, soleiðis at einki bleiv avgreitt, uttan at tey høvdu kannað uppgerðina og váttað, at hon var røtt.

***Rúsdrekkasølan bað ikki altíð um tilboð upp á keyp.***

Landsgrannskoðanin tók nakrar stakroyndir av rokningum, størri enn 50 t.kr., fyri at kanna um Rúsdrekkasølan hevði biðið um tilboð. Bert í einum føri hevði stovnurin biðið um tilboð frá fleiri veitarum. Landsgrannskoðanin mælti til, at Rúsdrekkasølan helt seg til rundskrivið um keyp av vørum og tænastum.

Onkrar rokningar vóru goldnar í einum fíggjarári, har vøran ella tænastan var latin í seinni fíggjarári. Stjórin vísti á, at tey fylgdu ásetingunum í roknskaparkunngerðini, men tað var ikki altíð lætt.

*Vøru- og tænastuáogn*
Í K. nr. 144/1992 er ásett, at loyvt er at selja upp á borg til skeinkiloyvishavarar. Sambært Rúsdrekkasøluni skuldu kundar veita trygd, tá ið keypt varð upp á borg.

***Vit mæltu til at halda kunngerðina um sølu upp á borg.***

Á skuldaralistanum vóru fleiri skuldarar, sum ikki høvdu skeinkiloyvi, m.a. kommunur og almennir stovnar. Landsgrannskoðanin mælti til, at Rúsdrekkasølan helt ásetingina í kunngerðini, ella at stig vórðu tikin til at broyta kunngerðina.

*Tíðaravmarkingar av egnum panti*
Egiðpant er pant, sum Rúsdrekkasølan sjálv leggur á vørur. Rúsdrekkasølan tíðaravmarkar munin ímillum egiðpant-sølu og egiðpant-keyp. Í 2021 var munurin 798 t.kr., og við árslok 2021 var saldan í fíggjarstøðuni 4.174 t.kr.

Upphæddirnar hava verið støðugt hækkandi síðani 2018, og sambært stjóranum kundi ein orsøk vera, at fleiri einnýtisíløt vóru seld, og at fólk ikki bóru tey aftur.

Landsgrannskoðanin hevur spurt landsstýrismannin í lógarmálum, hvussu støðan er í dag, men hevur ikki fingið svar enn.

### Egin búskaparskipan
Rúsdrekkasølan brúkar egna búskaparskipan til skrásetingar av keypi og sølu, herundir eisini MVG og umsitingarkostnað av stovnsrakstrinum.

Roknskapartíðarskeiðini í egnu búskaparskipanini blivu ikki stongd, og tí bar til at bóka í farnum tíðarskeiði, eftir at stovnurin hevði sent roknskapartølini til Gjaldstovuna. Sambært stjóranum var neyðugt at bóka í farnum tíðarskeiði, um tey skuldu hava ein rættvísandi roknskap.

*Mælt var til at steingja roknskapartíðarskeiðini.*

Tá ið Rúsdrekkasølan bókar í farnum mánaðarroknskapum, eru mánaðarroknskapirnir í Búskaparskipan landsins ikki rættir. Landsgrannskoðanin mælti til at steingja roknskapartíðarskeiðini, tá ið roknskapartølini vóru send Gjaldstovuni at bóka í Búskaparskipan landsins.

Rúsdrekkasølan hevði ikki formligt loyvi til egna fíggjarskipan. Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan vóru tó kunnað. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevði fyri árum síðani, vegna Rúsdrekkasøluna, biðið Fíggjarmálaráðið um formligt loyvi til skipanina, uttan at tað var komið. Landsgrannskoðanin mælti til, at fáa formligu viðurskiftini í rættlag.

### Kassa- og goymslueftirlit

Landsgrannskoðanin hevur verið á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirlitum á nøkrum deildum hjá Rúsdrekkasølu landsins. Vit stemmaðu dagligu søluna av við bókhaldið og peningastovnskonturnar, og vit stemmaðu goymslurnar á sølustaðnum við goymsluyvirlitið í høvuðsbókhaldinum. Um ársskiftið gjørdu vit eftirlitsuppteljingar av høvuðsgoymsluni á Hjalla.

Samanumtikið stemmaðu kassarnir stórt sæð eftirlitsdagin, men nakrir munir vóru á goymslunum úti á deildunum.

## 5.9 Umhvørvisstovan (LG 2021/206-374)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Umhvørvisstovuni.

Sambært innanhýsis reglum kunnu starvsfólk eiga upp til 50 tímar á, ella skylda í mesta lagi 20 tímar. Í oktober 2021 áttu nøkur starvsfólk meira enn hægst loyvda tímatalið, og fleiri skyldaðu meira enn 20 tímar. Sambært Umhvørvisstovuni høvdu tey tikið stig til at fáa viðurskiftini upp á pláss.

Stovnurin hevði ikki tíðaravmarkað lønir við árslok 2020. Tíðaravmarkingin við árslok 2020 var uppgjørd til 142 t.kr.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í umhvørvismálum greitt frá, at rundskrivið hjá Fíggjarmálaráðnum um skráseting av arbeiðstíð o.a. verður í løtuni sett í verk, soleiðis at innanhýsis reglugerð og umsiting av tíðarskráseting verður dagførd í samsvari við ásetingarnar í rundskrivinum.

### KT-viðurskifti

Teldurnar hjá Umhvørvisstovuni eru knýttar í Landsnet. Stovnurin hevur dátur, sum hava týdning fyri stovnin sjálvan og fyri samfelagið sum heild.

KT-grannskoðari skoðaði skipanirnar hjá Umhvørvisstovuni í 2021. Hann vísti á fleiri veikleikar og gav tilmælir, harav nøkur við høgari raðfesting. Grannskoðarin helt, at høgt raðfestu tilmælini áttu at verða bøtt, til tess at stovnurin kundi sigast at liva upp til ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd. Sambært Umhvørvisstovuni høvdu tey avgreitt fimm av høgt raðfestu tilmælunum, og vóru í holt við restina.

### Inntøkufíggjað virksemi

Í inntøkufíggjaða virkseminum eru virksemi hjá Skógrøktini í Hoydølum, røkt av viðarlundum og útskiftingararbeiði. Í 2021 var nettojáttanin 0 kr., t.e. 2,2 mió.kr. í inntøkum og 2,2 mió.kr. í útreiðslum.

*1,8 mió.kr. í áogn.*

Tær 1,8 mió.kr. á kontuni "Tíðaravmarkan" í fíggjarstøðuni vóru áognir hjá 32 jarðareigarum, sum Umhvørvisstovan ikki hevði fingið fatur á í sambandi við útskifting, tó at tey fleiri ferðir høvdu roynt.

Røktarleiðararnir hava heimild at avtala prísir á vørum og tænastum innan ávísar karmar. Prísásetingin var lagað til marknaðarprísir, og Skógrøktin hevði dagførdar príslistar. Flestu planturnar vóru eginframleiðsla, har útsøluprísurin svaraði til kostnaðin at ala tær. Í øðrum førum samanbar Skógrøktin við prísir hjá øðrum veitarum. Skógrøktin lat avsláttur til tey, ið keyptu nógv.

Prísirnir fyri røkt av skógarfriðaðum lendi vóru, sambært Umhvørvisstovuni, eftir avtalu við Tórshavnar Kommunu. Spurd um avtaluna, svaraði stovnurin, at tey funnu ikki avtaluna, men tey vóru í holt við at gera eina nýggja avtalu.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í umhvørvismálum greitt frá, at avtalað er við Tórshavnar kommunu, at nýggjar avtalur skulu gerast um røkt av skógfriðaðu økjunum í Tórshavnar kommunu.

### Stuðulsfíggjað virksemi

Umhvørvisstovan luttekur í fleiri granskingarverkætlanum, sum heilt ella lutvíst eru fíggjaðar uttanífrá.

Roknskapartøl 2017 til 2021 fyri samlaða stuðulsfíggjaða virksemið:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 972 | 952 | 1.145 | 1.230 | 2.002 |
| Keyp av vørum og tænastum | 542 | 1.086 | 988 | 1.013 | 1.462 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 75 | 122 | 1 | 0 | 6 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 122 | 192 | 194 | 27 | 14 |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | -13 | -1 | 0 | 0 |
| Tilskot til útlandið | 0 | 0 | 2.131 | 2.105 | 5.111 |
| Íløgustuðul | 0 | 0 | 56 | 0 | 0 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -133 | 506 | 1.096 | -499 | 343 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | -1.005 | -2.940 | -5.483 | -3.682 | -8.967 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovnar (útr.) | 0 | 334 | 56 | -190 | 0 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovnar (innt.) | -573 | -229 | -183 | -121 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **11** | **0** | **-117** | **-29** |

Í 2021 var nettojáttanin 0 kr., t.e. 1,8 mió.kr. í inntøkum og 1,8 mió.kr. í útreiðslum. Sambært roknskapinum vóru inntøkurnar og útreiðslurnar væl hægri.

Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Onnur áogn | 0 | 0 | 565 | 236 | 1.726 |
| Skuld, sum er greidd til útgjaldingar | 24 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ikki innt.ført – granskingarstyrkir o.a. | -1.095 | -457 | -1.374 | -4.414 | -5.147 |
| Skuld, annað | -5 | 0 | -7 | -19 | 0 |

Í Búskaparskipan landsins vóru 37 verkætlanir í 2021; í fleiri av teimum vóru fáar ella ongar rørslur í árinum.

#### *Emergreen (Emerging Technologies for Greener Communities)*

Emergreen er ein NPA[14] verkætlan, sum hevur til endamáls at menna nýskapandi modell, sum eru luttakandi, miðsavna seg um brúkarar, eru góðsku- og burðardygg, og sum miðja ímóti grønari samfeløgum í fjarøkjum.

Umhvørvisstovan luttók fyri Føroyar, og fýra onnur lond vóru við, t.e. Írland, Svøríki, Finnland og Stórabretland. Samlaða fíggjarætlanin var 1,6 mió.evrur, harav parturin hjá Føroyum var 246 t.evrur. Emergreen fíggjaði 65%, ella 160 t.evrur. Verkætlanin

[14] Northern Periphery and Arctic Programme.

byrjaði í oktober 2018, og skuldi enda í 2021, men orsakað av COVID-19 skuldi hon enda 31. mars 2022.

Parturin hjá Umhvørvisstovuni var at menna heimasíðuna, orka.fo, sum kunnar um hitapumpur og sólorku. Nakað var eftir at gera við heimasíðuna, men sambært Umhvørvisstovuni hildu tíðar- og fíggjarætlanir.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at verkætlanin Emergreen endaði, sum ætlað á vári 2022. Føroyski heimasíðuparturin er eisini liðugt mentur.

*Formansskapsverkætlanir hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum*
Í 2020 hevði Danmark formansskapin í Norðurlendska Ráðharraráðnum. Í tí sambandi fekk Danmark játtaðar 45 mió.kr. til at stuðla verkætlanum í Danmark, Føroyum og Grønlandi; 15 mió.kr. til hvønn, býttar yvir 3 ár.

Landsstýrismaðurin, sum var norðurlendskur samstarvsráðharri fyri Føroyar, útveitti uppgávuna at finna, leiða og stuðla verkætlanir til Umhvørvisstovuna.

NORA umsat fíggjarliga partin av verkætlanunum. Leikluturin hjá Umhvørvisstovuni var at leiða verkætlanir, og stovnurin fekk samsýning fyri tað. Í 2020 var samsýningin 200 t.kr.

Umhvørvisstovan valdi tvær verkætlanir út, sum Norðurlendska Ráðharraráðið góðkendi. Onnur var at stuðla Bakkafrost at byggja ein 100% el-riknan alibát, og hin var at stuðla sjógvhitaskipan í Leirvík.

Alibáturin kostaði um 16 mió.kr., harav stuðulin frá Norðurlendska Ráðharraráðnum var um 5,1 mió.kr.

Upprunaliga var ætlanin at gera eina sjógvhitaskipan í Leirvík at hita hús og aðrar bygningar. Eftir kommunuvalið í november 2020 broytti nýggja kommunustýrið verkætlanina. Verkætlanin var nú minni í vavi, og avgjørt var at brúka jarðhita í staðin fyri sjógvhita. Skúlin og eitt ellisheim vóru partar av verkætlanini. Upprunaliga skuldu tríggir aðrir bygningar knýtast í skipanina, og møguliga eisini ein stórur partur av bygdini.

Sambært Umhvørvisstovuni var broytingin av verkætlanini í Leirvík góðkend av Norðurlendska Ráðharraráðnum. Verkætlanin var seinkað umleið eitt hálvt ár, og skuldi ætlandi verða liðug á sumri 2022. Samlaða verkætlanin kostaði um 9 mió.kr., harav stuðulin frá Norðurlendska Ráðharraráðnum var 4,1 mió.kr.

Tær sløku 6 mió.kr., sum ikki vóru brúktar, skuldu sambært Umhvørvisstovuni verða nýttar til at netverka og kunna um úrslitini av verkætlanunum.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at hitaskipanin var handað Eysturkommunu endaligt í 2023. Av samlaðu fíggingini, sum var 15 mió.kr., blivu áleið 11 mió.kr. brúktar til grønu tvíkiljuna og hitaskipanina í Leirvík. Sostatt hava 4 mió.kr. verið tøkar til netverksvirksemi, sum Nordisk Energiforsking í Oslo hevur umsitið. Tríggjar ráðstevnur hava verið í Føroyum, Grønlandi og Hetlandi.

Verkætlanin endaði 1. juli 2023 og endalig uppgerð verður send sekreteriatinum hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum. Ikki nýttur partur, um 500 t.kr., verður afturførdur til Norðurlendska Ráðharraráðið.

## 5.10 Heilsufrøðiliga starvsstovan (LG 2017/206-375)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Heilsufrøðiliga starvsstovan nevnir í roknskaparreglugerðini, hvørji inntøkusløg stovnurin hevur, men ikki nærri reglur um prísáseting v.m.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið var samt við Landsgrannskoðanini, at tað var ikki samsvar ímillum ásetingina í rundskrivinum og uppskotið til roknskaparreglugerð. Ráðið skuldi saman við Heilsufrøðiligu starvsstovuni broyta ásetingina um inntøkur í samsvari við rundskrivið.

Í 2020 kunnaði Umhvørvis- og vinnumálaráðið um, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tekur gjøld fyri ymiskar tænastur og veitingar. Prísir eru ásettir í kunngerð. Tó áttu prísir fyri ymisku inntøkusløgini at framgingið av roknskaparreglugerðini. Tað eigur at verða tikið við, tá ið roknskaparreglugerðin verður endurskoðað.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum kunnað um, at roknskaparreglugerðin er ikki dagførd enn.

***Roknskaparreglu-gerðin er ikki dagførd.***

## 5.11 Barsilsskipanin (LG 2020/206-394)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Barsilsskipanini. Í Ll. nr. 48/2001 “um barsilsskipan” eru reglur um m.a. rætt til barsilsfarloyvi, útgjald av barsilspeningi og inngjald til skipanina. Fleiri kunngerðir eru gjørdar við heimild í Barsilslógini.

Løntakarar og arbeiðsgevarar hava skyldu at gjalda barsilsgjald, tá ið A-inntøka verður móttikin ella rindað. Í § 19, stk. 2, í barsilslógini er ásett, at barsilsgjaldið fellur til gjaldingar samstundis, sum teir gjaldsskyldugu rinda ella fáa A-inntøku. Áðrenn A-inntøkan verður útgoldin, skal inngjaldið avroknast.

Sambært K. nr. 123/2001 “um barsilsgjald” kunnu arbeiðsgevarar rinda við at geva TAKS fulltrú til at taka barsilsgjaldið av peningastovnskontu hjá viðkomandi, ella við at rinda barsilsgjaldið eftir rokning frá TAKS. Barsilsgjaldið skal rindast innan 20 dagar eftir, at TAKS hevur sent rokningina.

Í kunngerðini er ásett, at tá ið arbeiðsgevarar rinda A-inntøku, skulu teir avrokna sín part av barsilsgjaldinum til TAKS.

Áðrenn føroysku peningastovnarnir fluttu sítt KT-virksemi av landinum, bleiv gjaldið frá arbeiðsgevarum trekt sjálvvirkandi, tá ið lønir vórðu avgreiddar. TAKS hevði kannað, um tað aftur bar til at trekkja gjaldið sjálvvirkandi, men tað lat seg ikki gera.

***Tað ber ikki til longur at trekkja gjaldið av sjálvvirkandi.***

Í kunngerðini um barsilsgjald er ásett, at bæði løntakarar og arbeiðsgevarar skulu avrokna barsilsgjaldið, samstundis sum lønin verður móttikin ella rindað. Við verandi innheintingarmannagongd verður gjaldið frá arbeiðsgevarum ikki rindað samstundis sum A-inntøka verður goldin.

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum helt TAKS, at verandi mannagongd riggaði væl. Ráðið ásannaði, at tørvur var á at endurskoða lógina og tilhoyrandi kunngerð. Ætlanin var, at gjaldshátturin skuldi vera smidligur fyri arbeiðsgevarar, men samstundis tryggja inntøkurnar hjá Barsilsskipanini.

Í 2022 greiddi Umhvørvis- og vinnumálaráðið frá, at ráðið ætlaði framvegis at broyta ásetingarnar um, hvussu gjaldingin hjá arbeiðsgevarum skuldi fara fram. Ætlanin var

at hava eina smidliga gjaldsloysn, sum tryggjar inntøkurnar til Barsilsskipanina, og sum er smidlig fyri arbeiðsgevararnar.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í umhvørvismálum kunnað um, at einki nýtt er í málinum.

TAKS hevði skrivliga vegleiðing við mannagongdum fyri málsviðgerð og innaneftirlit. Innaneftirlitið var skipað m.a. við at avstemma og kanna listar, og eisini kannaðu málsviðgerarnir málini hjá hvørjum øðrum. Málsviðgerðin, innaneftirlitið og avstemmingar annars vóru fyri tað mesta handlig; tað helt Landsgrannskoðanin vera ein veikleiki, sum kundi virka til at feilir komu í.

Í august 2023 hevur Umhvørvismálaráðið boðað frá, at ráðið er greitt yvir, at tað er ein veikleiki, at skipanin er soleiðis háttað, at neyðugt er at gera ein stóran part av arbeiðinum handligt. Í baksýni av hesum var í 2022 farið undir fyrireiking, saman við TAKS, at nýmenna nýggja KT-skipan til at umsita Barsilsskipanina. Ætlanin er at skipanin og avgreiðsla í mest møguligan mun skulu verða talgild, og at umsóknir skulu avgreiðast talgilt. Ætlanin er eisini, at tað skal gerast lættari at framleiða hagtøl v.m.

Í næstum verður metta talið av menningartímum sett í útboð.

# 6. Uttanríkis- og mentamál

## 6.1 Umsiting av stuðli undir § 7 (LG 2021/207-000)

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsgrannskoðanin frá um grannskoðanina av umsitingini av stuðulsjáttanum undir § 7 í fíggjarlógini.

Fyri at kunna rinda út stuðul er neyðugt at hava fíggjarliga og materiella heimild. Tá ið um stuðulsjáttanir ræður, finst materiella heimildin ofta í fíggjarlógini. Í lógini um landsins játtanarskipan er ásett, at viðmerkingarnar til stuðulsjáttanir skulu lýsa neyvt endamál, móttakaraskara, útrokningarhátt, samantalda studningsupphædd og útgjaldstíðarskeið.

Í játtanarskipanini er heimilað landsstýrismanninum í fíggjarmálum at áseta nærri reglur um m.a. endamálið við stuðli, móttakaraskara, eftirlit, fíggjarætlan, roknskap og grannskoðan. Endamálið við reglunum er at tryggja skynsama stuðulsfyrisiting. Um serligar reglur ikki eru ásettar um stuðulin, galda reglurnar í K. nr. 125/2011 “um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan”.

Í 2020 vóru útreiðslurnar til stuðulsjáttanir til “Útbúgving og gransking” og “Mentan” 125 mió.kr.

*Ymiskir studningar, tónleikur, sangur, Saltsilo og kappróðrarbátar*

Sambært K. nr. 90/2008 “um stuðul til mentan og list” skal stuðulsmóttakari lata inn roknskap, tá ið verkætlan er endað ella í seinasta lagi 1. mars árið eftir. Tað er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn um stuðul.

***Torført at fáa roknskapir inn til tíðina.***

Samanumtikið var torført hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum at fáa roknskapir v.m. inn til tíðina. Sambært ráðnum hendi tað seg meira enn so, at roknskapir komu ov seint, tó at ráðið minti á freistina. Uttanríkis- og mentamálaráðið ásannaði, at trupult var at fáa alt inn rættstundis, av tí at tað snýr seg um nógvar stuðulsmóttakarar, og arbeiðið var handligt. Ráðið samskifti við Fíggjarmálaráðið um at broyta K. nr. 90/2008 “um stuðul til mentan og list”, m.a. fyri at leingja freistina til 1. apríl, eins og ásett er í K. nr. 125/2011 “um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan”.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum kunnað um, at áðrenn mentamál vóru flutt til Almanna- og mentamálaráðið í desember 2022, hevði Uttanríkis- og mentamálaráðið umrøtt at gera broytingar í kunngerðina “um stuðul til mentan og list”, men komið var ikki á mál við arbeiðinum.

***Ikki nøktandi eftirlit við stuðli.***

Í 2022 hevði Uttanríkis- og mentamálaráðið ikki fingið roknskapir v.m. fyri 2020 fyri allan játtaðan stuðul; tað vóru fyri tað mesta smærri játtanir og stuðul, sum var veittur eftir umsókn. Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at eftirlitið við stuðlinum 2020 ikki var avgreitt.

Eitt listafelag hevði ikki latið ráðnum roknskap v.m. fyri 2020. Stuðulsveitingin var afturvendandi upphædd, og Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði latið felagnum stuðul

í 2021. Sambært ráðnum var talan um eitt mistak. Stuðulin fyri 2022 var ikki goldin, tí roknskapirnir fyri 2020 og 2021 vantaðu. Landsgrannskoðanin helt, at tað var ikki nøktandi, at stuðul varð goldin, hóast stuðulsmóttakari ikki hevði latið ráðnum roknskap fyri undanfarna ár.

Nakrir stuðulsmóttakarar høvdu yvirskot í rakstrinum sambært roknskapunum, t.v.s. tey høvdu ikki brúkt allan stuðulin. Landsgrannskoðanin spurdi Uttanríkis- og mentamálaráðið, hvørja støðu ráðið hevði til, at feløg ikki brúktu allan stuðulin, men lótu yvirskotið falla til eginognina.

Uttanríkis- og mentamálaráðið kann krevja stuðul aftur, og sambært ráðnum var endamálið við stuðli ikki, at feløg skuldu økja eginognina, men at stuðulin skuldi brúkast í árinum. Tó kundi tað vera skynsamt hjá felagi at hava eina lítla eginogn, t.d. um felagið skuldi hava eitt størri tiltak okkurt árið, ella at okkurt óvæntað barst á, sum kravdi eyka fígging. Yvirskipað helt Uttanríkis- og mentamálaráðið eyguni við eginognunum hjá teimum, sum fáa stuðul í fíggjarlógini. Vísti tað seg, at eitt felag fekk meira í stuðli, enn tað hevði brúk fyri, kundi talan blíva um at lækka stuðulin árið eftir.

### Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Landsstýrismaðurin tók í 2022 undir við, at nøkur viðurskifti í stuðulsumsitingini áttu at verða betrað. Uttanríkis- og mentamálaráðið fór tí at leggja seg eftir at styrkja umsitingina, við at fáa greiðari og betri mannagongdir.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum kunnað um, at ráðið hevði lagt seg eftir at styrkja umsitingina av stuðulsfyrisitingini við greiðari innanhýsis arbeiðsgongdum og arbeiðsbýti. Ætlanin at lýsa arbeiðsgongdirnar og arbeiðsbýtið í roknskaparreglugerðini hjá ráðnum, var ikki framd, tá ið mentamál fluttu til Almanna- og mentamálaráðið.

## 6.2 Neyðhjálp og menningarsamstarv (LG 2022/207-133)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað fíggjarstøðuna á játtanini “Neyðhjálp og menningarsamstarv”. Fíggjarstøða 2018 til 2022:

*t.kr.*

| StRk | Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 0888 | Skuld, annað | -4.950 | -8.938 | -8.938 | -8.888 | 0 |

Í 2018 vóru tilsamans 4.950 t.kr. av játtanini støðlaðar, og í 2019 vóru 4.188 t.kr. støðlaðar afturat. Í 2019 vóru 200 t.kr. brúktar av støðlaðum pengum, og í 2021 vóru 50 t.kr. brúktar.

Løgmálaráðið hevur ásannað, at stórur partur av tí menningarsamstarvi, sum fer fram í dag, er skipað í ST-høpi. Ráðið heldur tí, at Føroyar eiga at leggja seg eftir at brúka atlimaskapirnar í FAO og UNESCO sum karmar fyri menningarsamstarvi.

Sum liður í tilgongdini vóru pengar settir av í játtanini fyri 2018 og 2019, ið skuldu latast í menningarstuðli og neyðhjálp til FAO, UNESCO og World Food Programme í sambandi við samstarvsavtalurnar. Stígur kom tó í tilgongdina, og rúm tíð gekk, áðrenn loysn var funnin á avbjóðingunum. Tá var nýtt landsstýri komið til, sum hevði aðrar raðfestingar á menningarsamstarvs- og neyðhjálparøkinum.

Tær 8,9 mió.kr. hava tí verið støðlaðar, og samskift hevur verið við Fíggjarmálaráðið um, hvussu støðlingarnar skuldu handfarast. Við árslok 2022 eru støðlingarnar afturførdar, og upphæddin er inntøkuførd á kontuni “ymiskt” undir inntøkum.

## 6.3 Nám (LG 2021/207-231)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðanina av Námi.

Roknskaparreglugerðin, sum Mentamálaráðið hevði góðkent í 2016, var ikki dagførd, tó at bygnaðarbroytingar vóru gjørdar í 2017. Sambært Námi var reglugerðin ikki endurskoðað, tí bygnaðarbroytingarnar vóru ikki lidnar.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur móttikið dagførda roknskaparreglugerð, ið ráðið fer at viðgera.

*Keyp av vørum og tænastum*
Nám bjóðaði ikki út uppgávur at skriva undirvísingartilfar. Tá ið bøkur skuldu skrivast, kom onkur við hugskoti um at skriva eina bók fyri Nám, ella bað Nám persón við røttum førleikum.

Nám brúkti ikki Keypsportalin, tí prent og uppseting kostaðu sjáldan 50 t.kr. ella meira. Stovnurin bað um tilboð frá minst tveimum veitarum, tá ið tey skuldu hava bøkur umbrotnar ella prentaðar. Tó velja tey í ávísum førum føroyskar veitarar framum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at um vørur ella tænastur ikki ítøkiliga eru undantiknar sambært rundskrivinum "um keyp av vørum og tænastum", ber til at biðja um undantak frá regluni um útbjóðing.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Nám hevur enn ikki biðið um nakað undantak, soleiðis sum rundskrivið sigur, men Nám tekur upp samband við Keypsportalin og fer at rætta mannagongdina.

*Kunningartøkni*
KT-netið hjá Námi er knýtt í Landsnet. Seinasta KT-grannskoðanin var gjørd av einum grannskoðanarvirki í juni 2021. Grannskoðarin hevði trý tilmæli við høgari raðfesting, átta við miðal raðfesting og tvey við lágari raðfesting. Landsgrannskoðanin mælti til, at tilmælini blivu bøtt skjótast gjørligt. Nám vísti á, at stovnurin arbeiddi við nýggjari skipan, og so skjótt hon virkaði, um tvey til trý ár, fóru tey at sløkkja Kervi.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað frá, at Nám arbeiðir regluliga við tilmælunum í KT-grannskoðanini, og nýggj KT-grannskoðan verður í næstum. Arbeiðið við nýggju KT-umsitingarskipanini Kervi+, ið er nýggja lestrarfyrisitingarskipanin hjá føroyska undirvísingarverkinum heldur fram, og so skjótt tann skipanin megnar tað, sum gamla Kervi megnar, verður Kervi sløkt.

**Uppfylging frá seinastu frágreiðing**
Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin eisini grannskoðan av Námi. Ll. nr. 53/2014 "um at útvega undirvísingarmiðlar o.a." var sett í gildi í mai 2014. Í august 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið arbeiddi við at umskipa Nám við atliti at bygnaðarbroytingum í ráðnum, har Nám skuldi átaka sær øktar uppgávur sum fakligur og námsfrøðiligur menningardepil. Tí var kunngerðin um virksemi á Námi ikki gjørd enn.

Arbeiðið at skipa eftirútbúgvingina í síni heild, sum byrjaði í 2013, var ikki liðugt. Sambært landsstýrismanninum var tað arbeiðið eisini tongt at bygnaðarbroytingunum og broyttu uppgávunum hjá Námi.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at stovnurin var skipaður við toymisbygnaði, sum var í støðugari menning og mentur við atliti at nýggjum uppgávum, har Próvstovan er partur av Námi. Harumframt var ein ráðgevingareind skipað. Ráðgevingartoymið, sum eftir ætlan skuldi skipast sum námsfrøðiligur menningardepil, var komið væl áleiðis, og arbeiðið at gera reglur um virksemið var byrjað.

*Nýggjur bygnaður.*

Í 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Nám hevði skipað ráðgevingina sum eina deild, og var sostatt farið frá toymisbygnaðinum til meira klassiskan bygnað. Nú bygnaðurin var komin uppá pláss, var farið undir at gera reglur um virksemið á stovninum, sambært § 3, stk. 2, í lógini "um at útvega undirvísingarmiðlar o.a".

*Ongar reglur gjørdar um virksemið á stovninum.*

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at nýggi bygnaðurin er lýstur í roknskaparreglugerðini, ið Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur móttikið. Enn eru ongar reglur gjørdar um virksemið hjá stovninum.

**Grannskoðan av fíggjarstøðu**

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað fíggjarstøðuna hjá Námi. Við árslok 2022 er goymslan hjá Námi 0 kr., meðan mótkontan til goymsluna er 3.066 t.kr. Mótkontan hevur staðið óbroytt síðani 2008. Spurt um orsøkina, svaraði Nám, at tey høvdu ikki verið varug við, at upphæddin hevur staðið á fíggjarstøðuni, men at tey nú eru í samskifti við Barna- og útbúgvingarmálaráðið um at greina málið.

Nám hevur ikki tíðaravmarkað tímasaldur í 2022, men stovnurin hevur boðað frá, at tey fara at gera tað við árslok 2023.

## 6.4 Rásin (LG 2020/207-232)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Rásini.

Ógoldið kostgjald 2019 var 12 t.kr. Rásin helt tað vera ósannlíkt at fáa peningin inn, tí rættarliga var kravið ivasamt, tí næmingurin tá var undir 18 ár og hevði ikki sjálvur tikið avgerð um skúlagongdina. Flestu næmingar eru undir 18 ár, og tí kundi vera ivasamt um teir heftu fyri møguligari skuld. Landsgrannskoðanin mælti til at fáa greiði á, hvønn kravið skuldi sendast til.

Undirvísingarstýrið vísti Rásini á, at um næmingur ella avvarðandi ikki høvdu tikið avgerð um, at næmingur skuldi í skúla á Rásini, átti tann stovnur ella skipan, sum avgjørdi tað, at vátta, at tey heftu fyri kostgjaldinum.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at enn er mannagongdin viðvíkjandi kostgjaldinum ikki broytt. Arbeitt verður við einari hóskandi loysn, soleiðis at tað verður lættari umsitingarliga fyri allar partar.

## 6.5 Glasir (LG 2020/207-233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Glasi.

**Depilsráð**

Landsstýrismaðurin setir depilsráð, sum sambært Ll. nr. 79/2015 "um skúladepil í Marknagili" m.a. skal tryggja yrkisfakliga virksemið í Marknagilsdeplinum, og at skúlin í størst møguligan mun bjóðar út yrkisfakligar grund-, eftir- og víðariútbúgvingar, sum eru viðkomandi fyri tørvin hjá vinnuni. Sambært lógini verður depilsráðnum heimilað at ráða yvir inntøkufíggjaða virkseminum í Marknagilsdeplinum.

Depilsráðið skuldi gera starvsskipan fyri virksemi sítt, sum landsstýrismaðurin skuldi góðkenna. Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at góðkenning av starvsskipanini hevði verið knýtt at málinum um báðar sjálvsognarstovnarnar, sum ikki var avgreitt.

Spurdur, greiddi landsstýrismaðurin í august 2022 frá, at væntandi varð komið á mál í 2022.

### Sjálvsognarstovnar

Tekniski skúlin í Tórshavn og Føroya Handilsskúli vóru framvegis sjálvsognarstovnar skipaðir sambært Ll. nr. 106/1998 “um yrkisskúlar”, og sum eftir ætlan skuldu taka seg av í 2020.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið helt tað ikki vera haldbart at bíða longur eftir heimildini at flyta avlop yvir um ár, og ætlaði ráðið tí at varðveita annan av sjálvsognarstovnunum, ið skuldi taka sær av inntøkufíggjaða virkseminum. Leisturin fyri umsitingina av inntøkufíggjaða virkseminum skuldi verða at líkna við eginraksturin, sum sjálvsognarstovnarnir høvdu, áðrenn Skúladepilin í Marknagili var settur á stovn.

Í desember 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt var við ætlanini at leggja báðar sjálvsognarstovnarnar saman, men enn var ikki komið á mál. Stýrini fyri sjálvsognarstovnarnar høvdu samtykt at fara undir eina tilgongd at leggja stovnarnar saman, soleiðis at talan fór at verða um ein sjálvsognarstovn.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum greitt frá, at eftir at miðnámsskúlavirksemið var savnað á Glasi, var ætlanin at taka av sjálvsognarstovnarnar Føroya Handilsskúli og Tekniski skúli í Tórshavn. Eginraksturin hjá sjálvsognarstovnunum skuldi takast við í fíggjarlógina sum inntøkufíggjað virksemi.

Ein fortreyt fyri at eginraksturin hjá sjálvsognarstovnunum var tikin við í fíggjarlógina var, at ásetingarnar í játtanarskipanini um inntøkufíggjað virksemi blivu broyttar til at loyva at flyta avlop tvørtur um ár (uppsparingarheimild). Fíggjarmálaráðið hevði í longri tíð arbeitt við at gera broytingar í játtanarskipanini, men arbeiðið dró út.

Tí var í staðin avgjørt at taka annan sjálvsognarstovnin av og varðveita hin við savnaða virkseminum frá báðum, og savna tað sum eginrakstur uttan fyri fíggjarlógina.

Sambært landsstýrismanninum er nú komið á mál; annar sjálvsognarstovnurin er varðveittur, og hin er tikin av. Stýrið fyri sjálvsognarstovnin er Depilsráðið. Arbeitt verður við starvsskipanini, sum væntandi verður góðkend í næstum.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Mentamálaráðið hevði ikki góðkent roknskaparreglugerðina, ið var send ráðnum í mai 2017. Landsgrannskoðanin mælti til, at Glasir fekk ásetingar við í roknskaparreglugerðina um, hvussu skrásetingin av inntøkum er løgd til rættis, og hvussu prísásetingin av vørum og tænastum verður gjørd, so til bar at kanna, um samsvar var ímillum vørukeyp, vørunýtslu og sølu.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at roknskaparreglugerðin, sum Uttanríkis- og mentamálaráðið fekk í 2021, var løgd til síðis, og skúlin var biðin um eina dagførda reglugerð, tí skúlin er umskipaður og nógv broyttur síðani 2017, og tí at atlit skuldu takast at viðmerkingunum frá Landsgrannskoðanini.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði ikki móttikið dagførda roknskaparreglugerð frá Glasi. Ráðið fór at spyrja eftir reglugerðini, og í sambandi við góðkenningina av henni at tryggja, at atlit eru tikin at viðmerkingunum frá Landsgrannskoðanini.

Landsstýrismaðurin hevur í august 2023 kunnað um, at Glasir hevur sent Barna- og útbúgvingarmálaráðnum dagførda roknskaparreglugerð, ið ráðið fer at viðgera í næstum.

*Inntøku- og stuðulsfíggjað virksemi*

Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at um stovnur hevur fingið loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at hava inntøku- og stuðulsfíggjað virksemi, skal virksemið vísast fyri seg í fíggjarlógini og í landsroknskapinum á serstøkum undirkontum.

Landsgrannskoðanin mælti enn eina ferð til, at inntøkufíggjað virksemi og/ella stuðulsfíggjað virksemi verður skrásett, sum ásett í játtanarreglunum.

Í 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at spurningurin viðvíkjandi inntøkufíggjaða virkseminum hjá Glasi, var partur av málinum um, at báðir sjálvsognarstovnarnir skuldu leggjast saman í ein, sum skuldi hava loyvi at hava eginrakstur, eins og sjálvsognarstovnarnir høvdu áður.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin víst á, at avgerð er tikin um at varðveita annan sjálvsognarstovnin og savna virksemið sum eginrakstur uttan fyri fíggjarlógina. Í sambandi við at roknskaparreglugerðin skal góðkennast, fer Barna- og útbúgvingarmálaráðið at ansa eftir, at øll formligu viðurskiftini viðvíkjandi eginrakstrinum eru upp á pláss.

*Næmingagjøld*

Síðani 2017 hevði Glasir goldið Fjølriti 250 kr. fyri hvønn næming fyri upphavsrættindi. Næmingarnir rindaðu harumframt 200 kr. fyri avrit o.a., tilsamans skuldu teir rindað 450 kr. um árið.

Við skúlaársbyrjan boðaði Glasir næmingunum frá, at teir skuldu rinda næmingagjøld. Umsitingardeildin krossaði av á einum lista, hvør hevði goldið. Fíggjardeildin hevði ikki yvirlit yvir, hvussu stór skuldin var, ella hvør skyldaði næmingagjald.

Frá 2018 til 2020 vóru næmingagjøldini 1.770 t.kr., men næmingarnir høvdu einans goldið 552 t.kr. Áognin, sum var 1.218 t.kr., var ikki skrásett í roknskapinum. Landsgrannskoðanin vísti á, at tað var ikki nøktandi at krevja gjøld frá næmingum, uttan at halda skil á roknskaparliga, um gjaldið var goldið, og hvussu nógv hvør næmingur skyldaði.

Glasir hevði ikki gjørt meira fyri at fáa áognina goldna, tí skúlin hevði samskift við Mentamálaráðið um heimildir, og hvussu gjaldið skuldi krevjast inn, men enn hevði skúlin ikki fingið nakra niðurstøðu.

Í 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at sambært lógini “um gymnasialar miðnámsútbúgvingar”, kundi landsstýrismaðurin heimila skúlunum at taka gjald, ið samsvarar við kostprís, fyri ljóstøk, útprenting o.a. tilfar, ið verður nýtt í undirvísingini.

Landsstýrismaðurin segði eisini, at miðnámsskúlarnir helst ongantíð høvdu fingið formligt loyvi at taka gjald frá næmingunum, men nakrir skúlar høvdu í áravís kravt næmingagjald. Uttanríkis- og mentamálaráðið ætlaði at umrøða, um tørvur var at fáa tað formliga upp á pláss.

***Næmingagjald verður ikki kravt longur, Glasir rindar kostnaðin.***

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Glasir hevur broytt mannagongd soleiðis, at einki næmingagjald verður kravt. Fjølrit verður goldið yvir raksturin á Glasi.

*Eftirlitsslóð v.m.*

Landsgrannskoðanin vísti eins og áður á, at roknskapurin var ikki rættur, tá ið Glasir bókaði keyp og sølu í fíggjarstøðuni í staðin fyri í rakstrinum, og tað var ikki í samsvari við roknskaparreglurnar. Tað bar ikki altíð til at fylgja eftirlitsslóðini, tí upphæddir vóru fluttar ímillum nógvar ymiskar kontur.

Glasir greiddi frá, at tað var í samsvari við “Depilslógina”, at skúlin bókaði inntøkur og útreiðslur í fíggjarstøðuni.

Landsgrannskoðanin mælti enn eina ferð til at fáa viðurskiftini viðvíkjandi roknskapinum í rættlag.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Uttanríkis- og mentamálaráðið tók tað í størsta álvara, at roknskapurin ikki var rættur. Ráðið helt, at bókingarhátturin hjá Glasi var ikki í samsvari við Depilslógina, og fór at taka málið upp við Glasir í sambandi við dagføring av roknskaparreglugerðini.

Í 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Undirvísingarstýrið hevði víst Glasi á, at grundgevingin fyri at bóka inntøkur og útreiðslur í fíggjarstøðuni var skeiv. Undirvísingarstýrið hevði givið Glasi boð um at rætta bókingarháttin. Sambært Undirvísingarstýrinum lovaði Glasir, at alt skuldi verða komið í rættlag í mars 2022.

***Bókingarhátturin enn ikki rættaður.***

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin víst á, at Glasir í fjør fekk boð um at rætta bókingarháttin viðvíkjandi inntøkum og útreiðslum og um at boða frá, tá tað var gjørt. Glasir hevur nú víst á, at enn er einki broytt hesum viðvíkjandi, tí eingin avkláring er um handfaring av inntøkufíggjaðum virksemi.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur nevndu viðurskiftini viðvíkjandi vantandi eftirlitsslóðini uppaftur við Glasir. Tað verður gjørt í sambandi við, at roknskaparreglugerðin verður viðgjørd.

*Lønir*

Seinastu árini er skyldugi kostnaðurin til lønir støðugt øktur. Í 2017 var hann 6,2 mió.kr., og í 2020 var hann 12,2 mió.kr. Ultimo 2020 var skylduga tímatalið slakir 26.000 tímar.

26 lærarar áttu 13.415 tímar á fyri tíðina fram til skúlaárið 2019/20. Teir áttu yvir 300 tímar hvør og upp í nærum 1.300 tímar.

Glasir hevði biðið deildarleiðarar og starvsfólk um at minka tímabankan, har tímabankin ikki tyktist fylgja endamálinum. Sambært Glasi var saldan hjá summum lærarum lækkað í 2020/21 í samsvari við áheitanina.

Onkrir lærarar við stórum tímabanka kundu ikki fáa tímarnar ella yvirtíð goldna, tí teir høvdu tímaniðurskurð sambært § 26 í sáttmálanum hjá YF. 120 lærarar kundu sambært YF-sáttmálanum eiga +/- 300 tímar. Teir flestu høvdu positiva tímasaldu.

Í desember 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at Glasir skuldi halda seg til ásetingina í § 26 í sáttmálanum, og alt tað ber til ráðleggja árliga tímatalið til 1.750 +/-300 klokkutímar. Uttanríkis- og mentamálaráðið ætlaði, saman við Undirvísingarstýrinum, at taka málið upp við Glasir, fyri at finna út av um nakað skuldi stillast við mátanum, sum Glasir brúkti tímabankan.

***Komið verður ikki á mál hetta skúlaárið.***

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært Glasi er saldan í tímabankanum minkað munandi frá juli 2021 til juli 2023, og skúlaárið 2023/24 verður ráðlagt so neyvt sum gjørligt eftir 1.750 +/-300 klokkutímum. Vísandi til avmarkingar í sáttmálanum at rinda yvirtíð út og onnur atlit, verður ikki komið á mál hetta skúlaárið. Miðað verður ímóti, at við skúlaársbyrjan 2024/25 eru allar saldur á hóskandi støði og í samsvari við leiðreglurnar, sum Glasir hevur gjørt á økinum.

### Fíggjarstøða

Í 2018 vísti Landsgrannskoðanin á, at tað var átaluvert, at skúlin enn ikki hevði yvirlit yvir ognirnar, tó at hann í 2010 upplýsti, at hann fór at gera ognaryvirlit. Glasir var samt við Landsgrannskoðanina, men vísti samstundis á, at tey høvdu ikki arbeiðsorku til at

gera yvirlitið, tí síðani 2013 var øll orkan farin til umsitingina av nýggja lønarsáttmálanum. Glasir hevði gjørt avtalu við Gjaldstovuna og Mentamálaráðið um at gera yvirlit yvir innbúgv og maskinur við virði oman fyri 50 t.kr., ið fóru at verða keyptar til nýggja skúlabygningin, og at gamalt innbúgv og maskinur, ið tey tóku við sær, eisini skuldu skrásetast.

Glasir hevði ikki yvirlit yvir maskinur, innbúgv o.a. Leiðslan greiddi frá, at bygningurin var enn ikki yvirtikin frá Landsverki, og vísti á, at ein umbøn um eykajáttan var til viðgerðar um at játta 6 mió.kr. til manglar í bygninginum, sum skuldu gerast, áðrenn hann kundi góðkennast og fáa nýtsluloyvi.

Í støðisognini hjá Glasi í Búskaparskipan landsins vóru 5 bygningar í Hoydølum, serligt innbúgv og 3 bilar skrásettir. Leiðarin á KT-deildini hevði yvirlit yvir allar teldur hjá skúlanum.

Landsgrannskoðanin mælti enn eina ferð til, at Glasir útvegaði yvirlit yvir ognirnar hjá skúlanum, og at allar ognir, sum skuldu skrásetast í landsroknskapinum, vórðu skrásettar.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini.

Landsstýrismaðurin hevur í august 2023 kunnað um, at Glasir arbeiðir við at fáa eina skipan til skráseting av ognum, men enn er eingin skipan funnin, ið á nøktandi hátt kann brúkast til endamálið. Barna- og útbúgvingarmálaráðið fylgir málinum, soleiðis at ognir verða skrásettar sambært galdandi reglum. Tað veri seg, at ognir við virði upp á 50 t.kr. ella meira verða skrásettar í Búskaparskipan landsins, og at Glasir hevur eina innanhýsis skráseting til ognir, har virðið er minni enn 50 t.kr.

*Peningastovnskontur og gjaldkort*

Á kontu í BankNordik, “Føroya Studentaskúli (inngjøld)” bókaði Glasir rørsluna eina ferð um mánaðin. Ultimo 2020 stóðu 153 t.kr. á kontuni. Skúlin hevði arvað kontuna í samanleggingartilgongdini. Kontan var stovnað í samráði við Mentamálaráðið til at rinda fyri stakgreinalestur hjá næmingum í øllum miðnámsskúlunum. Glasir hevði fleiri ferðir biðið Undirvísingarstýrið um at fáa ábyrgdina av kontuni staðsetta, uttan at tað var gjørt.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið og Undirvísingarstýrið fóru at umrøða, hvat skuldi gerast við kontuna, og um hvørt skipanin við depositum til innskriving var røtt.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki nýtt er í málinum. Málið verður viðgjørt saman við Undirvísingarstýrinum og Glasi í sambandi við roknskaparreglugerðina.

*Stuttfreistað skuld*

Salda á StRk. 0881 “Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t:

*t.kr.*

| | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ikki inntøkuført - granskingarst., gávur o.t. | -621 | -1.276 | -1.376 | -1.567 | -1.563 |

***Bókingarhátturin forðar gjøgnumskygni.***

Talan er í høvuðsheitum um inntøkur og útreiðslur, sum bert eru bókaðar í fíggjarstøðuni. Bókingarnar vóru ikki í samsvari við reglurnar um, at inntøkur og útreiðslur skulu bókast í rakstrinum. Roknskapurin vísti ikki samlaða virksemið hjá skúlanum, og tað forðaði fyri gjøgnumskygni.

Landsgrannskoðanin mælti staðiliga til at bóka allan raksturin í rakstrarroknskapinum.

Uttanríkis- og mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at inntøkur og útreiðslur skuldu bókast í rakstrinum og ikki í fíggjarstøðuni. Ráðið ætlaði at taka málið upp við Glasir.

## 6.6 Tekniski skúli í Klaksvík, løgujáttan (LG 2018/207-233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin løgujáttanina til Tekniska skúla í Klaksvík. Sambært landsroknskapinum kostaði skúlin 36,6 mió.kr. Tó hevði landið goldið 38,2 mió.kr. fyri bygningina. Munurin stóðst av, at Landsverk í 2016 sendi høvuðsráðgevanum ein faktura, 1,6 mió.kr., har Landsverk vísti til, at feilir hjá ráðgevanum høvdu gjørt, at aðrar arbeiðstøkur vóru vorðnar dýrari. Upphæddin var mótroknað í prosjekteringsútreiðslunum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað var lítið sannlíkt, at landið fór at fáa peningin, og at roknskapurin fyri bygningina tí ikki var rættur. Í 2018 hevði høvuðsráðgevin einki goldið. Mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at bókingarhátturin gjørdi, at roknskapurin var ikki rættur.

Í 2019 segði landsstýrismaðurin, at Landsverk royndi at fáa semju við høvuðsráðgevan, av tí at sakarmál var kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Landsverk hevði latið gerðarrættinum málið.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at síðani 2020 var roynt at fáa semju millum partarnar, tó uttan nakra niðurstøðu. Seinastu tíðina hevði tað víst seg, at bygningurin lak sera illa. Nærri kanningar vístu, at bygningurin mátti umvælast. Landsverk hevði boðið umvælingina út og fingið tilboð á slakar 2 mió.kr. við MVG. Samlaða kravið í hesum máli var tískil hækkað til 3,4 mió.kr. við MVG. Tað var fráboðað gerðarrættinum 24. august 2021. Partarnir samráddust tá um sýn og meting á staðnum, fyri at fáa staðfest manglar, áðrenn teir vórðu umvældir.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sambært Landsverki, vóru sýn og meting gjørd av takinum á Tekniska skúla í Klaksvík. Semja var tó ikki funnin millum partarnar, men málini vóru enn áleikandi. Landsverk gjørdi tá eina nýggja roynd at fáa semju, men annars var hildið fram við gerðarrættarmálinum. Málið um lekan var partur av málinum.

Í august 2023 sigur landsstýrismaðurin, at gerðarrættarmálið liggur enn í einari millumstøðu, meðan roynt hevur verið at finna semju. Landsverk roynir nakað enn, og um tað ikki ber á mál í heyst, verður málið tikið uppaftur við gerðarrættin.

***Gerðarrættarmálið er ikki avgreitt enn.***

## 6.7 Miðnám í Vestmanna (LG 2021/207-233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Miðnámi í Vestmanna. Roknskaparreglugerðin var frá 2015, og Undirvísingarstýrið hevði heitt á skúlan um at dagføra reglugerðina.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at skúlin hevur dagført roknskaparreglugerðina, ið Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur góðkent í juni 2023.

Miðnám í Vestmanna rindaði starvsfólkum tímapening, tó at tænastuferð byrjaði eftir kl. 7 og endaði fyri kl. 19. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja ásetingunum í avtaluni frá 2018 um tænastuferðir. Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at skúlin hevur tikið til eftirtektar tilmælið frá Landsgrannskoðanini og fylgir ásetingunum í avtaluni um tænastuferðir.

*Inntøkur, debitorar og banki*
Skúlin hevði inntøkur frá ferðaleiðaraskeiði og útleigan av hølum. Sølan fyri 2020 var bókað í januar 2021 eftir uppgerð av peningastovnskontu.

Landsgrannskoðanin mælti skúlanum til at brúka debitorskipanina í Búskaparskipan landsins til at skráseta inntøkur, gera rokningar og fylgja við skuldarum, og at umhugsa at brúka peningastovnskonturnar hjá Gjaldstovuni, heldur enn at hava egna kontu.

Sambært landsstýrismanninum brúkar Miðnám í Vestmanna nú debitorskipanina í Búskaparskipan landsins til inntøkurnar, og peningastovnskontan er strikað.

*KT-skoðan*
Privat grannskoðanarvirki hevði í 2020 gjørt KT-skoðan av Miðnámi í Vestmanna sambært rundskrivinum um KT-trygd. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði biðið um skoðanina, og niðurstøðan av henni var, at trygdarviðurskiftini vóru ikki til fulnar í samsvari við krøvini í trygdarrundskrivinum, og grannskoðarin hevði tilmælir til staðfestu veikleikarnar.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at sambært skúlanum er tikið hond um tilmælini frá grannskoðaranum.

## 6.8 Miðnám á Kambsdali (LG 2021/207-233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Miðnámi á Kambsdali og Klaksvíkar HF-skeiði.

*Roknskaparreglugerð*
Roknskaparreglugerðin, sum var frá august 2020, var ikki góðkend. Undirvísingarstýrið hevði kunnað skúlan um, at stýrið arbeiddi við roknskaparreglugerðum fyri alt miðnámsøkið, og tí gjørdi Miðnám á Kambsdali ikki meira við málið.

*Støðisogn*
Skúlin hevði skrásett Bygning á Dalsvegi 1, og “Orkudepilin á Kambsdali” í støðisognini. Í 2021 keypti skúlin nýggjan bil, sum ikki var skrásettur í Búskaparskipan landsins.

Sambært skúlanum var støðisognin í Búskaparskipan landsins ikki fullfíggjað. Leiðslan var ikki kunnað um skipanina við ognaryvirliti. Tey fóru at senda neyðugu skrásetingarskjølini til Gjaldstovuna.

Í august 2023 manglar Miðnám á Kambsdali framvegis at skráseta bilin í støðisognini í Búskaparskipanini. Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur heitt á skúlan um at fáa málið við støðisognini avgreitt, og at boða frá, tá ið tað er gjørt.

*Peningastovnskontur og forskotskassi*
Miðnám á Kambsdali hevði fýra peningastovnskontur til inntøkur. Tríggjar høvdu gjaldkort hjá starvsfólkum atknýtt. Til fjórðu peningastovnskontuna, ið Føroya Handilsskúli á Kambsdali hevði, áðrenn samanleggingina av skúlunum, var knýttur ein gjaldterminalur.

Skúlin hevði loyvi til fýra gjaldkort, harav tvey kredittkort, ið ikki vóru knýtt at kontu í peningastovni. Sostatt vóru tvær peningastovnskontur uttan loyvi. Landsgrannskoðanin mælti til, at skúlin fekk formligu viðurskiftini avgreidd.

Landsstýrismaðurin hevur í august 2023 greitt frá, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið fer at ansa eftir, at øll formlig viðurskifti eru upp á pláss, í sambandi við at skúlin fer at dagføra roknskaparreglugerðina í næstum.

*Ikki-inntøkuførdur granskingarstyrkur*

Ikki-inntøkuførdur granskingarstyrkur, greinaður á staðartættir:

*t.kr.*

| Heiti | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ógreinað | -26 | -18 | -26 | -26 | -632 | -608 | 0 |
| Næmingaheimið | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | -507 |
| Nordpluss | -175 | 5 | -14 | -46 | -71 | -143 | -175 |
| NGK | 0 | 0 | 0 | 19 | -6 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **-201** | **-13** | **-39** | **-52** | **-710** | **-751** | **-682** |

Í 2020 var næmingaheimið selt, og skúlin fekk ágóðan, sum var 754 t.kr. Peningurin var oyramerktur til trý endamál, og var bókaður á "ógreinað" í fíggjarstøðuni. Bókhaldarin hevði uppgerð yvir nýtsluna av kontuni í rokniarki, har 419 t.kr. vóru eftir.

Tær 143 t.kr., sum stóðu á Nordpluss í 2021, vóru sambært skúlanum 6 verkætlanir, sum ikki vóru rakstrarførdar. Stígur kom í onkra av verkætlanunum, tí koronu farsóttin forðaði fyri ferðing millum lond. Í 2022 vóru verkætlanirnar farnar í gongd aftur, og vóru væntandi gjøgnumførdar og endaðar í 2022 og 2023.

Sambært landsstýrismanninum hevur Miðnám á Kambsdali í august 2023 kunnað um, at verkætlanirnar, sum korona setti stíg í, mestsum allar eru gjørdar upp. Bert ein hongur eftir; hon er avgreidd, men tað fíggjarliga hongur eftir enn.

*Skuld annað*

Í 2021 var onnur skuld 1,5 mió.kr. Talan var um nakrar javningar, har avsett var fyri skylduga løn og saldu í tímabanka, men størsti parturin av salduni var frá 2016.

*t.kr.*

| Heiti | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ógreinað | -843 | -151 | -894 | 365 | -654 | -499 | 184 |
| Undirvísingarvirksemi | -1.458 | -1.458 | -1.458 | -1.458 | -1.002 | -1.002 | 0 |
| **Tilsamans** | **-2.301** | **-1.609** | **-2.352** | **-1.093** | **-1.656** | **-1.501** | **184** |

Sambært Miðnámi á Kambsdali stavaðu saldurnar frá samanleggingini av Handilsskúlanum og Studentaskúlanum í 2016.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at 1,5 mió.kr. er bókað útaftur og saldan rættað, soleiðis at upphæddin nú er komin niður á 0 kr. Málið er avgreitt sambært Miðnámi á Kambsdali.

## 6.9 Skúladepil við Marknagil, løgujáttan (LG 2020/207-233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin løgujáttanina á høvuðskontu 7.23.3.09. Í 2019 vóru 23,9 mió.kr. játtaðar til liðugtgerð og ymiskar tillagingar á Glasi. Nýggj verklagslóg var gjørd, ið ásetir, at byggiútreiðslurnar kundu í mesta lagi verða 23,9 mió.kr.

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlóg fyri oktober 2020 segði Fíggjarmálaráðið m.a., at munandi manglar vóru í gjørda arbeiðinum, sum máttu bøtast, fyri at bygningurin kundi góðkennast. Bygningurin hevði ikki fingið endaligt nýtsluloyvi. Útfylt R&V-ætlan skuldi latast kommununi, sum kravdi, at ætlan skuldi fyriliggja fyri øll aktivu brunaanleggini. Ætlanin var gjørd, men Glasir skuldi fylla hana út.

Bygningurin var ikki endaliga góðkendur, og góðkenningin kemur ikki, fyrr enn saman-stoypingarnar eru gjørdar. Landsverk hevði ikki sett arbeiðið við samanstoypingunum í verk, tí stovnurin hevði bíðað eftir endaligu játtanini.

Sambært Landsverki vóru nøkur arbeiðir á Glasi um at vera liðug, tó at arbeiðstakarin framvegis ikki hevði sent rokning. Einastu veruligu stóru arbeiðini, sum vóru eftir, vóru samanstoypingarnar. Landsverk hevði gjørt sáttmála við múrarafyritøku fyri 5 mió.kr.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at bygningurin í vár fekk byggi-váttan (nýtsluloyvi) við ávísum manglum at avgreiða. Landsverk hevur saman við Glasi arbeitt við at avgreiða manglarnar. Summi viðurskifti av tekniskum/byggifakligum slag og summi meiri praktisk og skipanarlig.

## 6.10 Frítíðarundirvísing (LG 2019/207-235)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av játtanini til Frítíðarundirvísing. Undirvísingarstýrið vísti í 2019 Mentamálaráðnum á, at neyðugt var at dagføra lógarverkið. Stýrið hevði spurt um tulkingar av lógini og av fyrisitingarligu mannagongdunum, sum høvdu verið siðvenjur, áðrenn Undirvísingarstýrið fekk ábyrgdina av at fyrisita lógina.

Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at hann ætlaði at dagføra lógina um frítíðarundir-vísing v.m., og hevði sett hana á løglistan.

Landsgrannskoðanin vísti á ymisk viðurskifti í rundskrivinum um læraralønir frá 5. juli 2001. Talan var um ásetingar í sambandi við lønir til almenna frítíðarundirvísing, serstaka frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt var framvegis við lógarbroytingunum, serliga at gera ítøkiligari ásetingar fyri føroyskt sum annaðmál, ið verður skipað sum serstøk frítíðarundirvísing. Rundskrivið um læraralønir var partur av hesum arbeiði, og fór at verða endurskoðað samstundis.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið við lógarbroytingunum var framvegis í gongd.

***Lógin um frítíðar-virksemi er enn ikki dagførd.***

Landsstýrismaðurin hevur í august 2023 greitt frá, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið er ikki komið víðari við málinum um møguligar broytingar í lógini um frítíðarundirvísing. Málið verður umrøtt, men enn ber ikki til at siga, nær komið verður á mál.

## 6.11 Musikkskúlar (LG 2021/207-235)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Musikkskúla-skipanini.

Í 2021 hækkaði játtanin til Musikkskúlaskipanina 1,2 mió.kr. til at styrkja skipanina og stytta bíðilistarnar. Musikkskúlastjórin vísti á, at ikki allir musikkskúlar høvdu bíðilistar. Tað var trupult at seta beinleiðis samband ímillum tímatal og næmingatal, tá ið undir-vísingin ikki burturav var einstaklingaundirvísing, men eisini samanspæl og felags-undirvísing. Bíðilistar vóru til einstøk ljóðføri, og tímatalið til musikkskúlamiðnám var hægri, enn ætlað.

Fyri at sanna um samband var ímillum hækkaðu játtanina og styttar bíðilistar, bað Landsgrannskoðanin um at síggja bíðilistarnar til Tórshavnar musikkskúla frá 2020 til

2022. Vit fingu ikki umbidna tilfarið, men musikkskúlastjórin kunnaði um, at sambært Tórshavnar Musikkskúla eru umleið 114 fleiri næmingar tiknir inn.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt soleiðis frá: *"Í mun til bíðilista hjá Tórshavnar Musikkskúla, so er hesin sambært Musikkskúlanum ikki statiskur, men broytist alla tíð. T.v.s. at ikki ber til at seta upp í rokniark, at x antal næmingar vóru á bíðilista í 2020, so kemur økt játtan, og so fer bíðilistin samsvarandi x antal næmingar niður. Næmingar koma og fara alla tíð á og av bíðilistanum. Útskiftið av næmingum, sum eru á bíðilista og teir, sum eru aktivir í Tórshavnar Musikkskúla, hevur vegna korona í 2021 verið óvanliga stórt.*

*Í mun til økta játtan eru umleið 100 næmingar fleiri tiknir inn í Tórshavnar Musikkskúla."*

### *Ferðaendurgjøld*

Í § 4 í musikkskúlalógini er m.a. ásett, at landið rindar ferðing hjá musikkskúlalærarum. Í viðmerkingunum til lógina stendur, at musikkskúlalærarar framhaldandi hava eina samskipaða setan, og at setanin fevnir alla Musikkskúlaskipanina.

Í § 4, stk. 5, í sáttmálanum ímillum Musikklærarafelagið og Fíggjarmálaráðið er ásett, at *"lærarar, sum í starvi sínum ferðast ímillum arbeiðsøki, fáa ferðakostnaðin endurgoldnan. Lærarar eiga í mesta mun at nýta almenna ferðasambandið. Um nýtsla av egnum bili metist neyðug, verður km-gjald latið sambært galdandi reglum og harafturat møguligt ferðagjald fyri bil, har ferðing sjóvegis er neyðug."*

Í roknskaparreglugerðini hjá Musikkskúlaskipanini er ásett um ferðing innanlands, at uppgerðir verða gjørdar á ferðauppgerðarskjal, og víst verður til avtaluna ímillum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið um dagpening.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um ferðaendurgjøldini vóru í samsvari við reglurnar frá Fíggjarmálaráðnum "um endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum". Samanumtikið brúktu fáir lærarar almenna ferðasambandið. Í fleiri førum sá út sum, at Musikkskúlaskipanin rindaði endurgjøld fyri koyring frá bústaði til undirvísingarstað og aftur, tá ið lærarar ferðast heimanífrá til skúla í aðrari bygd ella býi.

Fyri at fáa endurgjald eftir reglunum hjá Fíggjarmálaráðnum, er treytin, at starvsfólk javnan eru í tænastuørindum, og tá kunnu tey fáa skrivliga heimild frá stovninum at nýta egnan bil í tænastuørindum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at vanliga hava tænastuørindi ikki verið roknað sum tað, at starvsfólk koyra heimanífrá til arbeiðsstað, men heldur at starvsfólk, sum eru møtt á arbeiðsstaðnum, og síðani verða send arbeiðsørindi, fáa endurgjald fyri koyring í egnum bili. Koyring frá egnum bústaði til arbeiðsstað er vanliga at rokna sum privat útreiðsla, sum løntakarar hava rætt til at søkja um ferðastuðul fyri.

Sambært stjóranum legði Musikkskúlaskipanin seg eftir at umsita ferðaendurrindanina soleiðis, at lærari bert fekk endurgjald fyri ferðing ímillum undirvísingarstøðini. Hann vísti á, at endurrindað var ikki ímillum heim og arbeiðspláss. Tó fekk lærari, sum ferðast til Suðuroyar í undirvísingarørindum, og bert hevði undirvísingarstað í Suðuroy, ferðina endurrindaða. Lærarin kundi í sínari sentralu setan verða fluttur ímillum ymisku musikkskúlarnar.

Landsgrannskoðanin helt, at tørvur var á, at Musikkskúlaskipanin fekk greinað nærri, hvat setan í allari Musikkskúlaskipanini merkti, tá ið um endurgjøld fyri ferðaútreiðslur ræður, vísandi til lógina, roknskaparreglugerðina, rundskrivið o.a. Eisini mælti Landsgrannskoðanin til at seta mannagongdirnar í roknskaparreglugerðina.

Í 2022 og aftur í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin fyri Musikkskúlan fer at verða partur av roknskaparreglugerðini hjá

Undirvísingarstýrinum. Mannagongdir, sum Landsgrannskoðanin viðmerkti, fara í tí sambandi at verða umrøddar.

## 6.12 Vinnuháskúlin (LG 2018/207-236)

Í undanfarnu frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Vinnuháskúlanum. Avtala um samsýning fyri verkætlanarleiðslu, sum Vinnuháskúlin hevði goldið, var ikki at finna. Sambært Vinnuháskúlanum var avtalan gjørd, áðrenn Maskinmeistaraskúlin var lagdur saman við Føroya Sjómansskúla.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at sambært Vinnuháskúlanum var skrivlig avtala ikki gjørd um samsýningina, sum lærarar fingu fyri verkætlanarleiðslu hjá skipsførara-lesandi. Føroya Sjómansskúli hevði ásett samsýningina í 2001 ella har á leið, og samsýningin var ongantíð prísjavnað ella broytt. Í sambandi við sáttmálasamráðingarnar var arbeitt við ársverki fyri maritimu skúlarnar, sum ætlandi skuldi verða sett í verk í 2022. Í tí sambandi fór Fíggjarmálaráðið at endurskoða og góðkenna allar samsýningar.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Undirvísingarstýrið luttók í sáttmálasamráðingunum saman við Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, og sambært stýrinum skuldi fyrsti samráðingarfundur við lærarafeløgini á maritimu skúlunum verða í juni 2022. Avtalað var at halda fram í september. Komið var tí ikki á mál við ætlanini at endurskoða og góðkenna samsýningar hjá Vinnuháskúlanum.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin víst á, at lønarsáttmálin millum Felagið Maskinmeistaralærarar og Fakfelag Sjómansskúlalærara og hinumegin Fíggjarmálaráðið er nýliga endurnýggjaður, uttan at broytingar eru gjørdar í samsýningunum hjá Vinnuháskúlanum. Orsøkin er, at samráðingarnar drógu so langt út, at Lønardeildin var ikki sinnað at halda fram við samráðingunum um annað enn lønarspurningin á hesum sinni. Málið verður tikið uppaftur.

## 6.13 Sjónám (LG 2020/207-236)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Sjónámi og Trygdarmiðstøðini.

Roknskaparreglugerðin hjá Sjónámi frá 2018 var send Mentamálaráðnum til góðkenningar. Í 2022 segði landsstýrismaðurin, at Sjónám var biðið um at dagføra reglugerðina.

***Roknskaparreglugerðin er ikki góðkend.***

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur ikki móttikið dagførda roknskaparreglugerð, men Sjónám er í holt við arbeiðið.

*Heimildir til skeiðsgjøld*
Sambært K. nr. 100/2012 “um gjald fyri skeið innan trygd á sjónum” kunnu gjøldini fyri lógarkravd trygdarskeið í mesta lagi vera 2.500 kr. fyri næmingar í fólkaskúla og sjóvinnubreyt og 4.000 kr. fyri sjófólk.

Sambært § 11 í K. nr. 73/2016 “um trygdarskeið fyri manning á fiskiskipum” kann skúlin krevja gjald frá hvørjum einstøkum luttakara fyri útreiðslur í sambandi við trygdarskeiðið, undir hesum luttøkugjald og gjald fyri prógv. Í 2020 var kostnaðurin fyri trygdarskeið á Sjónámi 3.250 kr. fyri næmingar í fólkaskúla og 6.500 kr. fyri sjófólk. Sami takstur hevði verið galdandi í nøkur ár.

Spurt, hvar heimildin var at áseta onnur gjøld fyri trygdarskeið enn tey, sum vóru ásett í K. nr. 100/2012, svaraði Sjónám, at skúlin í 2015 munnliga gjørdi Vinnuháskúlan og Mentamálaráðið varug við, at kunngerðin ikki longur var rímilig fyri stovnin, tí tað var ómøguligt at bjóða slíkt skeið út í samsvari við kunngerðina. Í samráði við Vinnuháskúlan helt Sjónám, at 6.500 kr. fyri eitt 5 daga trygdarskeið, var rímiligur prísur fyri bæði skeiðsveitara og skeiðstakara. Stovnarnir ynsktu ikki at koma í ta støðu at bjóða skeið út við undirskoti.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at skúlarnir fóru at fáa boð um at tillaga gjøldini soleiðis, at tey svaraðu til ásetingina í K. nr. 100/2012, og at ráðið eisini skuldi umrøða spurningin um at endurskoða kunngerðina.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at skúlarnir hava tillagað gjøldini, soleiðis at tey svara til ásetingina í K. nr. 100/2012. Barna- og útbúgvingarmálaráðið umhugsar at broyta kunngerðina, soleiðis at gjaldsupphæddin fyri skeiðið ikki er ásett í kunngerð, men at skúlarnir fáa heimild at krevja gjald fyri kravd trygdarskeið, og sjálvir áseta gjaldsupphæddina við støði í kostnaðinum at hava skeiðið.

***Skúlarnir hava tillagað gjøldini.***

*Skeiðsgjøld*
Sjónám bjóðaði eisini út onnur skeið, enn vanligu trygdarskeiðini, og Landsgrannskoðanin mælti til at greina prísásetingina av skeiðum í roknskaparreglugerðini.

Uttanríkis- og mentamálaráðið helt, at ráðið skuldi ikki góðkenna einstøku skeiðsgjøldini, og ásetingar vóru ikki fyri onnur skeið, enn vanliga trygdarskeiðið. Í roknskaparreglugerðini skuldi tó verið greitt frá um heimildir, prísásetingar, avsláttir og kredittir, og tí fór ráðið at taka tann spurningin upp í sambandi við góðkenning av reglugerðini.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur ikki móttikið dagførda roknskaparreglugerð, og tí er málið við at greiða frá heimildum, prísásetingum og avsláttum og kredittum í sambandi við skeiðsvirksemið ikki avklárað.

## 6.14 Føroya Brandskúli og inntøkufíggjað virksemi hjá Vinnuháskúlanum (LG 2021/207-236)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Føroya Brandskúla og inntøkufíggjaða virkseminum hjá Vinnuháskúlanum. Vinnuháskúlin hevði sent roknskaparreglugerðina til Uttanríkis- og mentamálaráðið at góðkenna. Reglugerðin var send aftur til Vinnuháskúlan við nøkrum viðmerkingum, og var tí ikki góðkend.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum kunnað um, at Vinnuháskúlin er farin undir at at endurskoða roknskaparreglugerðina.

*Fíggjarstøða*
Skúlin hevði einki ognaryvirlit. Landsgrannskoðanin mælti til at gera yvirlit yvir, hvørjar ognir skúlin eigur, so sum ásett er í roknskaparkunngerðini § 20.

Í fíggjarstøðuni 2021 hjá Føroya Brandskúla eru 355,5 t.kr. settar av sum stuttfreistað skuld.

Sjónám og Vinnuháskúlin høvdu ikki hildið seg til skeiðsgjaldið, sum er ásett í K. nr. 100/2012 “um gjald fyri skeið innan trygd á sjónum”. Sambært kunngerðini skuldi gjaldið vera í mesta lagi 2.500 kr. fyri skúlanæmingar og í mesta lagi 4.000 kr. fyri sjófólk. Vinnuháskúlin hevði tikið ávikavist 3.250 kr. og 6.500 kr. fyri skeiðini.

*Vinnuháskúlin skuldi gjalda ov nógv kravda skeiðspeningin aftur.*

Vinnuháskúlin skuldi tí gjalda skeiðsluttakarunum ov nógv kravda skeiðspeningin aftur, men sambært skúlanum, høvdu tey havt trupult við at finna fram til, hvørjir skeiðsluttakararnir vóru, tí var peningur settur av til tað. Skúlin arbeiddi framvegis við at loysa málið, og samskifti við Uttanríkis- og mentamálaráðið um tað.

*Skúlarnir hava tillagað gjøldini.*

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at skúlarnir hava tillagað skeiðsgjøldini soleiðis, at tey svara til ásetingina í kunngerðini um gjald fyri skeið innan trygd á sjónum. Barna- og útbúgvingarmálaráðið umhugsar at broyta kunngerðina, soleiðis at upphæddin fyri skeiðið ikki er ásett í kunngerð, men at skúlarnir fáa heimild at krevja gjald fyri kravd trygdarskeið og sjálvir áseta upphæddina við støði í kostnaðinum at hava skeiðið.

## 6.15 Fróðskaparsetur Føroya (LG 2021/207-236)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Fróðskaparsetri Føroya.

Fróðskaparsetrið hevur dagført roknskaparreglugerðina í mars 2022 og sent hana til góðkenningar hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at reglugerðin er ikki góðkend. Hon skal tillagast smærri broytingum, sum sambært Fróðskaparsetrinum verða framdar í heyst.

*Leiga*

Leigumálið fyri Sjóvinnuhúsið er galdandi frá 2017 til 2027, og kann sigast upp av báðum pørtum við 12 mánaða varningi. Um eigarin sigur leigumálið upp, innan 10 ár eru umliðin, síðan gildiskomuna av sáttmálanum, skal hann endurrinda leigaranum íløguna, leigarin hevur gjørt í leigumálið við leigumálsbyrjan, frádrigið tað áramálið, farið er av leigumálinum deilt við 10.

Landið hevði goldið 10,6 mió.kr. til at innrætta leigaðu hølini í Sjóvinnuhúsinum. Setrið væntaði ikki at fáa longt sáttmálan við Tórshavnar havn.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at avtalað er við Tórshavnar Havn, at ein hædd í Sjóvinnuhúsinum verður avhendað á sumri 2024. Restin av leigumálinum er ikki endaliga komið upp á pláss enn, og tí heldur sáttmálin fram.

*Yvirlit yvir innbúgv o.a.*

Í ársfrágreiðingini 2019 umrøddi Landsgrannskoðanin m.a., at Fróðskaparsetrið hevði ikki skrásett innbúgvið í Sjóvinnuhúsinum.

Fróðskaparsetrið var samt við Landsgrannskoðanina, at tað var ikki nøktandi, at innbúgv v.m. ikki var skrásett, og sambært Setrinum høvdu tey nú skrásett lutir, ið høvdu virði oman fyri 50 t.kr., í Búskaparskipan landsins.

Landsgrannskoðanin vísti á, at í løgujáttan til Fróðskaparsetur Føroya hevði landið goldið góðar 2 mió.kr. fyri innbúgv til Sjóvinnuhúsið. Landsgrannskoðanin mælti til, at Fróðskaparsetrið hevði yvirlit yvir ognir sínar, eisini um tær hvør sær kostaðu minni enn 50 t.kr.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum greitt frá, at Fróðskaparsetrið er í holt við at skráseta ognir, sum hava virði undir 50 t.kr. Ognir, sum hava størri virði, eru skrásettar í Búskaparskipan landsins.

*Kunningartøkni v.m.*
Góðkendur KT-grannskoðari hevði skoðað stovnin. Fróðskaparsetrið hevði fingið privata fyritøku at røkja uppgávuna sum DPO[15]. Saman við viðkomandi persóni vóru tey í holt við at orða KT-trygdarpolitikk. Váðametingin var frá 2019, og sambært Fróðskaparsetrinum vóru tey í holt við at endurskoða hana.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at KT-trygdarpolitikkurin er endurskoðaður og endaliga góðkendur. Politikkurin er lagdur á heimasíðuna hjá Fróðskaparsetrinum.

*Próvbókin*
Leiðarin og tvey starvsfólk á Próvstovuni høvdu ábyrgd av Próvbókini. Lesandi høvdu atgongd til egnar upplýsingar, og kundu broyta navn, adressu, teldupost o.a. Fróðskaparsetrið skuldi verða partur av KT-skipanini, sum Undirvísingarstýrið var í holt við at menna, og tey vónaðu, at próvbókaparturin fór at verða liðugt mentur innan eini tvey ár.

Próvbókin er ein skipan frá 1987, sum upprunaliga var útvegað til at útskriva prógv. Skipanin er dagførd við tíðini og útbygd eftir tørvinum hjá Fróðskaparsetrinum. Persónurin, ið lat Fróðskaparsetrinum skipanina, hevur einsamallur ment og umsitið hana øll árini, og bara hann kennir skipanina til fulnar.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Kervi+ verður sett í verk í heyst, og próvbókin verður síðani fasað út.

## Stuðulsfíggjað virksemi
Fróðskaparsetrið hevur játtan til stuðulsfíggjað virksemi. Granskingarverkætlanir eru heilt ella lutvíst fíggjaðar uttanífrá. Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nakrar verkætlanir.

*Cancer Epidemiology in the Faroe Islands*
Verkætlanin, sum er PhD-verkætlan, byrjaði í 2019, og skuldi vara til februar 2022. Játtaðar vóru 2.166 t.kr. í stuðli. Stuðulsupphæddir frá 2019 til 2021:

*t.kr.*

| Ár | Stuðulslatari | |
|---|---|---|
| 2019 | Dansk Kræftforening | 247 |
| 2019 | Brødrene Hartmanns Fond | 86 |
| 2019 | Granskingarráðið | 300 |
| 2020 | Kræftens Bekæmpelse | 13 |
| 2020 | Granskingarráðið | 300 |
| 2021 | Granskingarráðið | 350 |
| 2021 | Føroya Felag móti krabbameini | 300 |
| 2021 | Krabbameinsfelagið | 50 |
| | **Tilsamans** | **1.696** |

Fróðskaparsetrið roknaði við at fáa 241,5 t.kr. frá Landssjúkrahúsinum, og at Fróðskaparsetrið skuldi lata 360 t.kr. til verkætlanina. Í fíggjarætlanini fyri verkætlanina var eisini roknað við 325 t.kr. til útgávu, teldu, innskriving og umsitingargjald. Hesar útreiðslurnar vóru ikki bókaðar í Búskaparskipan landsins. Sambært Fróðskaparsetrinum bókaðu tey tær, tá ið verkætlan var liðug, og tey vistu, at nóg mikið av peningi var á verkætlanini. Um hall var, fór tað at verða fíggjað av oman fyri nevndu inntøkum. Tá ið verkætlanin var liðug, og allir kostnaðir skrásettir, skuldi Fróðskaparsetrið gera endaligan roknskap. Møguligt yvirskot verður goldið aftur til stuðulsveitararnar.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at verkætlanin er liðug, og endaligur roknskapur er gjørdur.

[15] Data Protection Officer.

*Health and Environment Monitoring of Ships and Propellers (HARMONAISE) GCFI*
Granskingarráðið hevði játtað 1 mió.kr. at rinda í 2021 og 2022. Granskingarráðið helt 50 t.kr. aftur, til endalig frágreiðing var góðkend. Verkætlanin var staðsett á Umhvørvisstovuni. Í 2020 undirskrivaðu Umhvørvisstovan, Landsverk og Fróðskaparsetrið Memorandum of Understanding, um at rinda 200 t.kr. í part til verkætlanina.

Verkætlanin hevði fingið 200 t.kr. frá aðrari verkætlan, nevnd "PhD-verkætlan í orkuverkfrøði". Sambært Setrinum var peningurin tøkur frá eldri verkætlanum, við privatari fígging, sum vóru lidnar. Endamálið við hesum stuðlinum var at fyrireika eitt "Geospatial center" á Setrinum.

Fróðskaparsetrið hevði goldið góðar 200 t.kr. fyri útbúnað, sum sambært Setrinum stóð á Umhvørvisstovuni, men var skrásettur í ognaryvirliti hjá Fróðskaparsetrinum.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at verkætlanin koyrir eftir ætlan við somu luttakarum.

*The Hydrogen & Green Energy, HUGE*
Verkætlanin byrjaði í 2019. Fróðskaparsetrið er ein av átta samstarvspørtum, og Northern Periphery and Arctic Programme (NPA) hevur stuðlað. Parturin hjá Setrinum skuldi vera 1.061 t.kr., harav NPA skuld lata 690 t.kr. og Setrið sjálvt 370 t.kr.

Í 2019 játtaði Fróðskaparsetrið Náttúruvísindadeildini 248 t.kr. í stuðli í trý ár. Afturat tí roknaði Fróðskaparsetrið við 124 t.kr. til umsitingargjald.

Frá 2019 til 2021 eru 441 t.kr. goldnar í lønum og 55 t.kr. fyri rakstrarkostnað. Í 2020 og 2021 rindaði North Highland College Setrinum tilsamans 241 t.kr.

Fróðskaparsetrið greiddi frá, at verkætlanin endaði summarið 2022. Útreiðslur, sum komu afturat, vóru í høvuðsheitum knýttar at seinasta verkætlanarfundinum, sum var hildin í Skotlandi frá 25. til 28. apríl 2022. Eisini vóru útreiðslur til film, sum greiðir frá, á hvønn hátt Vetni kundi fáa ein leiklut í umlegging hjá skipum og bátum frá olju til varandi orku.

Sambært Fróðskaparsetrinum rindar NPA 65% av útreiðslunum frá desember 2021 til juni 2022. Uppgerðir eru latnar inn hvørt hálvár, og eru góðkendar av First Level Controller. Endaliga uppgerðin skuldi verða tøk summarið 2022.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum greitt frá, at verkætlanin er liðug, og endaligur roknskapur er gjørdur.

*Burðardygg aling á sjónum*
Í 2019 skrivaðu Fróðskaparsetrið og P/f Bakkafrost undir upprit (Memorandum of Understanding) um strategiskt samarbeiði um gransking og menning. Bakkafrost skuldi lata 700 t.kr. um árið til verkætlanina, sum vardi í trý ár. Allur stuðulin var goldin Fróðskaparsetrinum.

Í 2019 vóru ongar inntøkur bókaðar, og útreiðslurnar, 289 t.kr., vóru støðlaðar. Í 2020 vóru inntøkurnar 1,4 mió.kr. og útreiðslurnar 697 t.kr. Við ársenda vóru 709 t.kr. støðlaðar sum stuttfreistað skuld. Útreiðslurnar 2019 til 2021 hava verið 1.040 t.kr.

Í 2021 vóru lønir til granskaran 589 t.kr., av teimum vóru 530 t.kr. fluttar til rakstrarjáttanina hjá Fróðskaparsetrinum, og sambært Fróðskaparsetrinum var orsøkin, at stovnurin stuðlar verkætlanini. 700 t.kr. vóru inntøkuførdar í 2021, og 31. desember 2021 vóru 1.061 t.kr. støðlaðar í fíggjarstøðuni.

Vanliga fær Fróðskaparsetrið umsitingargjald fyri at hýsa verkætlanum. Sambært stovninum vóru eingi umsitingargjøld í fíggingini frá Bakkafrosti. Fróðskaparsetrið hevði latið arbeiðsorku til fíggjarligu umsitingina til tess at stuðla undir samstarvið.

Verkætlanin var ikki liðug, og endalig frágreiðing ikki gjørd. Sambært Fróðskaparsetrinum vóru ávegis frágreiðingar gjørdar á statusfundum millum Fróðskaparsetrið og Bakkafrost.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at verkætlanin heldur fram við nýggjum sáttmála.

### Onnur áogn og stuttfreistað skuld

Tá ið stuðul verður goldin afturút, verður brúkta upphæddin bókað í fíggjarstøðuni sum “Onnur áogn”. Stuðul, sum er goldin frammanundan, verður skrásettur sum “Ikki inntøkuført”.

Seinastu 5 árini hava áogn og stuttfreistað skuld verið:

*t.kr.*

| | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Onnur áogn | 6.895 | 6.889 | 7.820 | 10.526 | 809 |
| Ikki inntøkuf. - gransk.styrk. og gávur | -11.305 | -17.529 | 24.237 | -31.476 | -21.168 |

Í 2021 vóru brúktar 10,5 mió.kr., sum verkætlanir áttu á hjá stuðulslatarum, og Fróðskaparsetrið hevði fingið 31,5 mió.kr., sum ikki vóru brúktar. Tað bar tó ikki til at siga, at nettoupphæddin var “ikki inntøkuført”, tí t.d. í roknskapinum hjá onkrari verkætlan, vit kannaðu, var salda á báðum kontunum.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fróðskaparsetrið í 2022 hevur mótroknað ímillum ogn og skuld á verkætlanum, soleiðis at í dag er bert tann ogn og skuld, sum er verulig, víst á fíggjarstøðuni. Eisini verða verkætlanir regluliga gjørdar upp, soleiðis at fíggjarstøðan vísir røttu ognina og røttu skyldurnar.

## 6.16 Studni (LG 2021/207-237)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av játtanini til lestrarstuðul á høvuðskontu 7.23.7.04, undirkontu 01 “Lestrarstuðul”, og játtanini til lestrarlán á høvuðskontu 7.23.7.05 “Lestrarlán”.

### Reglur

Heimild at rinda stuðul v.m. er í Ll. nr. 36/2007 “um lestrarstuðul”, og nærri ásetingar eru í K. nr. 107/2011 “um lestrarstuðul”.

Stuðul til lestur í Føroyum verður veittur teimum, ið eru lestrarvirkin og annars lúka treytirnar í lógini. Lestrarvirkin eru lesandi, sum ikki eru meira enn eitt ár afturúr í lesnaðinum í mun til ásettu lestrartíðina. Harafturat skulu lesandi møta til frálæruna, lata inn kravdar uppgávur og fara til próvtøkur eftir reglunum á útbúgvingarstovninum.

Stuðul kann latast til útbúgvingar, ið eru skipaðar sum heiltíðarlestur, eru minst 3 fylgjandi mánaðir til longdar, eru óløntar og enda við próvtøku.

Lesandi á miðnámi kunnu fáa hægra studningin, tá ið tey kunnu skjalprógva, at tey hava leiguútreiðslur, sum tey rinda.

Studni kann krevja stuðul aftur, um lesandi hevur givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar, hevur tagt burtur týðandi upplýsingar ella ikki lýkur treytirnar fyri stuðli annars.

Frá 1. august 2021 skal útbúgvingarstovnurin hava eftirlit við, um tann lesandi er lestrarvirkin og boða Studna frá hvørt hálvár.

### Roknskaparviðurskifti v.m.
Roknskaparreglugerðin hjá Undirvísingarstýrinum er frá juli 2021. Í august 2022 kunnaði Uttanríkis- og mentamálaráðið um, at reglugerðin var ikki góðkend, men at ráðið fór at avgreiða hana skjótast gjørligt.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur móttikið dagførda roknskaparreglugerð, ið ráðið ikki hevur viðgjørt enn.

Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra mannagongdirnar hjá Studna um innanhýsis eftirlit og arbeiðsgongdir, og umhugsa hvørt tær tryggjaðu, at umsitingin var trygg, og at útgjøld av studningi og lánum vóru røtt.

### Lestrarstuðul
Roknskapartøl 2018 til 2022:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Útbúgvingarstudningur | 95.561 | 94.969 | 94.341 | 100.179 | 100.035 |
| ÚSUN | 8.942 | 8.956 | 8.810 | 9.254 | 7.931 |
| Ferðastudn. uttanlands | 2.182 | 2.024 | 1.832 | 1.423 | 1.661 |
| Verkætlanarstudningur | 327 | 162 | 67 | 73 | 246 |
| **Tilsamans** | **107.011** | **106.110** | **105.049** | **110.929** | **109.873** |

Í talvuni niðanfyri er útbúgvingarstudningurin útgreinaður:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Studningar til hægri útbúgvingar | 54.523 | 54.224 | 56.174 | 60.606 | 60.714 |
| Studn. til miðnámsútb., heimabúgvandi | 18.989 | 20.648 | 20.489 | 21.257 | 21.553 |
| Studn. til miðnámsútb., útibúgvandi | 14.339 | 13.368 | 11.533 | 11.299 | 9.691 |
| Bókastudningur | 2.901 | 2.861 | 3.052 | 3.130 | 3.279 |
| Vistarhaldsstudningur | 824 | 695 | 609 | 724 | 1.180 |
| Ferðastudningur innanoyggja | 3.984 | 3.173 | 2.483 | 3.094 | 3.574 |
| **Tilsamans** | **95.561** | **94.969** | **94.341** | **100.109** | **99.991** |

#### *Treytir fyri hægri stuðli til miðnámslestur*
Miðnámslesandi kunnu fáa hægri studning, um tey ikki búgva heima hjá foreldrum, men t.d. leiga. Studni hevði spurt Landsfólkayvirlitið, hvussu reglurnar um flyting av bústaði skuldu tulkast. Landsfólkayvirlitið vísti m.a. á, at skrásetti bústaðurin í Landsfólkayvirlitinum var at rokna sum bústaður hjá persóni, og at TAKS, Almannaverkið, Landssjúkrahúsið og Heilsutrygd nýttu upplýsingarnar hjá fólkayvirlitinum sum grundupplýsingar í sínum skráum og málsviðgerð.

Uttanríkis- og mentamálaráðið helt eisini í fyrstu atløgu, at í hesum sambandi var lógin um fólkayvirlit yvirskipað, og neyðugt var ikki við serstøkum ásetingum í kunngerð um lestrarstuðul. Eftirsíðan hevði Uttanríkis- og mentamálaráðið boðað Studna frá, at ráðið hevði viðgjørt spurningin av nýggjum, og metti, at heimild var ikki í lógini um lestrarstuðul at seta sum treyt, at umsøkjari boðaði frá flyting hjá fólkayvirlitinum fyri at fáa hægra stuðulin.

Undirvísingarstýrið ynskti at fáa lógina broytta, soleiðis at skrásetti bústaðurin í Landsfólkayvirlitinum er at rokna sum bústaður hjá persóni, ið fær lestrarstuðul, eins og tað var hjá øðrum almennum stovnum.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Studni hava umrøtt spurningin um, hvørt lógar- ella kunngerðarbroyting er neyðug til tess at styrkja eftirlitsarbeiðið hjá Studna viðvíkjandi útibúgvandi. Mett er, at

tað ikki er neyðugt við lógarbroyting. Eitt uppskot til broyting í kunngerð um lestrarstuðul er orðað og verður ætlandi sent til hoyringar í næstum.

***Uppskot til kunngerð um lestrarstuðul verður ætlandi sent til hoyringar í næstum.***

## Lestrarlán

Lestrarlán kunnu latast lesandi, 18 ár og eldri. Lánini verða rentað við 2% p.a. í útbúgvingartíðini og við 3% p.a. yvir diskontuni eftir lokna útbúgving.

Yvirlit yvir lán, afturrindan av lánum og játtan:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tilskot til einstaklingar | 39 | 147 | 33 | 51 | 44 |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti | -1.770 | -1.937 | -1.749 | -1.546 | -1.378 |
| Útlán v.m. | 7.386 | 8.466 | 6.483 | 6.238 | 6.033 |
| Afturgjaldan av útlánum v.m. | -10.854 | -11.867 | -12.381 | -12.394 | -9.658 |
| **Tilsamans** | **-5.199** | **-5.191** | **-7.614** | **-7.649** | **-4.959** |
| *Játtan* | *-3.900* | *-4.500* | *-4.500* | *-6.500* | *5.000* |

Lesandi byrja vanliga at gjalda aftur eitt ár eftir, at útbúgvingin er lokin ella steðgað. Lánini skulu rindast aftur við í minsta lagi 300 kr. um mánaðin og í mesta lagi í 15 ár.

Hevði skuldari ikki goldið, tá ið Studni hevði sent tríggjar rykkjarar, boðaði Studni viðkomandi skrivliga frá, at skuldin var søgd upp til skaðaleysa afturrindan.

TAKS heintaði eftirstøður inn, um skuldari búði í Føroyum, og boðaði Studna frá, um skuldari flutti av landinum. Tá kallaði Studni kravið aftur.

Krøv viðvíkjandi skuldarum, ið búðu uttanlands, sendi Studni til advokat, sum antin gjørdi avtalur við skuldarar, ella sendi hann krøvini t.d. til útlendskan advokat.

### *Eftirstøður*

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum áognir av lánum, sum vóru bókaðar á høvuðskontu 7.23.7.05 “Lestrarlán”. Í november 2021 vóru 342 lán í eftirstøðu.

Ímillum eftirstøðurnar av lestrarlánum vóru eisini eftirstøður viðvíkjandi ov nógv útgoldnum stuðli, tó at stuðul ikki er játtaður á somu høvuðskontu sum lestrarlán.

### *Reglurnar um í mesta lagi 15 ára afturgjaldstíð*

Reglurnar, um at rinda lán aftur yvir í mesta lagi 15 ár, vóru ikki altíð fylgdar.

Ein skuldari, ið skyldaði 211 t.kr., og skuldi byrja afturgjald í 2014, hevði goldið 37 t.kr. Studni sendi málið til advokat í 2021. Í august 2023 móttekur Studni 500 kr. um mánaðin.

Studni sendi eitt krav til innheintingarfyritøku í 2015, har skuldarin skuldi byrja at gjalda aftur í 2013. Eftirstøðan var 265 t.kr. í 2021. Sambært Studna var kravið sent til advokat í 2018. Skuldin er í dag 187 t.kr. Síðani januar 2019 eru 120 t.kr. goldnar.

Skuldari, sum skuldi byrja afturgjald í 2011, skyldaði 102 t.kr., og hevði goldið 19 t.kr. Kravið var sent til advokat í 2018. Sambært Studna er skuldin framvegis til innkrevjingar hjá TAKS. Síðani juli 2021 hevur Studni móttikið 7 t.kr., og eftirstøðan er 106 t.kr.

Hjá einum skuldara hevði Studni í 2010 sett mánaðargjaldið til 400 kr. Í 2020 sendi stovnurin kravið til TAKS, tá var skuldin 250 t.kr. Eftirstøðan var 192 t.kr. í 2021. Sambært Studna er skuldin framvegis til innkrevjingar hjá TAKS.

Ein persónur, sum skuldi byrja afturgjald í 2015, skyldaði 135 t.kr. Studni hevði sent kravið til TAKS í 2018. Viðkomandi hevði higartil goldið 1 t.kr. Sambært Studna er skuldin framvegis til innkrevjingar hjá TAKS, og er í 2023 komin niður um 500 kr.

*Áogn av ÚSUN-lánum*
Áognin vegna ÚSUN-lán v.m. var sambært Studna slakar 11 mió.kr.

Ein skuldari, sum skyldaði 125 t.kr., var settur at gjalda 500 kr. um mánaðin til ár 2054. Studni hevði havt nógv samskifti við hann, tí hann helt ikki fyrstu avtaluna um at rinda 1.500 kr. um mánaðin. Studni hevði eftirsíðan boðað honum frá, at lánið fór at verða uppsagt, og kravið sent til advokat at heinta inn. Sambært Studna er skuldin í dag 117 t.kr., og kravið er sent advokati í mars 2023.

Í 2022 kunnaði Undirvísingarstýrið um, at tá ið Studni lækkar avdrátt, gera tey avtalu við skuldara um tað í styttri tíðarskeið, og boða samstundis frá, at gjaldið skal hækkast aftur, soleiðis at øll skuldin er goldin eftir 15 árum.

Sambært Barna- og útbúgvingarmálaráðnum hevur Studni broytt siðvenju, soleiðis at allar fráboðanir um lækking av avdrátti eru skrivligar, og at skuldarin fær at vita, at gjaldið møguliga hækkar aftur, soleiðis at skuldin verður goldin eftir 15 árum.

### Ov nógv útgoldin lestrarstuðul

Sambært Studna kravdi stovnurin ov nógv útgoldnan studning aftur frá teimum, ið høvdu fingið studning av órøttum, t.d. tá ið tey ikki høvdu verið lestrarvirkin, og ikki høvdu boðað Studna frá.

Í 2021, 2020 og 2019 vóru ávikavist 515 t.kr., 802 t.kr. og 842 t.kr. goldnar ov nógv í studningi. Somu ár var áognin ávikavist 336 t.kr., 904 t.kr. og 405 t.kr.

Ein persónur hevði fingið studning í 3 ár, uttan at hava lokið treytirnar. Í 2020 gjørdi hann sjálvbodna sátt við Studna um ov nógv útgoldnan studning, tilsamans 158 t.kr. Seinni í 2020 sendi Studni málið til TAKS at heinta inn.

Landsgrannskoðanin ivaðist í, um reglurnar at senda falna skuld til innheintingar hjá TAKS fataðu um "ov nógv goldnan studning".

Í 2022 hevur landsstýrismaðurin svarað, at § 21, stk. 1-4, í lógini "um lestrarstuðul" einans fevnir um afturgjald av láni og um falnar rentur og avdráttir sambært § 21, stk. 1.

***Uppskot um at broyta lógina um lestrarstuðul, sum heimilar TAKS at krevja stuðul aftur.***

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur, í samráði við Studna, orðað uppskot at broyta lógina um lestrarstuðul, sum heimilar TAKS at krevja ov nógv útgoldnan studning aftur.

Studni hevði ikki altíð kravt ov nógv goldnan studning aftur, tó at móttakari ikki hevði lokið treytirnar fyri lestrarvirkni. Sambært lógini hevur lesandi ikki rætt til studning, m.a. um viðkomandi er meira enn eitt ár afturút við lestrinum.

Í einum málið var eftirstøðan 53 t.kr. Málið var sent TAKS í 2020, og sambært Studna vóru slakar 18 t.kr. goldnar. Persónurin hevði lisið í trý ár, og staðið ECTS-stig, ið svaraðu til minni enn eitt árs lestur. Spurt, hví tey ikki høvdu kravt ov nógv goldnan studning aftur, svaraði Studni, at viðkomandi hevði lisið í trý ár, fingið 34 útgjøld, og at upplýsingar úr Próvbókini vóru ikki tøkar hjá Studna tá.

Í 2022 kunnaði Undirvísingarstýrið um, at Studni hevði ikki fingið boð um, at tann lesandi ikki hevði staðið nóg nógv ECTS-stig, og at útbúgvingarstovnurin hevði ábyrgd av at vátta lestrarvirkni sambært § 9 í K. nr. 107/2011. Undirvísingarstýrið vísti á, at eftir at Studni partvíst hevði fingið talgilda atgongd til Próvbókina hjá Fróðskaparsetrinum, vóru møguligar ábendingar um, at einstøk lesandi ikki høvdu lokið treytirnar um lestrarvirkni, og sostatt var neyðugt at hyggja at tí aftur í tíð.

Sambært Undirvísingarstýrinum kundi Studni ikki altíð ganga út frá, at Próvbókin var dagførd, og harafturat var eisini neyðugt at menna skipanina hjá Studna, soleiðis at mánaðarlig útgjøld vóru hildin saman við staðin ECTS-stig. Neyðugt var tí at ganga ígjøgnum hvørt einstakt mál, saman við Fróðskaparsetrinum, áðrenn krav um ov nógv útgoldnan stuðul verður sent. Hetta arbeiðið kravdi tíð og var ikki gjørt enn. Undirvísingarstýrið helt eisini, at altavgerandi var, at Fróðskaparsetrið frameftir raðfesti at dagføra Próvbókina á ein tílíkan hátt, at hon kundi nýtast sum prógv fyri lestrarvirkni.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum greitt frá, at Studni og Fróðskaparsetrið hava gjøgnumgingið hvørt einstakt mál, áðrenn krøv um ov nógvan útgoldnan stuðul vóru send út. Fróðskaparsetrið hevur raðfest at dagføra Próvbókina, og mánaðarligu útgjøldini verða hildin saman við staðin ECTS framleiðslu. Í heyst tekur Kervi+ við ístaðin fyri Próvbókina, sum síðani verður tikin av stigvíst. Kervi+ er nýggja lestrarfyrisitingarskipanin hjá føroyska undirvísingarverkinum.

Ein persónur skyldaði upprunaliga 381 t.kr., og eftirstøðan var 90 t.kr. Sambært Studna stavaði skuldin frá gjaldskúlaláni, sum var uppskrivað og lagt um frá studningi, umframt rentur. Skuldin var send til innheinting hjá advokati, sum hevði havt tað hjá advokati í útlandinum, har skuldarin búði. Málið hevur verið í fútarættinum, sum í skrivi hevur sett 10 ára fyrningarfreist at vera í 2031.

Undirvísingarstýrið greiddi frá, at uppruddingararbeiði var byrjað viðvíkjandi krøvum um afturgjald av ov nógv goldnum studningi, sum var fingin orsakað av, at móttakari ikki hevði lokið treytirnar fyri lestrarvirkni.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Studni hevur gjøgnumgingið stuðulsútgjøldini fyri síðstu 5 árini. Studni hevur sent ætlanarskriv og afturgjaldskriv til 30 persónar, sum skulu rinda ov nógv útgoldnan stuðul aftur.

Landsstýrismaðurin vísti í 2022 á, at Próvbókin hjá Fróðskaparsetrinum var eitt amboð, sum Studni á virknan hátt brúkti, fyri at finna út av, um lesandi vóru lestrarvirkin og høvdu rætt til lestrarstuðul. Tað var ein trupulleiki, at Próvbókin var ikki ment beinleiðis til tørvin hjá Studna, og síðsti parturin av menningararbeiðinum hjá Studna, sum skuldi koyra saman upplýsingarnar frá Próvbókini, var ikki liðugur; tí kundi arbeiðið við Próvbókini vera umsitingarliga tungt.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at skipanin hjá Studna er ment soleiðis, at Studni kann taka upplýsingar út um lesandi, sum ein ávísan dag eru meira enn 60 ECTS afturút, og tískil ikki lúka treytirnar um lestrarvirkni. Tvær ferðir um árið verður listi sendur Fróðskaparsetrinum til eftirkanningar.

### Heimild at heinta inn sambært lógini um lestrarstuðul

Um lántakari ikki lýkur lánitreytirnar ella letur vera við at gjalda falnar rentur og avdráttir, kann skuldin sigast upp til skaðaleysa afturrindan sambært § 21, stk. 1.

Sambært § 21, stk. 2 og 3, kann Studni biðja TAKS heinta inn skuld við at halda aftur í A-inntøkum og panta. Í 2003 gjørdi Studni avtalu við TAKS um innheinting av eftirstøðu. Sambært reglugerð hjá Fíggjarmálaráðnum frá 2. apríl 2003 heintar TAKS inn eftirstøður, sum viðkomandi stovnur (áognari) sambært viðkomandi lóggávu kann senda til innheintingar.

Spurt, hvar heimild var ásett at senda krøv um ov nógv útgoldnan studning til TAKS at heinta inn, svaraði Studni, at stovnurin helt, at alt, sum lesandi skyldaðu, var skuld.

Í 2022 greiddi Undirvísingarstýrið frá, at ov nógv útgoldin studningur er simpult krav, og fellur sostatt til gjaldingar beinanvegin. Undirvísingarstýrið fór at biðja Uttanríkis- og mentamálaráðið broyta lógina, soleiðis at heimild fór at verða at gera sjálvbodna semju við móttakara av ov nógv útgoldnum studningi, og at Studni sambært § 3, stk. 4, eisini

skuldi fáa heimild at renta og innkrevja krøvini hjá TAKS, bæði tey simplu krøvini og um undirskrivað verður sjálvboðin sátt.

Í 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Studni kundi krevja ov nógv goldnan stuðul aftur, sambært § 3, stk. 4, í lógini, um lestrarstuðul var útgoldin grundað á skeivar ella villleiðandi upplýsingar, sum tann lesandi hevði givið Studna, ella um tann lesandi hevði tagt burtur týðandi upplýsingar ella ikki leyk treytirnar fyri stuðli annars.

Landsstýrismaðurin vísti á, at orðaljóðið í § 21, stk. 1-4, fevndi einans um lán, og tískil ikki um lestrarstuðul. Ráðið helt tí, at Studni kundi krevja skuld sambært § 3, stk. 4, aftur á privatrættarligum grundarlagi, tað var, sum við øllum øðrum vanligum peninga-krøvum, við at Studni heitti á skuldaran um at rinda innan rímiliga tíð, og um tað ikki bar á mál, við at beina málið til advokat til innkrevjingar. Í síðsta enda mátti málið tá avgerast við rættarúrskurði.

Uttanríkis- og mentamálaráðið var sinnað at kanna, um leisturin í § 21 um afturrindan av láni eisini var skynsamari, tá ið um lestrarstuðul galt, ið próvfast var útgoldin á skeivum grundarlagi, ella sum móttakarin annars ikki hevði havt rætt til sambært § 3, stk. 4.

Sambært landsstýrismanninum umrøddi ráðið við Studna, hvørt tað var neyðugt við lógar- ella kunngerðarheimild, fyri at tryggja, at Studni kundi gera sjálvbodna sátt við skuldara, ella um heimild longu var fyri tí á privatrættarligum grundarlagi. Hann legði afturat, at sjálvboðin sátt ikki neyðturviliga merkti, at partur av skuldini verður eftirgivin.

Uttanríkis- og mentamálaráðið helt, at eftirgeving av skuld til tað almenna, til minni enn áljóðandi virði, krevur lógarheimild, t.d. eins og TAKS hevur sambært § 1, stk. 4, í Ll. nr. 93/1993 um gjøld o.t. fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Barna- og útbúgvingarmála-ráðið hevur umrøtt spurningin saman við Studna og orðað eitt uppskot til lógarbroyting.

## Fíggjarstøða

### *Fíggjarligur útbúnaður*

Lestrarlánini og áognin av ov nógv útgoldnum stuðli eru skrásett sum fíggjarligur útbúnaður:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Útlán (primo) | 75.637 | 72.169 | 68.768 | 62.870 | 56.715 |
| Útlán (tilgongd) | 7.386 | 8.466 | 6.483 | 6.238 | 3.033 |
| Útlán (frágongd) | -10.854 | -11.867 | -12.381 | -12.393 | -9.658 |
| **Tilsamans** | **72.169** | **68.768** | **62.870** | **56.715** | **53.090** |

Í tilgongdini av lánum í 2021 eru 4 mió.kr. vanlig lán til lesandi, 1,5 mió.kr. rentur og 700 t.kr. eru ÚSUN gjaldskúlalán.

Í teimum 56,7 mió.kr. í 2021 eru lán, eftirstøður av lánum, ov nógv útgoldin stuðul og upphæddir, sum advokatur hevði heintað inn úrslitaleyst.

Í november 2021 vóru slakar 2,7 mió.kr. til innheintingar hjá TAKS, og sambært uppgerð frá advokatinum vóru slakar 1,3 mió.kr. úrslitaleyst innheintaðar, og Studni hevði markað krøvini sum óvirkin.

Studni hevði ikki sundurgreinað áognina í fíggjarstøðuni. Tað sást heldur ikki, hvussu gomul skuldin var, hvussu stór virðisleysu krøvini vóru, ella hvussu nógv var avskrivað. Studni renturoknaði lán, men ikki studning, sum lesandi vóru kravd at rinda aftur. Sambært Studna var eftirstøðan av lánum og ov nógv útgoldnum studningi 9,2 mió.kr. tilsamans.

Studni vísti á, at tað hevði ongantíð verið nakað ynski um at útgreina fíggjarstøðuna. Studni hevði heldur ongantíð sett av ímóti tapi av skuldarum. Studni helt tað ikki bera til, uttan at tey høvdu mannagongdir t.d. um at eftirstøða, eldri enn eitt ávíst, kundi avsetast.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at komið er ikki á mál við at greina fíggjarstøðuna betur. Studni hevur samskift við veitaran av útgjaldskipanini. Talan er um størri dagføringar av skipanini, og arbeitt verður í løtuni við at greina kostnaðin av at menna eina nýggja skipan. Helst er betri at bíða og gera neyðugu tillagingarnar í nýggju skipanini.

### Umsiting av játtanum á høvuðskontum

Ov nógv útgoldin lestrarstuðul var ikki bókaður á somu høvuðskontu, t.e. á høvuðskontu 7.23.7.04 "Lestrarstuðul", sum játtanin til stuðul er.

Undirvísingarstýrið tók undir við, at áognin av ov nógv útgoldnum stuðli eigur at verða bókað í fíggjarstøðuni á høvuðskontu 7.23.7.04. Sambært Studna fór stovnurin at kanna, hvussu áognin kundi skrásetast á rætta høvuðskontu.

Studni mótbókaði "ov nógv útgoldnan stuðul" á høvuðskontu 7.23.7.04 "Lestrarstuðul", undirkontu 01, og bókaði upphæddina sum veitt lán á høvuðskontu 7.23.7.05 "Lestrarlán". Hesin bókingarháttur gjørdi, at feilir vóru í báðum roknskapunum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er ikki í samsvari við játtanarreglurnar. Afturgjalding av ov nógv útgoldnum stuðli átti at inntøkuførast á somu høvuðskontu.

Studni broytti "ov nógv útgoldnan stuðul" til lán, tá ið lesandi ikki megnaðu at gjalda upphæddina aftur beinanvegin. Onkuntíð hevur Studni gjørt avtalur við lesandi um at mótrokna ov nógv útgoldnan stuðul frameftir, um tað bar til.

Landsgrannskoðanin vísti á, Studni kundi heldur ikki flyta upphæddir frá einari høvuðskontu til aðra, tá ið tey løgdu "ov nógv útgoldnan stuðul" um til lán.

Undirvísingarstýrið greiddi frá, at tað tøkniliga bar ikki til at umsita ov nógv útgoldnan stuðul á høvuðskontu 7.23.7.04 "Lestrarstuðul". Stýrið sá trupulleikan, sum Landsgrannskoðanin vísti á, og fór tí, saman við Studna, at royna at finna eina loysn, soleiðis at bókað verður á rætta høvuðskontu.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at tað var ein trupulleiki í bókingarháttinum, tá ið ov nógv útgoldin stuðul verður bókaður inn á kontuna fyri lánini.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Studni hevur tikið málið upp við veitaran av skipanini. Tað ber til at tillaga skipanina soleiðis, at Studni hevur eina skipan undir lestrarstuðli, sum minnir um verandi lánsskipan. Leyslig kostnaðarmeting er gjørd, og sambært Studna er neyðugt við eykajáttan til endamálið. ÚS-skipanin krevur fleiri kostnaðarmiklar dagføringar og menning. Besta loysnin er helst at menna eina nýggja skipan frá grundini, í staðin fyri at menna eina gamla skipan, sum ikki nøktar núverandi tørv hjá Studna.

### Samanumtikið um grannskoðanina

Grannskoðanin av umsitingini av lestrarstuðli og -lánum vísti, at umsøkjarar luku treytirnar fyri at fáa studning/lán, t.e. tilknýti til Føroyar, bústað í landinum, aldur v.m. Studni hevði eftirlit við, at útbúgvingarnar vóru góðkendar, at stuðulstíðarskeiðið var rætt við atliti at normeraðari tíð + 1 ár.

Landsgrannskoðanin kundi ikki sanna, at roknskapirnir vóru rættir, m.a. tí at okkara stakroyndir vístu,

- at Studni hevði ikki nóg væl skipað eftirlit við, um studningsmóttakarar vóru lestrarvirknir,
- at Studni hevði ikki fingið neyðug skjalprógv frá hægru lærustovnunum um, at lesandi vóru lestrarvirkin,
- at tó at stovnurin hevði havt beinleiðis samband við Próvbókina hjá Fróðskaparsetrinum í rúma tíð, vóru upplýsingarnar ikki brúktar til at hava eftirlit við lestrarvirkni hjá teimum lesandi, og
- dømi vóru um, at Studni hevði ikki kravt staðfestan "ov nógv útgoldnan stuðul" aftur frá móttakarum.

Aðrar orsøkir, sum eisini gjørdu, at roknskapurin var misvísandi, vóru, at Studni hevði skrásett áognir av ov nógv útgoldnum studningi á skeiva høvuðskontu. Reglurnar um í mesta lagi 15 ára afturgjaldstíð av lánum vóru ikki altíð fylgdar.

Studni vísti á, at stovnurin hevði gott eftirlit við lestrarvirkni. Studni sendi árliga næmingalistar til allar skúlar, og lestrarvirkni var grundað á upplýsingar frá útbúgvingarstovnunum. Studni helt, at skúlarnir hildu sína fráboðanarskyldu.

Nú Studni hevði fingið innlit í Próvbókina, sást, at tað møguliga vóru lesandi, sum kundu hava fingið ov nógv útgoldið í mun til staðin ECTS, orsakað av, at fráboðanir frá Fróðskaparsetrinum ikki vóru komnar, tá ið Studni brúkti váttanarskjøl.

Fyri at fáa endaliga staðfest rættleikan, fór Studni undir at hyggja at Próvbókini 5 ár aftur. Studni vísti eisini á lestrarfyrisitingarskipanina, sum Undirvísingarstýrið var í holt við at menna, og sum miðað var eftir at taka í nýtslu um 2 ár.

Undirvísingarstýrið greiddi frá, at stýrið saman við Studna fór at royna at broyta mannagongdir og finna loysnir á teimum viðurskiftum, sum gjørdu, at Landsgrannskoðanin ikki kundi sanna, at roknskapirnir vóru rættir.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur verið í støðugum samskifti við Studna. Studni hevur saman við Fróðskaparsetrinum lagt stóra orku í at gjøgnumganga lestrarvirkni 5 ár aftur. Komið er á mál, og afturgjaldskriv eru send út. Eisini er skipanin ment soleiðis, at eftirlitið við lestrarvirkni á Fróðskaparsetrinum er vorðið tryggari.

***Studni hevur gjøgnumgingið lánini.***

Studni hevur gjøgnumgingið øll lán, har afturgjaldstíðin er longri enn 15 ár, og gjørt nýggjar avtalur. Skipanin er ment soleiðis, at tað altíð ber til at síggja yvirlit yvir lánini og hava regluligt eftirlit við teimum. Heldur ikki ber longur til at leggja avtalur um afturgjald inn, um afturgjaldstíðin er longri enn 15 ár, ella at mánaðarliga gjaldið er minni enn 300 kr. Studni hevur lagt orku í at gjøgnumganga lánini, umframt at gjøgnumganga stuðulsútgjøldini fyri síðstu 5 árini og krevja ov nógv útgoldnan stuðul aftur.

## 6.17 Yrkisdepilin (LG 2021/207-237)

### 6.17.1 Umsiting av lógarbundnum játtanum

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingini av lønar- og ferðaendurgjøldum til læripláss og gjøld fyri lærusáttmálar.

Heimildin at skipa fyri yrkisútbúgvingum er í Ll. nr. 94/1998 "um yrkisútbúgvingar". Lærupláss gjalda landskassanum 3.000 kr. fyri hvønn góðkendan lærusáttmála. Landskassin endurrindar læruplássum fyri løn, sum læruplássini rinda lærlingum í skúlatíðini. Endurgjaldið er 75% av ásettu minstulønini hjá avvarðandi yrkisfeløgum íroknað frítíðarløn. Landskassin veitir læruplássum 2.600 kr. fyri hvørt skúlaskeið til

ferðaútreiðslur, sum standast av, at lærlingur ikki fær kravda skúlaundirvísing í Føroyum.

### KT-skipan

Til at avgreiða útgjøldini brúkti Yrkisdepilin KT-skipanina, nevnd ÚS-skipanin. Studni útvegaði í sínari tíð skipanina til at umsita lestrarstuðul og -lán. Parturin, sum Yrkisdepilin brúkar, var lítið mentur, síðani skipanin var tikin í nýtslu í 2005.

Yrkisdepilin hevði raðfest at menna verandi skipan, soleiðis at umsitingin av ferða- og lønarendurgjøldum er góðskutryggjað, inntil nýggja Skúlanetið er tøkt.

Í 2020 framdi Elektron KT-skoðan av Yrkisdeplinum sambært rundskrivinum um KT-trygd. 11 tilmælir vóru, harav 6 vóru høgt raðfest, 2 miðal og 3 lágt raðfest. Av teimum 6 høgt raðfestu eru 2 lokað.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Yrkisdepilin er KT-skoðaður í 2022. 4 tilmælir vóru; eingi høg, 3 miðal, harav eitt er lokað, og eitt lágt.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Yrkisdepilin hevði fleiri ferðir spurt Fíggjarmálaráðið, um nýtslan av egnari fíggjarskipan var fata av loyvinum hjá Studna.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Yrkisdepilin hevur ikki fingið svar frá Fíggjarmálaráðnum, um loyvið hjá Yrkisdeplinum til egna fíggjarskipan er fevnt av loyvinum, sum Fíggjarmálaráðið gav Studna í 2002.

Roknskapar- og játtanartøl seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lestrarstuðul, Studningur til læropláss | 14.544 | 12.796 | 18.201 | 26.019 | 19.382 |
| Lestrarstuðul, Gjald fyri lærusáttmálar | -1.131 | -1.125 | -942 | -1.119 | -1.221 |
| Lestrarstuðul, Ferð.end.gj. til læropláss | 800 | 861 | 676 | 1.017 | 1.157 |
| **Tilsamans** | **14.213** | **12.532** | **17.935** | **25.917** | **19.318** |
| *Játtan* | *12.735* | *15.035* | *15.535* | *17.035* | *20.000* |

### Innaneftirlit

Landsgrannskoðanin vísti á, at innaneftirlitið í besta føri hevði verið veikt, og alt handliga arbeiðið í sambandi við útgjøld vísti, at einføld eftirlit, sum kundu havt byrgt fyri feilum, høvdu ikki verið í KT-skipanini.

ÚS-skipanin hevði ikki innbygd eftirlit at byrgja fyri vanligum feilum, so sum at sama upphædd kundi vera goldin út fleiri ferðir, ella at læropláss fingu endurgjald fyri sama lærling sama skúlaskeið meira enn eina ferð.

Sambært Yrkisdeplinum bar ikki til at fáa neyðug yvirlit úr ÚS-skipanini, áðrenn hon var ment í 2020/21, og skipanin hevði ikki nøktandi innbygd eftirlit. Eisini hevði stovnurin avmarkaða játtan til KT-menning, og tí var skipanin ment so við og við. ÚS-skipanin var nú nógv ment við innbygdum kontrollum, og innanhýsis eftirlitið var hert.

### Kanning av útgjøldum

Landsgrannskoðanin kannaði, um lønar- og ferðaendurgjøldini vóru sambært galdandi reglum, og um upphæddirnar vóru rættar.

#### *8 vikurs freistin*

Yrkisdepilin hevði ikki fylgt regluni í § 4 í K. nr. 63/2003, um at umsóknir um lønar- og ferðaendurgjøld skuldu sendast stovninum seinast 8 vikur eftir, at lærlingurin var komin aftur av hvørjum einstøkum skúlaskeiði. Stovnurin hevði tí rindað læruplássum endurgjøld langt aftur í tíð; og tað kundi eisini hava havt við sær, at feilir vóru í útgjøldum.

Frá 1. desember 2021 broytti Yrkisdepilin siðvenju, soleiðis at umsóknir, sum ikki komu inn rættstundis, vóru ikki viðgjørdar.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at eftir at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði gjørt vart við, at Yrkisdepilin ikki fylgdi reglunum í kunngerðini um 8 vikurs freist, boðaði ráðið stovninum frá, at freistin á 8 vikur var bindandi, og at Yrkisdepilin hevði ikki heimild at rinda endurgjald, tá ið umsókn kom ov seint.

*Lønarendurgjald*
Fyri at fáa lønarendurgjald vátta læurupláss fyri Yrkisdeplinum, at tey hava goldið lærlingum í minsta lagi minstulønina sambært galdandi lønarsáttmála, og at skúladagar og læruár samsvara.

Landsgrannskoðanin spurdi, um Yrkisdepilin hevði umhugsað at fáa lærupláss at upplýsa, hvussu nógv tey høvdu goldið lærlingum í løn og frítíðarløn fyri skúlaskeið, ið tey søktu um endurgjald fyri. Yrkisdepilin hevur eftirsíðan broytt oyðubløðini soleiðis, at lærupláss upplýsa, hvørjum arbeiðsmarknaðarsáttmála lærlingur er løntur eftir, og um lærlingur er fastløntur ella tímaløntur.

Feilir vóru í øllum málunum, ið Landsgrannskoðanin kannaði, og øll læruplássini høvdu fingið ov lítið endurgjald. Yrkisdepilin hevði brúkt skeivar lønartalvur, hevði goldið frítíðarløn eftir ymiskum satsum, og eisini var feilur í rokniarkinum, sum gjørdi allar upphæddirnar skeivar. Øll høvdu harvið fingið ov lágan dagstakst.

Afturat hesum feilunum hevur Yrkisdepilin mest sannlíkt goldið skeivar upphæddir til tey, ið høvdu søkt um lønarendurgjøld aftur í tíð og fyri fleiri skúlaskeið í senn.

Í februar 2022 kunnaði Yrkisdepilin um, at feilirnir í rokniarkinum, sum tey rokna dagstakstirnar eftir, nú vóru rættaðir. Stovnurin vísti eisini á, at ÚS-skipanin megnaði ikki at brúka fleiri takstir samstundis, t.v.s. at um løn hjá lærlingi broyttist, ímeðan viðkomandi var í skúla, megnaði skipanin bert at brúka ein takst fyri alt tíðarskeiðið. Yrkisdepilin hevði tikið stig til at menna skipanina, soleiðis at tað verður broytt, og legði stovnurin afturat, at einki fór at verða goldið út, fyrr enn tað var rættað.

Sambært Yrkisdeplinum hevði stovnurin hert innanhýsis eftirlitið við áseting av lønartakstum, og biðið arbeiðsgevarar boða stovninum frá, tá ið nýggjar avtalur vóru undirskrivaðar á arbeiðsmarknaðinum, og nýggir takstir tí skuldu skrásetast í ÚS-skipanini.

*Ferðaendurgjald*
Yrkisdepilin hevði rindað læruplássum endurgjald fyri ferðir hjá lærlingum, uttan at kanna, um læruplássini høvdu goldið fyri ferðaseðlar.

Yrkisdepilin bað Uttanríkis- og mentamálaráðið um ráð, tí stovnurin ætlaði at broyta oyðublaðið viðvíkjandi ferðaendurgjaldi, tí lærlingar, í tíðini við koronufarsóttini, tóku skúlaskeið við danskar skúlar á netinum, og lærupláss høvdu tí ikki útreiðslur av at rinda ferðaseðlar.

Uttanríkis- og mentamálaráðið vísti á, at tað var ikki samsvar ímillum ásetingarnar í lógini og kunngerðini. Sambært lógini skuldi lærupláss hava havt útreiðslur av at rinda fyri ferðir hjá lærlingunum, meðan tað í kunngerðini var einasta treyt, at skúlagongdin ikki kundi takast í Føroyum. Ráðið mælti tí stovninum frá at broyta oyðublaðið, uttan at kunngerðin fyrst verður broytt.

Í 2022 kunnaði Uttanríkis- og mentamálaráðið um, at ráðið arbeiddi við at lýsa málið um ferðaendurgjald. Ráðið miðaði ímóti at fáa eina áseting um, at ferðaendurgjald einans verður goldið, tá ið lærlingur er noyddur at fara uttanlands fyri at fáa ta til læruna hoyrandi skúlagongd, og at lærlingurin hevur verið uttanlands á skúlaskeiði.

## Samanumtikið um grannskoðanina

Samanumtikið var niðurstøðan hjá Landsgrannskoðanini, at roknskapurin fyri lønar- og ferðaendurgjøld var ikki rættur, tí:

- Yrkisdepilin hevði øll árini brúkt eina skipan, sum ikki roknaði rætt lønar-endurgjald.
- Stovnurin hevði ikki syrgt fyri, at lønarendurgjaldið var sambært sáttmálum og lønartalvum, ið vóru galdandi á arbeiðsmarknaðinum, tó at tað var greitt ásett í lógini, at endurgjaldið skuldi vera 75% av sáttmálalønini tað tíðarskeiðið, lærlingurin hevði verið í skúla.

Landsgrannskoðanin dugdi heldur ikki at síggja, at heimild var at endurrinda læru-plássum fyri ferðaútreiðslur, tey ikki høvdu havt.

Í 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði viðgjørt frágreiðingina frá Landsgrannskoðanini saman við Yrkisdeplinum, og kundi samanum-tikið siga, at:

- ÚS-skipanin, sum Yrkisdepilin hevði brúkt síðani 2005 til at rinda út lønar- og ferðaendurgjøld, var nógv ment seinastu tvey árini, og eftir bestu sannføring var skipanin nú før fyri at rinda út røtt endurgjøld í samsvari við lógarverkið.
- Teir feilir, sum Landsgrannskoðanin vísti á, vóru rættaðir, eins og arbeiðs-gongdir í Yrkisdeplinum í sambandi við viðgerð og útgjald av lønar- og ferða-endurgjøldum nú vóru greitt lýstar. Samstundis var innanhýsis eftirlitið í Yrkis-deplinum nógv hert.
- Saman við Yrkisdeplinum var arbeitt við at lýsa málið um ferðaendurgjaldið. Miðað var ímóti at fáa lógarverkið broytt, so ferðaendurgjald einans varð goldið, tá ið lærlingur hevði verið uttanlands á skúlaskeiði.

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at málið um ferðaendurgjald nú er lýst, men enn er lóggávan ikki tillagað. Yrkisdepilin rindar ikki longur ferðaendurgjald til arbeiðsgevara, um lærlingur hevur tikið skúlaskeiðið umvegis alnótina. Yrkisdepilin hevur tillagað oyðublaðið, sum danskir skúlar fylla út fyri luttøkuna av føroyskum lærlingum, sum taka skúlagongdina í Danmark. Skúlarnir skráseta, um lærlingarnir hava verið í skúla ella um skúlaskeið eru tikin umvegis alnótina, og arbeiðsgevararnir brúka tillagaða oyðublaðið til at søkja um ferða- og lønarendurgjøld.

## Hendingar eftir grannskoðanarlok

*Avsetingar til lønarendurgjøld aftur í tíð*

Stovnurin hevði broytt roknskapin munandi, eftir at grannskoðanin var gjørd. Í mars 2022 bað Yrkisdepilin Gjaldstovuna bóka 300 t.kr. í útreiðslum til lønarendurgjøld. Yrkisdepilin vísti til, at gjøldini vóru skrásett til útgjaldingar í skipanini í 2018 og 2019, men av onkrari orsøk vóru tey ikki goldin út.

7. apríl 2022 bað Yrkisdepilin Gjaldstovuna bóka útreiðslur fyri 6,5 mió.kr. í 2021 vegna skyldug lønarendurgjøld. Upphæddin var støðlað í fíggjarstøðuni. Sambært Yrkis-deplinum var orsøkin, til at tey avsettu so stóra upphædd, at stovnurin hevði ikki handhevja regluna um 8 vikurs freist at søkja um endurgjald, sum ásett í K. nr. 63/2003.

Tá ið Yrkisdepilin ikki hevði hildið reglurnar um tíðarfreistir, ið læupláss høvdu at søkja um lønar- og ferðaendurgjøld, vóru roknskapirnir fyri undanfarin ár ikki rættir.

Játtanin til lønar- og ferðaendurgjøld er lógarbundin játtan. Sambært § 13, stk. 3, í roknskaparkunngerðini skulu útreiðslur, ið ikki stava frá vørum og tænastuveitingum, skrásetast, so skjótt, upphæddin kann gerast upp, og í seinasta lagi, tá ið goldið verður.

Játtanin til studning til læupláss er hækkað 3,5 mió.kr. við eykajáttanarlóg fyri oktober 2021, sum er samtykt 25. november 2021. Í álitinum frá fíggjarnevndini stendur m.a.,

at *“óvissa er um upphæddina fyri lønarendurgjald til lærupláss, tí hendan er grundað á, at Yrkisdepilin er í holt við at broyta mannagongdina viðvíkjandi tíðarfreistini fyri, nær eitt lærupláss kann fáa endurgoldið útreiðslur í sambandi við skúlauppihald hjá lærlingum. Yrkisdepilin fer í framtíðini at stramma upp uppá tíðarfreistirnar.”*

Í august 2023 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Yrkisdepilin í 2021 fór undir eina tilgongd, har freistin á 8 vikur til at søkja um ferða- og lønarendurgjald, eftir at lærlingur hevði lokið skúlaskeið, skuldi praktiserast, sum ásett í kunngerð. Tíðarfreist varð givin fyritøkunum, har tær kundu senda inn umsóknir eldri enn 8 vikur.

Hesar umsóknirnar vóru savnaðar saman, og peningurin goldin út í apríl árið eftir (2022), eftir at ÚS-skipanin var ment, soleiðis at útgjaldið fyri gomlu umsóknirnar var rætt og eftir lønarsatsum, sum vóru galdandi, tá ið lærlingar høvdu verið í skúla. ÚS-skipanin megnaði ikki hetta í 2021, og tí mátti hon mennast, áðrenn umsóknirnar kundu útgjaldast. Skipanin var liðugt ment í apríl 2022. Yrkisdepilin samskifti við Gjaldstovuna um, hvussu tað skuldi gerast roknskaparliga.

***8 vikurs freistin verður ikki brúkt.***

Eftirfylgjandi vístu kærur frá fyritøkum, at lógarheimild ikki var fyri at nokta umsóknum, sum vórðu sendar Yrkisdeplinum, eftir at freistin á 8 vikur var farin. Tí verður freistin ikki brúkt í dag.

### 6.17.2 Stovnsroknskapur

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Yrkisdeplinum. Játtanin er á høvuðskontu 7.11.1.09 “Barna- og útbúgvingarmálaráðið”, undirkontu 21 “Yrkisdepilin”.

Yrkisútbúgvingarráðið virkar undir lógini um yrkisútbúgvingar. Ráðið viðger mál um arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingar, og ger tilmæli til landsstýrismannin um hvussu økið kann mennast. Ráðið hevur í minsta lagi fýra fundir um árið.

Landsstýrismaðurin velur formann fyri Yrkisútbúgvingarráðið, og velur 8 aðrar limir eftir tilmæli frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, fýra frá hvørjum parti. Valskeiðið er 4 ár. Yrkisskúlar eru umboðaðir og hava talurætt í Yrkisútbúgvingarráðnum, men ikki atkvøðurætt.

Yrkisútbúgvingarráðið velur Yrkisnevndina fyri 4 ár í senn eftir tilmæli frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, tvey umboð fyri arbeiðstakarar og tvey fyri arbeiðsgevarar.

Yrkisnevndin hevur ábyrgd av ymiskum uppgávum í sambandi við læru og skúlagongd hjá lærlingum. Hon tekur avgerðir um læruplássgóðkenningar, útbúgvingarinnihald í einstøku yrkisútbúgvingunum og um stytting/leinging av útbúgvingartíðini. Um lærupláss og lærlingar ikki semjast, tekur nevndin sær eisini av tí.

Yrkisdepilin er sambandið ímillum arbeiðsmarknaðin og stjórnarráðið á yrkisútbúgvingaøkinum. Stovnurin umsitur yrkisútbúgvingar, vaksnamannalæru og ferða- og lønarendurgjøld til arbeiðsgevarar.

Stovnurin er ikki er nevndur í Ll. nr. 94/1998 “um yrkisútbúgvingar” men í kunngerðum. Stovnurin fyrisitur ráðsskipanina sambært kap. 5 í lógini um Yrkisútbúgvingar.

Stór útskifting hevur verið í starvsfólkahópinum á Yrkisdeplinum, sum sambært leiðaranum hevur við sær, at nógv vitan má byggjast upp av nýggjum.

## Roknskaparviðurskifti

Roknskapartøl 2018 til 2022:

*t.kr*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 3.033 | 3.114 | 3.557 | 3.727 | 3.229 |
| Keyp av vørum og tænastum | 721 | 610 | 780 | 1.157 | 697 |
| Keyp av útbúnaði o.a., netto | 161 | 52 | 146 | 156 | 24 |
| Flyt. innt. úr útlandinum | -213 | -158 | 0 | 0 | 0 |
| Innanh. flyt. m. alm. stovn. (útr) | 17 | 0 | 4 | 31 | 31 |
| **Tilsamans** | **3.719** | **3.617** | **4.487** | **5.071** | **3.980** |
| *Játtan* | *3.719* | *3.678* | *4.424* | *4.839* | *3.979* |

Roknskaparreglugerðin er góðkend í februar 2022. Yrkisdepilin hevur í fíggjarstøðuni sett av til væntaðar lønarhækkingar.

### *Samsýningar og lønir*

Í fyrisitingini eru trý starvsfólk í føstum starvi umframt tvey verkætlanarsett starvsfólk. Lærarar á yrkisútbúgvingunum fáa samsýningar fyri at gera uppgávur til sveinaroyndir.

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur lønarmál, um viðkomandi skjøl vóru í málunum, og um lønirnar samsvaraðu sáttmálum. Einki var at finnast at.

### *Keyp av vørum og tænastum*

Yrkisdepilin hevur onga peningastovnskontu ella kassa við kontantum peningi, men stovnurin hevur eitt gjaldkort, sum verður brúkt til eitt nú umboðan.

Landsgrannskoðanin vísti á, at rokningar skulu sendast almennum stovnum talgilt, sambært lógini um talgildar rokningar.

Spurdur, hví Yrkisdepilin brúkar advokathjálp, heldur enn at spyrja løgfrøðingar í ráðnum, svaraði Yrkisdepilin, at tað gera tey, tá ið talan um brátt íkomnar støður, sum krevja skjóta viðgerð, og tí at Barna- og undirvísingarmálaráðið er kærumyndugleiki, og kann tí ikki ráðgeva í kærumálum. Vit hava í august 2023 biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

Vit hava eisini biðið landsstýrismannin um viðmerkingar til, at Yrkisdepilin rindar advokatfelag fyri m.a. at seta starvsfólk (vegleiðara) og lærling í starv.

Yrkisdepilin bað ikki um tilboð frá fleiri, tá ið tey rindaðu fyritøku 48 t.kr. fyri at lýsa krøvini hjá stovninum til møgulina nýggja KT-skipan. Sambært leiðsluni vildu tey hava ein óheftan, sum ikki hevði nakað við nýggju skipanina at gera, og tí leiðslan metti seg ikki at vera føra fyri at skilja krøvini til nýggju skipanina uttan serkøna hjálp. Vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

Sambært Yrkisdeplinum biðja tey um tilboð, tá ið talan er um størri arbeiðir, men ikki tá ið tað eru smáar upphæddir.

Nøkur keyp eru skrásett sum "Umboðan", men tað sæst ikki á skjølunum, hvør er við á fundunum. Landsgrannskoðanin mælti Yrkisdeplinum til at skráseta, t.d. hvør hevur verið við á fundum fyri at tryggja, at útreiðslurnar hoyra til stovnin.

## KT-trygd

Yrkisdepilin hevur sínar skráir hjá KT landsins, og journalin er í Skjalhaldi. Stovnurin er trygdargóðkendur í 2022 sambært rundskrivinum um KT-trygd.

## 6.18 Tjóðpallur Føroya (LG 2020/207-242)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðanina av Tjóðpalli Føroya.

*Fíggjarstøða*
Í fíggjarstøðuni stóðu 250 t.kr. sum ogn hjá Tjóðpallinum. Upphæddin hevði staðið síðani 2016. Sambært Tjóðpallinum stavaði áognin frá einum felags projekti ímillum fleiri partar. Ógreitt var, um upphæddin var røtt. Landsgrannskoðanin mælti til fáa greiði á upphæddini, og krevja tað inn, sum skuldi.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum greitt frá, at sambært frágreiðing frá Tjóðpallinum er málið avgreitt.

*KT-viðurskifti*
Teldurnar hjá Tjóðpallinum vóru knýttar í Landsnet. Á heimasíðuni var ein skipan til at selja talgild atgongumerkir. Atgongumerkjaskipanin fór umvegis atgongumerki.fo, sum var tekniskur veitari.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Tjóðpallurin flokkaði dáturnar, sum stovnurin varðaði av og gjørdi eina váðameting av tí, sum hótti tær dáturnar.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði gjørt avtalu við veitara, ið skuldi hjálpa ráðnum og stovnum undir ráðnum at lúka krøvini í dátuverndarlógini. Arbeiðið fataði m.a. um váðameting, dátuflokking, viðgerðaryvirlit o.s.fr. Landsstýrismaðurin vísti á, at arbeiðið eisini ávirkaði KT-trygdina sum heild, tí at tað var ógjørligt at hava nøktandi dátuvernd, uttan at KT-trygdin eisini var í lagi.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði tikið í brúk skipanina Wired Relation, ið stovnarnir undir ráðnum skuldu brúka til eitt nú at gera váðametingar, dátuflokkingar og viðgerðaryvirlit. Eitt starvsfólk í ráðnum var sett sum DPO fólk fyri stovnarnar, ið vísa til Uttanríkis- og mentamálaráðið. Arbeiðið við at fáa stovnarnar at brúka skipanina var í gongd.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum kunnað um, at sambært frágreiðing frá Tjóðpallinum, er einki hent í málinum.

## 6.19 Tjóðsavnið (LG 2019/207-243)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Tjóðsavninum og umsiting stovnsins av stuðulsjáttanum. Roknskaparreglugerðin var dagførd í 2019, men Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði ikki góðkent hana.

Í 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at roknskaparreglugerðin hjá Tjóðsavninum var enn ikki góðkend. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði fingið eina dagførda roknskaparreglugerð frá Tjóðsavninum, sum ráðið var í holt við at gjøgnumganga.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum kunnað um, at roknskaparreglugerðin er ikki góðkend.

*Umsiting av stuðulsjáttanum*
Landsgrannskoðanin grannskoðaði útgjøldini av stuðli, sum Tjóðsavnið lat bygdasøvnum, mentanarsøguligum skipum, Sjósavninum og listasøvnum.

Tá ið reglur um eftirlit, roknskap, grannskoðan v.m. ikki eru í serligu heimildarlógunum, eru reglurnar í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan galdandi.

Stuðul til bygdasøvn og mentanarsøgulig skip hevur heimild í serligari lóg, men tað hevur stuðulin til Sjósavnið og stuðulin til listasøvn ikki.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at málið um umsitingina av stuðulsjáttanum hjá Tjóðsavninum var umrøtt við Tjóðsavnið. Uttanríkis- og mentamálaráðið samskifti við Fíggjarmálaráðið um møguligar tillagingar av reglunum, ið stuðulin varð umsitin eftir, men arbeiðið var ikki liðugt.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum greitt frá, at einki nýtt er í málinum.

## 6.20 Tjóðskjalasavnið (LG 2021/207-243)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Tjóðskjalasavninum. Í 2022 kannaði Landsgrannskoðanin, um stovnurin hevði bøtt um innaneftirlitið síðani grannskoðanina í 2021.

*Roknskaparreglugerð*
Tjóðskjalasavnið hevði gjørt roknskaparreglugerð, og í februar 2021 sent hana til Uttanríkis- og mentamálaráðið at góðkenna.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum kunnað um, at sambært Tjóðskjalasavninum er roknskaparreglugerðin ikki góðkend.

*Tíðarskráseting*
Starvsfólk kundu eiga ella skylda 2/3 av sínari vikuligu arbeiðstíð. Landsgrannskoðanin mælti enn eina ferð til, at stjórin góðkennir mánaðarligu skrásetingarnar.

Sambært yvirliti yvir tíðarskrásetingar kom tað fyri, at starvsfólk áttu ella skyldaðu fleiri tímar, enn reglurnar loyvdu. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin fylgir rundskrivinum frá 18. desember 2017 um tíðaravmarking av lønum.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum greitt frá, at sambært Tjóðskjalasavninum verður nú javnan hugt nærri at tíðarskrásetingum hjá starvsfólkum. Eisini verður regluliga heitt á starvsfólkini, um at eftirkanna um tíðarskrásetingin er røtt.

*Inntøkur, kassi og banki*
Tjóðskjalasavnið hevði kassa í lesistovuni, har fólk rindaðu fyri at taka avrit, skanna skjøl v.m. Inntøkurnar vóru smáar og minkandi, tí fólk tóku heldur myndir av skjølum við fartelefonini.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Tjóðskjalasavnið fekk greiði á, um møguleiki skuldi vera at fáa avrit av skjølum á lesistovuni, og at stovnurin fann ein hóskandi leist fyri kontantgjøld. Vit mæltu eisini til at dagføra roknskaparreglugerðina viðvíkjandi umsiting av inntøkum og gjaldingum.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum greitt frá, at sambært Tjóðskjalasavninum hevur savnið ikki kontantkassa longur. Allar rokningar verða avgreiddar umvegis skipanina hjá Gjaldstovuni.

## 6.21 Landsbókasavnið (LG 2020/207-243)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Landsbókasavninum.

Roknskaparreglugerðin var seinast dagførd í 2019. Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Landsbókasavnið hevði sent Uttanríkis- og mentamálaráðnum dagførda roknskaparreglugerð, ið Landsbókasavnið nú var í holt við at gjøgnumganga av nýggjum. Tá ið tað var gjørt, fór hon at verða send av nýggjum til góðkenningar hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum greitt frá, at sambært Landsbókasavninum, er roknskaparreglugerðin send táverandi Uttanríkis- og mentamálaráðnum til góðkenningar í mai 2021. Reglugerðin er ikki góðkend.

## 6.22 Miðlastuðul (LG 2021/207-244)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingini av Miðlastuðlinum, sum var latin í 2019, har Landsgrannskoðanin m.a. hevði kannað, um stuðulin var latin sambært ásetingunum í lógini um miðlastuðul, Ll. nr. 35/2017.

Samanumtikið var miðlastuðul í 2019 játtaður grundað á lønarútreiðslur og útreiðslur til freelance. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um heimild var at lata stuðul út frá øðrum fortreytum enn lønarútreiðslum, og mælti til, at Uttanríkis- og mentamálaráðið skipaði soleiðis fyri, at miðlastuðulin bleiv latin sambært lógini, og at umsøkjararnir blivu kunnaðir neyvt um stuðulsgrundarlag, krøv til grannskoðan o.a.

Uttanríkis- og mentamálaráðið tók undir við tilmælinum og helt, at tørvur var á at eftirmeta umsóknarskjalið og møguliga at orða eina vegleiðing, soleiðis at tað var greiðari fyri øllum, hvat var stuðulsheimilað.

*Miðlastuðul 2021*
Landsgrannskoðanin fylgdi grannskoðanini upp og kannaði, hvussu miðlastuðul er latin í 2021.

Í 2021 hevur Miðlastuðulsnevndin greitt Uttanríkis- og mentamálaráðnum frá, at nevndin frá fyrsta degi hevði havt eina breiða tulking av hugtakinum lønarútreiðslur í sambandi við Miðlastuðul. Tað merkti, at bæði løn hjá fólki í starvi og samsýning av arbeiði hjá atknýttum arbeiðstakarum høvdu verið roknað við í útrokningargrundarlagið fyri miðlastuðlinum.

Í viðgerðini av at avmarka stuðulsgrundarlagið til bert at fevna um A-inntøkur, kom Miðlastuðulsnevndin til tað úrslit, at miðlarnir ikki høvdu møguleika at laga seg eftir broytingini, tí stuðulsárið var longu byrjað. Í 2021 hevði nevndin tí kunnað umsøkjararnar um, at frá 2023, tá ið stuðul varð rindaður fyri fíggjarárið 2022, fór lønarútreiðslustuðulin at verða latin, grundað á ta løn, ið var rindað sum A-inntøka. Miðlastuðulsnevndin hevði eisini kunnað umsøkjararnar um, at nágreiningar verða gjørdar í einari komandi vegleiðing.

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Miðlastuðulsnevndin í skrivi til ráðið í februar 2022 kunnaði um, at nevndin hevði fylgt leistinum frá seinastu fýra árunum við einari lutfalsliga breiðari tulking í mun til treytirnar, ið lógin og viðmerkingarnar til lógina seta til innihaldið.

Landsstýrismaðurin kundi bert taka tað til eftirtektar. Landsstýrismaðurin vísti á, at sambært málsøkjabýti løgmans hevði Uttanríkis- og mentamálaráðið onga heimild at

geva nevndini tænastuboð. Nevndin er løgskipað sum sjálvstøðugur myndugleiki uttan fyri fyrisitingarliga stigveldið, og tekur endaligar avgerðir innan fyrisitingina. Uttanríkis- og mentamálaráðið kundi heldur ikki stýra venjuni hjá nevndini sum kærumyndugleiki.

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum hevur í august 2023 víst á, at “*miðlastuðulslógin er broytt til bæði at fevna um lønarstuðul og verkætlanarstuðul. Lønarstuðulin er 30% av játtanini, og verkætlanarstuðulin er 70%.*

*Viðvíkjandi lønarstuðlinum er hann ikki longur býttur í eina grundupphædd og í ein lutfalsligan stuðul. Grundupphæddin er burtur, soleiðis at alt verður býtt lutfalsliga við støði í lønarútreiðslunum árið fyri.*

*Viðvíkjandi verkætlanunum, sum søkjast kann um miðlastuðul til, kunnu tær fevna um eitt nú greinarøð, heimildarsending, poddvarp o.a.*

*Í 2022 býtti Miðlastuðulsnevndin verkætlanarstuðul út í tveimum umsóknarumførum, í 2023 er bert eitt umsóknarumfar til verkætlanarstuðul.*

*Lógarbroytingin varð framd í mai 2021 við gildiskomu í 2022. Ein kunngerð um stuðul til verkætlanir varð eisini sett í gildi í desember 2021.*

*Nýggj Miðlastuðulsnevnd varð vald í oktober í 2022. Nevndin hevur í viðgerðini av umsóknunum fylgt leistinum frá undanfarnum árum við einari lutfalsliga breiðari tulking av treytunum, ið lógin og viðmerkingarnar til lógina seta til innihaldið í miðlunum.”*

***Nýggja miðlastuðulsnevndin tulkar eisini reglurnar breitt.***

Landsgrannskoðanin kann bara staðfesta, at Miðlastuðulsnevndin við sínari breiðu tulking av hugtakinum ”lønarútreiðslur”, gongur ímóti ásetingini í § 4, stk. 2, í lógini um miðlastuðul. Havandi í huga, at Mentanarnevndin broytti orðingina í lógaruppskotinum frá at vera rakstrarútreiðslur til at vera lønarútreiðslur, ivast Landsgrannskoðanin í, um heimild er at lata stuðul út frá øðrum fortreytum enn lønarútreiðslum.

## 6.23 Kirkjugrunnurin og Tiltaksgrunnurin (LG 2018/207-245)

Í fleiri ár hevur Landsgrannskoðanin víst á, at sambært Ll. nr. 60/2007 “um fólkakirkjuna í Føroyum” ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini, og sambært Ll. nr. 61/2007 “um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar” ásetir landsstýrismaðurin reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir.

Í 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var at gera kunngerðirnar í 2015, og í 2017 upplýsti landsstýrismaðurin, at enn var arbeitt við kunngerðunum.

Í uppskoti til samtyktar at góðkenna landsroknskapin 2016 vóru løgtingsgrannskoðararnir ónøgdir við, at kunngerðirnar enn ikki vóru gjørdar, hóast meira enn 10 ár vóru liðin, síðani lógirnar komu í gildi.

***Í 2016 vóru løgtingsgrannskoðararnir ónøgdir við, at ongar kunngerðir vóru gjørdar.***

Í 2018 ásannaði Mentamálaráðið, at gott hevði verið, um kunngerðir vórðu gjørdar; men av tí at virksemið var í hampiliga tryggari legu, hevði Mentamálaráðið fyri ein part valt at raðfesta annað virksemi, og lutvíst høvdu viðurskifti, ið ráðið ikki var harri yvir, kravt stóran part av teirri avmarkaðu orku, ið var til meira yvirskipaða málsviðgerð viðvíkjandi kirkjuøkinum. Tí var arbeiðið ikki gjørt enn.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at: *“Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur greiða fatan av, at virksemið hjá Stiftsstjórnini yvirhøvur er í tryggari legu, um enn einki er at taka seg aftur í, at ein hóskandi kunngerð hevði verið ein lætti fyri arbeiðið hjá Stiftsstjórnini. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur tí ikki raðfest uppgávuna so høgt, men væntar - við fyrivarni fyri, hvørjar meira áleikandi uppgávur fara at koma nú í heyst og*

***Í 2020: Arbeiða við uppskotum um kunngerðir.***

*vetur - at kunngerð kann verða lýst komandi vár. Komið er ikki á mál við reglunum fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir. Uttanríkis- og mentamálaráðið kann tó upplýsa, at Stiftsstjórnin arbeiðir við einum kunngerðaruppskoti, sum er um ein part av hesum. Miðað verður eftir, at kunngerð kann verða lýst komandi vár. Tá arbeiðið er liðugt, fer Uttanríkis- og mentamálaráðið at gera eina aðra kunngerð um teir partarnar av reglunum fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir, sum hendan kunngerðin ikki fer at fevna um".*

***Í 2021: Einki hent.***

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at einki nýtt var hent í málinum. Málsøkini, fólkakirkjan, onnur trúarsamfeløg og attongd øki, vóru bert mannað við einum ársverki tilsamans, og tá drúgt forfall hevði verið, hevði tíverri ikki borið til at fremja annað enn tær mest neyðugu málsviðgerðirnar hetta seinasta árið, meðan alt menningararbeiðið hevði ligið stilt.

***Í 2022 var farið undir arbeiðið at gera reglur.***

Í 2022 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðsorkan á málsøkinum fólkakirkjan, onnur trúarsamfeløg og attongd øki var nú mannað uppaftur, og tí var gongd sett á aftur arbeiðið við at menna reglurnar á økinum. Tað, sum fyrst lá fyri, var at laga til uppskot til kunngerð um samsýningar til kirkjutænarar og hjálparfólk, ið Stiftsstjórnin hevði gjørt uppkast til, so tað kundi verða sett í gildi. Kunngerðin um samsýningar til kirkjutænarar og hjálparfólk kom at regluseta ein týðandi part av arbeiðinum hjá kirkjukassunum við at gera fíggjarætlanir.

***Í 2023 er einki nýtt hent.***

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum.

# 7. Heilsumál

## 7.1 Fólkaheilsuráðið (LG 2020/211-201)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin Fólkaheilsuráðið. Játtanin er á høvuðskontu 11.20.1.04 "Upplýsing og ráðgeving".

Fólkaheilsuráðið fær stórar nøgdir av dátum, tá ið kanningar verða gjørdar, men sambært formanninum eru dáturnar gjørdar navnleysar. Í 2020 framdi eitt grannskoðanarvirki KT-skoðan av ráðnum. Grannskoðarin hevði 15 tilmæli, harav 1 høgt, 9 miðal og 5 lágt raðfest.

Fólkaheilsuráðið miðaði eftir at avgreiða høg tilmæli sum skjótast, miðal tilmæli áðrenn hálvt ár var farið, meðan eingin ítøkilig freist var fyri lágu tilmælini.

Í 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at trý tilmæli eru lokað. Arbeiðið, at avgreiða øll tilmælini, var seinkað, av tí at ætlanin var at leggja Fólkaheilsuráðið, Ílegusavnið og Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu saman í nýggja Fólkaheilsustýrið. Upprunaliga var ætlanin at stovnseta Fólkaheilsustýrið 1. januar 2022, men tað varð 1. januar 2023.

Stórur partur av arbeiðinum at avgreiða tilmælini frá KT-skoðanini skuldi gerast fyri nýggja stovnin, og sambært landsstýrismanninum fór Fólkaheilsuráðið undir arbeiðið at avgreiða tilmælini í 2022.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at sambært Fólkaheilsustýrinum raðfestir stovnurin KT-trygdararbeiðið høgt og arbeiðir miðvíst við at fylgja ISO 27001 og 27002 standardunum um KT-trygd. Nú Fólkaheilsuráðið er lagt undir Fólkaheilsustýrið, verða dátur hjá ráðnum handfarnar eftir somu standardum.

Fólkaheilsustýrið er stovnur við viðkvæmum dátum. Í mai 2023 var avtala gjørd við KT-veitara um skoðan, og tilgongd er farin í gongd í Fólkaheilsustýrinum fyri at kunna uppfylla krøvini til eina serliga skoðan. KT-grannskoðanin verður framd í heyst.

## 7.2 Heilsutrygdarveitingar (LG 2020/211-202)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Heilsutrygdarveitingum. Játtanin er á høvuðskontu 11.20.2.03.

*Heilivágur*
Í 2020 var tilskotið til keyp av heilivági, fyriskipaðum á forskrift, 81,7 mió.kr. Í 2016 vóru 66,4 mió.kr. latnar í tilskoti. Landsstýrismaðurin hevur ásett reglur um áseting av søluprísi í K. nr. 113/1992 "um áseting av søluprísi á heilivági".

Spurt, um Heilsutrygd hevði eftirlit við, at upphæddirnar, sum stovnurin rindaði apotekunum fyri heilivág, vóru rættar, svaraði Heilsutrygd, at møguligt eftirlit mátti gerast úti á apotekunum.

Heilsutrygd kannaði í ávísan mun útgjøldini til kommunulæknar, men hevði ikki gjørt eftirlit á staðnum í longri tíð. Heilsutrygd hevði heldur ikki gjørt kanningar á apotekunum nýliga. Stovnurin kunnaði um, at ætlanin var at gera eftirlit í næstum og útbyggja KT-skipanina til tað.

*Roknskaparreglugerðin er frá 2010.*

### *Roknskaparreglugerð*

Landsgrannskoðanin mælti Heilsutrygd til at útvega skrivligar mannagongdir til umsiting og útgjald av veitingunum, og vísti á, at roknskaparreglugerðin var ikki dagførd síðani 2010.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at í oktober 2022 sendi Heilsumálaráðið Heilsutrygd roknskaparreglugerðina aftur, við boðum um at lesa ígjøgnum, og gera aðrar tillagingar, um broytingar høvdu verið.

Heilsutrygd hevur síðani gjørt onkra broyting í roknskaparreglugerðini, og fer at gera onkra tillaging afturat, og síðani senda Heilsumálaráðnum hana aftur.

### *Dygdarskipan*

Í 2019 rindaði Heilsutrygd 3,90 kr. til BE-skipanina og 1,84 kr. til Dygdargrunnin fyri hvønn borgara yvir 18 ár. Sambært Heilsutrygd áttu kommunulæknarnir grunnin, og stjórin á Heilsutrygd gjørdi roknskapin og hevði umsitingina.

31. desember 2019 vóru 298 t.kr. á peningastovnskontu hjá Dygdargrunninum og 399 t.kr. hjá BE-skipanini. Allar inntøkurnar vóru frá Heilsutrygdarveitingum.

Sambært Heilsutrygd hevði nevndin givið stjóranum á Heilsutrygd og einum fulltrúa heimild at flyta pening av kontu hjá BE-skipanini. Eftir áheitan frá nevndini bókaði stjórin og bað um flytingar, og fulltrúin góðkendi. Roknskapirnir hava ikki verið grannskoðaðir.

Í 2020 kunnaði Heilsutrygd um, at einki stóð í reglugerðini fyri Dygdarskipanina um, at roknskapurin skuldi grannskoðast, og at Heilsutrygd fór at leggja uppskot fyri nevndina, um at roknskapirnir hereftir vórðu grannskoðaðir.

Heilsutrygd hevði ikki tikið støðu til, um grunnurin kom undir landsins almenna roknskaparhald, og visti heldur ikki, um leiðslan í Dygdarskipanini hevði tikið støðu til tann spurningin. Heilsutrygd legði afturat, at talan var ikki um pening, sum beinleiðis var játtaður í fíggjarlóg, men um gjald, sum var ásett í sáttmála ímillum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Kommunulæknafelag Føroya, og at talan tí var um vunnin rættindi hjá kommunulæknum í einari sáttmálasamráðing.

Dygdarskipanin var sambært reglugerðini umsitin av nevnd, sett saman av tveimum umboðum fyri Heilsutrygd og tveimum umboðum fyri Kommunulæknafelagið. Sambært Heilsutrygd var seinasta samskiftið í nevndini á vári 2020, og sambært nevndini í Dygdargrunninum høvdu tveir fundir verið seinastu fimm árini.

Sambært reglugerðini verður óbrúktur peningur fluttur til eftirfylgjandi ár, og um peningur hópar seg upp, verður málið lagt fyri Samstarvsnevndina. Spurd, um Samstarvsnevndin hevði viðgjørt málið, nú 700 t.kr. vóru í Dygdarskipanini, svaraði Heilsutrygd, at málið ikki var lagt fyri Samstarvsnevndina enn, men at tað væntandi fór at verða gjørt í næstum.

Í 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at einki virksemi hevur verið í Dygdarskipanini seinasta hálvtannað árið. Nevndin hevði ikki umrøtt, hvussu peningurin í Dygdarskipanini skuldi brúkast.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at sambært Heilsutrygd kom seint í 2022 umsókn til Dygdargrunnin um at stuðla eitt viðgerðartilboð til børn við yvirvekt, og skeið/útbúgving til kommunulæknarnar í hesum sambandi. Hesa umsóknina hevur Dygdargrunnurin játtað at stuðla.

## 7.3 Frágreiðing um viðgerðarstovnarnar (LG 2022/405-013)

Í februar 2023 lat Landsgrannskoðanin Løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um viðgerðarstovnarnar Blákrossheimið, Frælsi og Heilbrigdi.

Kanningin skuldi m.a. lýsa:

- bygnað og leiðslu hjá viðgerðarstovnunum,
- um eftirlitini hjá Heilsutrygd og Landslæknanum, eru framd, og
- um viðgerðarstovnarnir eru góðkendir og fylgja ásetingunum í góðkenningini frá Heilsutrygd.

Kanningin skuldi eisini lýsa, um játtanar- og roknskaparviðurskifti seinastu 5 árini eru lýst á nøktandi hátt, og hvussu peningurin verður brúktur til virksemið, herundir treytirnar fyri at fáa játtan.

Frágreiðingin umrøður m.a., at Løgtingið í fíggjarlógum árliga hevur játtað viðgerðarstovnunum pening til raksturin.

Roknskapartøl fyri seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Stovnur | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Blákrossheimið | 8.547 | 8.547 | 8.687 | 9.275 | 9.390 |
| Frælsi | 3.659 | 4.697 | 4.640 | 4.924 | 5.728 |
| Heilbrigdi | 6.335 | 7.679 | 8.122 | 8.370 | 8.334 |
| **Tilsamans** | **18.541** | **20.923** | **21.449** | **22.569** | **23.452** |

Teir tríggir stovnarnir eru rættiliga ólíkir, tá ið um leiðslu og hugsjónir ræður. Økið bleiv ikki løgskipað fyrr enn í januar 2020 við Ll. nr. 53/2019 "um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð". Lógin ásetir, at landið hevur ábyrgd av at veita persónum, búsitandi í Føroyum, ókeypis viðgerð fyri bundni av rúsdrekka ella rúsevnum.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum, sum varðar av økinum, hevur latið Heilsutrygd uppgávuna at góðkenna stovnarnar sambært K. nr. 75/2020. Sambært § 6, stk. 1, í lógini um viðgerðarstovnar skal Landslæknin hava heilsufakligt eftirlit við stovnunum.

Í desember 2021 góðkendi Heilsutrygd Blákrossheimið sum viðgerðarstovn. Um sama mundi fyribilsgóðkendi Heilsutrygd Frælsi og Heilbrigdi, og vísti á viðurskifti, ið ikki vóru nøktandi. Stovnarnir fingu eitt skotbrá at fáa viðurskiftini í rættlag, og spurningurin um endaligu góðkenningina skuldi takast uppaftur í mars 2023.

Frágreiðingin er latin Løgtingsgrannskoðarunum í februar 2023, og kann lesast á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini, lg.fo[16].

### Eftirlit hjá Heilsutrygd

Í juni 2023 hevur Heilsutrygd góðkent viðgerðarstovnin Frælsi.

[16] https://lg.fo/adrar-fragreidingar

Heilbrigdi fekk ikki góðkenning, m.a. tí at Heilsutrygd metti, at hølini vóru ikki hóskandi til rúsviðgerð. Heilsutrygd ásannaði eisini, at trupulleikarnir við hølisumstøðunum kundu ikki loysast, áðrenn endaliga fundin um góðkenning í mars 2023.

**Eftirlit hjá Landslæknanum**
Landslæknaembætið er danskt málsøkið og skal, sambært Bek. nr. 922/2022 "for Færøerne om registrering af, underretning om og tilsyn med offentlige og private behandlingssteder m.v.", hava heilsufakligt eftirlit við viðgerðarstovnunum í framtíðini.

Landslæknin byrjaði at gera eftirlit á stovnunum á heysti 2022.

Á heimasíðu Landslæknans verður kunnað um framd eftirlit og úrslit av teimum. Tá ið viðurskifti, sum Landslæknin hevur givið boð um at rætta, eru komin í rættlag, verða eftirlitsfrágreiðingarnar tiknar av heimasíðuni.

Á heimasíðu Landslæknans er eftirlitsfrágreiðing um Heilbrigdi, har niðurstøðan er, at Stýrið fyri "Patientsikkerheden" metir, at Heilbrigdi hevur "kritiske problemer af betydning for patientsikkerheden", og tí gav Landslæknin Heilbrigdinum boð um at halda uppat at avrúsa og viðgera fólk fyri "abstinenser".

Samanumtikið er støðan, at Heilbrigdi vantar góðkenning frá Heilsutrygd og at fáa viðurskiftini, sum Landslæknin átalar, í rættlag. Heilsufakligt eftirlit hevur enn ikki verið á Frælsinum.

## 7.4 Frágreiðing um Kommunulæknaskipan (LG 2022/405-014)

Løgtingsgrannskoðararnir heittu, vísandi til § 14 í grannskoðaralógini, á Landsgrannskoðanina, um at gera eina frágreiðing um Kommunulæknaskipanina, sum m.a. skuldi lýsa:

- játtanar- og roknskaparviðurskifti,
- lógargrundarlag og aðrar reglur,
- mannagongdir og innaneftirlit viðvíkjandi skráseting av læknaveitingum, og
- hagtøl og greiningar av hagtølum um skipanina.

Endamálið við frágreiðingini var at lýsa, hvussu Kommunulæknaskipanin bygnaðarliga er sett saman, greiða frá roknskaparligu gongdini og frá virkseminum hjá læknunum. Eisini er greitt frá, hvørjar leiklutir Heilsumálaráðið og Heilsutrygd hava.

Landsgrannskoðanin gjøgnumgekk roknskapartilfar, mannagongdir og annað skrivligt tilfar viðvíkjandi Kommunulæknaskipanini. Vit samskiftu við Heilsumálaráðið og Heilsutrygd um mannagongdir og innaneftirlit.

Frágreiðingin er latin Løgtingsgrannskoðarunum í februar 2023, og kann lesast á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini, lg.fo[17].

Niðanfyri er stuttur samandráttur av frágreiðingini.

**Um skipanina**
Kommunulæknaskipanin er skipað við fleiri lógum, kunngerðum, sáttmálum og avtalum. Skipanin er ein týðandi partur av heilsuverkinum, tí meginparturin av teimum, sum koma í samband við heilsuverkið, koma til kommunulækna. Tað er av stórum týdningi fyri samfelagið at hava eina vælvirkandi kommunulæknaskipan, ið hevur ein týðandi leiklut til tess at tryggja fólkaheilsuna í Føroyum.

[17] https://lg.fo/adrar-fragreidingar

Kommunulæknaskipanin er broytt fleiri ferðir seinastu árini. Frá gamlari tíð var skipanin býtt ímillum land, kommunur og sjúkrakassar, sum varðaðu av hvør sínum parti. Við árslok 2009 fór sjúkrakassaskipanin úr gildi, og Heilsutrygd var sett á stovn.

Skipanin er tvíbýtt ímillum land og kommunur. Landið hevur ábyrgd av sjálvari Kommunulæknaskipanini, meðan kommunurnar hava skyldu til at útvega viðtaluhøli við neyðugum innbúgvi, tólum o.ø., og at bera útreiðslurnar av rakstri og viðlíkahaldi.

Í Føroyum eru 34 kommunulæknastørv normerað. 1. september 2022 vóru 27 kommunulæknar í føstum starvi, harav 5 vóru frá arbeiði vegna farloyvi ella sjúku.

Yvirlit yvir viðtalur og tilhoyrandi tal av borgarum[18]:

| Øki | Viðtalur | Borgarar | Miðal borgaratal pr. viðtalu |
|---|---:|---:|---:|
| Eiðis Læknadømi | 2 | 2.603 | 1.302 |
| Fuglafjarðar Læknadømi | 2 | 3.919 | 1.960 |
| Norðoya Læknadømi | 3 | 6.262 | 2.087 |
| Sandoyar Læknadømi | 2 | 1.209 | 605 |
| Skálafjarðar Læknadømi | 4 | 6.827 | 1.707 |
| Suðuroyar Læknadømi | 4 | 4.620 | 1.155 |
| Suðurstreymoyar Læknadømi | 13 | 20.446 | 1.573 |
| Vága Læknadømi | 2 | 3.350 | 1.675 |
| Vestmanna Læknadømi | 2 | 2.864 | 1.432 |
| Enn ókendur lækni (Suðurstreymoy) | - | 1.534 | - |
| **Tilsamans** | **34** | **53.634** | **1.577** |

Læknaviðtalur kunnu í mesta lagið hava 2.542 borgarar knýttar at sær, og kommunu-lækni kann nokta at taka ímóti nýggjum viðskiftafólkum, um talið av atknýttum borgarum fer upp um 1.600. Í oktober 2022 vóru í miðal 1.577 borgarar fyri hvørja læknaviðtalu.

Roknskapartøl seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Høvuðskt. | Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---:|---:|---:|---:|---:|
| *Rakstrarjáttanir:* | | | | | | |
| 11.20.2.04 | Kommunulæknaskipanin | 11.356 | 12.486 | 12.690 | 12.968 | 13.246 |
| 11.20.2.03 | Heilsutrygdarveitingar, (Ógreinað, endamál 0000) | 3.019 | 2.821 | 2.843 | 3.476 | 3.932 |
| 11.20.2.03 | Heilsutrygdarveitingar (Læknahj., endam. 0100) | 49.870 | 54.878 | 60.875 | 62.732 | 64.780 |
| *Lógarbundnar játtanir:* | | | | | | |
| 11.20.1.10 | Koppsetingar | 3.801 | 4.424 | 6.203 | 5.211 | 4.261 |
| 11.20.1.13 | Upplýsing um gitnaðarfyribyrging | 481 | 392 | 416 | 456 | 399 |
| 11.20.1.16 | Heilsukanningar av barnakonum | 1.021 | 949 | 1.167 | 1.015 | 879 |
| 11.20.1.19 | Læknakanningar av børnum | 854 | 850 | 803 | 857 | 764 |
| **Tilsamans** | | **70.402** | **76.800** | **84.997** | **86.715** | **88.261** |
| *Játtan* | | *67.530* | *72.319* | *81.953* | *90.712* | *99.259* |

Raksturin av Kommunulæknaskipanini er hildin á fleiri játtanum. Samlaða játtanin til Kommunulæknaskipanina, Heilsutrygdarveitingar og aðrar veitingar er økt støðugt øll árini. Í 2018 var hon 67,5 mió.kr. og í 2022 var hon 99,3 mió.kr., sum er ein hækking upp á 47%. Størsta hækkingin er til Heilsutrygdarveitingar, tær hækkaðu 23,3 mió.kr. frá 2018 til 2022, ella 46,9%.

[18] Hagtøl frá Heilsutrygd, oktober 2022.

Kommunulæknaskipanin, greinað á standardkontur:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 12.876 | 13.743 | 14.169 | 14.021 | 15.693 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.556 | 1.358 | 1.133 | 1.269 | 1.163 |
| Útb., leiga, viðlíkahald v.m. | 0 | 40 | 40 | 34 | 13 |
| Innanh. flyt. m. alm. stovn. (útr) | 2 | 2 | 2 | 50 | 2 |
| Flyt. frá landi til komm. (land) | 0 | 0 | 0 | 959 | 189 |
| Innanh. flyt. m. alm. stovn. (innt) | -3.079 | -2.657 | -2.654 | -3.365 | -3.814 |
| **Tilsamans** | **11.356** | **12.486** | **12.690** | **12.968** | **13.246** |

Meginparturin av útreiðslunum er grundløn til kommunulæknar í føstum starvi. Útreiðslurnar til lønir eru hækkaðar 8,9% árini 2018 til 2021.

## Mannagongdir og eftirlit

*Heilsumálaráðið*

Heilsumálaráðið setur eingi ítøkilig krøv um, hvussu Heilsutrygd skal skipa eftirlitið við Kommunulæknaskipanini. Ráðið hevur víst á, at stjórin á Heilsutrygd hevur ábyrgd av at tryggja, at nøktandi eftirlit eru. Ráðið hevur fundir við Heilsutrygd annan hvønn mánað, har konturnar, sum Heilsutrygd varðar av, verða gjøgnumgingnar.

*Heilsutrygd*

Heilsutrygd nýtir í høvuðsheitum tvær KT-skipanir til at avrokna samsýningar til kommunulæknar, Talgildu heilsuskipanina og Samlirokning, harafturat brúka tey eisini Búskaparskipan landsins.

Skrásetingar av tímum og lønum verða partvís gjørdar við hond; tað ger, at størri vandi er fyri feilum.

Kommunulæknar skráseta allar heilsutrygdarveitingar í Talgildu heilsuskipanini. Einastu skipaðu eftirlitini við veitingunum eru innbygdu eftirlitini í Talgildu heilsuskipanini, og at viðskiftafólk skriva undir viðtaluseðil.

Landsgrannskoðanin vísti á, at vandi kann verða fyri, at skráseting ikki er eins, tá ið eingin vegleiðing fæst um, hvussu og hvat skal skrásetast og nær.

Heilsutrygd hevur heimild at gera eftirlit úti hjá læknunum, men hevur bert gjørt fá eftirlit. Okkurt eftirlit á staðnum hevur havt við sær, at avrokningar eru rættaðar.

## Hagtøl

Tal av viðtalum hjá kommunulæknum frá 2018 til 2021:[19]

| Viðtalur hjá lækna, tal | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Vanligar viðtalur | 148.559 | 153.990 | 171.435 | 174.731 |
| Teldupostviðtalur | 2.247 | 7.730 | 12.166 | 19.245 |
| Telefonviðtalur | 80.352 | 77.104 | 78.672 | 70.598 |
| Vanligar viðtalur, vakt | 11.216 | 11.328 | 12.093 | 11.668 |
| Telefonviðtalur, vakt | 10.724 | 11.133 | 13.808 | 11.722 |
| **Tilsamans** | **255.116** | **263.304** | **290.194** | **289.985** |

Frá 2018 til 2021 hækkaði talið av vanligum viðtalum og teldupostviðtalum í dagtímunum, meðan talið av viðtalum í vakttíð broyttist lítið.

[19] Heilsutrygd hevur gjørt vart við, at tey bert nýta fysiskar/vanligar viðtalur, tá ið tey gera hagtøl.

Samsýningar til kommunulæknar, býtt í talstrekki (interval):

| Talstrekki | Tal av læknum |
|---|---|
| 1.000 – 1.499 t.kr. | 1 |
| 1.500 – 1.999 t.kr. | 11 |
| 2.000 – 2.499 t.kr. | 4 |
| 2.500 – 2.999 t.kr. | 3 |
| 3.000 – 3.499 t.kr. | 1 |
| 3.500 – 3.999 t.kr. | 1 |
| 4.000 – 4.499 t.kr. | 0 |
| 4.500 – 4.999 t.kr. | 0 |
| 5.000 – 5.499 t.kr. | 1 |

Í 2021 lógu samsýningarnar til 11 læknar ímillum 1,5 og 2 mió.kr. Hjá 7 læknum lógu samsýningarnar ímillum 2 og 3 mió.kr., og hjá trimum yvir 3 mió.kr. til hvønn.

Meginparturin av samsýningunum til kommunulæknar eru gjøld fyri veitingar; í størstu samsýningunum er lutfalsliga stórur partur fyri vaktir. Stórur munur er á samsýningunum. Í frágreiðingini sæst av hagtølum, at summir læknar hava arbeitt meira enn aðrir, bæði í dagtíð og í vaktum.

Sambært yvirliti yvir tal av viðtalum, býtt á økir í landinum, eru fæst viðtalur fyri hvønn borgara í Eysturoynni og í Suðurstreymi, og flest í Sandoynni. Pinkubørn eru oftast hjá lækna, og kvinnur eru oftari enn menn.

Í 2021 høvdu læknar í føstum størvum 65% av viðtalunum um dagin, og um helvtina av viðtalunum í vaktartíð.

Í juli 2022 gjørdi Landslæknin vart við, at læknar í mesta lagið kunnu hava 10 vaktir um mánaðin.

## 7.5 Frágr. um Landssjúkrahúsið, útbygging (LG 2022/405-016)

Løgtingsgrannskoðararnir heittu á Landsgrannskoðanina, um at kanna nýtsluna til byggiverkætlanina "Landssjúkrahúsið, útbygging", herundir játtanar- og roknskaparviðurskiftini.

Kanningin skuldi m.a. lýsa:

- Útreiðslugongdina, herundir hvussu útreiðslurnar samsvara við fíggjarligu heimildirnar í verklagslógum og fíggjarlógum.
- Ábyrgdar- og myndugleikabýti, roknskaparviðurskifti og mannagongdir hjá Landsverki, so sum skrásetingarmannagongdir, nær kostnaðir verða skrásettir í landsroknskapinum, og hvussu fylgt verður við útreiðslunum frá disponering til landsroknskap.
- Á hvønn hátt Fíggjarmálaráðið, Heilsumálaráðið og Landssjúkrahúsið hava verið við í málinum/verkætlanini, og hvørji eftirlit ráðini hava havt við verkætlanini.

Kanningin skuldi eisini lýsa, hvussu undanfarnar kanningar eru viðgjørdar og tiknar til eftirtektar.

Í apríl 2023 lat Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingina um nýtsluna til byggiverkætlanina "Landssjúkrahúsið, útbygging". Frágreiðingin kann lesast á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini, lg.fo[20].

[20] https://lg.fo/adrar-fragreidingar

### Viðgerð av frágreiðingini

*Uppskot til samtyktar*

14. juni 2023 samtykti Løgtingið uppskot til samtyktar "um at gera greiðar reglur um, hvussu almennar byggiverkætlanir skulu skipast".

Í uppskotinum, sum var lagt fram í mai 2023, heitir Løgtingið á landsstýrið um at leggja eina frágreiðing fyri Løgtingið, sum viðger, hvørjar reglur kunnu tryggja greiða leiðslu, ábyrgd og útinnan, tá ið almennar byggiverkætlanir verða framdar, og hvussu hesar reglur kunnu verða ásettar.

Í frágreiðingini um nýtsluna til byggiverkætlanina "Landssjúkrahúsið, útbygging", er staðfest:

- at verandi skipan í sambandi við byggiverkætlanir ikki virkar,
- at leiðsla og ábyrgd í sambandi við byggiverkætlanir eru ikki nóg greið,
- at upplýsingar eru lagdar fyri Løgtingið, sum ikki eru eftirfarandi,
- at upprunaligar og endurskoðaðar játtanir og kostnaðarmetingar fyri H-bygningin hava ikki hildið,
- at verkætlanin er seinkað fleiri ár, og hevur ikki hildið upprunaligu og ei heldur endurskoðaðar tíðarætlanir, og
- at landsstýrisfólk hava ikki hildið sínar eftirlitsskyldur.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at frágreiðingin vísir, at verandi skipan í sambandi við byggiverkætlanir ikki virkar. Tað hevur ikki verið nóg greitt, hvørja ábyrgd og hvønn leiklut partarir hava havt av byggiverkætlanini.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla til greiðari ábyrgdarbýti, har landsstýrisfólkið, sum fær játtanina, stendur fyri byggingini, og hevur fíggjarliga og fakliga ábyrgd, soleiðis sum lóg um ábyrgd landsstýrismanna ásetir um býti á málsøkjum.

Sambært frágreiðingini:

- hava tølini í lógaruppskotum ikki altíð verið eftirfarandi,
- eru sparingar gjørdar, sum seinni gerast útreiðslur,
- sæst ikki í fíggjarlógum, hvat er játtað til H-bygningin, og hvat er játtað til annað,
- samsvarar nýtslan illa við játtaðu upphæddirnar, serliga í 2020, 2021 og 2022,
- hevur helst verið meirnýtsla í 2017, 2018 og 2019, tí at rúm tíð gongur, frá tí at Landsverk hevur disponerað, til útreiðslan sæst í Búskaparskipan landsins,
- hevur kunningin frá Landsverki til sjúkrahúsleiðsluna og Heilsumálaráðið ikki verið røtt,
- var fíggjarstýringin farin av lagi í 2018; brek á fíggjarskipanini og eftirlitunum hjá Landsverki elvdi til, at verkætlanarroknskapurin ikki var eftirfarandi, og
- áttu Fíggjarmálaráðið og Heilsumálaráðið at havt varhugan av trupulleikanum, tá ið grannskoðarin sáddi iva um fíggjarligu stýringina.

Frágreiðingin vísir eisini, at tað oyðileggur gjøgnumskygni, tá ið viðlíkahald og nýbygging eru á somu játtan.

Landsverk hevur ikki stýrt verkætlanini nóg væl. Løgtingsgrannskoðararnir átala hvassliga, at meginamboðið í fíggjarstýringini hjá Landsverki hevur ikki verið brúkt sum tað skal, og at Fíggjarmálaráðið í tí sambandi hevur ikki livað upp til sína eftirlitsskyldu við Landsverki. Løgtingsgrannskoðararnir átala eisini hvassliga vantandi fakliga og fíggjarliga eftirlitið hjá Heilsumálaráðnum, ið hevur ábyrgd av játtanini, men hvønn mánað hevur váttað roknskapir, sum ikki hava verið í lagi.

Eins og fyri 10 árum síðani, mæla løgtingsgrannskoðararnir til at gera nágreiniligar reglur um, hvussu almennar byggiverkætlanir skulu stýrast, og hvørja ábyrgd og hvønn leiklut hvør hevur, tá ið almennar byggiverkætlanir verða framdar.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at tað er alneyðugt, at frágreiðingin frá Landsgrannskoðanini verður tikin í álvara og krevja, at myndugleikarnir læra av hesum, soleiðis at framtíðar byggiverkætlanir verða væl fyriskipaðar og fíggjarliga væl stýrdar.

*Álit frá Fíggjarnevndini*
Eftir at løgtingsgrannskoðararnir høvdu lagt málið fram 9. mai 2023 var málið eftir 1. viðgerð 16. mai 2023 beint í Fíggjarnevndina. Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi 24. mai 2023.

Ein samd fíggjarnevnd hevði hesar viðmerkingar: Í uppskotinum verður heitt á landsstýrið um at leggja eina frágreiðing fyri Løgtingið, sum viðger, hvørjar reglur kunnu tryggja greiða leiðslu, ábyrgd og útinnan, tá ið almennar byggiverkætlanir verða framdar, og hvussu hesar reglur kunnu verða ásettar.

Løgtingsgrannskoðararnir vísa í uppskotinum á nógv ymisk viðurskifti, sum ikki hava verið nøktandi, harav nøkur verða átalað hvassliga. Nevndin tekur undir við hesum átalum og heldur, at avvarðandi landsstýrisfólk eiga at arbeiða miðvíst fyri at fáa tey av hesum viðurskiftum í rættlag, sum ikki longu eru tað.

Frágreiðingin frá apríl 2023 um nýtsluna til byggiverkætlanina “Landssjúkrahúsið, útbygging” hevur sítt høvuðsfokus á árini 2018-2020.

Viðgerðin í nevndini hevur í stóran mun staðfest, at samsvar er ímillum frágreiðingina og hoyringarnar við avvarðandi partar. Herundir eisini, at leiðslurnar fyri heilsuverkið ikki hava átikið sær ta ábyrgd, sum reglurnar leggja upp til, samstundis sum stór útskifting av lyklapersónum fyri verkætlanina í byggitíðarskeiðinum hevur havt neiliga ávirkan á stýringina.

Tað hevur stóran týdning, at øll skipanin tekur frágreiðingar sum hesa í størsta álvara og arbeiðir miðvíst við at gera og yvirhalda skipanir, ið tryggja, at byggiverkætlanir ikki framhaldandi fara av kós. Fíggjarnevndin kann staðfesta, at ov lítið er gjørt at bøta um viðurskiftini seinastu 10 árini.

Viðgerðin hevur víst, uttan at tað tekur nakað frá frágreiðingini, at síðan 2020 hevur verið og verður framvegis arbeitt við ymiskum viðurskiftum, ið frágreiðingin vísir á. Fíggjarmálaráðið hevur kunnað nevndina um arbeiðið við at orða rundskriv um byggiverkætlanir, sum er komið væl áleiðis.

***Fíggjarmálaráðið arbeiðir við at orða reglugerð um byggiverkætlanir.***

Landsverk hevur latið landsstýrinum frágreiðing í 2020 og kunnað nevndina um, at samsvarandi tí frágreiðingini hevur Landsverk arbeitt miðvíst við at styrkja stovnin, fíggjarstýringina og mannagongdir annars.

Løgmaður hevur í vár sett ein innanhýsis arbeiðsbólk við umboðum úr avvarðandi ráðum (Fíggjarmálaráðnum, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum og Løgmansskrivstovuni) at eftirmeta alla skipanina, og skuldi tað arbeiðið vera liðugt áðrenn ólavsøku.

***Løgmaður hevur sett arbeiðsbólk, ið skuldi vera liðugur áðrenn ólavsøku.***

Tað verður síðan upp til politisku skipanina at gera av, um verandi skipan skal halda fram, um játtan og ábyrgd skulu verða staðsettar hjá einstaka ráðnum, ella um eitt ráð hevur alla ábyrgd av bygging hjá landinum.

Fíggjarnevndin hefti seg eisini við, at Landsgrannskoðanin vísir á, at reglur og mannagongdir eru, men tær hava ikki verið fylgdar.

Nevndin var eisini undir viðgerðini kunnað um, at sami trupulleiki við fíggjarstýring og øðrum er kendur eitt nú í Danmark, meðan Noreg hevur eina øðrvísi skipan, ið hevur havt munandi betri úrslit, tá ið tað kemur til bygging, og har kostnaðarætlanirnar hava hildið.

Tað kundi, sambært Fíggjarnevndini, verið áhugavert at tikið royndirnar í eitt nú Noregi við í viðgerðina av, hvussu byggiverkætlanir skulu skipast í framtíðini.

# 8. Almannamál

## 8.1 Familjufyrisitingin (LG 2019/212-141)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Familjufyrisitingini. Í 2021 hevði Almannamálaráðið móttikið roknskaparreglugerð frá Familjufyrisitingini til góðkenningar.

Í august 2023 hevur Løgmálaráðið kunnað um, at ráðið fer at eftirkanna roknskaparreglugerðina og væntandi góðkenna hana í næstum.

## 8.2 Almannaverkið (LG 2021/212-211)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Almannaverkinum.

Roknskaparreglugerðin hjá Almannaverkinum er frá 2004, og er ikki dagførd síðani. Almannaverkið arbeiddi við nýggjum leisti til roknskaparreglugerð.

***Roknskaparreglugerðin er frá 2004.***

*Lønir*

Í mars 2022 høvdu fleiri starvsfólk tímasaldur, sum ikki vóru í samsvari við reglurnar um flekstíð. Saldurnar vóru frá +252 tímar til -1.391 tímar.

Allir leiðarar á Almannaverkinum skulu skráseta í Totalview. Tað er fyrst og fremst fyri, at umstillingin o.o. skulu kunna síggja, um leiðararnir eru tøkir. Burtursæð frá feriu og sjúkrafráveru, hevur Almannaverkið ikki eftirlit við fleks-saldum hjá leiðarum. Tað áliggur leiðarunum at leggja egna arbeiðstíð til rættis. Almannaverkið vísti á, at leiðari fær ikki plusssaldu útgoldnað, heldur ikki í sambandi við at viðkomandi fer úr starvi.

*Grannskoðara-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur*

Í desember 2021 rindaði Almannaverkið advokati 175 t.kr. í ómaksløn fyri málsviðgerð. Sambært Búskaparskipan landsins er upphæddin goldin fyri mál, sum er til viðgerðar viðvíkjandi ætlan at byggja vardar bústaðir í einum almennum/privatum samstarvi.

Sambært Almannaverkinum hevði stovnurin havt bjóðað uppgávuna út, høvdu tey verið varug við kostnaðin. Almannaverkið vísti á, at stovnurin leitaði sær løgfrøðiliga hjálp frá advokati, sum hevði royndir á økinum, av tí at tílíkt samstarv við privatan veitara krevur væl skrivaðan sáttmála, har hædd er tikin fyri øllum.

Sambært viðmerkingum í fíggjarlógini 2022 til høvuðskontu 12.21.6.22 “Keyp og avhendan av lendi til leigubústaðir, løgujáttan”, hevur Almannaverkið heimild til at keypa grundstykki, við tí endamáli at selja sama grundstykki aftur til privatan veitara, sum vinnur útboð frá Almannaverkinum.

Vísandi til, at Landsverk síðani 2009 hevur havt heimild til at standa fyri allari bygging av bygningum hjá landinum, t.v.s. at bygningsumsitingin liggur hjá Landsverki, spurdi Landsgrannskoðanin í august 2022 landsstýrismannin um, hvønn leiklut Landsverk hevði í sambandi við ætlaðu byggingina.

Í november 2022 svaraði Almannamálaráðið, at *"Talan er ikki um at bjóða bygging út, sum Almannaverkið skal leiga ella viðlíkahalda. Talan er um útboð av bygningi, sum Almannaverkið skal hava ávísingarrætt til. Privati íleggjarin, t.e. útleigarin, leigar bústaðin beinleiðis til leigaran. Almannaverkið hevur einans ein ávísingarrætt, vísandi til leigulógina. Landsverk hevur soleiðis ongan leiklut í málinum, tí her er ikki talan um leiguavtalur hjá Almannaverkinum."*

## 8.3 Barnapeningur veittur í forskoti (LG 2015/212-213)

Í fleiri undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av barnapeningi, m.a. innheinting av barnagjøldum, móttikin av órøttum. Í august 2016 var eftirstøðan 445 t.kr. Almannaverkið krevur eftirstøðuna inn, men roknaði við, at meginparturin fór ikki at verða goldin.

Í 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at hóast tað var óvist, hvussu nógv veruliga kundi krevjast inn, helt Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verða veitt TAKS at fremja innheintingina, tá ið ikki bar til at fáa gjaldsavtalu við gjaldskyldug. Fyrireikingar til møguligar lógarbroytingar vóru byrjaðar í samráði við TAKS og Almannaverkið.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið hevði vent sær til TAKS fyri at fáa heimild til vega at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað var eftir at áseta reglur um tað, næstu ferð broytingar skuldu verða gjørdar í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl."

Í august 2023 er, sambært landsstýriskvinnuni, einki nýtt í málinum.

## 8.4 Innheinting av skyldugum barnapeningi (LG 2021/212-213)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av innheintingina hjá TAKS av forskotsrindaðum barnapeningi. Í landsroknskapinum sæst áognin sum nota 4 "TAKS, innkrevjing". Inngjøld av skyldugum barnapeningi eru á høvuðskontu 12.21.3.04, undirkontu 02.

Í januar 2022 var áognin fyri forskotsrindaðan barnapening 37,7 mió.kr., sum er samansett av "Eykagjald forskotsrindan" 39 t.kr., "Ígongurættur" 1.884 t.kr. og "Barnapeningur" 35.766 t.kr.:

| Land | Tal av skuldarum | Áogn í t.kr. |
|---|---:|---:|
| Føroyar | 377 | 13.617 |
| Danmark | 229 | 16.334 |
| Norðurlond | 42 | 2.241 |
| Onnur lond og ókendir bústaðir | 36 | 3.574 |
| **Tilsamans** | **684** | **35.766** |

TAKS heintar inn skuld hjá teimum, sum búgva í Føroyum, og hevur avtalur við myndugleikar í Norðurlondunum um innheinting.

1. januar 2022 vóru 15,4 mió.kr. av skyldugum barnapeningi til innheintingar hjá TAKS. Tá ið mál koma til Innheintingardeildina, fara tey beinleiðis til málsviðgera ella pantifúta, sum í fyrstu atløgu senda áminningarskriv út. Um skuldari ikki rindar innan rímiliga

tíð, sendir Innheintingin fráboðanarskriv ella samskiftir um telefon. Panting er seinasta amboðið.

Kann skuldari ikki rinda, ger TAKS avtalu við hann, um at rinda ávísa upphædd av útgoldnari løn; annars eftirheldur TAKS í A-inntøkuni, vanliga 15% afturat A-skattinum.

Um persónur, sum skyldar barnapening, fer uttanlands, t.d. at lesa, tekur TAKS støðu til, um avtala skal gerast við skuldaran, ella kravið skal sendast til innheintingar í útlandinum. TAKS kann steðga innheinting hjá lesandi. Tó mótroknar TAKS altíð í avlopsskatti e.ø. útgjøldum.

Sambært TAKS steðgar eykatrekk í A-inntøku ikki fyrningarfreist. Skuldari má aktivt taka við skuldini, ella má TAKS panta, so skuldin ikki fyrnar.

TAKS kann ikki eykatrekkja í DIS-inntøkum. Tey hava heitt á donsku myndugleikarnar um hjálp, men teir afturhalda ikki fyri skuld í tílíkum inntøkum. Innheintingin hevur tí heitt á umboð síni fyri útlond, ið luttaka á norðurlendskum fundum, um at útvega møguleika at afturhalda í DIS-inntøkum. Til samanberingar kann nevnast, at TAKS afturheldur í FAS-inntøkum.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at einki nýtt er hent í málinum.

Samanumtikið riggar innheintingin av skuld frá teimum, ið búgva í Føroyum, tí TAKS heldur lív í rættarkrøvunum. Ivasamt er tó, um øll skuldin verður goldin, serliga hjá teimum, ið eisini hava aðra skuld til tað almenna, ella har lítið gjaldføri er.

Um innheinting uttan fyri Føroyar virkar ella ikki, veldst um, hvat land skuldari er fluttur til. TAKS hevur avtalur við Danmark og onnur Norðurlond, men skipanirnar kunnu virka ymiskt. TAKS heintar ikki inn uttan fyri Norðurlond, tí stovnurin heldur, at útreiðslurnar standa ikki mát við, hvat fæst inn.

## 8.5 Eftirgeving av forskotsrindaðum barnapeningi (LG 2021/212-213)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin okkara samskifti við Almannaverkið um eftirgeving av skyldugum barnapeningi. Almannaverkið hevur, sambært lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar, heimild at eftirgeva skuld.

Fyri at fáa skuld eftirgivna er grundleggjandi treyt, at skuldari ikki er førur fyri at rinda, uttan at mangla tað, sum má metast at vera neyðugt til hansara egna og familjunnar uppihald. Skuld kann eftirgevast eitt ár eftir, at forskotsrindanin er endað, t.v.s. barnið er 19 ár, ella fyri tíðarskeið, har skuldari hevur sitið inni.

Landsgrannskoðanin vísti á, at einki oyðublað var til umsóknir um eftirgeving. Á heimasíðuni hjá Almannaverkinum vóru heldur ongar upplýsingar um møguleikan at søkja. Almannaverkið ráddi fólki til at senda stovninum teldupost, um tey ætlaðu at søkja um eftirgeving.

Almannaverkið hevði ikki yvirlit yvir, hvussu nógvar umsóknir tey høvdu fingið um eftirgeving, ella hvussu nógvar vóru sýttar ella játtaðar. Stovnurin hevði eitt yvirlit frá 2010 til 2015, sum vísti, at tey høvdu fingið 19 umsóknir. Við verandi skrásetingum bar ikki til at fáa yvirlit yvir tíðarskeiðið 2016 til 2021. Talan var tó um heilt fá mál.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at kunning nú er á heimasíðuni hjá Almannaverkinum um, at søkjast kann um eftirgeving við at senda Almannaverkinum teldupost, og at einki oyðublað er til endamálið.

## 8.6 Einkjubarnastyrkur (LG 2014/212-213)

Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingini av játtanini til einkjubarnastyrk.

Sambært § 21, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl." skal barnagjald, sum umsøkjari hevur móttikið av órøttum, gjaldast aftur. Lógin segði einki um, hvørji amboð Almannaverkið kundi ella skuldi brúka at krevja gjaldið aftur. Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skuldi forða fyri feilum.

Almannamálaráðið helt tað vera neyðugt at umrøða reglur um innkrevjing av útgjøldum nærri saman við TAKS og Almannaverkinum.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið hevði vent sær til TAKS fyri at fáa til vega heimild at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað var eftir at áseta reglur um tað, næstu ferð broytingar skuldu verða gjørdar í lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum.

## 8.7 Barnaískoyti (LG 2015/212-213)

Í undanfarnu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at ivi var um innheintingar-heimildirnar hjá Almannaverkinum. Sambært § 21, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl." skal tann, sum hevur móttikið barnaískoyti móti betri vitan, gjalda upphæddina aftur. Í lógini framgongur ikki, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja peningin aftur. Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skuldi forða fyri feilum.

Í 2017 helt Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verið veitt TAKS at heinta inn, um ikki bar til at fáa í lag gjaldsavtalu.

Í 2018 greiddi Almannamálaráðið frá, at fundur hevði verið um málið ímillum TAKS, Almannaverkið og Almannamálaráðið. Eingin niðurstøða var gjørd, tí støða skuldi takast til m.a. fíggjarlig, teknisk og løgfrøðilig atlit.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið hevði vent sær til TAKS fyri at fáa heimild til vega at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað var eftir at áseta reglur um tað, næstu ferð broytingar skuldu gerast í lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum.

## 8.8 Bústovnar o.a., løgujáttan (LG 2019/212-216)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av roknskapinum fyri Bústovnar o.a. Játtanin er á høvuðskontu 12.21.6.02 "Bústovnar o.a., løgujáttan". Vit umrøddu verkætlanir, ið eru nevndar í viðmerkingum í fíggjarlógunum 2017, 2018 og 2019.

Almannamálaráðið hevði um 70 bygningar tilsamans. Stovnarnir høvdu onga játtan til viðlíkahald í sínum rakstri. Landsgrannskoðanin spurdi Almannamálaráðið, hvørjar

raðfestingar vóru gjørdar 2017 til 2022, og hvussu býtið var ímillum viðlíkahald og umbyggingar í 2019.

Í 2020 vísti Almannamálaráðið á, at játtanin var til nýbyggingar, umvælingar og dagføringar av bygningum hjá ráðnum og stovnum undir ráðnum. Landsverk hevði ræðisrættin á játtanini og ráðið raðfesti játtanina í samstarvi við Landsverk og stovnarnar undir ráðnum. Tað var týdningarmikið, at neyvt samstarv var um nýtslu av játtanunum, soleiðis at sleppast kundi undan dupultarbeiði, og at játtanirnar blivu nýttar so skilagott sum møguligt.

Almannamálaráðið og Almannaverkið vóru umboðað í bygginevndum, har verkætlanir vóru settar í verk við verklagslóg. Regluligir mánaðarfundir ímillum landsstýrismannin og Landsverk vóru tiknir uppaftur í apríl 2021, har Landsverk kunnaði um støðuna á verkætlanunum.

*Eirargarður og Sambýli í Reynstúni*
Í staðin fyri at umbyggja Eirargarð gjørdi Almannamálaráðið av at byggja í Reynstúni á Argjum.

Ll. nr. 79/2017 "um at dagføra ognina Eirargarður 14/16" fyri í mesta lagi 30 mió.kr. kom í gildi 30. mai 2017, og fór úr gildi 31. desember 2019.

Frá 2016 til 2021 vóru tilsamans 13,3 mió.kr. brúktar til umvælingar av Eirargarði og til bygging í Reynstúni. Í oktober 2018 hevði landsstýrismaðurin slept ætlanini at heildar-umbyggja Eirargarð 14-16. Ístaðin gjørdi Landsverk ábøtur fyri at bøta um inni-umhvørvið.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at í 2019 og 2020 vóru 4,6 mió.kr. brúktar til umvæling av Eirargarði 14 og 16, til nýggj loft, lyftiútgerð o.a. Í 2023 var ætlanin at totalrenovera Eirargarð 14-1, og 3,1 mió.kr. vóru settar av til at betra inniluftina, nýtt loft, lyftiútgerð o.a.

Í august 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið á Eirargarði 16-1 byrjaði í mars 2022, og búfólkini kundu eftir ætlan flyta inn aftur síðst í august 2022.

Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at byrja upp á Eirargarð 16-2 í september 2022, og væntandi fór hetta arbeiðið at ganga skjótari, við tað at felagsarbeiðið er gjørt. Upprunaliga var ætlanin bert at umvæla/dagføra vátrúm á Eirargarði 16 1 & 2, men tað var broytt seinni, tí at tørvur var á fleiri dagføringum.

Sambært Almannamálaráðnum roknaði Landsverk við at brúka 700 t.kr. afturat, fyri at røkka nýggja málinum, t.e. at høvuðsumvæla 2 hæddir fyri umleið 5,4 mió.kr., og arbeiddi Landsverk við at finna fíggingina innan fyri verandi játtanarkarm.

Sambært Almannamálaráðnum hevur verið avbjóðandi at halda kostnaðar-metingarnar, av tí at príshækkingar á m.a. tilfari høvdu verið óvanliga stórar.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at høvuðsumvælingin og dagføringin av Eirargarði 16-1 og 16-2 er liðug. Høvuðstrappuuppgongdin er eisini dagførd. Príshækkingar, eyka arbeiði, og annað óvæntað í sambandi við viðlíkahaldsarbeiðið hevur havt við sær, at samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina er 6,3 mió.kr.

## 8.9 Almannaverkið, Trivnaðartænastur (LG 2022/212-216)

### 8.9.1 Eind 8 í Trivnaðardeplinum

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Eind 8 hjá Trivnaðartænastum. Játtanin er á høvuðskontu 12.21.6.09 "Trivnaðartænastur". Trivnaðartænasturnar virka sambært Ll. nr. 72/2020 "um almannatrygd og tænastur".

Eind 8 er partur av "Trivnaðardeplinum, likamlig brek", ætlaður til vaksin fólk, sum hava tørv á persónligum stuðli fyri at megna gerandisdagin. Í eindini eru: Sambýlið Niðaragøta, Sambýlið Sundsvegur, dagtilhaldini á Glyvrum, Skotarók og Heildin í Havn. Harafturat er ein einstaklingafyriskipan í Sandavági umframt stuðulsfyriskipanir.

Sambýli eru skipað eftir K. nr. 221/2020 "um húsaleigu og felags útreiðslur, skilhald o.a. á fyribils bústøðum og vardum bústøðum" og rundskrivi frá 1. januar 2009 "um skipan av sambýlum.

Tilboðini eru skipað sambært lógini um almannatrygd og tænastur, og eru í høvuðsheitum til fyritíðarpensjónistar, ið hava so týðandi skert virkisføri, at vanligi arbeiðsmarknaðurin ella arbeiðsfremjandi tiltøk ikki kunnu veita teimum neyðugar karmar og stuðul til at megna eitt arbeiði á jøvnum føti við onnur.

Felags fyri hesi fólkini er, at tey hava tørv á fakfólki at stuðla og vegleiða sær, bæði í sambandi við arbeiði og ítøkiligar arbeiðsuppgávur. Tørvur kann t.d. vera á hjálp til samskifti, til serliga umsorgan og røkt, ella stuðul til at vera saman við øðrum.

Stuðulstænastur, sum hava verið skipaðar í toymum, verða frameftir skipaðar sambært sjálvstøðugari áseting um dagstovna- og frítíðarheim, eins og frítíðartilboð í framtíðini verða skipað sum virknistænastur. Umlætting er skipað í áseting fyri seg.

Endamálið við grannskoðanini var m.a. at kanna um roknskapurin er rættur í mun til lóg, sáttmálar, vaktætlan v.m., og at kunna okkum nærri um innanhýsis mannagongdir.

**Roknskaparviðurskifti o.a.**

Nógv tann størsti parturin av útreiðslunum er til lønir v.m. Trivnaðartænastan hevur nakað av inntøkum frá húsaleigu og brúkaragjøldum.

Roknskapartøl fyri Eind 8:

*t.kr.*

| Heiti | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 36.627 | 37.069 | 32.962 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2.307 | 1.815 | 1.405 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 693 | 64 | 103 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 617 | 333 | 116 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 102 | 124 | 92 |
| Søla av vørum og tænastum | -66 | -53 | 0 |
| Ymsar rakstrarinntøkur | 0 | -6 | -147 |
| **Tilsamans** | **40.279** | **39.345** | **34.531** |

*Lønir*

Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin um setanarpolitikkurin er hildin, um lýsingar, umsóknir, prógv, tilmælir, tilboð um størv og setanarskriv v.m. vóru tøk. Vit samanhildu lønarseðlar við Vaktætlan fyri at staðfesta, um útgoldnu lønirnar eru rættar í mun til sáttmálar og arbeiðsætlanir. Einki var at finnast at nýggjaru setanunum.

Fleiri starvsfólk hjá Almannaverkinum hava fyrr verið í starvi hjá sjálvsognarstovnum, og í málum frá gomlu sjálvsognarstovnunum manglaðu onkrar lýsingar og prógv.

Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra lønarmálini og vísti á, at tað hevði gjørt umsitingina av lønarmálunum greiðari, um skjølini vórðu flutt í nýggju journalina. Almannaverkið tók tilmæli til eftirtektar.

## Vitjan á sambýli og dagtilhaldum

Fyri at kunna okkum um dagliga arbeiðið og at síggja hølini, vitjaði Landsgrannskoðanin í 2022 eitt sambýli og dagtilhaldini í Eind 8. Stovnurin hevur eisini átta einstaklingafyriskipanir. Trivnaðartænasturnar veita eisini stuðulstímar í norðara parti av Eysturoynni og í Norðstreymoy.

### *Sambýlið Niðaragøta*

Í Niðarugøtu í Hoyvík búgva fólk í hvør sínari íbúð við atgongd til felags køk, stovu og vaskirúm. Almannaverkið miðar eftir at skapa trygg og góð heim við búfólkunum í miðdeplinum. Búfólkini eru við í húsliga arbeiðinum eftir førimuni. Tey kunnu arbeiða í virknis- og verkstaðstilboði gerandisdagar, og í frítíðini kunnu tey vera við í tí, sum fyriferst í nærumhvørvinum.

Búfólkini rinda húsaleigu til Almannaverkið og gjald til felagskassa. Útreiðslurnar í roknskapinum eru tí fyri tað mesta lønir, bilútreiðslur, KT v.m.

Búfólkini hava sjálvi kontantan pening, og um tørvur er á tí, hjálpir UAP-toymið hjá Almannaverkinum teimum at umsita pensjónina.

### *Dagtilhaldið á Glyvrum*

Dagtilhaldið er ætlað fólki, yngri enn 67 ár, ið eru rakt av demens. Tey húsast í einum sethúsum. Loftið í húsunum er ikki góðkent sum dagtilboð ella til umlætting, tó at har eru fýra kømur og baðirúm. Tað verður onkuntíð brúkt til starvsfólkafundir v.m.

Pláss er fyri átta fólkum í dagtilhaldinum. Fýra starvsfólk eru, svarandi til 3 ársverk, umframt bilførara.

Eingin bíðilisti er til dagtilhaldið. Tey flestu, ið koma í har, hava heimahjálp, og leiðslan kunnar heimarøktina, tá ið dagtilhaldið steingir í 2 vikur um summarið. Luttakararnir í dagtilhaldinum á Glyvrum hava avvarðandi heima, og tí hevur ikki verið tørvur á at hava opið í vikuskiftum og í ferium.

Almannaverkið leggur dent á at skipa tryggan og virknan gerandisdag við atliti at førleikum, tørvi og áhuga hjá tí einstaka.

Fólkini rinda Almannaverkinum 1.200 kr. um mánaðin fyri mat og rinda eisini fyri tiltøk, tey fara til. Starvsfólkini rinda 150 kr. um mánaðin fyri mat.

Tilhaldið hevur tveir bilar. Fjarstøðurnar í Eysturoynni gera, at Almannaverkið hevur gjørt av at bjóða koyring til og frá tilhaldinum.

### *Dagtilhaldið Skotarók*

Skotarók í Havn er ætlað fólki, yngri enn 67 ár, ið eru rakt demens, og er skipað eins og dagtilhaldið á Glyvrum. Tilhaldið er í einum sethúsum, og pláss er fyri átta fólkum. Á loftinum og í kjallaranum eru kømur, sum verða brúkt til skrivstovu, verkstað o.a. Hølini í kjallaranum eru ikki góðkend til umlætting.

Opið er gerandisdagar vanliga arbeiðstíð. Fólk, ið búgva einsamøll, kunnu koma í tilhaldið leygardagar og sunnudagar.

Á Skotarók rinda brúkararnir kontant fyri mat eina ferð um mánaðin. Leiðarin førir inngjøldini í eina bók og leggur peningin í brævbjálva. Tá ið mánaðurin er úti, ger hon roknskap.

Skotarók hevur ein buss, ið tekur 9 fólk, men bjóðar ikki koyring til og frá dagtilhaldinum, tí fjarstøðurnar í Havn eru ikki so stórar. Starvsfólkini heinta tó nøkur, meðan onnur verða koyrd av avvarðandi.

*Dagtilhaldið Heildin í Havn*

Heildin er ætlað fólki, yngri enn 67 ár, sum hava seinheilaskaða. Trý fólk starvast í tilhaldinum, sum er opið hvønn gerandisdag.

Ymiskt er, hvussu brúkararnir av dagtilhaldinum eru fyri. Onkur er á arbeiðsmarknaðinum og kemur einstakar dagar, meðan onnur koma dagliga. Í dagtilhaldinum er ítriv, venjingar, sangløtur, útferðir o.a. Í ávísum førum veita tey heimavitjanir og serlig námsfrøðilig tilboð.

Matur fæst til keyps, og vanliga verður goldið so hvørt. Tey, sum koma hvønn dag, rinda 2.500 kr. fyri hálvt ár ísenn. Nøkur rinda størri upphæddir, og eiga tí pening á í kassanum. Í teimum førunum skráseta starvsfólkini inngjaldið í roknskaparheftið og telja niður, so hvørt viðkomandi brúkar av upphæddini.

Peningur og roknskaparhefti lógu í læstum peningakassa. Leiðarin førir inngjøld og innkeyp í roknskaparheftið og viðmerkir, um kvittan er við. Kvittanir lógu saman við mánaðarligum uppgerðum. Ongar skrivligar reglur eru fyri kontantkassan.

**Umsiting av peningi v.m.**

Sambært § 22 í roknskaparkunngerðini kunnu landsstovnar ikki fyrisita ogn ella skuld hjá øðrum, uttan at heimild er fyri tí, ella avtala er gjørd við aðalráðið ella annan javnsettan myndugleika. Sambært § 22 stk. 2 og 3, skal tøkur peningur setast inn í peningastovn, hann má ikki telja við í ogn og skuld hjá stovninum, og skal skrásetast samsvarandi Kontuskipan landsins.

Sambært Almannaverkinum verður peningurin frá teimum, ið luttaka í dagtilhaldunum á Glyvrum og í Skotarók nú settur á peningastovnskontu og umsitin í Búskaparskipan landsins. Luttakararnir í Heildini rinda kontant fyri mat.

Sambært Almannaverkinum eru tey í holt við at gera skrivligar mannagongdir fyri kassaumsitingina, og fara at venda sær til Almannamálaráðið viðvíkjandi spurninginum um heimild til umsiting og áseting av gjaldi.

### 8.9.2 Eind 11 í Trivnaðartænastum

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Eind 11, sum nærum øll er staðsett í Vági.

*Verkstaðið á Bakka*

Í sambandi við grannskoðanina í 2020 vístu starvsfólkini á Verkstaðnum á Bakka á, at gjóstur var í parti av bygninginum. Í august 2022 kunnaði Almannamálaráðið um, at Landsverk fyri stuttum hevði hugt at bygninginum, men síðani var einki hent.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at Verkstaðið á Bakka er umvælt. Landsverk ger enn aðrar dagføringar, sum eru við til at betra um umstøðurnar hjá borgarum og starvsfólkum.

*Eiðisgarður*

Felagshølini hjá Eiðisgarði eru í sama bygningi sum røktarheimið Hamragarður. Bygningurin er rímiliga nýggjur, men ávísir manglar høvdu verið, sum enn ikki vóru bøttir. Búfólkini høvdu egna íbúð við køki/alrúmi, kamari, gongd og baðirúmi. Í einari íbúð manglaði ein rútur. Sambært starvsfólkunum var rúturin tikin úr, fyri at kanna vindeygakarmin. Í felagshølunum vóru flestu manglarnir, at vindeygu og terrassuhurðar ikki virkaðu.

Í 2022 greiddi landsstýrismaðurin frá, at í sambandi við eftirlitsvitjan hjá Løgtingsins umboðsmanni á sambýlinum kunnaði Almannaverkið um, at ósemja var ímillum Landsverk og arbeiðstakaran, og tískil vóru feilir og manglar ikki umvældir.

Umboðsmaðurin segði í fyribilsfrágreiðing frá eftirlitsvitjanini, at tað var óheppið, at búfólkini á Eiðisgarði í so langa tíð noyddust at finna seg í teimum viðurskiftum, ið sýnsfrágreiðingin greiddi frá. Umboðsmaðurin bað Almannaverkið kanna, um møguleiki var at gera ábøtur, hóast ósemjuna ímillum Landsverk og arbeiðstakaran.

Í 2022 spurdi Almannaverkið Landsverk, um møguleiki var at gera onkrar ábøtur, sum t.d. brotnu rútarnar, hóast ósemjan við arbeiðstakaran ikki var avgreidd enn. Landsverk svaraði, at stovnurin fór at taka málið upp. Á fundi í juli 2022 ímillum Almannamálaráðið og Landsverk var málið umrøtt. Niðurstøðan var, at Landsverk kannaði nærri, hvussu málið um bráðfeingis ábøtur kundi loysast.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at Landsverk hevur verið á staðnum, og bráðfeingis viðlíkahald er gjørt.

## 8.10 Felagskassar (LG 2022/212-216)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapirnar 2022 fyri felagskassarnar hjá sambýlunum undir Almannaverkinum. Bókhaldið er í Búskaparskipan landsins undir "ogn og skuld hjá øðrum", og vanlig krøv eru til roknskap og grannskoðan.

Roknskapirnir í 2022 geva samanumtikið eina rættvísandi mynd av virkseminum í árinum. Samanborin við undanfarin ár eru stórir batar viðvíkjandi rættleikanum av fíggjarstøðuni, og Landsgrannskoðanin hevur ikki stórvegis viðmerkingar í sambandi við grannskoðanina.

## 8.11 Arbeiðsfremjandi tiltøk (LG 2021/212-217)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av skipanunum "Arbeiðsbúgving", "Tillagað starv" og "Vart starv", sum eru á undirkontum til høvuðskontu 12.21.7.02 "Arbeiðsfremjandi tiltøk". Í 2021 var samlaða játtanin til Arbeiðsfremjandi tiltøk 118 mió.kr.

Heimild at veita stuðul er í Ll. nr. 63/2012 "um arbeiðsfremjandi tiltøk". Lógin hevur til endamáls at stuðla undir eitt virkið arbeiðslív hjá persónum, sum hava ella kunnu fáa trupulleikar við at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.

Roknskapartøl frá 2018 til 2022:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiðsbúgving | 32.741 | 32.297 | 30.404 | 33.770 | 41.214 |
| Tillagað starv | 34.026 | 49.958 | 62.685 | 74.061 | 83.237 |
| Vart starv | 12.045 | 9.318 | 7.634 | 9.897 | 7.003 |
| **Tilsamans** | **78.812** | **91.573** | **100.723** | **117.728** | **131.454** |

### Tillagað starv

Lønarískoyti kann veitast persóni í tillagaðum starvi á arbeiðsmarknaðinum, um arbeiðsførleikin er minkaður við í minsta lagi 1/3, og viðkomandi tí ikki kann fáa ella varðveita arbeiði undir vanligum treytum.

Hjá fleiri var lønarískoytið ikki javnað, eftir at lønirnar á arbeiðsmarknaðinum vóru hækkaðar. Sambært Almannaverkinum hava tey ikki havt skipaða javning av lønarískoytinum, men frá 2021 skuldi nýggj mannagongd tryggja, at javningin var røtt frameftir.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at *"lønarískoytini verða javnaði sambært § 22 stk. 8 í løgtingslógini um arbeiðsfremjandi tiltøk, t.e. upphæddir sbrt. stk. 1 og 3 verða javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.*

*Almannaverkið ásetur nýggjar lønarsatsir sambært sáttmála 12 mánaðir aftaná at ein fær játtan um tillagað starv, og eftir hetta leypandi hvønn 12. mánað."*

### Vart starv

Síðani 1. januar 2013 hevur heimild ikki verið at seta á stovn vard størv. Persónar, ið vóru í vardum starvi, ella sum høvdu játtan um vart starv eftir gomlu treytunum, vóru verandi í størvunum sambært skiftisreglunum í lógini.

Arbeiðsgevarar, sum søktu um endurgjald, skuldu brúka oyðubløð hjá Almannaverkinum. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra oyðubløðini, t.d. tíðarskeið og lønargjøld. Sambært Almannaverkinum var eingin tíðarfreist hjá arbeiðsgevarum at søkja um endurgjald. Ein arbeiðsgevari hevði í september 2020 søkt og fingið lønarendurgjald fyri 2019.

Almannaverkið kannaði ikki umsóknirnar gjølla, tá ið tey móttóku tær. Málsviðgeri kannaði, um alt sá rætt og rímiligt út, og at tað var í samsvari við játtanina.

Almannaverkið endurrindaði einum arbeiðsgevara 4,31% fyri arbeiðsmarknaðargjøld. Í sama máli fekk persónurin 10% í eftirløn frá arbeiðsgevaranum, tó at sáttmálin ásetti, at hjálparfólk frá januar 2018 fingu 12% í eftirløn. Sambært Almannaverkinum vóru arbeiðsmarknaðargjøldini sannlíkt skeiv, og áttu at verið 5,06%. Almannaverkið rindaði eftirlønargjaldið, sum var sett í umsóknina, men gjørdi vanliga vart við skeivleikar, um søkt varð um meira, enn játtað var. Annars var tað ábyrgd arbeiðsgevarans at rinda arbeiðstakaranum rætta eftirløn.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tá ið útrokningargrundarlagið ikki var rætt, vóru útgjøldini heldur ikki røtt. Stakroyndirnar vístu fleiri ivamál. Landsgrannskoðanin mælti til, at Almannaverkið styrkti eftirlitið við, at upphæddirnar á oyðubløðum og lønarseðlum samsvaraðu við tølini frá TAKS.

Um umsøkjarar skuldu fylla út oyðubløð, fyri at kundu søkja um endurgjald, mælti Landsgrannskoðanin til, at Almannaverkið dagførdi oyðubløðini.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at Almannaverkið sendi nýggj dagførd oyðubløð til arbeiðsgevararnar í november 2021. Tað eru kortini fleiri arbeiðsgevarar, sum brúka gomul oyðubløð ella skjøl úr egnum skipanum.

Almannaverkið ger stakroyndir fyri at kanna, um upphæddirnar eru rættar, tá ið umbønir um endurgjald koma inn. Í løtuni eru 41 vard størv virkin.

### Avtalað løn

Landsgrannskoðanin umrøddi í seinastu frágreiðing grannskoðan av høvuðskontu 12.21.7.02 "Arbeiðsfremjandi tiltøk", herundir avtalaða løn sambært § 24 í Ll. nr. 63/2012.

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur mál viðvíkjandi løn, sum arbeiðstakarar kundu avtala við fyritíðarpensjónistar, og sum var lægri enn sáttmálalønin. Nøkur mál snúðu seg um persónar í starvi í royndartíð uttan løn. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um heimild var fyri royndartíð uttan løn í fyriskipanini.

Tá ið ásett er í lógini, at avtala skal gerast í samráði við viðkomandi fakfelag, helt Landsgrannskoðanin tað vera umráðandi, at fakfeløg verða kunnað í hvørjum einstøkum føri.

Í 2018 var landsstýrismaðurin samdur við Landsgrannskoðanina, at tað hevði týdning, at fakfeløg vórðu kunnað í hvørjum einstøkum føri, men lógin fyrihelt seg ikki til, hvør hevði ábyrgd av at kunna fakfelagið í sambandi við eina avtalu. Landsstýrismaðurin ætlaði at taka málið upp við Almannaverkið, soleiðis at fakfeløgini fóru at verða kunnað um einstøku avtalurnar á ein smidligan hátt.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan víst á, at sambært lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk skal Almannaverkið vátta, at persónur, ið ger avtalu um "avtalaða løn", er fyritíðarpensjónistur. Almannaverkið er annars ikki partur av málum um avtalaða løn. Almanna- og mentamálaráðið og Almannaverkið hava umrøtt málið og halda ikki, at tað er rætt, at Almannaverkið við verandi orðing í lógini skal hava virknari leiklut. Almanna- og mentamálaráðið heldur, at tørvur er á at endurskoða § 24 í lógini við tí endamáli at geva fleiri fyritíðarpensjónistum ágóða av skipanini við avtalaðari løn.

# 9. Fíggjarstøða

## 9.1 Fíggjarstøða stovnanna

Fíggjarstøða er ein sera týdningarmikil partur av roknskapinum; hon er fíggjarliga uppgerðin av ogn og skuld eitt ávíst mund, vanliga við árslok.

Í Búskaparskipan landsins ber til at vísa fíggjarstøður í fleiri dimensjónum, t.d. fyri samlaða landsroknskapin, fyri hvørja høvuðskontu sær ella fyri hvørt stovnsnummar sær.

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað fíggjarstøðurnar til allar høvuðskonturnar í landsroknskapinum. Endamálið við grannskoðanini var at kanna um:

- tíðaravmarkingar eru í lagi,
- ognir eru skrásettar,
- ognarar og skuldarar tykjast rættir,
- goymslur eru skrásettar rætt,
- upphæddir eru, sum hava staðið óbroyttar í fleiri ár,
- peningastovnskontur eru skrásettar,
- saldan á peningastovnskontunum stemmar við uttanhýsis kontuavrit, og
- um fíggjarstøðan í sínari heild myndar ogn og skuld á rættan hátt.

### 9.1.1 Eftirlit og góðkenning av roknskapum

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum umrøtt roknskapargóðkenningar. Í § 9 í roknskaparkunngerðini er ásett, at stovnsleiðarar skulu góðkenna roknskapirnar viðvíkjandi stovnunum mótvegis hægri myndugleika.

Tað at hava ábyrgd av roknskapinum merkir, at aðalráðini og stovnarnir undir teimum hava støðugt innanhýsis eftirlit, sum tryggjar, at ársroknskapurin er rættur, og at hann gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar. Sama er eisini galdandi fyri fíggjarstøðupostar.

Landsgrannskoðanin hevur áður staðfest, at tað javnan hendir seg, at innanhýsis eftirlitið hjá stovnum ikki er nøktandi, og tað ger, at Landsgrannskoðanin ikki kann sanna, at roknskapurin er rættur. Sum dømi hava vit víst á, at skrásetingin av ognum er ikki nøktandi, og at rundskrivið um at tíðaravmarka lønir verður ikki hildið.

***Skráseting av ognum er ikki nøktandi.***

Landsgrannskoðanin hevur hugt at øllum fíggjarstøðunum í Búskaparskipan landsins, tó ikki teimum, sum verða grannskoðaðar av privatum grannskoðarum.

Við árslok 2022 vóru 314 høvuðskontur í landsroknskapinum, og undir teimum vóru 537 stovnsnummur. Privatir grannskoðarar grannskoða 28 høvuðskontur.

Ikki allar høvuðskonturnar hava veruliga ogn og skuld í fíggjarstøðuni. Tær flestu av teimum 127 høvuðskontunum, sum ikki høvdu fíggjarstøðu við ogn og skuld, hava postar sum nevnast "tøknilig millumrokning (StRk. 0360)" og "salda primo (StRk. 0510)". Postarnir svara til samlaðu játtanirnar til einstøku høvuðskonturnar í fíggjarlógunum, t.v.s. at saldurnar vaksa við árligu játtanunum.

Samlað fíggjarstøða 2021 og 2022, sambært Búskaparskipan landsins:

*t.kr.*

| StRk. | Heiti | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| 0121-0149 | Ítøkilig- og ikki-ítøkilig ogn | 1.036.489 | 982.438 |
| 0210-0222 | Partabrøv o.t. | 2.310.379 | 2.347.047 |
| 0250-0269 | Útlán netto | 81.134 | 73.631 |
| 0310 | Goymslur | 66.400 | 77.455 |
| 0321-0329 | Tænastu- vøruskuldarar o.t., netto | 194.279 | 213.467 |
| 0330-0339 | Skattir og avgjøld, netto | 359.138 | 338.084 |
| 0358-0359 | Ferðaavrokning og ferðaforskot | 56 | 37 |
| 0360 | Tøknilig millumrokning | 1.695 | 7.244 |
| 0363 | Millumrokn.við landkassan, tíðaravmarking | -17.502 | -28.405 |
| 0350, 0352, 0371, 0643 | Onnur áogn | 65.898 | 64.792 |
| 0375 | Tíðaravmarking, ogn | 89.582 | 82.147 |
| 0401-0438 | Virðisbrøv, bankakontur og forskotskassar | 3.848.698 | 3.873.848 |
| 0510 | Salda primo | -1.063.975 | -1.251.463 |
| 0531-0536 | Mótkontur til ognir | -1.654.545 | -1.634.406 |
| 0621-0632 | Avstemmingarkontur, TAKS | 0 | -19.129 |
| 0661 | Trygdir | 165.385 | 209.200 |
| 0662 | Trygdir, mótkonta | -165.385 | -209.200 |
| 0751-0754 | Brævalán, marknaðarvirði | -4.039.035 | -3.540.842 |
| 0811 | Skuld, stovnar, sum eru í landskassadøm. | -399.649 | -354.997 |
| 0812 | Stovnar, ið hava egið roknskapardømi | -66.450 | -50.537 |
| 0814 | Skuld, sum er flutt til útgjaldingar, FSL útgjald | -311.765 | -323.232 |
| 0819 | Skuld, sum er greidd til útgj., ymsar skipanir | -121.519 | -66.518 |
| 0831-0834 | MVG, netto | 341 | -1.268 |
| 0842-0843 | Viðurskifti við kommunur, ikki eru avroknað | 22.073 | 5.741 |
| 0849 | Ymsar, ikki avgreiddar skyldur | -4.894 | -1.436 |
| 0850 | Varðveitingar (deponeringar) og trygdir | -9.434 | -14.835 |
| 0865 | Tíðaravmarking, skuld | -68.183 | -91.948 |
| 0881 | Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t. | -104.616 | -101.486 |
| 0646, 0888 | Skuld, annað | -146.634 | -507.676 |
| 0889 | Skyldur, ið ikki eru endaligar | -67.960 | -77.754 |
| **Tilsamans** | | **0** | **0** |

## 9.1.2 Grannskoðan

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið fíggjarstøðurnar við at kanna, eftirrokna og meta um postarnar fyri einstøku høvuðskonturnar. Harafturat hava vit hugt at skjalfestingini í Búskaparskipan landsins, og í teimum førum skjalfestingin ikki var nøktandi, bóðu vit avvarðandi stovnar um skjalprógv.

Í teimum førum Landsgrannskoðanin var varug við viðurskifti, sum kravdu nærri frágreiðing, bóðu vit avvarðandi stovn greiða frá.

Niðanfyri hava vit tikið samanum úrslitið av grannskoðanini av nøkrum av roknskaparpostunum í fíggjarstøðuni.

*Ítøkilig- og ikki-ítøkilig ogn*

Ítøkilig ogn er t.d. grundstykkir, bygningar, bilar og rakstrargøgn annars. Ikki-ítøkilig ogn er t.d. ritbúnaður. Í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum er ein postur, sum eitur "Immateriellur og materiellur útbúnaður", men eingin upphædd er ásett. Sjálvt um upprunavirði á ognum og avskrivingar eru skrásett í Búskaparskipan landsins, ber ikki til at nýta tey til fíggjarstøðuna, av tí at nógvar ognir eru ikki skrásettar, og virðið á skrásettu ognunum sjáldan er dagført.

Í 2017 var roknskaparkunngerðin broytt við K. nr. 110/2017 “um broyting í kunngerð um roknskaparverk landsins o.t.” Sambært § 20 í kunngerðini skulu stovnar gera yvirlit yvir ognir, so sum verkløg, bygningar, maskinur, før, innbúgv og annan virðismiklan útbúnað. Yvirlitini skulu fevna um ognir og útbúnað, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr. Ognirnar og útbúnaðurin skulu skrásetast í Búskaparskipan landsins, um ikki stovnurin hevur fingið loyvi til at nýta egna búskaparskipan.

Ongar ávísar reglur eru um at skráseta smærri ognir við keypsvirði undir 50 t.kr. Landsgrannskoðanin hevur tó víst á, at tað er skynsamt at føra yvirlit yvir smærri ognir, ikki minst KT-útbúnað, sum eisini er undir serstøkum reglum um burturbeining.

Í 2020 kannaði Landsgrannskoðanin um ognir landsins vóru skrásettar, og um tær vóru rætt skrásettar. Í kanningini staðfesti Landsgrannskoðanin, at reglurnar um at skráseta ognir vóru ikki hildnar.

Í hesari grannskoðanini hevur Landsgrannskoðanin við stakroyndum kannað, um ognir eru skrásettar í Búskaparskipan landsins, og um avskrivingarnar eru rætt roknaðar. Eisini kannaðu vit, um skrásettu ognirnar framvegis eru ogn hjá landinum. Í fleiri førum var skrásetingin ikki røtt, og Landsgrannskoðanin kann tí aftur staðfesta, at skrásetingarnar av ognum í Búskaparskipan landsins ikki eru fullfíggjaðar ella dagførdar.

*Tænastu- og vøruskuldarar o.t.*

Nógvir stovnar hava skrásett tænastu- og vøruskuldarar í fíggjarstøðuna. Talan er um ágóða av seldum tænastum og vørum. Hjá flestu stovnum, sum hava tænastu- og vøruskuldarar, eru nógvar bókingar. Í teimum førunum hevur Landsgrannskoðanin við stakroyndum kannað nakrar bókingar nærri. Vit hava eisini hugt at heildini, at einki sær óvanligt út. Einki var at finnast at.

*Kreditorskuld*

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin víst á, at kreditorsaldan sæst ikki í fíggjarstøðuni hjá einstøku stovnunum, men samlaða saldan hjá øllum stovnum er savnað á einum stovnsnummari, t.e. 009999 “Landskassin”. Stovnsleiðarar kanna og góðkenna rakstrarroknskap og fíggjarstøðu á egnum stovnsnummari, og harvið er kreditorsaldan ikki partur av góðkenningini. Tó at stovnar meginregluliga ikki góðkenna samlaðu kreditorsalduna, heldur Gjaldstovan, at stovnsleiðslurnar skulu síggja til, at alt er bókað og tikið við í roknskapin. Landsgrannskoðanin mælti Gjaldstovuni til:

- at gera aldursgreinaðar útskriftir og greiningar, sum vísa, um gamlar saldur og saldur, sum ongan áhuga hava longur, eru í kreditorskipanini,
- at hava skipað samskifti við stovnar um kreditoravstemmanir og tryggja, at avstemmanir verða framdar á nøktandi støði, og
- at skipa samskiftið somikið væl, at ábyrgdarpersónur á Gjaldstovuni kundi vátta, at kreditorposturin í Landsroknskapinum var rættur.

Gjaldstovan hevur nú ment eina funku í Leiðslukunningarskipanini, soleiðis at til ber at síggja, hvussu leingi rokningar hava ligið í verkgongdarskipanini. Gjaldstovan vísti á, at einstaki stovnurin ábyrgist fyri at stemma kreditorar av. Tó at Gjaldstovan hjálpir nógvum stovnum, hevur hon ikki orku til at stemma allar kreditorar av. Landsgrannskoðanin hevur staðfest, at støðan viðvíkjandi kreditorskuld er óbroytt.

*Tøkur peningur, peningastovnskontur*

Allar peningastovnskontur hjá landinum skulu skrásetast í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin hevur kannað, at saldan á kontunum í Búskaparskipan landsins stemmar við kontuavrit frá peningastovnum. Nakrar kontur vóru ikki skrásettar í Búskaparskipan landsins; annars var einki at finnast at.

*Tíðaravmarkingar av lønum*

Sambært rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum, frá 18. desember 2017 "um at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum", skulu lønirnar tíðaravmarkast. Í fylgiskjali til rundskrivið er vegleiðing, sum nágreinar, hvat skal tíðaravmarkast, og hvussu tað skal gerast.

***Skyldugar lønir skulu tíðaravmarkast í BSL.***

Meginreglan er, at tímasaldur skulu tíðaravmarkast, tá ið starvsfólk eigur fleiri enn 40 tímar ella skyldar meira enn 30 tímar. Serstakar frívikur, sum starvsfólk hevur spart saman, skulu tíðaravmarkast sum partur av tímasalduni. Eisini skulu lønir, sum standast av vaktum og ikki-avgreiddum sáttmálabroytingum, sum meginregla tíðaravmarkast, umframt uppsagnarløn, tá ið starvsfólk verður fríttstillað í uppsagnartíðini.

Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at ikki allir stovnar hava hóskandi tíðarskrásetingar, sum eiga at vera grundarlag undir at tíðaravmarka arbeiðstímar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um stovnar hava tíðaravmarkað lønir, og um tær eru tíðaravmarkaðar eftir vegleiðingini í rundskrivinum.

Ikki-avgreiddar sáttmálabroytingar hevur Gjaldstovan tíðaravmarkað fyri allar stovnar.

Ikki allir stovnarnir hava tíðaravmarkað tímasaldur sambært rundskrivinum. Nakrir hava tíðaravmarkað, men hava ikki fylgt mannagongdini í vegleiðingini.

Nakrir stovnar hava ikki tíðaravmarkað tímasaldur, og spurdir, um tímasaldur ikki skuldu tíðaravmarkast, svaraðu nakrir teirra, at teir av misgáum ikki hava tíðaravmarkað tímasaldurnar, men fara at gera tað frameftir. Aðrir stovnar svaraðu, at ongar tímasaldur vóru at tíðaravmarka.

*Ikki inntøkuført – granskingarstyrkir, gávur o.t.*

Roknskaparposturin, granskingarstyrkir, gávur, o.t., fevnir um upphæddir, sum latarar hava goldið til ymisk endamál, t.d. stuðul til verkætlanir ella stuðul til at keypa ávís amboð. Upphæddirnar eru goldnar, men ikki inntøkuførdar í raksturin.

Landsgrannskoðanin hevur í hesari kanningini hugt at bókingunum og mett um, um roknskaparposturin er rættur. Í sambandi við vanligar stovnsgrannskoðanir verður roknskaparposturin kannaður gjølliga.

*Aðrir roknskaparpostar í fíggjarstøðuni*

Fleiri av postunum í fíggjarstøðuni, sum ikki eru nevndir omanfyri, verða grannskoðaðir við serstøkum grannskoðanum, t.e. gjaldføri, goymslur, útlán og landskassaskuld, og eru ikki partur av hesari grannskoðanini. Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið hinar roknskaparpostarnar í fíggjarstøðuni, partvíst við stakroyndum og partvíst eisini við at kanna øll skjølini.

*Gjøgnumgongd av saldum*

Gjøgnumgongdin av fíggjarstøðunum vísti, at hjá fleiri stovnum hava saldur staðið óbroyttar í fleiri ár. Landsgrannskoðanin spurdi stovnarnar, hvør orsøkin var, og um áognin ella skuldin framvegis var galdandi. Í nøkrum førum vístu stovnarnir á, at áognin ella skuldin framvegis var galdandi, og greiddu frá, hví so var. Í øðrum førum søgdu nakrir stovnar, at upphæddin ikki var galdandi longur, men skuldi bókast burtur. Í triðja lagi var eisini ein stovnur, sum ikki visti, hví upphæddin stóð í fíggjarstøðuni og mátti taka málið upp við Gjaldstovuna. Í hesum málinum var upphæddin bókað í sambandi við samanlegging av stovnum.

### Samlað niðurstøða

Niðurstøðan av grannskoðanini er, at framvegis er ikki komið á mál at fáa skrásett ognirnar hjá landinum í Búskaparskipan landsins ella aðra búskaparskipan og at dagføra tað, sum er skrásett.

Tó at rundskrivið um tíðaravmarking av lønum er frá 2017, halda fleiri stovnar og aðalráð ikki reglurnar. Reglurnar verða tulkaðar ymiskt, og tí er tíðaravmarkingin ikki eins hjá øllum. Eisini eru stovnar, sum ikki hava tíðaravmarkað lønir, sjálvt um teir hava tímasaldur at tíðaravmarka.

Stovnar kunnu hava trupult við at avstemma kreditorskuld, av tí at kreditorskuldin ikki er í fíggjarstøðuni hjá stovnunum. Gjaldstovan hevur gjørt átøk at lætta um avstemmingina.

Samanumtikið er niðurstøðan av grannskoðanini av fíggjarstøðum hjá øllum høvuðskontum í Búskaparskipan landsins, at ymiskt er, hvussu rættar fíggjarstøðurnar eru. Nakrir stovnar leggja stóra orku í at stemma fíggjarstøðupostarnar av, meðan aðrir gera minni. Dømi eru um, at upphæddir í fíggjarstøðuni av órøttum hava staðið óbroyttar í áravís. Samanlagt fyri landsroknskapin merkir tað, at fíggjarstøðan er ikki røtt.

## 9.2 Fíggjarstøða landskassans (LG 2022/300-000)

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er samandráttur av fíggjarstøðunum hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og skuldini. Partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

Landsgrannskoðanin hevur í stóran mun bygt grannskoðanina av postum í fíggjarstøðuni 2022 á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Fíggjarstøðan við árslok 2018 til 2022.

*mió.kr.*

| | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| **OGN** | | | | | |
| Kapitalinnskot | 390 | 399 | 402 | 0 | 0 |
| Keypsskála-skrásett virðisbrøv | 0 | 0 | 0 | 470 | 452 |
| Virðisbrøv | 1.591 | 1.626 | 1.791 | 1.841 | 1.895 |
| Útlán | 109 | 101 | 91 | 81 | 74 |
| Áogn o.a. | 665 | 657 | 718 | 765 | 774 |
| Tøkur peningur | 3.666 | 3.478 | 4.729 | 3.849 | 3.874 |
| **Ogn tilsamans** | **6.421** | **6.261** | **7.731** | **7.005** | **7.069** |
| **SKULD** | | | | | |
| Langfreistað skuld | 4.608 | 2.472 | 4.069 | 2.739 | 2.991 |
| Stuttfreistað skuld | 1.060 | 2.445 | 2.438 | 2.584 | 2.174 |
| Útjavningarkonta | 753 | 1.344 | 1.224 | 1.682 | 1.903 |
| **Skuld tilsamans** | **6.421** | **6.261** | **7.731** | **7.005** | **7.069** |

### 9.2.1 Kapitalinnskot (LG 2022/300-102)

Kapitalinnskotið í landsroknskapinum hevur fevnt um Fíggingargrunnin frá 1992. Í desember 2020 fór Fíggingargrunnurin í sjálvbodna likvidatión, og 19. august 2021 er hann strikaður úr partafelagsskránni.

*t.kr.*

| Kapitalogn í landsfyritøkum | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Kapitalogn við ársbyrjan | 399.130 | 402.137 | 0 |
| Javning, kapitalognin samsvarar við eginognina í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum | 3.007 | 0 | 0 |
| Frágongd | 0 | -402.137 | 0 |
| **Kapitalogn við ársenda** | **402.137** | **0** | **0** |

Kapitalognin í 2020 svaraði til eginpeningin í Fíggingargrunninum við árslok 2019. Meginparturin av ognunum hjá grunninum vóru partabrøv í BankNordik. Grunnurin átti 3.342.280 partabrøv í bankanum, svarandi til 34,8% av samlaðu partabrøvunum.

Tá ið Fíggingargrunnurin var tikin av, blivu partabrøvini í BankNordik flutt til landskassan í postin “Keypsskála-skrásett virðisbrøv” í fíggjarstøðuni. Restin av ognini hjá grunninum er inntøkuførd í rakstrinum.[21]

Í nógv ár hevur Løgtingið mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum, t.d. sum “Kapitalogn í landsfyritøkum”.

Í 2013 kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um, at hesir grunnar verða ikki tiknir við í landsroknskapin, men verða partur av samlaða almenna roknskapinum.

Í 2014, 2015 og aftur í 2016 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt var framvegis við spurninginum, hvussu samlaði almenni roknskapurin skuldi gerast upp. Ætlanin var, at Frítíðargrunnurin, eins og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, skuldi bóka beinleiðis í Búskaparskipan landsins.

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum “Eksternir grunnar”. Ætlanin var, at eginpeningurin í Húsalánsgrunninum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframagrunninum í framtíðini skuldi takast við í landsroknskapin undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.” Eftir var at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kundu takast við í landsroknskapin.

Í 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt var við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini skuldi takast til tilknýti til landsroknskapin.

Í 2018 og aftur í 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at tað framhaldandi var arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið var gjørt í stigum. Í 2018 var miðað ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 skuldi eginpeningurin í eksternu grunnunum takast við undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.” Sambært landsstýrismanninum var tað ikki gjørt kortini.

Arbeitt var framvegis við nýggjum lógaruppskoti um Realin. Landsstýrismaðurin kunnaði um, at lógaruppskotið fór at vera sent til hoyringar í apríl 2019. Í uppskotinum var ásett, at Realurin verður skrásettur í landsroknskapinum, men verður ikki tikin við í fíggjarlógini. Tað eydnaðist ikki at fáa uppskotið fyri Løgtingið, áðrenn Tingið fór heim í mai 2019.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at *“uppskot um broyting í løgtingslóg fyri Realin var í apríl 2019 til almenna hoyring.”*

Í mai 2022 var lógin um Føroya Realkreditstovn[22] broytt, og í § 16, stk. 3, er ásett, at *“Stovnurin verður skrásettur í landsroknskapinum, men virksemið hjá stovninum verður ikki tikið við í løgtingsfíggjarlógini”*. Lógin kemur í gildi 1. januar 2023.

Í august 2023 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at fyri summarfrítíðina var fundur við Landsbankan, Hagstovuna og Gjaldstovuna um krøv og leist fyri innlating av roknskapartølum frá feløgum og grunnum. Arbeitt verður við at gera avtalu við eitt felag um, hvat og hvussu upplýsingar skulu latast inn, ábyrgdarbýti o.a. Avtaluleisturin skal síðani eftir ætlan brúkast til hini feløgini og grunnarnar.

[21] Sí notu 1 á síðu 310 í landsroknskapinum fyri fíggjarárið 2021.
[22] Løgtingslóg nr. 75 frá 5. november 1998 um Føroya Realkreditstovn (Realin).

### 9.2.2 Keypsskála-skrásett virðisbrøv

*t.kr.*

| | 2021 | 2022 |
|---|---|---|
| BankNordik | 469.590 | 452.259 |

Í 2021 vóru 3.342.280 partabrøv í BankNordik flutt frá Fíggingargrunninum frá 1992 til landskassan. Partabrøvini eru skrásett í keypsskála. Frammanundan átti landið harafturat 170 partabrøv, sum vóru skrásett í egnari goymslu, soleiðis at landið eigur tilsamans 3.342.450 partabrøv. Við árslok 2022 var kursurin 135,3075.

### 9.2.3 Virðisbrøv

*t.kr.*

| Skrásett í landsroknskapinum | 2020 | 2021 | 2022 | Til skjals |
|---|---|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 160.300 | 160.300 | Ja |
| P/f Norðoyatunnilin | 235.000 | 235.000 | 235.000 | Ja |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 77.948 | 77.948 | Ja |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 43.000 | 43.000 | Ja |
| P/f Fiskaaling | 17.376 | 17.376 | 17.376 | Ja |
| P/f Føroya Lívstrygging | 11.667 | 11.667 | 11.667 | Ja |
| P/f Vága Floghavn | 822.818 | 822.818 | 822.818 | Ja |
| P/f Atlantic Airways | 186.912 | 186.912 | 186.912 | Ja *) |
| P/f Elektron | 2.347 | 2.347 | 2.347 | Ja |
| Sp/f Ítróttavedding | 20 | 20 | 20 | Nei |
| P/f Smyril Line | 32.760 | 32.760 | 32.760 | Ja |
| P/f Tjaldur | 140 | 140 | 140 | Nei |
| P/f BankNordik | 1 | 1 | 1 | Ja *) |
| P/f Visit Faroe Islands | 500 | 500 | 500 | Nei **) |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 200.000 | 250.000 | 300.000 | Nei **) |
| P/f Suðuroyartunnil | 0 | 0 | 4.000 | Nei **) |
| **Partabrøv tilsamans** | **1.790.788** | **1.840.788** | **1.894.788** | |

*) Partabrøvini eru skrásett elektroniskt og tí pappírsleys.
**) Partabrøv verða ikki útskrivað longur.

Sum áður nevnt, átti landskassin, afturat partabrøvunum hjá Fíggingargrunninum frá 1992, eisini 170 partabrøv. Umframt at vera í postunum Keypsskála-skrásett virðisbrøv, eru partabrøvini eisini bókað til virði 1 t.kr. í postinum Virðisbrøv.

Partapeningurin í P/f Eystur- og Sandoyartunlar er hækkaður við 50 mió.kr. í 2022, og tað er í samsvari við Ll. nr. 30/2014[23].

Í november 2022 er P/f Suðuroyartunnil stovnað við 4 mió.kr. í partapeningi.

Í hesum 10 feløgunum eigur landið allan partapeningin:

*t.kr.*

| Roknskapartøl 2022 | Brutto-vinningur | Ársúrslit | Samlað ogn | Egin-peningur |
|---|---|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 6.631 | 1.351 | 203.524 | 194.346 |
| P/f Norðoyatunnilin | 9.003 | 2.368 | 280.572 | 273.408 |
| P/f Føroya Tele (samtak) | 216.613 | 14.011 | 792.004 | 522.409 |
| P/f Postverk Føroya (samtak) | 72.084 | 567 | 128.050 | 38.099 |
| P/f Fiskaaling | 17.950 | 101 | 12.554 | -2.360 |
| P/f Vága Floghavn (samtak) | 79.521 | 17.652 | 907.239 | 834.205 |
| P/f Atlantic Airways | 220.723 | 20.991 | 714.414 | 278.852 |
| P/f Visit Faroe Islands | 6.179 | 1 | 7.406 | 547 |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 189.517 | 111.706 | 3.303.154 | 471.521 |
| P/f Suðuroyartunnil *) | - | - | - | - |
| **Tilsamans** | **818.221** | **168.748** | **6.348.917** | **2.611.027** |

*) P/f Suðuroyartunnil var stovnaður í november 2022. Roknskapurin fyri 2022 er ikki tøkur.

[23] “um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy”.

Samlaða ársúrslitið hjá feløgunum var 168,7 mió.kr. í vinningi eftir skatt, og samlaði eginpeningurin 2,6 mia.kr. Í 2021 var samlaða úrslitið hjá feløgunum, har landið eigur allan partapeningin, 116,6 mió.kr. í vinningi, og eginpeningurin var 2,4 mia.kr. Í 2022 áttu minnilutapartaeigararnir 9,8 mió.kr. í dótturfelagi hjá P/f Vága Floghavn.

### Samlað roknskapartøl hjá feløgunum

Roknskapartøl 2011 til 2022 fyri feløg, sum landið eigur allan partapeningin í:

*t.kr.*

| Ár | Bruttovinningur | Ársúrslit | Samlað ogn | Eginpeningur |
|---|---|---|---|---|
| 2011 | 732.782 | -268.123 | 7.241.118 | 2.201.249 |
| 2012 | 608.022 | -513.502 | 3.730.656 | 1.631.006 |
| 2013 | 620.290 | 91.263 | 3.898.691 | 1.710.169 |
| 2014 | 660.020 | 67.148 | 4.201.625 | 1.819.871 |
| 2015 | 866.069 | 48.714 | 4.856.817 | 2.038.028 |
| 2016 | 607.125 | 71.277 | 5.835.015 | 1.990.572 |
| 2017 | 618.316 | 86.093 | 5.885.239 | 2.088.516 |
| 2018 | 580.528 | 86.576 | 6.097.371 | 2.196.207 |
| 2019 | 585.746 | 59.057 | 5.947.786 | 2.255.562 |
| 2020 | 389.466 | -94.728 | 5.977.783 | 2.277.936 |
| 2021 | 695.545 | 116.555 | 6.122.282 | 2.428.136 |
| 2022 | 818.221 | 168.748 | 6.348.917 | 2.611.027 |

#### *Virðismeting*

Gjaldstovan hevur ásett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið partabrøv og onnur virðisbrøv verða keypt, skulu tey latast Gjaldstovuni. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

***Skrásetti partapeningurin gevur ikki ábending um virðið á feløgunum.***

Í landsroknskapinum 2022 er partapeningurin hjá øllum feløgunum, uttan BankNordik, skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, yvirkurs og útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um ítøkiliga virðið á feløgunum.

Innara virðið á 14 feløgum, samanborið við keypsvirðið sambært landsroknskapinum fyri 2022:

*t.kr.*

| | Keypsvirðið sambært landsroknskapinum | Innara virðið |
|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 194.346 |
| P/f Norðoyatunnilin | 235.000 | 273.408 |
| P/f Vága Floghavn *) | 822.818 | 834.205 |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 522.409 |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 38.099 |
| P/f Fiskaaling | 17.376 | -2.360 |
| P/f Føroya Lívstrygging | 11.667 | 28.304 |
| P/f Atlantic Airways | 186.912 | 278.852 |
| P/f Elektron | 2.347 | 12.289 |
| P/f Smyril Line | 32.760 | 72.727 |
| P/f Tjaldur | 140 | 14.820 |
| Sp/f Ítróttavedding | 20 | 35 |
| P/f Visit Faroe Islands | 500 | 547 |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 300.000 | 471.521 |
| P/f Suðuroyartunnil** | 4.000 | - |
| **Partabrøv tilsamans** | **1.894.788** | **2.739.202** |

*) Parturin hjá minnilutapartaeigarum (Atlantic Airways) var 6 mió.kr.
**) Roknskapurin fyri 2022 var ikki tøkur

Sum sæst í yvirlitinum, er keypsvirðið í nøkrum førum munandi lægri enn innara virðið.

Vinningsbýti frá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

*t.kr.*

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| P/f Føroya Tele | 34.000 | 32.000 | 30.000 |

Í 2022 fekk landskassin harafturat vinningsbýti frá:

*t.kr.*

| | 2022 |
|---|---|
| P/f BankNordik | 134.400 |
| P/f Elektron | 1.134 |
| P/f Tjaldur | 652 |
| **Tilsamans** | **136.186** |

## 9.2.4 Útlán

*t.kr.*

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Útlán ársbyrjan | 286.010 | 143.244 | 131.631 |
| Tilgongd í árinum | 8.584 | 6.238 | 6.033 |
| Frágongd í árinum | -151.350 | -17.851 | -13.540 |
| **Brutto útlán við ársenda** | **143.244** | **131.631** | **124.124** |
| Sett av ímóti tapi | -52.078 | -50.498 | -50.493 |
| **Sambært roknskapinum** | **91.166** | **81.134** | **73.631** |

Heitið útlán fevnir um veðhaldsútlegg, lestrarlán, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán. Tilgongdin stavar í høvuðsheitum frá, at nýggj lestrarlán eru veitt. Frágongdin stavar í høvuðsheitum frá, at lán eru avskrivað, og at lestrarlán eru goldin aftur. Samanlagt eru útlánini lækkað 7,5 mió.kr. netto frá 2021 til 2022.

Sett er av ímóti tapi. Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum eru sett til 0 kr. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

***Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum eru sett til 0.***

### Rentu- og avdráttarfrí útlán

*t.kr.*

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Rentu- og avdráttarfrí lán ársbyrjan | 271.872 | 209.594 | 209.594 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 0 |
| Frágongd í árinum | -62.278 | 0 | 0 |
| **Rentu- og avdráttarfrí lán ársenda** | **209.594** | **209.594** | **209.594** |
| Sett av móti tapi | -209.594 | -209.594 | -209.594 |
| **Sambært roknskapinum** | **0** | **0** | **0** |

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, sjálvsognarstovnar, studningslán, eldrasambýli og Postverk Føroya.[24]

Sambært landsroknskapinum eru rentu- og avdráttarfrí lán tikin við í roknskapin við virðinum 0 kr., av tí at talan er um treytað lán, sum bert skulu rindast aftur, um bygningar o.t., sum lán eru veitt til, verða brúkt til annað enn til upprunaliga endamálið.

***Rentu- og avdráttarfrí lán eru sett til 0, tí talan er um treytað lán.***

## 9.2.5 Áogn o.a.

### Skatta-, toll- o.t. skuldarar[25]

*t.kr.*

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Áogn landskassans brutto | 440.402 | 490.295 | 470.166 |
| Sett av ímóti tapi | -112.828 | -126.102 | -105.478 |
| **Sambært roknskapinum** | **327.574** | **364.193** | **364.688** |

[24] Sí notu nr. 3 í landsroknskapinum.
[25] Sí notu nr. 4 í landsroknskapinum.

Frá 2021 til 2022 er áognin hækkað 495 t.kr. netto. Sambært landsroknskapinum eru størstu broytingarnar:

*t.kr.*

| Broytingar 2021 til 2022 | |
|---|---|
| Tollavgjøld | 25.788 |
| Skattur av vinningi frá sølu av veiðirættindum | 9.077 |
| TAKS, innkrevjing | 4.113 |
| Tøkugjald á alivinnu | 385 |
| Dagpengar, arbeiðsgevarans partur | 323 |
| Gjald til Heilsutrygd | 180 |
| Húsaleiguskattur | 137 |
| Barsilsskipan | -28 |
| Gjald til barsilsskipan | -153 |
| Lønarhæddaravgjald | -180 |
| Ferðaavgjald | -639 |
| Kringvarp Føroya | -1.094 |
| Felagsskattur | -1.975 |
| Brennioljuavgjald | -2.026 |
| Meirvirðisgjald | -3.701 |
| Vanligur landsskattur | -5.275 |
| FAS-endurgjald | -8.782 |
| Kapitalvinningsskattur | -15.654 |

## Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Apoteksverkinum, Landsverki, Kringvarpinum, Rúsdrekkasølu landsins og øðrum stovnum. Aðrir skuldarar eru m.a. inntøkur og endurgjøld, sum vanliga eru tíðaravmarkað. Eisini eru tað millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldskipanir, skipanir hjá TAKS, kommunur o.a.[26]

Niðanfyri eru upphæddirnar útgreinaðar:

*t.kr.*

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Tíðaravmarkingar | 80.574 | 89.582 | 82.147 |
| Uppboðssøla av fiskatilfeingi | 0 | 0 | 62.872 |
| Apoteksverkið | 44.735 | 35.020 | 46.981 |
| Avgjald á fiskatilfeingi | 81.991 | 88.602 | 26.167 |
| Tøkugjald á alivinnu | 324 | 25.387 | 24.707 |
| Landsverk, inntøkufíggjað virksemi | 16.877 | 15.294 | 18.713 |
| Gjald til Heilsutrygd | 6.541 | 8.114 | 8.234 |
| Umhvørvisstovan | 1.725 | 1.543 | 7.938 |
| Rúsdrekkasøla landsins | 5.165 | 690 | 6.844 |
| Landssjúkrahúsið | 9.394 | 9.058 | 6.620 |
| Fjarskiftiseftirlitið | 3.164 | 3.172 | 4.786 |
| Tryggingareftirlitið | 3.752 | 4.117 | 4.758 |
| Kringvarp Føroya | 4.616 | 4.465 | 4.641 |
| Vinnumálaráðið | 3.401 | 54 | 4.300 |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan | 6.988 | 8.209 | 4.254 |
| Strandfaraskip landsins | 3.182 | 3.670 | 4.172 |
| TAKS | 290 | 309 | 4.160 |
| Ymiskir skuldarar | 64.016 | 36.721 | 9.748 |
| **Tilsamans sambært roknskapinum** | **336.735** | **334.007** | **332.042** |

Fleiri hækkingar og lækkingar eru, sum frá 2021 til 2022 geva 2 mió.kr. í netto lækking. Størstu broytingarnar eru "Uppboðssøla av fiskatilfeingi", "Avgjald á fiskatilfeingi" og "Apoteksverkið".

[26] Sí notu 5 í landsroknskapinum 2022.

### Goymslur

| *t.kr.* | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 53.535 | 66.400 | 77.455 |

Í tølunum eru vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum landsins, Námi (útgávuvirksemi), Glasi, Miðnámi á Kambsdali, Landsverki, KT Landsins og Tekniska skúla í Klaksvík.

Frá 2021 til 2022 er virðið á goymslunum hækkað 11,1 mió.kr. netto. Goymslurnar hjá Strandfaraskipum landsins og Apoteksverkinum eru hækkaðar ávikavist 3,9 og 7,5 mió.kr. Hinar goymslurnar eru broyttar smávegis.

***Goymsluvirðið er hækkað 11,1 mió.kr. netto.***

### Ognir og útbúnaður (LG 2021/300-101)

Síðani 2017 hevur verið ásett í § 20 í roknskaparkunngerðini, at stovnar skulu gera yvirlit yvir ognir, so sum verkløg, bygningar, maskinur, før, innbúgv og annan virðismiklan útbúnað, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr. Ognirnar og útbúnaðurin skulu skrásetast í Búskaparskipan landsins, um ikki stovnurin hevur fingið loyvi til at nýta egna búskaparskipan.

Landsgrannskoðanin kann enn eina ferð staðfesta, at reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað eru ikki hildnar.

Í 2017 vísti landsstýrismaðurin í fíggjarmálum á, at ásetingin í roknskaparkunngerðini um ognaryvirlit var broytt, men tað vantaði tøknilig menning av ognaryvirlitum í Búskaparskipan landsins, til tess at fáa ognir við virði yvir 50 t.kr. skrásettar.

Í 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at ognarmodulið í Búskaparskipan landsins var broytt, soleiðis at størri stovnar, við fakligum førleika, fingu atgongd til at skráseta til- og frágongd av ognum. Smærri stovnar skuldu framvegis venda sær til Gjaldstovuna fyri at fáa ognirnar skrásettar.

Í 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið við játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum fór at verða uppraðfest, við m.a. at fáa aðalráð og stovnar at dagføra ognaryvirlitini.

Í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum er postur, nevndur "Immateriellur og materiellur útbúnaður, grundøki, bygningar, løgur o.t.", men eingin upphædd er ásett. Sjálvt um upprunavirði á ognum og avskrivingar eru skrásett í Búskaparskipan landsins, ber ikki til at nýta tey til fíggjarstøðuna, av tí at nógvar ognir eru ikki skrásettar, og virðið á skrásettu ognunum sjáldan er dagført.

***Nógvar ognir eru ikki skrásettar.***

## 9.2.6 Tøkur peningur

Tøkur peningur fatar um gjaldføri landsins. Sambært § 10, stk. 1, í Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" umsitur Landsbankin gjaldføri landsins eftir ásetingum frá landsbankanevndini. Sambært § 10, stk. 2, er endamálið við umsitingini:

- at landið altíð hevur neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at tað kann halda sínar skyldur,
- at landsins gjaldføri verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika, herundir at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin verður sum minst, og
- at landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor.

Sambært § 10, stk. 3 og 4, fevnir gjaldføri landsins um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum o.ø. Gjaldførið verður roknað sum landsins kassapeningur, innistandandi í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir.

Í fíggjarstøðuni er tøki peningurin býttur í tveir bólkar: virðisbrøv o.t. og bankakontur og kassapeningur.

### Virðisbrøv o.t.

Landsbanki Føroya hevur sett part av tøka peninginum í stuttfreistað virðisbrøv, sum eru tikin við til marknaðarvirði. Posturin nevnist "Virðisbrøv o.t."

Virðisbrøv o.t. seinastu 3 árini:

*mió.kr.*

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 4.191 | 3.449 | 3.174 |

Landsbankin hevur dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum, sum byggir á íløguinstruks frá landsbankanevndini. Í íløguinstruksinum eru ásetingar um m.a., hvussu nógv kann plaserast í ávís sløg av virðisbrøvum.

### Bankakontur og kassapeningur

*t.kr.*

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 538.040 | 400.188 | 699.474 |

*Bankakontur*

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv landskassin tilsamans hevur standandi á bankakontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar við leysum tilknýti til fíggjarlóg ella landsroknskap hava nógvan pening standandi í virðisbrøvum og á peningastovns-kontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Í 2022 kann upphæddin greinast sundur í tær kontur, sum Landsbankin og Gjaldstovan umsita, og tær, sum aðrir stovnar í landsroknskapinum umsita.

*Kassapeningur*

Landsgrannskoðanin hevur framt fleiri kassaeftirlit í 2022, har vit hava stemmað kassa-pening av við kassauppgerðir, Búskaparskipan landsins v.m. Hava stovnar peninga-stovnskontur, eru tær stemmaðar av við kontuavrit frá peningastovnum og Búskapar-skipan landsins. Eisini hava vit kannað konturnar fyri óvanligar bókingar ávís tíðarskeið. Kassaeftirlitini eru umrødd undir hvørjum stovni sær.

*Gjaldføri*

Landsbankin hevur gjørt innanhýsis reglugerð um, hvussu nógvur tøkur peningur kann standa í føroyskum peningastovnum, í hvørjum peningastovni sær og samanlagt. Ikki allur tøki peningurin sambært landsroknskapinum verður roknaður sum gjaldføri hjá landskassanum.

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum skal sambært lógini um Landsbanka og váðaráð fyriskipa, at landsins gjaldføri, vísandi til § 11, stk. 3 og 4, í minsta lagi samsvarar við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni undanfarna ár.

Landsbankanevndin skal í august mánað áseta minstagjaldførið. Landsbankin hevur greitt frá, at av tí at bruttotjóðarúrtøkan fyri undanfarið ár ikki altíð er gjørd upp, tá ið landsbankanevndin skal áseta minstagjaldførið, brúkar bankin seinasta uppgjørda talið, eisini um talan er um fyribilstal.

Gongdin í gjaldførinum 2020 til 2022, sambært heimasíðuni hjá Landsbankanum:

*mió.kr.*

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Gjaldføri | 4.705 | 3.802 | 3.430 |
| Harav minstagjaldføri | 2.890 | 3.290 | 3.050 |
| **Munur millum gjaldføri og minstagjaldføri** | **1.815** | **512** | **380** |

Gjaldføri fevnir sambært lógini um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum lands-stovnum v.m., og sum er trygt og lætt tøkt. Eisini fevnir tað um óveðsett virðisbrøv.

### 9.2.7 Skuld

#### Innanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 5.419.335 | 4.039.035 | 3.540.842 |

Við árslok 2022 var talan um 4 lánsbrævarøðir:

- FO-LB 230627, áljóðandi 550 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 27. juni 2023.
- FO-LB 240602, áljóðandi 1.100 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 2. juni 2024.
- FO-LB 250602, áljóðandi 1.645 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 2. juni 2025.
- FO-LB 320503, áljóðandi NOK 550 mió. (svarandi til 389,0 mió.kr. við árslok 2022), sum fellur til gjaldingar 3. mai 2032.

Við árslok 2022 var samlaða *áljóðandi marknaðarvirðið* á skuldini 3.684 mió.kr.

2. juni 2022 eru 1.300 mió.kr. rindaðar fyri fallið lán, og sama dag eru 1.100 mió.kr. tiknar í nýggjum láni.

7. juni 2023 eru tiknar 900 mió.kr. í nýggjum láni. 550 mió.kr. skuldu nýtast til at rinda aftur lán, sum fall til gjaldingar 27. juni 2023. Restin, 350 mió.kr., eru til landskassans gjaldføri.

Frá fíggjarárinum 2016 eru lánini gjørd upp eftir marknaðarvirði.

Landsbankin selur meginpartin av brævalánunum uttanlands. Heitið á roknskaparpostinum, "Innanlandsskuld, langfreistað", er tí helst ikki so beinrakið.

*Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar í komandi ári:*

t.kr.

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 1.350.000 | 1.300.000 | 550.000 |

Veruligu afturgjøldini vóru sambært Landsbankanum:

- Í juni 2021 fullu eftir skránni 1.350 mió.kr. av FO-LB 210622 til gjaldingar.
- Í juni 2022 fullu eftir skránni 1.300 mió.kr. av FO-LB 220602 til gjaldingar.
- Í juni 2023 fullu eftir skránni 550 mió.kr. av FO-LB 230627 til gjaldingar.

#### Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

t.kr.

| | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 1.087.928 | 1.278.690 | 1.561.547 |

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkingar og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

## 9.3 Útjavningarkonta (LG 2022/300-203)

Útjavningarkontan líkist ikki "kontu fyri eginpening" í privatum virki. Ognirnar í landsroknskapinum verða virðismettar øðrvísi, og í roknskapinum eru virði ikki sett á. Materiellu støðisognirnar, so sum bygningar, skip og vegir, eru ikki virðisásett í roknskapinum. Endamálið við útjavningarkontuni er tí so at siga bert tøkniligt.

*t.kr.*

| | 2021 | 2022 |
|---|---|---|
| Salda 1. januar | 1.223.792 | 1.682.031 |
| RLÚ-úrslit | 212.146 | 30.561 |
| Búskapargrunnur Føroya | 140.778 | 140.703 |
| Ymiskar broytingar | 105.315 | 50.136 |
| **Salda 31. desember** | **1.682.031** | **1.903.431** |

"Ymiskar broytingar" eru broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskapar-meginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

## 9.4 Fyrisiting av gjaldføri og skuld (LG 2022/300-104 og 202)

Landsbanki Føroya fyrisitur gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins. Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" kom í gildi 1. januar 2017.

Í broti 9.2 undir fíggjarstøðuni er stutt greitt frá um tøkan pening og skuld landsins.

### 9.4.1 Porteføljuskipanin

Landsbankin brúkar donsku skipanina, PandaConnect, til at fyrisita gjaldføris- og skuldaraviðurskifti. Bankin hevur einans rættindi til at spyrja í skipanini.

Bókingarnar í PandaConnect fara ikki sjálvvirkandi yvir í Búskaparskipan landsins. Tá ið mánaður er liðugur, sendir skipanin Landsbankanum eina fílu við broytingum frá mánaðinum frammanundan. Tølini verða bókað í Búskaparskipan landsins umvegis kontubrúgv. Landsbankin stemmar PandaConnect av við Búskaparskipan landsins. Bankin hevur ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum til PandaConnect skipanina, men hevur heitt á Gjaldstovuna um at fáa loyvi.

### 9.4.2 Gjaldførið hjá landinum

Við árslok 2022 vóru 3.874 mió.kr. í tøkum peningi skrásettar í landsroknskapinum; harav 3.174 mió.kr. í virðisbrøvum o.t. Við árslok 2021 var tøki peningurin 3.849 mió.kr.; tá vóru 3.449 mió.kr. í virðisbrøvum o.t.

Í talvuni er tøki peningurin sambært Búskaparskipan landsins sundurgreinaður:

*t.kr.*

| Tøkur peningur | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lánsbrøv | 2.855.638 | 2.523.675 | 3.637.450 | 2.809.239 | 2.529.743 |
| Lánsbrøv, rentuáogn | 8.071 | 8.211 | 11.177 | 8.824 | 12.353 |
| Partabrøv | 543.231 | 644.146 | 727.212 | 727.693 | 656.561 |
| Onnur virðisbrøv | 105.173 | 132.976 | 100.542 | 166.032 | 212.074 |
| Ogn hjá øðrum | -234.421 | -256.548 | -285.301 | -263.277 | -236.357 |
| ***Virðisbrøv tilsamans*** | ***3.277.692*** | ***3.052.460*** | ***4.191.080*** | ***3.448.511*** | ***3.174.374*** |
| Bankakontur, landskassin | 231.786 | 274.505 | 160.585 | 35.655 | 99.610 |
| Útlendskar bankakontur | 82.686 | 123.245 | 301.099 | 273.298 | 124.679 |
| Ogn hjá øðrum | 371 | 0 | 0 | 0 | 393.296 |
| Aðrar bankakontur og kassar | 73.731 | 27.437 | 76.356 | 91.234 | 81.889 |
| **Tilsamans** | **3.666.266** | **3.477.647** | **4.729.120** | **3.848.698** | **3.873.848** |

Virðisbrøvini eru skrásett í landsroknskapinum við marknaðarvirðinum. Landsbankin hevur greitt frá, at virðisbrøvini eru skrásett í PandaConnect. Somuleiðis eru útlendskar peningastovnskontur, sum hava við virðisbrøv at gera, skrásettar í PandaConnect, og svara upphæddirnar á teimum til nærum allan peningin á útlendsku kontunum.

Aðrar peningastovnskontur eru ikki skrásettar í PandaConnect, hvørki útlendskar ella føroyskar. Talan er um kontur, sum Gjaldstovan og aðrir almennir stovnar umsita.

Landsbankin hevur kunnað um, at tær 393,3 mió.kr., sum eru skrásettar undir postinum "Ogn hjá øðrum" er frítíðarløn, sum TAKS umsitur. Landsbankin hevur gjørt avtalu við TAKS um, at Landsbankin skal umsita peningin frá 1. september 2023.

*Plasering av gjaldførinum*

Reglurnar um, hvussu gjaldførið hjá landinum skal handfarast, standa m.a. í lógini um Landsbankan og í ásetingum frá nevndini fyri bankan.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at transaktiónsslóðin millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins er ikki nóg góð, tá ið ikki ber til at finna allar skrásetingar av bókingum í Búskaparskipan landsins, uttan at fara aftur til porteføljuskipanina at finna transaktiónirnar.

Landsbankin hevur víst á, at bankin hevur transaktiónsslóðina, tí at bankin goymir øll skjalprógv. Landsbankin kundi viðheft skjalprógvini í Búskaparskipan landsins, men heldur, at tað er ov nógv og kann ørkymla.

*Úrslitið av plasering av gjaldførinum*

Sambært landsroknskapinum 2022 vóru rentur av innistandandi 292,8 mió.kr. 77,3 mió.kr. eru fluttar til Búskapargrunnin á § 89, og 246 mió.kr. eru fluttar til "Frávik fyri rentuinntøkur" á § 80 undir RLÚ II. Roknskapurin fyri 20.50.2.01.01 "Rentur av innistandandi" samsvarar sostatt við játtanina, sum er 30,6 mió.kr. í inntøkum. Av teimum 77,3 mió.kr. til Búskapargrunnin, hevur Landsbankin fingið 897 t.kr. í ómaksgjaldi.

Í talvuni niðanfyri eru rentuinntøkur o.a. sundurgreinað.

*t.kr.*

| **Heiti** | **2021** | | **2022** | |
|---|---|---|---|---|
| | *Játtan* | *Roknskapur* | *Játtan* | *Roknskapur* |
| Rentur og ógreinað | | -12.371 | | -45.455 |
| Vinningsbýti | | -42.661 | | -60.902 |
| Staðfestir kurs-/gjaldoyramunir | | 25.692 | | 142.629 |
| Ikki staðfestir kurs-/gjaldoyramunir | | -112.878 | | 256.453 |
| Rentur, bankar | | 751 | | 640 |
| Kostnaðir | | -435 | | -564 |
| Innanh. flyt. millum alm. grunnar | | 29.160 | | -77.328 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovnar | | 73.242 | | -246.024 |
| **Tilsamans** | **-39.500** | **-39.500** | **-30.550** | **-30.550** |

Sum sæst í talvuni, eru stórar broytingar í kursmunum, serliga í "ikki staðfestu munum". Sambært ársfrágreiðingini hjá Landsbankanum var avkastið í 2022 av íløguroktini - 8,6%. Í 2021 var tað 3,9%, og miðal avkastið 2017 til 2022 var 0,8%.

Sambært Landsbankanum er benchmarkið ásett fyri hvønn aktivklassa sær, og er ásett eftir miðalvektunum á ymisku aktivklassunum. Benchmark eru ikki fyri alternativar íløgur og kontur.

Í ársfrágreiðingini 2022 er avkastið býtt eftir ymisku virðisbrøvunum, sum bankin hevur gjørt íløgur í:

| Slag | Miðal íløga mió.kr. | Avkast mió.kr. | Avkast % | Býtið % |
|---|---|---|---|---|
| Partabrøv | 773 | -128 | -16,6 | 21,3 |
| Statslánsbrøv | 50 | -7 | -13,3 | 1,4 |
| Realkredittlánsbrøv | 2.121 | -149 | -7,0 | 58,4 |
| Kredittlánsbrøv | 136 | -19 | -13,7 | 3,8 |
| Hárentulánsbrøv | 264 | -29 | -10,8 | 7,3 |
| Alternativar íløgur | 178 | 18 | 9,8 | 4,9 |
| Onnur fíggjaraktiv | 110 | -0,3 | -0,3 | 2,9 |
| **Tilsamans** | **3.632** | **-313** | **-8,6** | **100,0** |

Sum sæst í talvuni, var avkastið 313 mió.kr. í halli í 2022, ella -8,6%.

### 9.4.3 Landskassaskuld - brævalán

*Heimild at læna*

Sambært § 42 í Stýrisskipanarlógini kunnu lán ella borgan, ið skuldbinda Løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, ikki verða tikin ella veitt uttan við heimild í lóg. Sambært § 1 í Ll. nr. 116/1991 “um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum” verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka lán til at rinda avdráttir av lánum, til afturrindan av lánum og til framskundaða afturrindan av lánum í Føroyum og uttan fyri Føroyar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað lániheimildirnar fyri árini 2011 til 2022. Einki var at finnast at.

*Lánini í samsvari við prospektini*

Í sambandi við lántøku ger Landsbankin prospekt (kunningartilfar) til íleggjarar o.o. Í prospektinum er m.a. kunning um búskaparviðurskifti, upplýsingar um útgevaran av lánsbrøvunum og upplýsingar um lánsbrøvini, so sum samlað upphædd, renta, kursur, lánitíð og fondskota.

Eitt nýtt brævalán er stovnað í 2022. Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lánini, sum vóru virkin við árslok 2022, eru í samsvari við prospektini. Einki var at finnast at.

*Skráseting av brævalánum*

Í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum síggjast brævalánini sum langfreistað innanlandsskuld. Í notu 8 eru sundurgreiningar, sum vísa marknaðarvirði og viðhangandi rentu. Notan vísir eisini samanhangin millum navnvirði og marknaðarvirði, eitt yvirlit yvir einstøku brævalánsrøðirnar, umframt hvussu stórur partur av skuldini fellur til gjaldingar í komandi ári, og hvussu stór restskuldin er um 5 ár.

Við árslok 2022 er bókaða virðið á brævalánunum 3.508 mió.kr. Við ársbyrjan var tað 3.961 mió.kr. Lánsupphæddirnar í landsroknskapinum eru grundaðar á marknaðarvirðið umframt tíðargreinaðar rentur sambært roknskaparmeginreglunum.

*t.kr.*

| Brævalán | 2021 | | | 2022 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | *Lán* | *Lánsbýti* | *Tilsamans* | *Lán* | *Lánsbýti* | *Tilsamans* |
| Marknaðarvirði | 3.950.492 | 80.251 | 4.030.743 | 3.489.657 | 34.906 | 3.524.563 |
| Viðhang. renta | 10.247 | -1.955 | 8.292 | 17.853 | -1.574 | 16.279 |
| **Tilsamans** | **3.960.739** | **78.296** | **4.039.035** | **3.507.510** | **33.332** | **3.540.842** |

*Lánsbýti*: Sonevndur swap, sum t.d. kann fevna um lán, rentu og gjaldoyra.
*Viðhangandi renta*: Tíðargreinað renta viðvíkjandi roknskaparárinum, goldin eftir roknskaparlok.

Síðani 2016 eru brævalánini virðisásett til marknaðarvirði, og kursbroytingar rakstrarførdar.

Í talvuni niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin greinað restskuldina á brævalánunum, sum vóru virkin, ávikavist við árslok 2021 og við árslok 2022. Við árslok 2022 er samlaði kursmunurin lægri, enn hann var við ársbyrjan. Broytingin er tikin við í raksturin, sum ikki staðfestur kursmunur, undir høvuðskontu 20.50.1.01 “Rentur at gjalda”.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við byrjan 2022 | Virði við byrjan 2022 | Munur | Restskuld við árslok 2022 | Virði við árslok 2022 | Munur | Broytt markn. virði |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 320503 | | 80.251 | 80.251 | | 34.906 | 34.906 | -45.344 |
| 320503 | 550.000 | 589.765 | 39.765 | 550.000 | 515.884 | -34.117 | -73.882 |
| 320503 | -139.755 | -149.859 | -10.104 | -161.178 | -151.180 | -11.425 | -1.320 |
| 230627 | 550.000 | 558.250 | 8.250 | 550.000 | 545.380 | -4.620 | -12.870 |
| 220602 | 1.300.000 | 1.302.730 | - | - | - | - | - |
| 250602 | 1.645.000 | 1.649.606 | 4.606 | 1.645.000 | 1.513.894 | -131.107 | -135.713 |
| 240602 | - | - | - | 1.100.000 | 1.065.680 | -34.232 | -34.232 |
| **Tils.** | **3.905.245** | **4.030.742** | **122.767** | **3.683.823** | **3.524.563** | **-180.594** | **-303.361** |

*FO-LB 320503*: Lánið er í norskum krónum, men er býtt um við (swappað til) danskar krónur. Áljóðandi virðið á láninum er NOK 550 mió. við árslok 2022, svarandi til DKK 389 mió. Gjaldoyramunurin og virðið á lánsbýtinum eru víst fyri seg.

Landsbankin ætlar ikki at rinda lánið, sum er í norskum krónum, og swappað aftur til danskar krónur fyri tíð. Tá ið lánið verður rindað aftur í 2032, verður kursmunurin 0.

Sambært Landsbankanum er Nordea “marketmaker” á landskassans lánsbrøvum, t.v.s. at Nordea regluliga ásetir kursir á lánsbrøvum til besta kursin, tey kunnu koma fram til.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við árslok 2022 | Tíðargr. renta | Rentudagur | Dagar | Roknað renta í % | Ásett renta í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 320503 | 388.823 | 6.911 | 03-05-2022 | 237 | 2,7000 | 2,7000 |
| 230627 | 550.000 | 1.761 | 27-06-2022 | 187 | 0,6250 | 0,6250 |
| 250602 | 1.645.000 | 1.194 | 02-06-2022 | 212 | 0,1250 | 0,1250 |
| 240602 | 1.100.000 | 7.986 | 02-06-2022 | 212 | 1,2500 | 1,2500 |
| | ***3.683.823*** | ***17.853*** | | | | |
| 320503 - lánsbýti | -388.823 | -6.911 | 03-05-2022 | 237 | -2,7000 | -2,7000 |
| 320503 - lánsbýti | 447.883 | 5.337 | 03-05-2022 | 237 | 1,8100 | 1,8100 |
| **Tilsamans** | **3.742.883** | **16.279** | | | | |

*Rentudagar*: Í FO-LB 320503 verða nýttir 30/360 dagar í mánaðinum/árinum; í øðrum lánum eitt vanligt ár.
*FO-LB 320503*: Lánið í norskum krónum er til kursvirðið í donskum krónum við árslok 2022; lánið er býtt um við danskar krónur.

Í talvuni hevur Landsgrannskoðanin eftirroknað tíðargreinaðu rentuna av hvørjum láni sær í mun til restskuldina við árslok 2022. Rentan á norska láninum er 2,7%, men er býtt um til danskar krónur við 1,81% rentu. Rentumunurin verður góðskrivaður landinum.

### *Skráseting av rentuútreiðslum o.ø.*

Sambært landsroknskapinum 2022 eru rentuútreiðslur o.a. -280,3 mió.kr., og 300,4 mió.kr. eru fluttar til "Frávik fyri rentuútreiðslur" á § 80 undir RLÚ II, soleiðis at roknskapurin fyri 20.50.1.01 "Rentur at gjalda" samsvarar við játtanina, ið er 20.150 t.kr.

***Ikki staðfestir kursmunir eru hækkaðir 278 mió.kr.***

Í talvuni eru rentuútreiðslur o.a. sundurgreinað:

*t.kr.*

| Heiti | 2021 | | 2022 | |
|---|---|---|---|---|
| | *Játtan* | *Roknskapur* | *Játtan* | *Roknskapur* |
| Goldnar rentur | | 20.903 | | 12.749 |
| Broytt tíðaravmarkað renta o.a. | | -3.488 | | 8.449 |
| ***Rentur tilsamans*** | | ***17.414*** | | ***21.198*** |
| Staðfestir kursmunir | | -6.427 | | -2.804 |
| Ikki staðfestir kursmunir | | -20.994 | | -302.898 |
| ***Kursmunir tilsamans*** | | ***-27.421*** | | ***-305.702*** |
| Ómaksgjøld o.a. | | 0 | | 2.200 |
| Aðrar rentuútreiðslur | | 806 | | 2.038 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovnar | | 35.100 | | 300.416 |
| **Tilsamans** | **25.900** | **25.900** | **20.150** | **20.150** |

*Goldnar rentur*: Í Búskaparskipan landsins eru renturnar ikki greinaðar í goldnar og tíðargreinaðar rentur – upphæddirnar eru roknaðar sambært yvirliti úr Pandaskipanini.

Nettoútreiðslurnar av rentum og kursmunum av brævalánunum eru -284,5 mió.kr. í 2022; í 2021 vóru tær -10,0 mió.kr.

Í talvuni niðanfyri eru goldnar rentur og tíðargreinaðar rentur í 2022, býttar á brævalánini. Landsgrannskoðanin hevur roknað, hvat samlaða rentuupphæddin fyri hvørt lánið er út frá einari miðalsaldu á lánunum í árinum. Roknaða rentan er samanborin við ásettu rentuna á hvørjum láni sær.

*t.kr.*

| FO-LB | Miðalsalda í 2022 | Goldin renta | Broytt tíðargr. renta | Renta tilsamans | Roknað renta í % | Ásett renta í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 320503 | 399.534 | 11.151 | -381 | 10.770 | 2,7331 | 2,7000 |
| 230627 | 550.000 | 3.438 | 0 | 3.438 | 0,6250 | 0,6250 |
| 250602 | 1.645.000 | 2.056 | 0 | 2.056 | 0,1250 | 0,1250 |
| 240602 | 638.611 | 0 | 7.986 | 7.986 | 1,2506 | 1,2500 |
| ***Tilsamans*** | ***3.233.145*** | ***16.645*** | ***7.606*** | ***24.250*** | | |
| Lánsbýti | -399.534 | -11.077 | 381 | -10.696 | -2,7508 | -2,7000 |
| Lánsbýti | 447.883 | 8.107 | 0 | 8.107 | 1,8100 | 1,8100 |
| **Tilsamans** | **3.281.494** | **13.675** | **7.986** | **21.661** | | |

Í talvuni omanfyri er renta tilsamans roknað til 21.661 t.kr. Sambært landsroknskapinum 2022 eru rentuútreiðslurnar til uttanlandsskuld 21.198 t.kr.; munurin er 463 t.kr.

Í landsroknskapinum 2022 er “Ikki staðfesta kurstapið” 302.898 t.kr. Tað gevur 463 t.kr. størri inntøku, samanborið við útrokningina í talvuni á síðu 149, har munurin á marknaðarvirðinum á brævalánunum við árslok, samanborið við virðið við ársbyrjan, er eftirroknaður.

Samanlagt er eingin munur. Sambært Pandaskipanini er talan um “ikki staðfestan gjaldoyravinning”.

Í 2022 eru renturnar av brævalánunum 21.198 t.kr., og í 2021 vóru tær 17.414 t.kr. Høvuðsorsøkin til hækkingina er, at miðalrentan á lánunum er hækkað. Sambært ársfrágreiðingini 2022 frá Landsbankanum, var miðalrentan 0,3% við ársenda 2021, meðan hon er hækkað til 0,7% við ársenda 2022. Hinvegin minkaði lánsbrævaskuldin við 453 mió.kr. í 2022.

*Útreiðslur av rentu, kursi og lánsbýti í árinum*

Í talvuni niðanfyri eru brævalánini samanhildin við samlaðu rakstrarbroytingarnar av lánunum í árinum.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við árslok 2022 | Renta smb. roknskapi | Kursbroyt. o.a. smb. roknskapi | Rakstrar-broytingar tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| 320503 | 388.823 | 8.181 | -120.546 | -112.365 |
| 230627 | 550.000 | 3.438 | -12.870 | -9.433 |
| 250602 | 1.645.000 | 2.056 | -135.713 | -133.656 |
| 240602 | 1.100.000 | 7.986 | -34.232 | -26.246 |
| **Tilsamans** | **3.683.823** | **21.661** | **-303.361** | **-281.700** |

*Aðrar rentuútreiðslur*

Aðrar útreiðslur, enn rentur og kursmunir av brævalánunum, eru 4.238 t.kr., t.e. gjøld fyri skráseting, eftirlit o.a. Nakað av útreiðslum eru av føroyskum peningastovns-kontum hjá Landsbankanum og Gjaldstovuni.

Játtanin til Landsbankan rindar útreiðslurnar av sjálvari porteføljuskipanini. Útreiðslur í sambandi við plasering av gjaldføri, t.d. kurtaga, fara av høvuðskontu 20.50.2.01 "Rentuinntøkur av innistandandi".

## Játtanir undir § 20 til rentur av brævalánum og plaseringum

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum ársfrágreiðingum umrøtt meginreglurnar fyri virðisásetingum av skuld, sum Landsbankin fyrisitur. Í 2016 vóru meginreglurnar broyttar soleiðis, at brævalánini verða tikin við í roknskapin til marknaðarvirði. Fígging landsins mælti til broytingina í 2015, soleiðis at somu meginreglur eru galdandi fyri fíggjarliga ogn og skuld. Fígging landsins vísti á, at onnur lond hava tjóðbanka, sum hevur tiltøkupeningin hjá landinum um hendi, og tá síggjast rentur o.a. ikki beinleiðis í landsroknskapinum.

***Roknskaparmegin-reglurnar eiga at endurspegla avgerðir, tiknar í fíggjarárinum.***

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at roknskaparmeginreglurnar eiga á bestan hátt at endurspegla tær avgerðir, sum eru tiknar í fíggjarárinum. Eitt høvuðsendamál við fíggjarlógini og landsroknskapinum er at halda saman tað, sum er brúkt ella rátt yvir, við tað, sum er samtykt. Tann mest rættvísandi myndin av landsroknskapinum er tí tær upphæddir, sum samsvara við tær avgerðir, sum landsstýrisfólk ella stovnsleiðsla tekur.

Er endamálið við at taka lán einans at fíggja almennan rakstur, og lánini ætlandi ikki verða innfríað fyri tíð, hava kursbroytingar í einstøku árunum ikki útreiðslur ella inntøkur við sær í samlaðu lánstíðini. Rentan, sum hevur útreiðslur við sær hvørt ár, endurspeglar veruligu avgerðirnar. Árligu kursbroytingarnar geva tí ikki betri upp-lýsingar - sum við plaseringunum - men kunnu hinvegin heldur órógva veruligu myndina av útreiðslunum av skuldini.

Játtanir og roknskapir fyri ávikavist rentur av skuld og rentur av innistandandi síðani 2018:

*t.kr.*

| | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rentur av skuld** | | | | | |
| Játtan | 18.000 | 43.500 | 26.100 | 25.900 | 20.150 |
| *Roknskapur:* | | | | | |
| Rentur | 50.746 | 39.726 | 24.476 | 17.414 | 21.198 |
| Kursbroytingar | -27.702 | 13.380 | 12.418 | -27.421 | -305.702 |
| Ómaksgjøld o.a. | 649 | 1.950 | 7.008 | 806 | 4.238 |
| Javning | -5.693 | -11.557 | -17.802 | 35.100 | 300.416 |
| **Rentur av innistandandi** | | | | | |
| Játtan | -31.900 | -40.700 | -36.500 | -39.500 | 30.550 |
| *Roknskapur:* | | | | | |
| Samlaður vinningur | 45.193 | -191.305 | -73.217 | -141.902 | 292.801 |
| Javning | -77.093 | 150.605 | 36.717 | 102.402 | -323.349 |

Í ársfrágreiðingini 2017 vísti Landsgrannskoðanin á, at útreiðslurnar av rentum, kursbroytingum o.ø. vóru 80 mió.kr. Játtanin var 20 mió.kr. Sjálv rentan var 54 mió.kr. Landsgrannskoðanin ivaðist tí í, um broyttu roknskaparmeginreglurnar høvdu við sær, at bókaðu útreiðslurnar á bestan hátt endurspegladu tær avgerðir og tiltøk, sum vóru framd innan játtanarøkið.

Í 2022 er játtanin 20,2 mió.kr. til rentur av skuld. Í talvuni sæst, at rentuútreiðslurnar eru 21,2 mió.kr., og inntøkurnar av kursbroytingum eru 305,7 mió.kr.

### Javning av rentuútreiðslum og -inntøkum millum § 20 og § 80

Í undanfarnum ársfrágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin eisini umrøtt broytingarnar í upplýsingunum um rentu o.a. Nú er viðgerðin av rentuinntøkum og rentuútreiðslum, kursbroytingum o.ø. soleiðis, at inntøkur og útreiðslur, sum hava verið í árinum, eru tiknar við undir § 20, sum er partur av RLÚ I, meðan tær mánaðarliga eru javnaðar soleiðis, at frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80 "Rentur", sum er partur av RLÚ II. Landsgrannskoðanin helt tað vera ivasamt, um tað var rætt at javna ella flyta millum høvuðskontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.

Í fíggjarlógini 2020 var greitt frá undir høvuðskontu 20.50.1.01 "Rentur at gjalda", at fyri rentuútreiðslurnar verður effektiva rentan brúkt. Metingin av rentuútreiðslunum er grundarlag undir bæði játtan og roknskapi, og frávik ímillum játtan og nýtslu verða skrásett sum óvanligar útreiðslur og inntøkur.

Landsbankin hevur greitt frá, at frá 2015 brúkti bankin effektivu rentuna á lánsbrævarøðunum, tá ið hann metti um rentuútreiðslurnar. Tað er viðkomandi, um broytingar verða gjørdar í lántøkuni í úrtíð, men av tí at ætlanin ikki er at rinda lánini aftur fyri tíð, hevur Landsbankin, frá og við 2019, brúkt effektivu rentuna á lánunum við upptøku. Tað eigur í framtíðini at endurspegla rættari rentukostnað í fíggjarlógini.

Í landsroknskapinum 2022 eru rentuútreiðslurnar undir § 20 javnaðar við -300,4 mió.kr. og rentuinntøkurnar eru javnaðar við 323,3 mió.kr. Í javningini av rentuinntøkunum eru 77,3 mió.kr. í muni, sum sambært Búskaparskipan landsins er nettoparturin hjá Búskapargrunninum av samlaðu íløguøktini, frádrigið 897 t.kr. í umsitingargjaldi til Landsbankan.

# 10. Aðrar viðmerkingar

## 10.1 Skipan av roknskaparhaldinum

Aftur í hesari ársfrágreiðingini má Landsgrannskoðanin ásanna, at langt er ímillum dagførdar roknskaparreglugerðir.

*Kravið um reglugerð fyri roknskaparhaldið er sambært lóg frá 1994.*

Sambært § 5, stk. 1, í Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skulu landsumsitingin og teir stovnar, sum reglurnar í § 2 í lógini fevna um, gera reglugerð um roknskaparhaldið. K. nr. 22/2007 "um roknskaparverk landsins o.t." ásetir nærri, hvussu roknskaparhaldið hjá landinum skal vera skipað.

Stovnsleiðarin skal ansa eftir, at roknskaparreglugerðin við ábyrgdar- og heimildarreglum verður hildin.

Landsstýrisfólk og aðalráð hava skipað roknskaparøkið forsvarliga, tá ið allar roknskaparreglugerðir eru gjørdar og góðkendar, og tá ið eftirlit er við, at ásettu mannagongdirnar verða hildnar.

Landsgrannskoðanin hevur seinastu nógvu árini víst á, at roknskaparreglugerðirnar eru ikki dagførdar. Nakrar eru heilt gamlar. Sjálvt um viðurskifti á stovnum eru munandi broytt, t.d. við samanleggingum, kann long tíð ganga, uttan at roknskaparreglurnar koma uppá pláss.

Reglugerðirnar kunnu tí ikki nýtast sum grundarlag, tá ið Landsgrannskoðanin kannar, um roknskaparøkið er forsvarliga skipað. Reglugerðirnar eru tí í besta føri til onga nyttu og í ringasta føri villleiðandi og spill av tilfeingi.

## 10.2 Loyvi til egna búskaparskipan

Meginreglan í K. nr. 22/2007 "um roknskaparverk landsins o.t." er, at allir stovnar, sum koma undir § 2, stk. 1, í kunngerðini, t.e. aðalráð, stovnar undir teimum, serligir grunnar o.a., umframt sjálvsognarstovnar, sum eru á játtanarlóg javnbjóðis teimum rættiligu landsstovnunum, hava skyldu at nýta Búskaparskipan landsins.

Fíggjarmálaráðið kann bert loyva stovnum við serligum tørvi heilt ella lutvíst at nýta sínar egnu búskaparskipanir.

*Stovnar skulu hava formligt loyvi til at nýta egna búskaparskipan.*

Aðalráðini skulu, sambært reglunum, senda Fíggjarmálaráðnum umsókn um loyvi, tí sambært kunngerðini skipa tey roknskaparhaldið á sínum øki, og skulu hava eftirlit við, at reglurnar um roknskaparverkið verða hildnar. Aðalráðini eiga at taka stig til at fáa viðurskiftini í rættlag, um roknskaparhaldið ikki fylgir tí, sum er fyrisett.

Í roknskaparkunngerðini stendur, at stovnar, sum hava fingið loyvi til at nýta egna búskaparskipan, skulu nýta eina búskaparskipan, sum lýkur tey kunningar-, trygdar-, eftirlits- og tíðarkrøv, sum eru galdandi fyri Búskaparskipan landsins. Skipanin skal somuleiðis lúka tey krøv, sum annars verða sett í roknskaparkunngerðini.

Loyvið er eisini treytað av, at dátusamskiftið kann verða gjørt elektróniskt ella á annan slíkan hátt um markamótið hjá Búskaparskipan landsins. Kravið til slíkt samskifti er m.a. ein munadygg viðskiftisslóð. Skrivlig rakstraravtala skal verða gjørd við Gjaldstovuna og stovnin, sum gjøllari útgreinar treytirnar fyri dátusamskifti o.t. Gjaldstovan hevur heimild at áseta treytirnar fyri slíkum samskifti.

***Skipanirnar skulu vera tryggar og skulu lúka somu krøv sum BSL.***

Havandi í huga, at treytirnar til egna búskaparskipan í høvuðsheitum eru, at skipanin er eins trygg sum Búskaparskipan landsins, og lýkur somu krøv sum Búskaparskipanin, skilir Landsgrannskoðanin ikki, at stovnar, sum umsita stór virði og røkja týðandi samfelagsligar uppgávur, brúka egnar búskaparskipanir uttan formlig loyvir, sum taka støðu til, um skipanin lýkur ásettu krøvini.

Í september 2020 reisti Landsgrannskoðanin spurningin um egna búskaparskipan fyri landsstýrismanninum í fíggjarmálum, og vísti á, at spurningurin um, hvussu loyvið skuldi gevast var bæði viðkomandi og átrokandi. Landsgrannskoðanin heitti tí á Fíggjarmálaráðið um at greiða okkum frá, hvussu reglan um loyvi til egna búskaparskipan skuldi skiljast, og um reglan eisini fevndi um skipanir, sum fara at fóðra Búskaparskipanina við roknskaparskjølum.

Í juni 2021 svaraði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, at Fíggjarmálaráðið hevði viðgjørt spurningin um at geva stovnum o.ø. loyvi til egna búskaparskipan í sambandi við, at eitt uppskot er gjørt til nýtt rundskriv um roknskaparreglugerðir o.a.

*"Samanumtikið snýr tað seg um hesa mannagongdina:*

1. *Stjórnarráðið hjá viðkomandi stovni sendir Fíggjarmálaráðnum umsókn um, at stovnurin kann fáa loyvi til egna búskaparskipan.*
2. *Fíggjarmálaráðið sendir umsóknina til Gjaldstovuna, sum viðger umsóknina og ger tilmæli.*
3. *Fíggjarmálaráðið tekur støðu til umsóknina.*
4. *Skrivlig rakstraravtala, sum nágreinar vavið á loyvinum, samstarvið við Gjaldstovuna o.a., skal vera gjørd millum stjórnarráðið/stovnin og Gjaldstovuna, áðrenn skipanin kann setast í verk."*

Landsstýrismaðurin vísti á, at stjórnarráð og stovnar kunnu brúka orku og pening til at lýsa tørv og gera greiningar o.tíl., men skulu ikki binda seg til at útvega búskaparskipan, áðrenn Fíggjarmálaráðið hevur givið loyvi.

Landsstýrismaðurin legði afturat, at *"Egin búskaparskipan er at skilja sum ein skipan, sum letur upplýsingar til Búskaparskipan landsins, men ikki er partur av skipanini."*

Hóast roknskaparkunngerðin kom í gildi í 2007, kann Landsgrannskoðanin aftur í 2023 staðfesta, at fleiri stovnar hava egnar búskaparskipanir, uttan at formligt loyvi til skipanina er fingið frá Fíggjarmálaráðnum. Nakrir stovnar hava brúkt egna búskaparskipan í nógv ár, t.d. Rúsdrekkasøla Landsins, Strandfaraskip landsins, Landsverk og Vinnustovnurin.

## 10.3 Útbjóðing av vørum og tænastum

Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum “um keyp av vørum og tænastum” er ásett, at keyp av vørum og tænastum skulu bjóðast út alment á Keypsportalinum, um keypið er størri enn 500 t.kr. Eisini er ásett, at keyp fyri 50-500 t.kr. u/MVG kann avgreiðast við tilboðsfyrispurningi frá í minsta lagi tveimum veitarum, og at tílík keyp kunnu eisini verða boðin út á Keypsportalinum.

Í hesari frágreiðingini sæst enn eina ferð, at stovnar fylgja ikki altíð reglunum um útbjóðing av vørum og tænastum, og hava heldur ikki søkt um undantak frá at bjóða út. Dømi eru um, at stovnar eru tongdir at einum veitara ella tænastusáttmála við veitara. Eisini er dømi um, at stovnar halda ávísar veitarar vera bestar at gera uppgávurnar, ella tænastan er so serstøk fyri stovnin, at hon ikki kann bjóðast út millum fleiri.

***Bjóða ikki keyp út.***

Stovnar taka heldur ikki av møguleikanum um at biðja Keypsportalin um undantøku.

***Søkja ikki um undantak.***

Landsgrannskoðanin hevur eisini víst á, at einki forðar fyri at biðja um prísir frá fleiri til keyp av vørum og tænastum, sum kosta undir 50 t.kr., út frá sjónarmiðinum um at fáa sum mest fyri pening skattgjaldarans.

## 10.4 Tíðaravmarking av lønum og tíðarskráseting

Í desember í ár eru liðin 6 ár síðani Fíggjarmálaráðið sendi út rundskriv, um “at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum”. Roknskaparmeginreglan hjá landinum er latingarmeginreglan, sum merkir, at ein útreiðsla skal verða skrásett, tá ið vøran ella veitingin verður framd. Lønarútreiðslur skulu tí sum meginregla verða tiknar við í tí roknskaparári, rætturin til lønina verður innvunnin.

Rundskrivið nágreinar, hvussu lønir skulu tíðaravmarkast, t.d. tá ið starvsfólk eiga fleiri enn 40 tímar ella skylda fleiri enn 30 tímar, ella starvsfólk eiga uppspardar serstakar frívikur. Lønir, ið standast av vaktum og ikki avgreiddum sáttmálabroytingum, verða sum meginregla altíð tíðaravmarkaðar, somuleiðis uppsagnarløn, tá ið starvsfólk verður fríttstillað í uppsagnartíðini.

Tó at rundskrivið kom í gildi í 2017, kann Landsgrannskoðanin í 2023 staðfesta, at enn eru fleiri stovnar og aðalráð, sum ikki halda reglurnar. Reglurnar verða tulkaðar ymiskt, og tíðaravmarkingin er tí ikki eins hjá øllum. Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi.

***Halda ikki reglurnar um tíðaravmarking av lønum.***

Í ársfrágreiðingini framgongur, at ikki allir stovnar og ráð hava hóskandi tíðarskrásetingar, sum má sigast at vera grundarlag undir einihvørjari tíðaravmarking av arbeiðstímum.

Sambært roknskaparkunngerðini áliggur tað stovnsleiðarum at skipa fyri, at hóskandi skráseting av arbeiðstíð, fráveru, frítíð o.tíl. er á stovnunum, soleiðis at lønarútgjaldingarnar eru rættar. Reglurnar um roknskaparverk landsins eru, sambært § 2 í kunngerðini, galdandi fyri allar stovnar, t.e. aðalráð, stovnar undir teimum, serligar grunnar o.a., umframt sjálvsognarstovnar, sum eru á játtanarlóg javnbjóðis teimum rættiligu stovnunum.

***Fleiri stovnar vanta hóskandi tíðarskráseting.***

Uttan nøktandi skráseting av arbeiðstíð, kann grannskoðanin ikki sanna, at roknskapurin er rættur. Skrásetingin er m.a. ætlað at tryggja, at tímarnir goldið er fyri, eru arbeiddir, og at tilfeingi er fingið fyri útreiðsluna. Eisini skal skrásetingin virka til at tryggja, at møgulig yvirtíð og útgjald av serstakari fríviku er heimilað, at hvílutíð er hildin, at sáttmálaásetingar við skiftandi arbeiðstíðum verða fylgdar o.s.fr.

# 11. Orðalisti

**Benchmark:** ein miðvís kanning, sum verður gjørd fyri at samanbera úrslit.

**Búskaparskipan landsins (BSL):** felagsheiti fyri allar skipanirnar, sum Gjaldstovan umsitur.

**Dygdarskipan:** samanløgd skipan hjá kommunulæknunum til eftirútbúgving og gransking.

**Eksternir grunnar:** grunnar, sum ikki eru tiknir við í fíggjarstøðu landskassans, og sum hava sjálvstøðugan roknskap.

**Eykajáttanarlóg**: broytingar, sum Løgtingið ger í játtanum, eftir at fíggjarlógin er samtykt.

**FAS:** Føroya Altjóða Skipaskrá.

**FAS-skipanin:** skipan hjá TAKS til afturbering av skatti.

**Felagskassar:** peningur, sum búfólk á einstøku sambýlunum eiga.

**Fígging Landsins:** fyrrverandi deild hjá Gjaldstovuni, sum umsat gjaldførið hjá landinum.

**Fíggjargrannskoðan**: grannskoðan av, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

**Flekssalda:** tal av tímum, eitt starvsfólk eigur á ella skyldar.

**Fyrisitingargrannskoðan:** grannskoðan av, at tað er hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

**Grannskoðanarlógin:** løgtingslóg nr. 25/1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

**Høvuðskonta:** játtanir verða veittar á høvuðskontum, og tað er høvuðskontan, ið er sjálv játtanin, sum Løgtingið atkvøður um.

**Innaneftirlit:** tey tiltøk, sum leiðslan setir í verk fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at roknskapurin er rættur og álítandi, at raksturin er effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar.

**Inntøkufíggjað virksemi**: virksemi, ið ber handilsligan dám. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann loyva stovnum at hava inntøkufíggjað virksemi. Nærri reglur um inntøkufíggjað virksemi eru í kap. 6 í K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan”.

**Játtanarskipanin:** løgtingslóg nr. 42/2009 “um landsins játtanarskipan.”

**ISAE 3000:** altjóða standardur, sum verður brúktur í sambandi við váttan um, at stovnur lýkur dátuverndarlógina (GDPR).

**Løgujáttan:** játtanarslagið, ið verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum, skipum o.ø., og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði.

**Kervi**: KT-umsitingarskipan hjá skúlunum.
**Kervi+:** nýggj KT-skipan, ið verður ment til alt undirvísingarverkið.

**Kervisgrannskoðan:** grannskoðan av KT-skipanum.

**Keypsportalurin:** portalur har lýst verður alment, tá ið almennir stovnar skulu keypa vørur ella tænastur.

**Kontuskipan landsins:** kontuplanur fyri tað almenna. Reglur fyri, hvussu útreiðslur og inntøkur skulu flokkast í landsroknskapinum.

**KT Landsins:** deild hjá Gjaldstovuni, sum hevur til uppgávu at veita almennum stovnum KT-tænastur og at samskipa KT á yvirskipaðum stigi.

**Landsnet:** tænasta, sum KT Landsins veitir. Tænastan fevnir um hýsing og rakstur av servarum og netverkum, uppseting og atgongd til grundleggjandi forrit á brúkarateldum og KT- support til brúkarar.

**Landsroknskapurin:** samlaði ársroknskapurin hjá landinum og eigur at fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins fyri farið fíggjarár og ogn og skuld landsins. Gjaldstovan setir landsrokn-skapin upp.

**Løgfrøðiliga-kritisk grannskoðan:** grannskoðan av, at roknskapurin er samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

**PandaConnect:** porteføljuskipan til at fyrisita gjaldføris- og skuldaraviðurskifti.

**Rakstrarjáttan:** játtan, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslur í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur, tænastur o.a.

**RLÚ:** stytting fyri Rakstur, Løga og Útlán.

**RLÚ I:** ársúrslit av vanligu postunum í landsroknskapinum.

**RLÚ II:** RLÚ I pluss úrslit av óvanligum postum.

**Roknskapargóðkenningarskipanin (RGS):** KT-skipan, sum góðskutryggjar almenna rokn-skapin við góðkenningum av stovnsroknskapum.

**Roknskaparkunngerðin:** kunngerð nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins”.

**Roknskaparlógin:** løgtingslóg nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.”

**Roknskaparreglugerð:** reglugerð við ábyrgdar- og heimildarreglum fyri roknskaparhaldið hjá stovnum.

**Roknskaparrundskrivið:** roknskaparrundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001 um vegleiðing um roknskaparreglugerðir.

**Ræðisrættur:** er at hava ræði á einari játtan ella kontu.

**Setanarpolitikkur landsins:** partur av starvsfólkapolitikkinum hjá landinum. Setanarpolitikkurin hevur til endamáls at tryggja, at stovnar seta umsøkjarar, ið eru best egnaðir til starvið, og, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á rættan hátt.

**Standardkonta (St.kt.):** Sundurgreinar inntøkurnar og útreiðslurnar í t.d. sølu, lønir, vørukeyp, tænastuveitingar o.a.

**Standardroknskaparkonta (StRk):** Neyvari útgreining av standardkontu.

**Stuðulsfíggjað virksemi:** virksemi undir rakstrarjáttan, sum ikki er av handilsligum slag, og sum er fíggjað við stuðli. Nærri reglur um stuðulsfíggjað virksemi eru í kap. 7 í K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan”.

**Stýrisskipanarlógin:** Ll. nr. 103/1994 “um stýrisskipan Føroya”.

**Støðla:** er í verandi fíggjarárið at útreiðsluføra eina útreiðslu, ið fer at verða hildin í komandi fíggjarárum/seta av til væntaðar útreiðslur.

**Samleikin:** talgild innritan og undirskrift hjá føroyingum.

**Teyggjan:** KT-skipan til umsiting av Føroya Skipaskráseting, FAS, fiskiloyvum, eigaraviðurskiftum hjá skipum o.ø.

**TotalView**: KT-skipan, sum fleiri almennir stovnar brúka til at skráseta tíðarnýtslu v.m.

**Transaktiónsslóð:** eisini nevnd viðskiftisslóð, er treytin um, at allar skrásetingar skulu kunna finnast í roknskapinum, og at tølini í roknskapinum skulu kunna loysast upp í tær skrásetingar, sum tey eru samansett av.

**Trygdarpolitikkur:** yvirskipaður politikkur, ið tekur atlit at váðum, ið hótta.

**Tænastusáttmáli (SLA):** Service Level Agreement er heiti á KT-rakstrar- og viðlíkahaldsavtalu ímillum partar.

**Undirkonta:** verður brúkt, tá ið neyðugt er at býta eina játtan sundur í fleiri virkisøki.

**ÚS-skipan**: KT-skipan hjá Studna til at skráseta og gjalda út studning og lán.

**ÚSUN-skipan:** stuðulsskipan til lesandi uttan fyri Norðurlond.

**Útjavningarkonta:** minnir um eginpeningskontuna í roknskapum hjá privatum virkjum, men er tó meiri tøknilig, m.a. tí at ogn og skuld vera virðisásett øðrvísi.

**Vangin:** tænasta frá Talgildu Føroyum, har tænastur hjá almennum stovnum og kommunum eru savnaðar.

**Váðameting:** at eyðmerkja og greina teir vandar, sum mest sannlíkt kunnu raka stovnin meint.

**Vaktætlan (el. Vaktplan):** KT-skipan at ráðleggja arbeiðstíð í og at avgreiða lønir við.

**Verklagslóg:** lóg, sum eigur at verða løgd fyri Løgtingið, tá ið íløguætlan er 10 mió.kr. ella størri.

**Víðkað fyrisitingargrannskoðan:** størri og meira víðfevnd kanning, enn vanlig fyrisitingargrannskoðan, sum løgtingsgrannskoðararnir kunnu biðja um.

**Vinnugluggin:** skipan hjá TAKS til at lata inn roknskapir o.a.